# Kanningarfrágreiðing

sambært stýrisskipanarlógini § 38, stk. 2

í sambandi við útlutingar av fiskirættindum sambært § 49 í sjófeingislógini í 2020 og 2021

Mai 2023

Kanningarstjóri:

Ken Nónklett, adv.

Hjálparfólk við kunnleika til avhoyringar:

Rannvá Ragnardóttir, løgfrøðingur og fyrrverandi advokatur

# Innihaldsyvirlit

Kap. 1 – Kanningin ... 1
1.1 - Innleiðing ... 1
1.2 - Gongdin í kanningararbeiðinum ... 2
1.3 - Kanningarsetningurin ... 5
Kap. 2 – Samandráttur ... 6
Kap. 3 – Gongdin í málinum ... 23
Kap. 4 – Útlutan av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020 ... 31
4.1. Flyting av kvotum eftir § 49, stk. 1 í sjófeingislógini frá 2020 til 2021 ... 32
4.1.1 - Munnligar frágreiðingar ... 35
Jacob Vestergaard ... 35
Rógvi Reinert ... 39
Andras Kristiansen ... 41
Torkil V. Rasmussen ... 42
Ólavur Dalsgarð ... 44
4.1.1.1 - Meting ... 46
4.2 - Útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini ... 51
4.2.1 - Umsókn frá P/F Thor Fisheries ... 53
4.2.1.1 - Gongdin í málinum ... 53
4.2.1.1.1 - Munnligar frágreiðingar ... 57
Jacob Vestergaard ... 57
Rógvi Reinert ... 60
Torkil V. Rasmussen ... 61
Andras Kristiansen ... 62
4.2.1.1.1.1 - Meting ... 64
4.2.2 - Umsókn frá P/f Ocean Group Faroes Ltd ... 65
4.2.2.1 - Gongdin í málinum ... 65
4.2.2.1.1 - Munnligar frágreiðingar ... 69
4.2.2.1.1.1 - Meting ... 69
Kap. 5 – Útlutan av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021 ... 71
5.1 - Útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. í sjófeingislógini ... 74
5.1.1 - Lógargrundarlagið ... 74
5.1.1 - Umsókn frá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait ... 75

5.1.1.1 - Munnligar frágreiðingar ..... 77
Jacob Vestergaard ..... 77
Rógvi Reinert ..... 78
5.1.1.1.1 - Meting ..... 79
5.1.2 - Umsókn frá Sp/f Vaðhorn ..... 83
5.1.2.1 - Munnligar frágreiðingar ..... 84
Jacob Vestergaard ..... 84
Símun Grønadal ..... 84
5.1.2.1.1 - Meting ..... 85
5.1.3 - Umsókn frá Sp/f Tavan ..... 86
5.1.3.1 - Meting ..... 86
5.1.4 - Umsókn frá Sp/f 31.01.2011 ..... 87
5.1.4.1 - Munnligar frágreiðingar ..... 89
Jacob Vestergaard ..... 89
Rógvi Reinert ..... 89
Símun Grønadal ..... 90
5.1.4.1.1 - Meting ..... 90
5.1.5 - Umsókn frá P/F Vestmanna Fiskavirki ..... 93
5.1.5.1 - Munnligar frágreiðingar ..... 97
Jacob Vestergaard ..... 97
Rógvi Reinert ..... 98
Rannvá Sólheim ..... 100
Símun Grønadal ..... 101
5.1.5.1.1 - Meting ..... 102
5.2 - Útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini ..... 103
5.2.1 - Lógargrundarlagið ..... 103
5.2.1 - Umsókn frá Sp/f Mót ..... 105
5.2.1.1 - Munnligar frágreiðingar ..... 114
Jacob Vestergaard ..... 114
Rógvi Reinert ..... 116
Rannvá Sólheim ..... 120
5.2.1.1.1 - Meting ..... 124
5.2.2 - Umsókn frá Sp/f Gráastein ..... 131
5.2.2.1 - Munnligar frágreiðingar ..... 134

5.2.2.1.1 - Meting ........ 134
5.2.3 - Umsókn frá Sp/f Ango ........ 137
5.2.3.1 - Munnligar frágreiðingar ........ 140
5.2.3.1.1 - Meting ........ 140
5.2.4 - Umsókn frá Sp/f JKS Impex........ 141
5.2.4.1 - Munnligar frágreiðingar ........ 147
5.2.4.1.1 - Meting ........ 147
5.2.5 - Umsókn frá P/F Ocean Group Faroes ltd......... 148
5.2.5.1 - Munnligar frágreiðingar ........ 152
5.2.5.1.1 - Meting ........ 152
5.3 - Útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini í 2021 ........ 153
5.3.1 - Meting ........ 154
Kap. 6. Brot framt á lóg um ábyrgd landsstýrisins?........ 155
6.1 - Viðvíkjandi útsettari útlutan av kvotu eftir § 49, stk. 1 frá 2020 til 2021........ 155
6.2 - Viðvíkjandi manglandi kunning til P/F Ocean Group Faroes Ltd. í 2020 ........ 157
6.3 - Viðvíkjandi avgerð um at víkja frá tilmæli eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í 2021 ........ 157
Skjalayvirlit........159

# Kap. 1 – Kanningin

## 1.1 - Innleiðing

Við skrivi, dagfest 3. mars 2022, útnevndi Jógvan á Lakjuni, løgtingsformaður, vísandi til § 38, stk. 2 í stýrisskipanarlógini, meg til kanningarstjóra til at kanna og gera eina frágreiðing til Løgtingið, hvørt Jacob Vestergaard, nú fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevur umsitið sítt málsøkið á lógligan hátt í sambandi við útlutingar av fiskirættindum.

Í hesum sambandi eri eg biðin um:

At kanna, lýsa og gera niðurstøðu um avgerðirnar, sum tiknar eru av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, í sambandi við útlutingar av fiskirættindum sambært § 49 í sjófeingislógini í 2020 og 2021, og sum fevna um:

1. Útluting av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir
2. Útluting av ískoytiskvotum, og
3. Útluting av kvotum til ítøkiligt skipakeyp.

At kanna, hvørt viðgerðin av umsóknunum og tiknu avgerðirnar hjá landsstýrismanninum í hesum útlutingum hava verið í samsvari við lóggávuna, tvs. við løgtingslóg nr. 152 frá 23. des. 2019 um sjófeingi við seinni broytingum og fyrisitingarlógina.

At lýsa, hvørt viðgerðin av øllum umsóknunum hevur verið lóglig, saklig og fullgóð, undir hesum

- Hvørt umsøkjarar, ið fingu tillutað rættindi, uppfyltu tey høvuðskrøv, ið sett vórðu í lóg,
- Hvørt umsøkjarar, ið vórðu vrakaðir, uppfyltu hesi somu krøv,
- Hvørt tiknu avgerðirnar eru heimilaðar í lóggávuni,
- Hvørji tilmælini vóru frá umsitingini í Fiskimálaráðnum, og hvørt landsstýrismaðurin fylgdi hesum tilmælum, ella við hvørjum lógligum og sakligum grundgevingum landsstýrismaðurin tók møguliga aðra avgerð enn hana, sum umsitingin mælti til,
- Legði landsstýrismaðurin dent á aðrar treytir ella atlit, enn tey, ið lýst vóru í lóg, kunngerð, metingarskjølum o.l., og vóru hesar sakligar, um so var.

Um komið verður fram til, at viðgerðin av hesum útlutingum ikki hevur verið nøktandi, verður biðið um eina meting av, hvørt talan kann vera um brot á løgtingslóg nr. 90 frá 4. juni 1996 um ábyrgd landsstýrisins.

Fyri at kunna svara kanningarsetninginum hevur verið neyðugt at gjøgnumganga allar umsóknir eftir § 49, stk. 1 og 2 í sjófeingislógini, sum eru latnar Fiskimálaráðnum í tíðarskeiðinum 2020 og 2021.

Í 2020 vórðu 38 umsóknir latnar inn eftir § 49, stk. 1, og 16 umsóknir eftir § 49, stk. 2.

Í 2021 vórðu 44 umsóknir latnar inn eftir § 49, stk. 1, 1. og 2. pkt. og 7 umsóknir eftir § 49, stk. 2.

Ongin kvota varð útlutað í 2020 eftir § 49, stk. 1. Tær vórðu fluttar til 2021. Fleiri av teimum 38 umsóknunum, sum vóru latnar inn í 2020 ganga soleiðis aftur í teimum 44 umsóknunum, ið verða latnar inn í 2021 eftir §

49, stk. 1, 1. og 2. pkt. Tó eru treytirnar fyri at søkja broyttar, soleiðis at neyðugt hevur verið hjá umsøkjarum at tillaga umsóknirnar ella senda inn nýggjar umsóknir.

Allar umsóknir eru gjøgnumgingnar fyri at kunna svara kanningarsetninginum, og hvørt viðgerðin av øllum umsóknunum hevur verið lóglig, saklig og fullgóð.

Umsitingin í Fiskimálaráðnum hevur fyri hvørja útlutan av kvotum gjørt tilmæli til landsstýrismannin, har tað verður væl lýst og greinað, hvørjar umsóknir verða mettar at lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu, og hvørjar ikki lúka hesar treytir. Í tilmælunum verður eisini mælt til, hvør umsøkjari verður mettur best skikkaður at fáa kvotu tillutaða.

Tað hevði verið ov rúgvusmikið í hesi kanningarfrágreiðing at lýst og gjørt niðurstøðu um hvørja einkulta umsókn, sum er latin Fiskimálaráðnum í tíðarskeiðinum 2020 og 2021 um vinnuligar royndir og verkætlanir. Talan er um tilsamans 105 umsóknir. Høvuðsdenturin í kanningararbeiðinum er tískil lagdur á at kanna, lýsa og gera niðurstøðu um tær avgerðir, sum fyrrverandi landsstýrismaðurin hevur tikið í fráviki frá tilmælunum, ið umsitingin hevur latið landsstýrismanninum. Tær metingar, sum umsitingin hevur gjørt av umsóknum, sum ikki verða mæltar til at fáa kvotu, meti eg vera í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina. Eg havi tí ikki mett tað vera neyðugt at lýsa tær nærri í hesi frágreiðing.

Ásannandi, at henda kanningarfrágreiðing verður alment atkomulig, havi eg í neyðugan mun valt at strika upplýsingar, ið eg meti snúgva seg um fíggjarlig viðurskifti og vinnuloynidómar o.a. hjá umsøkjarunum. Talan er um møguligar trúnaðarupplýsingar. Í skjalatilfarinum, sum eg lati Løgtinginum, havi eg tó ikki strikað hesar upplýsingar. Eg lati tað vera upp til Løgtingið at gera av, í hvønn mun Løgtingið gevur innlit í hetta skjalatilfar.

Viðmerkjast skal, at tá eg varð tilnevndur kanningarstjóri, sat Jacob Vestergaard sum landsstýrismaður í Fiskivinnumálum. Jacob Vestergaard situr ikki sum landsstýrismaður í Fiskivinnumálum í dag. Í kanningarfrágreiðingini verður heitið ”landsstýrismaður” og ”fyrrverandi landsstýrismaður” brúkt.

Sum hjálparfólk og spyrjara í sambandi við avhoyringarnar av landsstýrismanninum og embætisfólkið í oktober mánað 2022 hevur luttikið Rannvá Ragnardóttir, løgfrøðingur við kunnleika í avhoyringum.

At skriva endurgevingar av avhoyringunum av landsstýrismanninum og embætisfólkunum havi eg fingið hjálp frá Gunnhild Persson.

Rættlestur hevur Rúna Berghamar tikið sær av.

Ábyrgdin fyri kanningina, frágreiðingina og niðurstøðurnar liggur tó bert á kanningarstjóranum.

### 1.2 - Gongdin í kanningararbeiðinum

10. mars 2022 sendi eg skrivliga umbøn til Fiskimálaráðið, Rógva Reinert, aðalstjóra, um at fáa útflýggjað alt skrivligt tilfar, ið Fiskimálaráðið hevur skrásett í sambandi við umsóknir um útlutan av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020 og 2021.

Tilfarið varð útflýggjað kanningarstjóranum 17. mars 2022.

12. september 2022 er aftur skrivlig umbøn send Fiskimálaráðnum um tilfar, m.a. um avrit av kærum, sum eru sendar Fiskimálaráðnum. Hetta tilfarið havi eg nakrar dagar seinni fingið útflýggjað frá journalleiðaranum í Fiskimálaráðnum.

15. september 2022 havi eg frá Jógvan Martin Ferjá Joensen, stjóra í P/F Jupiter, fingið avrit av telduposti, sum er ein klaga til Fiskimálaráðið í sambandi við, at umsóknin hjá P/F Jupiter eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini ikki varð gingin á møti. Eg havi seinni fingið klaguna í pappírsformi.

28. september 2022 skrivi eg til Jógvan Martin Ferjá Joensen, har eg vátti fyri móttøku av skjølunum, men har eg samstundis upplýsi, at kanningarstjórastarvið er ikki at skilja sum ein kærumyndugleiki. Eg havi eina bundna uppgávu sambært ásetta kanningarsetninginum. Í tann mun upplýsingar í klaguni møguliga verða tiknar við í kanningarfrágreiðingina, verður tað ítøkiliga viðvíkjandi uppgávuni at svara kanningarsetninginum.

14. oktober 2022 er skrivlig umbøn send Fiskimálaráðnum, har biðið verður um tilfar í kærumáli, umframt avrit av øllum skjølum í sambandi við lógarbroytingina í sjófeingislógini (LM-100/2020) og kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir. Eisini verður biðið um avrit av øllum skjølum í málinum, har arbeiðið við at broyta umsóknarblaðið til at fevna um kvotur eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. og 2. pkt. í sjófeingislógini er skrásett. Andras Kristiansen svarar aftur 21. oktober 2022, at skjølini eru klár at avheinta í Fiskimálaráðnum.

17. januar 2023 verður skrivlig umbøn um tilfar send Fiskimálaráðnum, har somuleiðis verður spurt um endalig avgerð er tikin í ávísum máli. 23. januar 2023 svarar Andras Kristiansen skrivliga uppá umbønina og sendir samstundis umbidna tilfarið í telduposti.

Avhoyringar av embætisfólkum og landsstýrismanninum vórðu hildnar 24., 27. og 28. oktober 2022. Avhoyringar av embætisfólkunum vóru ikki almennar orsakað av, at ávís skjøl, sum vóru grundarlag undir avhoyringunum, vóru frámerkt sum trúnaðarskjøl. Avhoyringin av landsstýrismanninum var almenn. Ongin áhoyrari var tó til avhoyringarnar.

Hvørki landsstýrismaðurin ella embætisfólkini høvdu hjásita.

Avhoyringarnar fóru fram í Føroya Rætti. Tó var ein avhoyring hildin sum videofundur orsakað av, at viðkomandi er búsitandi í Danmark.

Hesi góvu munnliga frágreiðing:

- Ólavur Dalsgarð, fyrrverandi fulltrúi á Fiskivinnustovuni í Fiskimálaráðnum, tann 24. oktober 2022, kl. 9.00 - 10.30
- Torkil V. Rasmussen, fyrrverandi fulltrúi á Fiskivinnustovuni í Fiskimálaráðnum, tann 27. oktober 2022, kl. 9.15 - 10.30

- Símun Grønadal, fulltrúi á Fiskivinnustovuni í Fiskimálaráðnum, tann 27. oktober 2022, kl. 10.30 - 11.45
- Rannvá Sólheim, fyrrverandi fulltrúi á Fiskivinnustovuni í Fiskimálaráðnum, tann 27. oktober 2022, kl. 13.15 - 15.00
- Andras Kristiansen, deildarstjóri á Fiskivinnustovuni í Fiskimálaráðnum, tann 27. oktober 2022, kl. 15.00 - 16.45
- Rógvi Reinert, aðalstjóri í Fiskimálaráðnum, tann 28. oktober 2022, kl. 9.00 - 11.30
- Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður í Fiskivinnumálum, tann 28. oktober 2022, kl. 13.15 - 16.30

Embætisfólkini eru í sambandi við avhoyringarnar vegleidd um teirra rættarstøðu, og at tey eru innkallað at geva frágreiðing sum vitni í málinum, ikki sum partur. Tey hava sambært § 38, stk. 4 í stýrisskipanarlógini skyldu til at geva frágreiðing, sum skal vera sonn. Tó er vitnisskylda ikki galdandi, um møguleiki er fyri, at einum kann áleggjast revsiábyrgd ella annað sambært § 217, stk. 2 í rættargangslógini.

Landsstýrismaðurin er vegleiddur um sína rættarstøðu sum partur í málinum, og at hann ikki hevur skyldu til at geva frágreiðing og ikki hevur skyldu at siga satt.

Avhoyringarnar eru bandaðar, og eru skrivligar endurgevingar gjørdar grundað á hesar. Bandaðu avhoyringarnar verða latnar Løgtinginum.

Endurgevingarnar eru sendar embætisfólkum og landsstýrismanninum til viðmerkingar og góðkenningar.

Tann 29. apríl 2023 sendi eg eina kladdu til frágreiðing og niðurstøðu til Jacob Vestergaard til viðmerkingar. Samandrátturin var tó ikki skrivaður. Svarfreistin varð sett til 15. mai 2023.

Eyðbjørn Larsen, advokatur hevur, vegna Jacob Vestergaard, sent mær viðmerkingar í telduposti tann 17. mai 2023.

Viðmerkingarnar frá advokatinum hjá landsstýrismanninum fevna bert um málið, har landsstýrismaðurin velur at útseta útlutanina av kvotum eftir § 49, stk. 1 í 2020 til 2021, sí kap. 4.1. Í viðmerkingunum verður m.a. víst á, at mett verður ikki, at landsstýrismaðurin hevur lagt ósaklig atlit til grund í sambandi við avgerðina at útseta útlutanina av kvotum. Víst verður víðari á, at atlit ikki einans kann takast til fyrisitingarrætt v.m., men atlit má eisini takast til markamótið millum fyrisiting, politikk og lóggávusmíð. Í tí sambandinum vísir advokaturin á, at tá er ikki lætt til at siga, hvat reglugrundarlagið er, ið landsstýrismaðurin skal hava brotið. Tað er undir øllum umstøðum ógreitt, um idealið um góðan fyrisitingarsið yvirhøvur er so greið rættarkelda, at ein kann tala um at bróta hana á ein slíkan hátt, at tað aftur elvir til brot á lóg um ábyrgd landsstýrisins.

Advokaturin er eisini ósamdur í, at lógarbroytingin, har kvotur verða fluttar frá 2020 til 2021 eftir § 49, stk. 1, skal metast hava afturvirkandi gildi. Tískil metir advokaturin ikki, at tað er viðkomandi at vísa til rundskrivið um lógarsmíð og góðan lóggávusið.

Advokaturin mælir soleiðis til, at tann parturin av frágreiðingini, sum er um metingar um brot á góðan fyrisitingarsið, verður broyttur, og at atlit verður tikið til tey serligu viðurskiftini, sum gera seg galdandi í virkisøkinum ímillum politikk og løgfrøði, og har løgtingið eftirfylgjandi hevur góðkent mannagongdina við at broyta sjófeingislógina 18. desember 2020.

Harumframt mælir advokaturin til, at parturin um brot á § 5, stk. 1 í lógini um ábyrgd landsstýrisins og um kritikk til landsstýrismannin eigur at verða umorðaður, soleiðis at tað ikki verður staðfest nakað brot á § 5, stk. 1, og at kritikkviðmerkingar annars verða tiknar úr frágreiðingini.

Viðmerkingarnar frá Eyðbjørn Larsen, adv., geva mær ikki høvi til at broyta mína niðurstøðu um, at landsstýrismaðurin hevur framt brot á góðan fyrisitingarsið við tilvitað at hava drálað við at taka avgerð í málinum. Eg vísa til grundgevingarnar, sum førdar verða fram í kap. 4.1.1.1.

Viðmerkingarnar um, at lógarbroytingin um at flyta kvotur frá 2020 til 2021 ikki hevur afturvirkandi gildi, gevur mær heldur ikki høvi til at broyta mína meting tí viðvíkjandi. Eg nevni eisini í míni meting, at lógarbroytingin ikki hevur beinleiðis afturvirkandi gildi. Tó verður nevnt beinleiðis í lógarviðmerkingunum til lógarbroytingina, at uppskotið hevur neiligar avleiðingar fyri tann partin av vinnuni, sum í 2020 hevur fyrireikað umsóknir o.a. við vón um at fáa lut í kvotum settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1. Lógaruppskotið fær soleiðis í veruleikanum virknað fyri hesar umsøkjarar.

Viðvíkjandi spurninginum, um brot er framt á § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrisins, eri eg samdur við Eyðbjørn Larsen, adv., í, at spurnartekin kann setast við, um brot á "góðan fyrisitingarsið" kann metast sum eitt brot á "lóggávuna annars", soleiðis sum § 5, stk. 1 er orðað. Eg meti tó, serliga vísandi til lógarviðmerkingarnar til 5, stk. 1 í donsku lógini um ministres ansvarlighed (lov nr. 117 af 15. april 1964), sum er meinleik § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrisins, at ásetingin skal skiljast soleiðis, at landsstýrismaðurin ikki bert hevur skyldur sambært lóggávuni annars, men eisini skyldur, sum ikki positivt verða nevndar í lóggávuni, men sum sambært starvsinnihaldinum mugu metast liggja á landsstýrismanninum, sí kap. 6.1.

Viðmerkingarnar frá advokatinum geva mær soleiðis ikki høvi til at broyta mína niðurstøðu viðvíkjandi broti á § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrisins.

## 1.3 - Kanningarsetningurin

Sambært § 38, stk. 2 í stýrisskipanarlógini skal kanningarstjórin, sum ikki hevur dómsmyndugleika, kannað málið og síðani gera eina frágreiðing til Løgtingið, hvørt fyrisitingin í ávísum máli er útint á lógligan hátt.

Sambært viðmerkingunum til ásetingina, er kanningin bert ein fyribils kanning hjá Løgtinginum at taka støðu til. Kemur kanningarstjórin til ta niðurstøðu, at fyrisiting landsstýrismansins er óreglulig, kann Løgtingið gera av, at málið fær politiskar avleiðingar, t.e. at misálit verður sett á ábyrgdarhavandi landstýrismann ella alt landsstýrið, og at landsstýrismaðurin ella landsstýrið noyðist at fara frá. Løgtingið kann eisini gera av, at avleiðingin skal vera revsirættarlig, og farið verður fram eftir reglunum um ábyrgd landsstýrismanna, og at landsstýrismaðurin kemur fyri rættin.

Víðari framgongur av viðmerkingunum, at skipanin kann sigast vera eitt avmarkað slag av løgtingsins umboðsmanni fyri hvørt málið sær.

Harumframt framgongur, at eftirlitið, sum framt verður eftir ásetingini, er av rættarligum slagi, t.e. at landsstýrið heldur seg innan teir karmar, lóggávan setir. Soleiðis fevnir eftirlitið ikki um, hvørt ein avgerð er forsvarlig ella ikki, út frá einum metingarsjónarmiði.

Sambært kanningarsetninginum skal kanningin avklárað, um fyrrverandi landsstýrismaðurin hevur umsitið sítt málsøki á lógligan hátt í sambandi við útlutingar av fiskirættindum eftir § 49, stk. 1 og 2 í sjófeingislógini í 2020 og 2021.

Um komið verður fram til, at viðgerðin av hesum útlutingum ikki hevur verið nøktandi, eri eg biðin at meta um, hvørt talan kann vera um brot á lóg um ábyrgd landsstýrisins. Vísandi til áður gjørdar kanningar, og serliga kanningarfrágreiðingina hjá Hans Gammeltoft Hansen í sambandi við Eysturoyartunnulin í 2015, síggi eg tað sum ein part av kanningarsetninginum at koma við einum tilmæli um, hvør avleiðingin skal vera í fall talan er um brot á lóg um ábyrgd landsstýrisins.

Í hesum sambandi havi eg roynt at kannað og lýst málini í hesi frágreiðing so væl sum møguligt, soleiðis at Løgtingið hevur eitt nøktandi grundarlag fyri at kunna taka støðu til, hvør víðari málsgongdin í málinum skal vera.

Tær metingar og niðurstøður, sum verða gjørdar í hesi frágreiðing, eru bert til nýtslu hjá Løgtinginum at taka støðu til málið, m.a. at gera endaligu metingina av, hvørt talan er um brot á lóg um ábyrgd landsstýrisins.

# Kap. 2 – Samandráttur

Frágreiðingin er skipað í 6 kapitlar.

Í kapitli 1 verður í fyrsta parti greitt frá tilnevningini at gera kanningarfrágreiðingina og kanningarsetningin.

Í øðrum parti verður greitt frá gongdini í kanningararbeiðinum, herundir um innheintan av skjalatilfari og munnligu avhoyringarnar.

Í triðja parti verður greitt nærri frá kanningarsetninginum, og hvussu hann skal skiljast.

Í kapitli 3 verður greitt frá yvirskipaðu gongdini í málinum í sambandi við, at táverandi samgonga millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Miðflokkin, sum varð skipað í september mánaði 2019, legði fram uppskot um nýggja sjófeingislóg í november mánaði 2019. Í lógaruppskotinum verður m.a. sett inn í § 49 ein nýggj áseting um vinnuligar royndir og verkætlanir. Greitt verður frá gongdini, frá tí lógin kom í gildi tann 1. januar 2020 og fram til útlutan av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir á heysti í 2021. Greitt verður yvirskipað frá lýsing eftir umsóknum, hvussu nógvar umsóknir komu inn til Fiskimálaráðið, nær umsitingin læt landsstýrismanninum tilmæli, nær landsstýrismaðurin tók avgerð um útlutan, og hvør fekk tillutað kvotur. Eisini verður greitt frá ymisku lógarbroytingunum til sjófeingislógina í tíðarskeiðinum 2020-2021.

Í kapitli 3 verður ikki komið inn á ítøkiligu umsóknirnar og viðgerðina av teimum. Komið verður ítøkiliga inn á viðgerðina av útvaldum umsóknum í kapitli 4 og kapitli 5.

Tyngdin í kanningarfrágreiðingini liggur soleiðis í størstan mun í kapitli 4 og 5. Her verður komið ítøkiliga inn á útvaldar umsóknir og viðgerðina av teimum fyri at kunna svara kanningarsetninginum.

Í kapitli 4 verður greitt frá viðgerðini av umsóknum í sambandi við útlutan av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir § 49, stk. 1 og 2 í sjófeingislógini í 2020.

Í fyrsta parti verður greitt frá avgerðini hjá landsstýrismanninum um ikki at luta út kvotu eftir § 49, stk. 1 í 2020, men heldur flyta kvotuna yvir um ár til at luta út í 2021. Greitt verður frá gongdini í málinum, og at 38 umsóknir koma inn til Fiskimálaráðið, og at umsitingin í Fiskimálaráðnum viðger umsóknirnar og ger tilmæli til landsstýrismannin. Landsstýrismaðurin velur eftir at hava fingið tilmælið ikki at luta út kvotu, men velur heldur at leggja uppskot fyri løgtingið um at broyta sjófeingislógina og flyta kvotuna til 2021. Komið verður inn á, hvør orsøkin er til, at landsstýrismaðurin ikki velur at luta út kvotu. Í hesum sambandi verður beinleiðis endurgivið úr viðkomandi skjalatilfari. Eisini verður endurgivið úr viðkomandi munnligum frágreiðingum frá landsstýrismanninum og embætisfólki. Síðani verður ein meting gjørd, har støða verður tikin til veruligu umstøðurnar, og hvussu tær skulu metast løgfrøðiliga. Í metingini verður somuleiðis gjørd ein niðurstøða um, hvørt viðgerðin av umsóknunum og tiknu avgerðirnar hava verið í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í sambandi við gjøgnumgongdina av tilfarinum í málinum og avhoyringina av landsstýrismanninum tann 28. oktober 2022 meti eg, tað er greitt, at landsstýrismaðurin tilvitað hevur valt at drála við at viðgera umsóknirnar og taka avgerð í málinum. Orsøkin til drálið er eitt politiskt ynski um, at nýggir aktørar við skipum kunnu fáa tillutað kvotu. Tilmælið, sum umsitingin letur landsstýrismanninum, mælir bert til at luta kvotu út til verkætlanir á landi. Ongin heimild er fyri at tilluta kvotu í sambandi við skipakeyp. Eg meti ikki orsøkina til drálið at vera sakliga. Staðfestast kann, at lýst hevur verið eftir umsóknum, umsóknir eru latnir inn, Fiskimálaráðið hevur viðgjørt umsóknirnar og latið landsstýrismanninum tilmæli. Tað er soleiðis klárt at taka avgerð í málinum. Landsstýrismaðurin velur tó ikki at luta út grundað á politiskar orsøkir.

Niðurstøðan er, at landsstýrismaðurin hevur framt brot á góðan fyrisitingarsið við tilvitað at hava drálað við at viðgera umsóknirnar og taka avgerð í málinum.

Í øðrum parti verður greitt frá útlutan av kvotu eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini í 2020. Her verður komið inn á tvær umsóknir, sum eg meti neyðugar at lýsa nærri í kanningarfrágreiðingini fyri at kunna svara kanningarsetninginum. Talan er um umsóknir frá ávíkavist P/F Thor Fisheries og P/F Ocean Group Faroes Ltd. Talan er um tvær rættuliga líkar umsóknir, har P/F Thor Fisheries fær játtað kvotu, meðan P/F Ocean Group Faroes Ltd. ikki fær játtað kvotu. Gongdin í málinum verður lýst fyri hvørja umsókn sær, og endurgivið verður úr viðkomandi skjalatilfari og munnligum avhoyringum fyri at lýsa málið. Eftirfylgjandi verður ein meting gjørd, har støða verður tikin til, um avgerðirnar hjá landsstýrismanninum eru í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina, og um fyrisitingarrættarliga líkareglan er hildin.

Eg kann staðfesta, at 24. august 2020 fær landsstýrismaðurin handað tilmæli, harav framgongur, at P/F Thor Fisheries ikki verður tilmælt at fáa kvotu orsakað av, at skip teirra er flaggað undir grønlendskt flagg. 3. september 2020 sendir P/F Thor Fisheries Fiskimálaráðnum eina dagføring viðvíkjandi síni umsókn, har greitt verður frá orsøkini til, at skipið Hoyvík er flaggað undir grønlendskt flagg, og at ætlanin er at flagga Hoyvík inn aftur undir føroyskt flagg í seinasta lagi 1. november 2020. Tað tykist soleiðis, at P/F Thor Fisheries hevur fingið onkra kunning um, at tað er ein trupulleiki, at skipið Hoyvík ikki er undir føroyskum flaggi.

Fiskimálaráðið boðar frá í telduposti 7. september 2020, at tilmæli er skrivað, men um Hoyvík verður flaggað innaftur, innan nøkur avgerð er tikin, kann Fiskimálaráðið realitetsviðgera umsóknina.

Av innanhýsis fundarnotati frá 8. september 2020 kann staðfestast, at landsstýrismaðurin vil hava umsitingina at kanna, um P/F Thor Fisheries ikki kann fáa eina tilsøgn um kvotu treytað av, at Hoyvík verður flaggað inn aftur seinni um heystið.

Í telduposti 9. september 2020 til Rógva Reinert, aðalstjóra, boðar umsitingin frá, at tað ikki er løgfrøðiliga møguligt at tilluta kvotu til P/F Thor Fisheries, um Hoyvík ikki er undir føroyskum flaggi. Seinni sama dag sendir P/F Thor Fisheries fráboðan til Fiskimálaráðið um, at felagið er í gongd við at flagga Hoyvík inn aftur, og samstundis verður heitt á Fiskimálaráðið at taka avgerð í málinum. Her kann tykjast aftur at hava verið okkurt samskifti við umsøkjaran. Eg havi í sambandi við avhoyringarnar av landsstýrismanninum og embætisfólkunum spurt, um nakað samskifti hevur verið við umsøkjaran, men tað hevur tað ikki.

22. september 2020 ringir advokaturin hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. til Fiskimálaráðið og vil vita, hvar tað stendur í lóggávuni, at felagið skal vera eigari av fiskifari fyri at fáa tillutað kvotu eftir § 49, stk. 2. P/F Ocean Group Faroes Ltd. hevur avreitt makrel og norðhavssild í januar mánaði 2019 við skipinum Nýborg. Skipið Nýborg er tó selt til danskt reiðarí á sumri 2019, og tískil metir Fiskimálaráðið ikki, at felagið lýkur treytirnar fyri at fáa tillutað kvotu. Fiskimálaráðið sendir tó ikki nakra kunning til P/F Ocean Group Faroes Ltd. um, at um skipið verður flaggað undir føroyskt flagg aftur, áðrenn nøkur endalig avgerð er tikin, so verður umsóknin realitetsviðgjørd.

Hóast eg meti tað vera ivasamt, at P/F Ocean Group Faroes Ltd. kundi fingið tillutað kvotu, um skipið varð flaggað undir føroyskt flagg, so meti eg, spurnartekin kann setast við, um fyrisitingarrættarliga líkareglan er hildin. Eg meti, tað er óheppið, at P/F Ocean Group Faroes Ltd. ikki hevur fingið somu kunning sum P/F Thor Fisheries.

Eg meti tó, tað er greitt, at P/F Thor Fisheries lýkur allar treytir, áðrenn endalig avgerð verður tikin. Viðvíkjandi umsóknini hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. er tað umsitingin í Fiskimálaráðnum og ikki landsstýrismaðurin sjálvur sum metir, at umsóknin ikki lýkur treytirnar. Tað er soleiðis serliga umsitingin, sum hevur eitt samskifti við P/F Ocean Group Faroes Ltd. og ikki landsstýrismaðurin sjálvur. Vísandi til munnligu frágreiðingina hjá landsstýrismanninum tykjast ongar ábendingar vera um, at landsstýrismaðurin hevur verið við í viðgerðini av umsóknini hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd.

Endaliga avgerðin hjá Fiskimálaráðnum byggir soleiðis á løgfrøðiligu metingina hjá umsitingini sjálvari. Landsstýrismaðurin velur at fylgja niðurstøðuni hjá ráðnum. Landsstýrismaðurin víkur soleiðis ikki frá tilmælinum hjá umsitingini.

Niðurstøðan er, at avgerðin er tikin í samsvari við sjófeingislógina. Eg meti tó, spurnartekin kann setast við, um líkareglan er hildin. Eg havi tó ikki grundarlag fyri at siga, at avgerðin ikki er lóglig.

Í kapitli 5 verður greitt frá viðgerðini av umsóknum í sambandi við útlutan av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir § 49, stk. 1, 1. og 2. pkt. og stk. 2 í sjófeingislógini í 2021.

Í fyrsta parti verður greitt frá viðgerðini av umsóknum eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. í sjófeingislógini. Fyrst verður innleiðandi greitt frá gongdini, hvussu nógvar umsóknir vórðu latnar Fiskimálaráðnum, og hvat tilmælið var frá umsitingini í Fiskimálaráðnum til landsstýrismannin, umframt í hvønn mun landsstýrismaðurin valdi at víkja frá tilmælinum. Lógargrundarlagið verður lýst. Hareftir verða tilmæltu umsóknirnar kannaðar, bæði tær, sum fingu tillutað kvotu, og tær, ið ikki fingu tillutað kvotu, umframt tær umsóknir, sum ikki vórðu tilmæltar, men sum fingu tillutað kvotu.

Talan er um umsóknir frá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait, Sp/f Vaðhorn, Sp/f 31.01.2011, P/F Vestmanna Fiskavirki og Sp/f Tavuni.

Umsóknirnar verða lýstar og gjøgnumgingnar hvør sær. Fyrst verða viðkomandi brot úr umsóknini endurgivin, og síðani verða viðkomandi brot úr skjalatilfari og munnligu avhoyringunum endurgivin. Til seinast verður ein meting gjørd, har støða verður tikið til, um avgerðin er tikin í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 5.1.1 verður greitt frá umsóknini frá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait. Staðfestast kann, at umsitingin í Fiskimálaráðnum mælir til í sínum tilmæli til landsstýrismannin, at Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait fær tillutað kvotu. Landsstýrismaðurin velur ikki at fylgja tilmælinum, og verður umsóknin tískil ikki gingin á møti. Verkætlanin byggir á at framleiða agn burtur úr brotnum og/ella ov smáum makreli og norðhavssild, sum vanliga fer til mjøl- og lýsiframleiðslu. Landsstýrismaðurin metir ikki framleiðslu av agni vera nóg nýskapandi í mun til aðrar umsóknir. Landsstýrismaðurin velur tí at víkja frá tilmælinum og tilluta kvotu til annan umsøkjara, sum hevur ætlanir um at framleiða roykta makrel og sild. Talan er um umsókn frá Sp/f 31.01.2011, sum tykist verða hildin beinleiðis upp ímóti umsóknini frá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait. Umsóknin frá Sp/f 31.01.2011 verður av umsitingini mett "helst ikki stuðulsverd".

Eg havi ikki fakligan førleika at meta um, hvørt royking av makreli og sild er meiri nýskapandi enn framleiðsla av agni, men eg meti, at landsstýrismaðurin hevur lagt dent á saklig atlit í síni avgerð, tá hann velur at víkja frá tilmælinum og ikki tilluta kvotu til Sp/f Fishproteins and Bait.

Niðurstøðan er tí, at landsstýrismaðurin hevur tikið avgerðina í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 5.1.2 verður greitt frá umsóknini frá Sp/f Vaðhorn. Staðfestast kann, at umsitingin í Fiskimálaráðnum mælir til í sínum tilmæli til landsstýrismannin, at Sp/f Vaðhorn fær tillutað kvotu. Landsstýrismaðurin velur ikki at fylgja tilmælinum, og verður umsóknin tískil ikki gingin á møti. Verkætlanin snýr seg um, at núverandi førleikar við salting verða fluttar á makrel- og sildaframleiðslu. Landsstýrismaðurin grundgevur í síni avgerð, at hann hevur valt at raðfesta verkætlanir frá umsøkjarum, sum heilt ella í stóran mun longu hava sítt virksemi við uppisjóvarfiski, heldur enn at lata uppsjóvarkvotur til tann partin av vinnuni, ið hevur rímiliga støðugt virksemi grundað á botnfisk. Í munnligu frágreiðingin greiðir landsstýrismaðurin frá, at hann metti tryggaru loysnina vera at luta kvotu til umsøkjarar, sum hava royndir við uppisjóvarfiski heldur enn at luta út til umsøkjarar, sum ikki hava nakrar royndir við uppisjóvarfiski.

Í hesum sambandi spyr landsstýrismaðurin umsitingina, um tað er lógarbrot at luta út kvotu til P/F Vestmanna Fiskavirki. Umsitingin svarar í uppriti, at tað er ikki mett at vera lógarbrot at luta part av kvotuni til P/F Vestmanna Fiskavirki. Tað tykist soleiðis, at landsstýrismaðurin velur at luta út kvotu til P/F Vestmanna Fiskavirki fram um Sp/f Vaðhorn.

Tá ið umsitingin í løgfrøðiligum uppriti metir, at landsstýrismaðurin kann luta út part av kvotuni til P/F Vestmanna Fiskavirki, meti eg, at landsstýrismaðurin hevur lagt dent á saklig atlit, tá hann velur at víkja frá tilmælinum og ikki tilluta kvotu til Sp/f Vaðhorn. Eg havi ikki grundarlag fyri at siga, at avgerðin er ólóglig.

Niðurstøðan er, at avgerðin er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 5.1.3 verður greitt frá umsóknini frá Sp/f Tavuni. Staðfestast kann, at umsitingin í Fiskimálaráðnum mælir til í sínum tilmæli til landsstýrismannin, at Sp/f Tavan fær tillutað kvotu. Staðfestast kann, at landsstýrismaðurin velur at fylgja tilmælinum frá umsitingini. Tað tykjast ikki vera viðurskifti, ið tala fyri, at avgerðin ikki er tikin í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Niðurstøðan er, at avgerðin er tikin í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 5.1.4 verður greitt frá umsóknini frá Sp/f 31.01.2011. Staðfestast kann, at umsitingin í tilmæli sínum til landsstýrismannin metir, at umsóknin ”helst ikki er stuðulsverd”. Verkætlanin snýr seg um framleiðslu av royktum makreli og sild. Umsitingin metir, at umsóknin fevnir um menning, nýskapan og virðisøking, men metir tað vera ivasamt, nær bygningurin, sum nýtast skal til virksemið, gerst klárur. Harumframt er ivasamt, um umsøkjari hevur tikið hædd fyri tollforðingum á ES -marknaðinum.

Landsstýrismaðurin velur partvíst at ganga umsóknini á møti vísandi til, at talan er um eina áhugaverda verkætlan, ið fevnir um menning, nýskapan og virðisøking av norðhavssild og makreli, ímeðan hetta bert í avmarkaðan mun ger seg galdandi fyri svartkjaft.

Landsstýrismaðurin velur at geva Sp/f 31.01.2011 eina 4 viku freist at lata inn eina frágreiðing til Fiskimálaráðið, har greitt verður frá, nær virkið verður klárt, umframt lýsa, at hædd er tikin fyri møguligum tollforðingum.

Sambært metingarskjalinum til kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir er ein týðandi partur av metingini upplýsingar um, nær verkætlanin ella royndin byrjar, eins og útlitini fyri, at verkætlanin gerst virkin og sjálvberandi, tá tíðarskeiðið er farið.

Tað skilst ongastaðni av lógarverkinum, nær verkætlanin í seinasta lagi skal byrja. Tað er ein ítøkilig meting. Eg havi ikki førleika at meta um, hvørt freistin á 4 vikur er realistisk ella ikki at fáa virkisbygningin kláran. Tískil havi eg ikki grundarlag fyri at siga, at avgerðin er í ósamsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Niðurstøðan er, at avgerðin er tikin í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Staðfestast kann tó, at virksemið hjá Sp/f 31.01.2011 framvegis ikki er komið í gongd í januar mánað 2023.

Í kapitli 5.1.5 verður greitt frá umsóknini frá P/F Vestmanna Fiskavirki. Staðfestast kann, at umsitingin í tilmæli sínum til landsstýrismannin metir, at umsóknin ”ikki er stuðulsverd”. Verkætlanin snýr seg um at framleiða [x] úr sild og makreli og útbyggja virki til at kunna framleiða [x] og [x] úr svartkjafti.

Landsstýrismaðurin biður umsitingina meta um, hvørt tað er lógarbrot at tilluta P/F Vestmanna Fiskavirki 800 tons av makreli, 1.000 tons av norðhavssild og 2.000 tons av svartkjafti. Í uppriti til landsstýrismannin metir umsitingin, at tað løgfrøðiliga kann grundgevast fyri at tilluta P/F Vestmanna Fiskivirki 800 tons av makreli og 1.000 tons av norðhavssild. Umsitingin metir tó ikki grundarlag vera fyri at tilluta P/F Vestmanna Fiskavirki svartkjaft.

Landsstýrismaðurin metir tryggastu loysnina vera at luta út kvotu til teir umsøkjarar, sum hava royndir við uppisjóvarfiski. Umsøkjarar, sum longu hava støðugt virksemi grundað á botnfisk, falla tí í raðfestingini. Hetta verður eisini víst til í grundgevingini viðvíkjandi umsóknini frá Sp/f Vaðhorn, sí kap. 5.1.2.

Havandi í huga, at talan er um avmarkaða nøgd av kvotu, umframt at talan er um meiri ella minni eins góðar umsóknir, sum eru truplar at taka dagar í millum, so meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at grundgevingarnar hjá landsstýrismanninum fyri at luta kvotu til P/F Vestmanna Fiskavirki eru ósakligar ella óviðkomandi. At umsitingin í Fiskimálaráðnum harumframt í løgfrøðiligum uppriti kemur til ta niðurstøðu, at tað er løgfrøðiliga í lagi at luta P/F Vestmanna Fiskivirki makrel og sild, talar eisini fyri, at landsstýrismaðurin ikki hevur lagt dent á ósaklig atlit í sambandi við sína avgerð.

Niðurstøðan er, at avgerðin er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í øðrum parti verður greitt frá viðgerðini av umsóknum eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini. Fyrst verður lógargrundarlagið lýst. Síðani verða tilmæltu umsóknirnar kannaðar, bæði tær, sum fingu tillutað kvotu, og tær, ið ikki fingu tillutað kvotu, umframt tær umsóknir, ið ikki vórðu tilmæltar sum fyrsta val, men sum fingu tillutað kvotu.

Talan er um umsóknir frá Sp/f Móti, Sp/f Gráasteini, Sp/f Ango, Sp/f JKS Impex og P/F Ocean Group Faroes Ltd.

Umsóknirnar verða lýstar og gjøgnumgingnar hvør sær. Fyrst verða viðkomandi brot úr umsóknini endurgivin, og síðani verða viðkomandi brot úr skjalatilfari og munnligu avhoyringunum endurgivin. Til seinast verður ein meting gjørd, har støða verður tikið til, um avgerðin er tikin í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 5.2.1 verður greitt frá umsóknini frá Sp/f Mót. Staðfestast kann, at umsitingin í tilmæli sínum til landsstýrismannin metir, at umsóknin "er stuðulsverd". Í tilmælinum verður víst á, at umsóknin lýkur allar treytir og ásetingar í lóggávuni. Umsóknin er væl undirbygd við viðløgdum váttanum, eins og víst verður á verandi samstørv, og at felagið hevur royndarloyvi til reyðæti. Verkætlanin fevnir um at keypa m/s […] fyri […] mió. kr. Viðløgd rakstrarætlan vísir, at verkætlanin ber seg við minstu nøgdum. Víst verður á keypssáttmála, ið staðfestir, at skipið kann yvirtakast beinanvegin og er klárt at fara til fiskiskap. Seljarafígging er frá núverandi eigaranum av m/s […], sum er […]"

Í innanhýsis avgerðarskrivi til umsitingina í Fiskimálaráðnum (Fiskivinnustovuna), dagfest 14. september 2021, sæst, at landsstýrismaðurin velur ikki at ganga umsóknini á møti. Grundgevingin er, at landsstýrismaðurin í størri mun enn í tilmælinum leggur dent á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir stigtakararnir hava við fiskiskapi og skiparakstri.

Í skrivi til Sp/f Mót, dagfest 23. september 2021, velur Fiskimálaráðið ikki at ganga umsóknini á møti. Fiskimálaráðið metir, at umsóknin er væl undirbygd við hjáløgdum váttanum. Hóast talan er um fleiri verkætlanir, sum kundu verið játtaðar, so avmarkar heildarkarmurin í tøkari kvotu talið av verkætlanum til tvey skip. Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum er dentur lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava við fiskiskapi og skiparakstri. Í avgerðini eru verkætlanir, ið vísa á lutfalsligan nógvan eginpening og beinleiðis royndir, sostatt raðfestar. Í hesi meting fellur umsóknin hjá Sp/f Móti í raðfestingini, serliga í sambandi við, at eginpeningurin er lítil.

Í skrivi, dagfest 24. september 2021, kærir Sp/f Mót avgerðina til Fiskimálaráðið. Í kæruni verður víst á, at stigtakararnir aftan fyri verkætlanina hava royndir á økinum, eginfíggingin er nøktandi, umframt at víst verður á, at teir, sum hava fingið játtað kvotu, ikki hava skip tøkt. Teir lúka tí ikki ásettu krøvini í lóggávuni. Verkætlanin er soleiðis ikki klár at fullføra beinanvegin. Eisini verður víst á, at ongin hoyring hevur verið, og tískil er málið ikki fult upplýst vísandi til fyrisitingarlógina.

Tann 6. oktober 2021 sendir Sp/f Mót ískoytisviðmerkingar til kæruna, har víst verður á, at mett verður ikki, at Sp/f Ango og Sp/f Gráastein lúka treytirnar fyri at fáa játtað kvotu eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini. Víst verður á, at hvørki Sp/f Ango ella Sp/f Gráastein hava nakað ítøkiligt skip at vísa á, tá Fiskimálaráðið gevur teimum treytaða tilsøgn. Harumframt hava feløgini ikki nøktandi játtan um fígging, og feløgini fáa játtað minni kvotu enn minstu nøgd, sum tey hava søkt um. Øll hesi viðurskifti eiga at hava við sær, at umsóknirnar hjá Sp/f Ango og Sp/f Gráastein falla í raðfestingini. Sp/f Mót metir tí, at málið eigur at ganga umaftur.

Í skrivi, dagfest 13. oktober 2021, svarar Fiskimálaráðið uppá kæruna hjá Sp/f Móti. Fiskimálaráðið vísir á, at talan er um umsóknarmál, har nógvir umsøkjarar eru til eitt avmarkað kvotugrundarlag. Hetta merkir, at kvotur eru ikki til allar umsøkjarar, og tað er heldur ikki vist, at umsøkjarar, sum lúka grundleggjandi treytir

fyri at fáa kvotu, neyðturviliga fáa kvotu játtaða. Um talan er um fleiri egnaðar umsøkjarar, enn kvota er til, mugu teir vigast grundað á saklig metingarstøði. Hóast fyrilitini, sum metingin serliga skal grundast á, er lýst í kunngerð, metir Fiskimálaráðið seg ikki vera avmarkað til hesi fyrilitini í síni meting. Talan er um eina heildarmeting, sum skal gerast við við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars. Tað sæst beinleiðis í metingarskjalinum til kunngerðina, at í heildarmetingini verður dentur lagdur á punktini, sum eru nevnd í kunngerðini umframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Harafturat verður eisini hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið. Fyrisitingin er einans bundin av teimum kørmum, sum lógarásetingin setir fyri metingina. Tá metast skal um sakligheitina viðvíkjandi metingarstøðum, skal tað gerast í mun til, at tað grundleggjandi endamálið við útlutan av kvotum til ítøkiligt keyp av skipi er at loyva nýggjum aktørum fram at fiskirættindunum við egnum fiskiførum. Umráðandi er eisini, at pláss er fyri fleiri aktørum. Vísast skal til generellu og serligu viðmerkingarnar til § 49, stk. 1 í løgtingslóg nr. 70 frá 2021 um broyting í sjófeingislógini, sum eru at finna í løgtingsmáli nr. 100 frá 2020. Fyrisitingin hevur sostatt víðar karmar, tá metast skal um, hvør umsøkjari er best egnaður til skiparakstur, tá kvotur skulu útlutast til skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini.

Fiskimálaráðið vísir eisini á, at fyri at tryggja eina skjóta og eins viðgerð av umsóknunum er ein mannagongd ásett við nýtslu av oyðublaði, har ávísar upplýsingar skulu latast. Umsóknir vera sum útgangsstøði bert viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum.

Viðvíkjandi avmarkaða talinum av kvotu hevur umsitingin mælt til, at tveir umsøkjarar fáa játtað kvotu. Landsstýrismaðurin hevur eisini valt at luta út kvotu til tveir umsøkjarar. Eg leggi tí til grund, at rúm bert er fyri tveimum verkætlanum eftir § 49, stk. 1, 2. pkt.

Eg meti tað vera greitt, at Sp/f Mót lýkur allar ásetingar í lóggávuni fyri at kunna fáa játtað kvotu. Fiskimálaráðið vísir í sínum viðmerkingum til Sp/f Mót á, at talan er um umsóknarmál, har nógvir umsøkjarar eru til eitt avmarkað kvotugrundarlag. Hóast fleiri umsøkjarar lúka grundleggjandi treytir, er ikki vist, at teir fáa kvotu játtaða. Her má ein saklig meting gerast.

Í sambandi við gjøgnumgongd av tilfarinum í málinum kann eg staðfesta, at Sp/f Ango og Sp/f Gráastein eisini lúka grundleggjandi treytir fyri at kunna fáa játtað kvotu. Tó kann staðfestast, at játtan um fígging í báðum førum er treytað av, at umsøkjararnir fáa 12 ára rullandi loyvir umframt eina ávísa minstunøgd av kvotu.

Sambært § 7 í kunngerðini verða umsóknirnar viðgjørdar við støði í innkomnum tilfari og treytum sambært løgtingslógini og kunngerðini. Harumframt verða umsóknirnar mettar við støði í teimum høvuðsfyrilitum, ið tilskilað eru í skjali 2 til kunngerðina og lóggávuna annars. M.a. er ásett, at verkætlanin skal vera klár at fullføra beinanvegin.

Staðfestast kann, at landsstýrismaðurin gevur Sp/f Ango og Sp/f Gráastein tilsøgn um kvotu við treyt um, at teir fáa endaliga váttan um fígging uppá pláss umframt hava skip tøkt. Tilsøgnin verður givin við einari 4 viku freist at fáa viðurskiftini uppá pláss. Heimildin at geva tilsøgn um kvotu sæst í § 49, stk. 1, 3. pkt. í sjófeingislógini.

Spurningurin er so, um tað er sakligt at leggja dent á eginfígging og royndir og játta kvotu til Sp/f Ango og Sp/f Gráastein fram um Sp/f Mót.

Mín meting er, at tað er ivasamt, at tað er sakligt at leggja dent á eginfígging og royndir. Eg meti ikki, sjófeingislógin og kunngerðin leggja beinleiðis upp til, at eginfígging og royndir skulu hava avgerandi týdning. Tó er endamálið við lógini, herundir serligu viðmerkingarnar til § 49, stk. 1, 2. pkt., og eisini metingarskjalið til kunngerðina orðað rættuliga breitt. Metingin skal gerast við støði í tilfari frá umsøkjaranum og upplýsingum annars. Eisini skal avgerðin takast út frá einari heildarmeting. Viðurskifti, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið, skulu takast við í metingina. Eg eri tí samdur við Fiskimálaráðnum í, at fyrisitingin hevur víðar karmar at gera sína meting.

Hóast eg meti, at ávís viðurskifti tala fyri, at umsóknirnar hjá Sp/f Ango og Sp/f Gráasteini møguliga eiga at falla í raðfestingini í mun til Sp/f Mót, má eg staðfesta, at biðið verður um upplýsingar um eginfígging og royndir í umsóknarblaðnum. Eg meti, at upplýsingar um eginfígging og royndir kunnu vera við at styrkja rakstrargrundarlagið. Eg meti meg tískil ikki hava grundarlag fyri at siga, at landsstýrismaðurin hevur lagt dent á treytir ella atlit, sum ikki síggjastí lóg, kunngerð, metingarskjølum o.t. Eg meti meg somuleiðis ikki hava grundarlag fyri at siga, at metingin hjá landsstýrismanninum byggir á ósaklig atlit.

Fyrisitingin hevur soleiðis víðar karmar at gera sína meting, og tá ið landsstýrismaðurin út frá einari heildarmeting metir, at Sp/f Ango og Sp/f Gráastein eru best før fyri at eydnast við sínum verkætlanum, havi eg ikki beinleiðis grundarlag fyri at siga, at avgerðin um ikki at ganga umsóknini frá Sp/f Móti á møti ikki er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Niðurstøðan er, at avgerðin er tikin í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 5.2.2 verður greitt frá umsóknini hjá Sp/f Gráastein. Staðfestast kann, at umsitingin í tilmæli sínum til landsstýrismannin metir, at umsóknin "er helst stuðulsverd, tó við fyrivarni". Í tilmælinum verður víst á, at umsóknin lýkur við fyrivarni avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni og er annars væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum. Verkætlanin fevnir um at keypa skipið […] úr […] fyri […] mió. kr. Viðløgd rakstrarætlan vísir, at verkætlanin kann bera seg við minstunøgdum. Keypssáttmáli er viðlagdur, men hann gekk út 5. juli 2021. Treytað játtan um fígging frá… er viðløgd. Vísast skal á, at fíggingarstovnarnir seta sum treyt, "at låntager tildeles egenkvoter på minimum 3000 tons makrel, 3000 tons sild og 12000 tons svartkjaft, og at kvoterne har en løbetid på 12 år." Umframt nevnda fyrivarni við fíggingini skal vísast á, at søkt verður um minstunøgd á 12000 tons av svartkjafti, hetta svarar til 2/3 av tøku kvotuni.

Í innanhýsis avgerðarskrivi til umsitingina í Fiskimálaráðnum (Fiskivinnustovuna), dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin at ganga umsóknini á møti. Landsstýrismaðurin leggur dent á fíggingina av eginpeninginum og royndirnar hjá stigtakarunum. Hóast fíggingarstovnarnir seta sum treyt, at talan er um eginkvotur og 12 ára rullandi loyvir, umframt at søkt verður um 2/3 av tøku svartkjaftakvotuni, leggur landsstýrismaðurin ta meting í málið, at útlit eru fyri, at Sp/f Gráastein fær lagað til fyrivarnini í fíggingini.

23. september 2021 tekur Fiskimálaráðið avgerð um partvíst at ganga umsóknini frá Sp/f Gráasteini á møti. Talan er um eina fyribils tilsøgn sambært § 49, stk. 1, 3. pkt., har Sp/f Gráastein fær eina 4 viku freist at fáa viðurskiftini uppá pláss.

Eg eri samdur við tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum um, at umsóknin hjá Sp/f Gráasteini við fyrivarni lýkur avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni.

Sp/f Gráastein fær tillutað nakað minni av kvotu, enn søkt varð um. Umsóknin er soleiðis partvíst gingin á møti.

Sp/f Gráastein upplýsir beinleiðis í sínari umsókn, at lánifíggingin er treytað av viðurskiftum, sum ikki samsvara beinleiðis við ásetingarnar, ið eru galdandi fyri tillutan av kvotu eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. Sp/f Gráastein vísir á, at hetta má avtalast nærri.

Viðvíkjandi royndum verður í umsóknini upplýst, at stjóri felagsins er royndur fiskiskipari, og hinir hava fingist við fiskasølu (útflutning) altíð og menning av nýggjum vørum og nýggjum marknaðum. Í tilfarinum dugi eg ikki at síggja aðrar upplýsingar um royndir enn tær, sum síggjastí pkt. 6 í umsóknarblaðnum. Tað tykjast soleiðis ikki at vera aðrar upplýsingar um royndir hjá stigtakarunum aftan fyri Sp/f Gráastein.

Eg meti tískil, grundgevingin fyri royndir stendur nakað veik í sjálvum sær. Eg meti, tað er trupult at meta um, hvørt stigtakararnir aftan fyri Sp/f Gráastein hava drúgvari og/ella meiri viðkomandi royndir enn teir aftan fyri Sp/f Mót.

Viðvíkjandi Sp/f Gráasteini tykist tað sum um, at landsstýrismaðurin serliga hevur lagt dent á eginfíggingina. Spurningurin er so, um tað er sakligt at leggja dent á eginfíggingina.

Sum víst á undir kap. 5.1.2 viðvíkjandi umsóknini hjá Sp/f Móti, so meti eg tað vera ivasamt, at tað er sakligt at leggja dent á eginpening og royndir viðvíkjandi umsóknini. Eg meti tó ikki beinleiðis grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin um at tilluta kvotu til Sp/f Gráastein er ólóglig, sí niðurstøðuna viðvíkjandi Sp/f Móti.

Hinvegin eri eg samdur við tilmælinum hjá umsitingini í Fiskimálaráðnum í, at umsóknirnar hjá Sp/f Ango, Sp/f Gráasteini, Sp/f JKS Impex og P/F Ocean Group Faroes Ltd. eru so mikið meinlíkar, at tað er sakligt at leggja dent á eginpening og royndir, tá støða skal takast til hesar umsóknirnar. Hesar umsóknir lúka allar við fyrivarni grundleggjandi treytirnar í lóggávuni.

Eg meti tað tó ikki vera part av kanningarsetninginum at taka støðu til, hvør av omanfyri nevndu umsøkjarum átti at fingið tillutað kvotu fram um annan. Eg taki soleiðis ikki støðu til, um tað er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina, at Sp/f Gráastein hevur fingið tillutað kvotu fram um Sp/f JKS Impex og P/F Ocean Group Faroes Ltd.

Niðurstøðan er, at avgerðin um partvíst at ganga umsóknini hjá Sp/f Gráastein á møti er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 5.2.3 verður greitt frá umsóknini hjá Sp/f Ango. Staðfestast kann, at umsitingin í tilmæli sínum til landsstýrismannin metir, at umsóknin "er helst stuðulsverd, tó við fyrivarni". Í tilmælinum verður víst á, at umsóknin lýkur við fyrivarni avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni og er annars væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum, eins og víst verður á fleiri samstarvsavtalur. Verkætlanin fevnir um at keypa skipið […] úr […] fyri […] mió. kr. Viðløgd raskstrarætlan vísir, at verkætlanin kann bera seg við minstunøgdum. Keypssáttmáli er viðlagdur, og skipið kann yvirtakast beinanvegin. Treytað játtan um fígging frá […] og […] er viðløgd. Vísast skal á, at fíggingarstovnarnir seta sum treyt, at felagið fær tillutað 12 ára rullandi eginkvotur, sum í minsta lagi svara til 3900 tons av makreli, 5400 tons av sild og 9500 tons av svartkjafti, av verandi rættindum hjá Føroyum sum strandaland (ikki av økingini, sum Føroyar hava givið sær sjálvum, nú eingin semja er).

Í innanhýsis avgerðarskrivi til umsitingina í Fiskimálaráðnum (Fiskivinnustovuna), dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin at ganga umsóknini á møti. Landsstýrismaðurin leggur dent á fíggingina av eginpeninginum og royndirnar hjá stigtakarunum. Hóast fíggingastovnarnir seta sum treyt, at felagið fær tillutað 12 ára rullandi eginkvotur, leggur landsstýrismaðurin ta meting í málið, at útlit eru fyri, at Sp/f Ango fær lagað til fyrivarnini í fíggingini.

23. september 2021 tekur Fiskimálaráðið avgerð um partvíst at ganga umsóknini frá Sp/f Ango á møti. Talan er um eina fyribils tilsøgn sambært § 49, stk. 1, 3. pkt., har Sp/f Ango fær eina 4 viku freist at fáa viðurskiftini uppá pláss.

Eg eri samdur við tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum um, at umsóknin hjá Sp/f Ango við fyrivarni lýkur avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni.

Sp/f Ango fær tillutað nakað minni av kvotu, enn søkt varð um. Umsóknin er soleiðis partvíst gingin á møti.

Sum við umsóknini hjá Sp/f Gráasteini verður eisini í hesi umsókn løgd við ein treytað játtan um fígging, sum Fiskimálaráðið ikki metir er í samsvari við lóggávuna.

Viðvíkjandi royndunum hjá stigtakarunum, so eru tær væl betri lýstar í umsóknarblaðnum í mun til hinar tilmæltu umsóknirnar. Tað tykist greitt, at talan er um persónar, sum hava drúgvar og viðkomandi royndir.

Eg meti, hesi viðurskifti eru saklig og viðkomandi, tá metast skal um umsóknirnar, sum eru tilmæltar, men við fyrivarni. Eg meti tað vera ivasamt, at hesi viðurskifti eru saklig og viðkomandi í mun til umsóknina hjá Sp/f Móti.

Hinvegin eri eg samdur við tilmælinum hjá umsitingini í Fiskimálaráðnum í, at umsóknirnar hjá Sp/f Ango, Sp/f Gráasteini, Sp/f JKS Impex og P/F Ocean Group Faroes Ltd. eru so mikið meinlíkar, at tað er sakligt at leggja dent á eginpening og royndir, tá støða skal takast til hesar umsóknirnar. Hesar umsóknir lúka allar við fyrivarni grundleggjandi treytirnar í lóggávuni.

Eg meti tað tó ikki vera part av kanningarsetninginum at taka støðu til, hvør av omanfyri nevndu umsøkjarum átti at fingið tillutað kvotu fram um annan. Eg taki soleiðis ikki støðu til, um tað er í samsvari við

sjófeingislógina og fyrisitingarlógina, at Sp/f Ango hevur fingið tillutað kvotu fram um Sp/f JKS Impex og P/F Ocean Group Faroes Ltd.

Vísandi til niðurstøðuna í málinum hjá Sp/f Móti, sí kap. 5.2.1., so meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin um at játta kvotu til Sp/f Ango ikki er lóglig.

Niðurstøðan er, at avgerðin um partvíst at ganga umsóknini hjá Sp/f Ango á møti er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 5.2.4 verður greitt frá umsóknini hjá Sp/f JKS Impex. Staðfestast kann, at umsitingin í tilmæli sínum til landsstýrismannin metir, at umsóknin "er helst stuðulsverd, tó við fyrivarni". Í tilmælinum verður víst á, at umsóknin lýkur við fyrivarni avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni og er annars væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum, eins og víst verður á samstarvsavtalur og ítøkiliga verkætlan viðvíkjandi reyðæti. Verkætlanin fevnir um at keypa skipið […] úr […] fyri […] mió. kr. Viðløgd rakstrarætlan vísir, at verkætlanin kann bera seg við minstunøgdum. Keypssáttmáli er viðlagdur, og skipið kann yvirtakast beinanvegin. Treytað játtan um fígging frá […] er viðløgd. Vísast skal á, at treytirnar frá fíggingarstovninum eru óitøkiligar, m.a. verður krav sett um, at kvotugrundarlagið skal vera nøktandi, uttan tó at upplýst verður, hvat nøktandi kvotugrundarlag er.

Í innanhýsis avgerðarskrivi til umsitingina í Fiskimálaráðnum (Fiskivinnustovuna), dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin ikki at ganga umsóknini á møti. Víst verður til grundgevingarnar, sum longu eru førdar fram omanfyri í sambandi við umsóknina frá Sp/f Móti, sí kap. 5.2.1.

17. september 2021 tekur Fiskimálaráðið avgerð um ikki at ganga umsóknini frá Sp/f JKS Impex á møti. Fiskimálaráðið metir, at umsóknin er væl undirbygd við upplýsingum og avtalum um samstørv, fígging, rakstur umframt annað virksemi, sum verður knýtt at verkætlanini. Vísast kann eisini á, at felagið hevur lutfalsligan nógvan eginpening. Hóast talan er um fleiri verkætlanir, sum kundu verið játtaðar, so avmarkar samlaði karmurin í tøkari kvotu talið av verkætlanum til tvey skip. Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum er dentur lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur. Í avgerðini eru verkætlanir, ið vísa á lutfalsligan nógvan eginpening og beinleiðis royndir, sostatt raðfestar. Í hesi meting fellur umsóknin hjá Sp/f JKS Impex í raðfestingini grundað á, hvørjar royndir sjálvir stigtakararnir hava við fiskiskapi og skiparakstri.

18. og 19. september 2021 mótmælir Sp/f JKS Impex avgerðina og ger galdandi, at avgerðin er tikin á skeivum grundarlagi, tí høvuðsgrundgevingin er, at stigtakararnir ikki hava royndir til fiskiskap og skiparakstur. Tað er ikki rætt.

21. september 2021 sendir Sp/f JKS Impex kæru til Fiskimálaráðið, har m.a. verður víst á, at fyrisitingarliga viðgerðin hevur so týðandi brek og manglar, at biðið verður um, at kæran fær steðgandi virknað fyri øllum avgerðum Fiskimálaráðsins, soleiðis at fyrisitingarliga viðgerðin kann ganga umaftur og avgerðin takast av nýggjum.

13. oktober 2021 svarar Fiskimálaráðið uppá kæruna. Fiskimálaráðið vísir á, at talan er um umsóknarmál, har nógvir umsøkjarar eru til eitt avmarkað kvotugrundarlag. Hetta merkir, at kvotur eru ikki til allar umsøkjarar, og tað er heldur ikki vist, at umsøkjarar, sum lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu, neyðturviliga fáa kvotu játtaða. Um talan er um fleiri egnaðar umsøkjarar, enn kvota er til, mugu teir vigast grundað á saklig metingarstøði. Hóast fyrilitini, sum metingin serliga skal grundast á, er lýst í kunngerð, metir Fiskimálaráðið seg ikki vera avmarkað til hesi fyrilitini í síni meting. Talan er um eina heildarmeting, sum skal gerast við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars. Tað sæst beinleiðis í metingarskjalinum til kunngerðina, at í heildarmetingini verður dentur lagdur á punktini, sum eru nevnd í kunngerðini umframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Harafturat verður eisini hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið. Fyrisitingin er einans bundin av teimum kørmum, sum lógarásetingin setir fyri metingina. Tá metast skal um sakligheitina viðvíkjandi metingarstøðum, skal tað gerast við tí í huga, at tað grundleggjandi endamálið við útlutan av kvotum til ítøkiligt keyp av skipi er at loyva nýggjum aktørum fram at fiskirættindunum við egnum fiskiførum. Umráðandi er eisini, at pláss er fyri fleiri aktørum. Vísast skal til generellu og serligu viðmerkingarnar til § 49, stk. 1 í løgtingslóg nr. 70 frá 2021 um broyting í sjófeingislógini, sum eru at finna í løgtingsmáli nr. 100 frá 2020. Fyrisitingin hevur sostatt víðar karmar, tá metast skal um, hvør umsøkjari er best egnaður til skiparakstur, tá kvotur skulu útlutast til skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini.

Fiskimálaráðið vísir eisini á, at fyri at tryggja eina skjóta og eins viðgerð av umsóknunum er ein mannagongd ásett við nýtslu av oyðublaði, har ávísar upplýsingar skulu latast. Umsóknir vera sum útgangsstøði bert viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum.

Eg eri samdur við tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum um, at umsóknin hjá Sp/f JKS Impex við fyrivarni lýkur avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni.

Fiskimálaráðið vísir í avgerð síni á, at umsóknin fellur í raðfestingini orsakað av vantandi beinleiðis royndum hjá stigtakarunum við fiskiskapi og skiparakstri.

Í hesum føri verður ikki víst til manglandi eginfígging, tí Sp/f JKS Impex hevur lutfalsligan nógvan eginpening, sum eisini víst verður á í avgerðini frá Fiskimálaráðnum.

Sum áður víst á, so meti eg, grundgevingin um ”beinleiðis royndir hjá stigtakarunum” stendur nakað veik.

Í oyðublaðnum viðvíkjandi § 49, stk. 1, 2. pkt. stendur hetta viðvíkjandi upplýsing um royndir undir pkt. 6: *”Lýs stutt, hvussu langt ætlanin er komin í fyrireiking og teir førleikar, ið eru grundarlag undir verkætlanini, eitt nú royndir og vitan innan fiskivinnu…”*.

Í oyðublaðnum verður soleiðis ikki biðið um skjalprógv um royndirnar. Tað sæst heldur ikki greitt, um tað eru sjálvir stigtakararnir, sum skulu hava royndir, ella um starvsfólk/manning eisini eru viðkomandi fyri metingina.

Vísandi til tilmæli frá umsitingini í Fiskimálaráðnum, har mælt varð landsstýrismanninum til sjálvur at velja ein umsøkjara úr bólkinum ”helst stuðulsverd, tó við fyrivarni”, so meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at metingin hjá landsstýrismanninum av førleikunum hjá umsøkjarunum er ósaklig í sjálvum sær.

Fiskimálaráðið hevur valt eina mannagongd, har umsóknirnar verða viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum, og har umsøkjarar ikki verða hoyrdir. Landsstýrismaðurin hevur soleiðis skulað tikið eina avgerð við støði í teimum upplýsingum, sum vóru til taks. Á hesum grundarlagi meti eg ikki, at avgerðin um at nokta Sp/f JKS Impex kvotu byggir á ósaklig atlit ella er í ósamsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Eg taki tó ikki støðu til, um Sp/f JKS Impex í størri ella minni mun lýkur treytirnar um at fáa kvotu tillutaða í mun til hinar umsøkjararnar, sum vórðu tilmæltir í bólkinum "helst stuðulsverd, tó við fyrivarni".

Niðurstøðan er, at avgerðin um ikki at ganga umsóknini frá Sp/f JKS Impex á møti er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 5.2.5 verður greitt frá umsóknini hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. Staðfestast kann, at umsitingin í tilmæli sínum til landsstýrismannin metir, at umsóknin "er helst stuðulsverd, tó við fyrivarni". Í tilmælinum verður víst á, at umsóknin lýkur við fyrivarni avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni og er annars væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum. Verkætlanin fevnir um at keypa […] úr […] fyri […] mió. umframt at keypa kvotur fyri […] mió. kr. Tilsøgn um seljarafígging av skipi, kvotukeypi og rakstri frá […] er viðløgd. Einki verður upplýst um, hvørjar kvotur talan er um at keypa, og heldur ikki verða nakrar treytir um lánifíggingina á […] mió. kr. upplýstar í tilsøgnini. Umframt nevnda fyrivarni viðvíkjandi fíggingini av kvotunum skal vísast á, at søkt verður um minstunøgd á 12.000 tons av svartkjafti, sum svarar til 2/3 av tøku kvotuni.

Í innanhýsis avgerðarskrivi til umsitingina í Fiskimálaráðnum (Fiskivinnustovuna), dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin ikki at ganga umsóknini á møti. Víst verður til grundgevingarnar, sum longu eru førdar fram omanfyri í sambandi við umsóknina frá Sp/f Móti, sí kap. 5.2.1.

17. september 2021 tekur Fiskimálaráðið avgerð um ikki at ganga umsóknini frá Sp/f JKS Impex á møti. Fiskimálaráðið metir, at umsóknin er væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum. Hóast talan er um fleiri verkætlanir, sum kundu verið játtaðar, so avmarkar heildarkarmurin í tøkari kvotu talið av verkætlanum til tvey skip. Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum er dentur lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava í fiskiskapi og skiparakstri. Í avgerðini eru verkætlanir, ið vísa á lutfalsligan nógvan eginpening og beinleiðis royndir, sostatt raðfestar. Í hesi meting fellur umsóknin hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. í raðfestingini, serliga í sambandi við, at eginpeningurin er lítil.

24. oktober 2021 sendir P/F Ocean Group Faroes Ltd. í telduposti viðmerkingar til Fiskimálaráðið. P/F Ocean Group Faroes Ltd. undrast á, at dentur er lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpengini, eins og hvørjar royndir stigtakararnir hava í fiskiskapi og skiparakstri. Víst verður somuleiðis á, at tað sæst ikki í umsóknarblaðnum, at dentur fór at verða lagdur á hesi viðurskifti. Eisini verður víst á, at Fiskimálaráðið hevur upplýsingarskyldu og eigur tí at upplýsa um allar treytir í eini umsókn.

3. november 2021 svarar Fiskimálaráðið uppá viðmerkingarnar. Fiskimálaráðið vísir á, at talan er um umsóknarmál, har nógvir umsøkjarar eru til eitt avmarkað kvotugrundarlag. Hetta merkir, at kvotur eru ikki til allar umsøkjarar, og tað er heldur ikki vist, at umsøkjarar, sum lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu,

neyðturviliga fáa kvotu játtaða. Um talan er um fleiri egnaðar umsøkjarar, enn kvota er til, mugu teir vigast grundað á saklig metingarstøði. Hóast fyrilitini, sum metingin serliga skal grundast á, er lýst í kunngerð, metir Fiskimálaráðið seg ikki vera avmarkað til hesi fyrilitini í síni meting. Talan er um eina heildarmeting, sum skal gerast við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars. Tað sæst beinleiðis í metingarskjalinum til kunngerðina, at í heildarmetingini verður dentur lagdur á punktini, sum eru nevnd í kunngerðini umframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Harafturat verður eisini hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið. Fyrisitingin er einans bundin av teimum kørmum, sum lógarásetingin setir fyri metingina. Tá metast skal um sakligheitina viðvíkjandi metingarstøðum, skal taða gerast við tí í huga, at tað grundleggjandi endamálið við útlutan av kvotum til ítøkiligt keyp av skipi er at loyva nýggjum aktørum fram at fiskirættindunum við egnum fiskiførum. Umráðandi er eisini, at pláss er fyri fleiri aktørum. Vísast skal til generellu og serligu viðmerkingarnar til § 49, stk. 1 í løgtingslóg nr. 70 frá 2021 um broyting í sjófeingislógini, sum eru at finna í løgtingsmáli nr. 100 frá 2020. Fyrisitingin hevur sostatt víðar karmar, tá metast skal um, hvør umsøkjari er best egnaður til skiparakstur, tá kvotur skulu útlutast til skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini.

Fiskimálaráðið vísir eisini á, at fyri at tryggja eina skjóta og eins viðgerð av umsóknunum er ein mannagongd ásett við nýtslu av oyðublaði, har ávísar upplýsingar skulu latast. Umsóknir vera sum útgangsstøði bert viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum.

Eg eri samdur við tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum um, at umsóknin hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. við fyrivarni lýkur avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni.

Fiskimálaráðið vísir í avgerð síni á, at umsóknin fellur í raðfestingini serliga í sambandi við, at eginpeningurin er lítil.

Í hesum føri er í avgerðini serliga lagdur dentur á, at eginpeningurin er lítil. Her verður soleiðis ikki beinleiðis víst til manglandi royndir í mun til teir umsøkjarar, sum hava fingið tillutað kvotu.

Vísandi til, at umsóknirnar bert verða viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum, skal eg enn einaferð vísa á, at eg meti, grundgevingin um royndir stendur veikt. Í umsóknini hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. verða førleikarnir aftan fyri verkætlanina lýstir stutt og yvirskipað. Eg meti tað vera trupult at taka dagar ímillum, hvørt royndirnar aftan fyri verkætlanina hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. eru betri ella verri enn royndirnar hjá hinum umsøkjarunum.

Eg kann tó út frá skjalatilfarinum staðfesta, at eginfíggingin hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. er væl lægri enn eginfíggingin hjá teimum umsøkjarunum, sum hava fingið tillutað kvotu.

Spurningurin er so, um tað er sakligt at lata eginfíggingina verða avgerandi fyri, at umsøkjari fær noktað kvotu.

Vísandi til, at P/F Ocean Group Faroes Ltd. er í tilmælinum bólkað sum ”helst stuðulsverd, tó við fyrivarni”, har mælt verður til, at landsstýrismaðurin sjálvur avger, hvør av hesum umsøkjarunum skal fáa tillutað kvotu, meti eg tað vera sakligt at leggja dent á eginfíggingina.

Umsitingin viðgongur í tilmælinum til Jacob Vestergaard, at tað er trupult at vísa á fyrisitingarliga saklig viðurskifti, ið kunnu lyfta eina umsókn fram um aðra. Jacob Vestergaard hevur í hesum sambandi mett eginfíggingina vera eitt avgerandi atlit at taka serliga viðvíkjandi rakstrargrundarlagnum undir verkætlanini.

Á hesum grundarlagi meti eg ikki, at avgerðin um at nokta P/F Ocean Group Faroes Ltd. kvotu byggir á ósaklig atlit ella er í ósamsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina. Eg meti tí, avgerðin er lóglig.

Sum áður sagt, so taki eg ikki her støðu til, um P/F Ocean Group Faroes Ltd. í størri ella minni mun lýkur treytirnar um at fáa tillutað kvotu í mun til hinar umsøkjarnar í bólkinum "helst stuðulsverd, tó við fyrivarni".

Niðurstøðan er, at avgerðin um ikki at ganga umsóknini frá P/F Ocean Group Faroes Ltd. á møti, er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í triðja parti verður greitt frá útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini í 2021. Av tí at ískoytiskvotur av makreli og norðhavssild vórðu lutaðar út í 2020 fyri 5 ár fram, kann bert søkjast um svartkjaft í 2021.

Umsitingin letur landsstýrismanninum tilmæli 23. september 2021. Landsstýrismaðurin velur at fylgja tilmælinum.

Eg kann staðfesta, at landsstýrismaðurin velur at fylgja tilmælinum hjá umsitingini uttan nakað frávik. Landsstýrismaðurin fylgir soleiðis tilmælinum fult og heilt.

Eg havi hugt umsóknirnar ígjøgnum og meti ikki, nakað talar fyri, at avgerðirnar hjá landsstýrismanninum ikki eru í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina. Eg meti tí, avgerðirnar eru lógligar.

Niðurstøðan er, at avgerðirnar eru í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kapitli 6 verður greitt frá, um brot er framt á lóg um ábyrgd landsstýrisins.

Í fyrsta partinum verður komið inn á málið viðvíkjandi útsetan av útlutan av kvotu eftir § 49, stk. 1 í 2020, sí kap. 4.1. Her eri eg komin til ta niðurstøðu, at landsstýrismaðurin hevur framt brot á góðan fyrisitingarsið við tilvitað at hava drálað við at viðgera umsóknirnar. Eg meti ikki, landsstýrismaðurin hevur havt nakra sakliga orsøk til at drála. Landsstýrismaðurin viðgongur eisini í munnligu avhoyringini at hava drálað.

Sambært § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna sæst, at løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara.

Við tilvitað at hava framt brot á reglurnar um góðan fyrisitingarsið meti eg, at talan er um brot á § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

Vísandi til umstøðurnar í málinum annars, herundir serliga, at Løgtingið hevur samtykt at broyta sjófeingislógina, soleiðis at kvoturnar kundu flytast til 2021, meti eg tó ikki grundarlag vera fyri at reisa

revsimál mótvegis landsstýrismanninum. Vísandi til tær hugleiðingar og metingar, sum verða førdar fram av Hans Gammeltoft Hansen, kanningarstjóra, í kanningini um ”Eysturoyartunnilin” í 2015, kap. 11 um siðvenjuna at reisa mál mótvegis landsstýrisfólki, meti eg ikki grundarlag vera fyri at reisa mál mótvegis landsstýrismanninum.

Í tí sambandinum mæli eg til, at Løgtingið endar hetta málið við í einum uppskoti til samtyktar at geva fyrrverandi landsstýrismanninum, Jacob Vestergaard, eina átalu fyri brot á § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna fyri tilvitað at hava drálað við at viðgera umsóknirnar viðvíkjandi útlutan av kvotu eftir § 49, stk. 1 í sjófeingislógini í 2020. Her skal serliga vísast á, at lýst var eftir umsóknum, umsóknir vórðu latnar inn og umsitingin í Fiskimálaráðnum hevði viðgjørt umsóknirnar, umframt latið Jacob Vestergaard tilmæli til støðutakan. Málið var soleiðis klárt at avgreiða. Landsstýrismaðurin velur tó tilvitað at drála og ikki viðgera umsóknirnar orsakað av politiskum orsøkum, sum ikki kunnu metast verða sakligar.

Í øðrum parti verður komið inn á málið viðvíkjandi manglandi kunning til P/F Ocean Group Faroes Ltd. í 2020.

Hóast eg meti, at spurnartekin kann setast við, um fyrisitingarrættarliga líkareglan er hildin, so meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at Jacob Vestergaard tilætlað ella við grovum ósketni hevur skúgvað til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara, smb. § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

Í triðja parti verður komið inn á málið viðvíkjandi útlutan av kvotu eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í 2021 ogr avgerðina hjá landsstýrismanninum at víkja frá tilmælinum frá umsitingini.

Mín niðurstøða í hesum føri er, at tá Sp/f Mót lýkur allar treytir, sum ásettar eru í lóg og kunngerð, fram um aðrar umsøkjarar, meti eg tað vera ivasamt, at tað er sakligt at leggja dent á eginfígging og royndir.

Eg meti tó ikki grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin hjá Jacob Vestergaard at víkja frá tilmælinum er beinleiðis brot á sjófeingislógina ella fyrisitingarlógina. Jacob Vestergaard er ikki bundin at fylgja tilmælinum frá umsitingini. Hann kann velja at víkja frá, men so skal hann grundgeva sakliga fyri, hví hann víkir frá tilmælinum. Í hesum sambandi hevur Jacob Vestergaard fingið vegleiðing og ráðgeving frá Rógva Reinert, aðalstjóra, og skrivaranum í Fiskimálaráðnum. Avgerðin og grundgevingarnar hjá Jacob Vestergaard eru skjalfestar í innanhýsis avgerðarskrivi, sum er sent umsitingini í Fiskimálaráðnum til avgreiðslu.

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar av Jacob Vestergaard, Rógva Reinert og embætisfólkunum kom greitt fram, at arbeiðið í Fiskimálaráðnum varð skipað soleiðis, at umsitingin skuldi gera oyðubløð, viðgera umsóknirnar og gera tilmæli til landsstýrismannin. Jacob Vestergaard vildi síðani brúka Rógva Reinert at sparra við og ráðgeva seg í sambandi við endaligu avgerðina. Rógvi Reinert hevur síðani, saman við skrivaranum í Fiskimálaráðnum, veitt Jacob Vestergaard ta tænastu at gera uppskot til innanhýsis avgerðarskriv at senda til umsitingina (Fiskivinnustovuna) til avgreiðslu.

Jacob Vestergaard hevur soleiðis ikki av sínum eintingum tikið avgerð í málinum uttan vegleiðing og ráðgeving frá sínum starvsfólki í ráðnum. Jacob Vestergaard hevur søkt sær ráðgeving og hevur, meti eg, soleiðis roynt at tryggjað sær, at avgerðirnar eru í samsvari við lóg og reglur.

Út frá tilfarinum í málinum meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at Jacob Vestergaard tilætlað ella við grovum ósketni hevur skúgvað til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara, smb. § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

## Kap. 3 – Gongdin í málinum

4. november 2019 legði táverandi samgonga, sum tók við í september 2019, fram lógaruppskot um nýggja sjófeingislóg - Løgtingsmál nr. 15/2019: Uppskot til løgtingslóg um sjófeingi (málsskjal 1).

Í lógaruppskotinum verður m.a. í § 49 sett inn ein nýggj áseting um vinnuligar royndir og verkætlanir. Í almennu viðmerkingunum til hesa áseting verður í lógaruppskotinum greitt frá (s. 41f):

*"Farið verður frá skipanini við menningarkvotum, sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, sum kom í gildi 1. januar 2018. Skipanin við menningarkvotum tók serlig økisrættarlig fyrilit í umsitingini, og tað var ein nevnd, Metingarnevndin, ið gjørdi tilmæli til landsstýrismannin, ið lá til grund fyri givnu tilsagnunum.*

*Sambært samgonguskjalinum verður prosentparturin, sum samsvarar við 1 ára uppboðssølukvotur í 2019 saman við menningarkvotunum, samlaður og býttur í tveir partar. Annar parturin verður tøkur til royndarkvotur og verandi menningarkvotur, meðan hin verður avhendaður sum loyvir við 12 ára gildistíð.*

*Skotið verður upp, at tær menningarkvotur, ið eru galdandi, tá ið henda lóg kemur í gildi, verða eftirmettar við støði í galdandi treytum. Um mett verður, at treytirnar í nóg stóran mun eru loknar í 2020, tá ið tær fyrstu av galdandi menningarkvotum fara úr gildi, kunnu tær leggjast um til egnar árskvotur. Tó skulu rættindahavararnir, áðrenn árslok 2021, lúka kravið um veiðiloyvi o.a., og tað merkir m.a., at teir skulu vera eigarar av fiskifari, og skulu lúka allar aðrar vanligar treytir, s.s. treytir um ognarviðurskifti, miðsavnan o.a.*

*Nýggja skipanin við vinnuligum royndum og verkætlanum, ið fevnir um svartkjaft, makrel og norðhavssild, verður latin umsøkjarum til verkætlanir, sum hava eitt menningar-og nýskapanarmál í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgum. Tó er tað ein grundleggjandi treyt, at umsóknin skal vera knýtt at ávísum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi, ella við fiskiloyvi í bólki 5.*

*Nøgdirnar, ið talan er um, eru 8,5% av tøku føroysku kvotuni av nevndu fiskasløgum t.e., áðrenn býtið er gjørt við onnur lond. Tó so, at um verandi menningarkvotur verða lagdar um til egnar árskvotur, verður tikið av teimum 8,5% og latið verandi feløgum við menningarkvotum, sbr. skiftisregluna í § 10. Tað verður umsitingin í Fiskimálaráðnum, ið fer at viðgera hetta.*

*Umframt nevndu nøgdir kann landsstýrismaðurin seta kvotu, sambært § 14, stk. 2 og 3, av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Hesin parturin av kvotuni fylgir tó eftir 2020 flytingunum í heildarkvotuni, t.v.s., um heildarkvotan okkurt ár fer undir heildarkvotuna í 2020, eru tað hesar kvoturnar, ið tað fyrst verður tikið av. Fer heildarkvotan undir mørkini í § 14, stk. 1, falla tær heilt burtur, inntil heildarkvoturnar aftur eru oman fyri mørkini.*

*Landsstýrismaðurin fær við uppskotinum heimild til at áseta nærri reglur um mannagongdog treytir í sambandi við umsóknir, og landsstýrismaðurin kann í loyvinum áseta treytir um fiskileiðir, veiðihættir, tíðarskeið o.a.”*

Í samgonguskjalinum (málsskjal 2) verður hetta nevnt undir Fiskivinnumál (s. 6 ovast):

*”…Vit skulu hava eina fiskivinnuskipan, ið elvir til búskaparliga, vinnuliga, lívfrøðiliga og umhvørvisliga burðardygd, og sum hevur við sær mest møguliga virðisøking og menning í Føroyum.*

*Tilfeingið, ið er ogn Føroya fólks, kann latast sum brúksrættur í ávíst tíðarskeið og kann fella aftur til landið eftir nærri ásettum treytum.*

*Gransking og menning innan veiðu og matvøruframleiðslu eru avgerandi fyri kappingarførið hjá føroysku fiskivinnuni og fyri at skapa mest møguligan virðisvøkstur.*

*Fiskiveiðiskipanin skal byggja á eina loyvisskipan við 10 árauppsagnartíð.*

*Prosentparturin, sum svarar til 1 ára uppboðssølurættindi í 2019, har parturin oman fyri hámarkið í §15 í løgtingslóg um sjófeingi av svartkjafti, norðhavssild og makreli er íroknaður, verður saman við menningarkvotunum samlaður og býttur í tveir lutir.*

*Annar luturin verður tøkur til royndar- og verandi menningarkvotur, meðan hin verður avhendaður sum loyvir við 10 ára uppsøgn…”*

Lógaruppskotið (málsskjal 3) kom í gildi 1. januar 2020 (løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019).

Umsitingin í Fiskimálaráðnum fer í januar mánað 2020 í gongd við arbeiðið at gera kunngerð til at lýsa eftir umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir.

13. mai 2020 verður uppskot til broyting til sjófeingislógina lagt fram í Løgtinginum (LM-142/2019) (málsskjal 4).

Í almennu viðmerkingunum um endamálið við lógaruppskotinum greitt frá (s. 5):

*”Endamálið við uppskotinum er at broyta verandi orðingar um, hvussu kvotur av makreli, svartkjafti og norðhavssild, ið vera settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir, verða brúktar, so at ein eisini hevur møguleika at útluta ein part av kvotunum til fiskifør fyri at styrkja kvotugrundarlagið og á tann hátt stuðla undir burðardyggari rakstri. Endamálið við uppskotinum er eisini at gera tekniskar broytingar og tillagingar í lógini um sjófeingi, soleiðis at orðingarnar eru neyvari og greiðari fyri borgara og umsiting.”*

Við hesi lógarbroyting kemur ásetingin um ískoytiskvotur inn í § 49, stk. 2 (Løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020 um broyting í løgtingslóg um sjófeingi) (málsskjal 5).

Kunngerð nr. 118 frá 10. juli 2020 um kvotur av makreli og norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir varð lýst í kunngerðarblaðnum 10. juli 2020 (málsskjal 6).

Somuleiðis varð sama dag á heimasíðuni hjá Fiskimálaráðnum alment lýst eftir umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir (málsskjal 13). Umsóknarfreistin var 10. august 2020, kl. 12. Í lýsingini vóru hesar nøgdir tøkar:

*"Tøka nøgdin til vinnuligar royndir og verkætlanir er:*

- *4.260 tons av makreli*
- *8.095 tons av norðhavssild*

*Tøka nøgdin til ískoytiskvotur er:*

- *2.840 tons av makreli*
- *5.397 tons av norðhavssild"*

Tilmæli frá umsitingini til landsstýrismannin viðvíkjandi umsóknum um ískoytiskvotur sambært § 49, stk. 2 í sjófeingislógini og samsvarandi ásetingum í kunngerð nr. 118 frá 10. juli 2020 um kvotur av makreli og norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir varð sent við telduposti, dagfestur 24. august 2020.

Í tilmælinum verður upplýst, at 16 umsóknir komu inn til ískoytiskvotur.

Endurskoðað tilmæli verður latið landsstýrismanninum 21. september 2020.

Tilmæli frá umsitingini til landsstýrismannin viðvíkjandi umsóknum um kvotur av makreli og norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1 í sjófeingislógini og samsvarandi ásetingum í kunngerð nr. 118 frá 10. juli 2020 um kvotur av makreli og norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir varð sent við telduposti, dagfestur 15. september 2020.

Í tilmælinum verður upplýst, at 38 umsóknir komu inn.

30. september 2020 verður í tíðindaskrivi á heimasíðuni hjá Fiskimálaráðnum boðað frá, at avgerð er tikin viðvíkjandi ískoytiskvotum 2020 sambært § 49, stk. 2 í sjófeingislógini (málsskjal 14). Tíðindaskrivið er soljóðandi:

*"Tann 10. juli 2020 varð alment lýst eftir umsóknum millum annað til kvotu fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskifari; "ískoytiskvotu".*

*Seinasta freist at søkja var 10. august 2020.*

*16 umsóknir komu inn til ískoytiskvotur. Sambært lógini kann í 2020, av kvotunum av norðhavssild og makreli, setast ávís nøgd av fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskifari. Landsstýrismaðurin hevur í*

*kunngerð ásett nøgdirnar at vera 2.840 tons av makreli og 5.397 tons av norðhavssild, sbr. § 5 í kunngerð nr. 118 frá 10. juli 2020 um kvotur av makreli og norðhavssild til vinnuligar royndir.*

*Í september 2020 fekk landsstýrismaðurin handað tilmæli frá umsitingini um, hvørjar umsóknir skulu fáa tilsøgn, eins og hvussu nógv tons hvør umsøkjari fær tillutað av hvørjum fiskaslagi.*

*Avgerðin hjá landsstýrismanninum fylgir tilmælinum í høvuðsheitum. Øll skipini, sum fáa tillutað ískoytiskvotu, og eru virkin í uppsjóvarvinnu eina, fáa tillutað eins stóra nøgd. Mett verður, at virkisøki teirra er á líknandi støði, og rættast er at leggja somu niðurstøðu fyri hesi skip hvat tørvi á ískoytiskvotu viðvíkur. Tvey skip, ið eru fevnd at avgerðini um tilsøgn, kunnu hava rímiliga støðugan fiskiskap eftir botnfiski við Føroyar. Umframt fiskidagar hava hesi skip eisini gulllaksakvotu, ið tryggjar støðugan rakstur í fleiri mánaðir um árið. Tí er avgerð tikin um at lata hesum skipunum minni ískoytiskvotu enn hinum. Annað av hesum skipunum søkti ikki um kvotu av norðhavssild.*

*Við grundarlagi í viðgerð av innkomnum umsóknum er avgerð tikin um at lata hesum 7 skipum ískoytiskvotu:*

| ***Skip*** | ***Makrelur í tonsum*** | ***Norðhavssild í tonsum*** |
|---|---|---|
| *Jupiter* | *490* | *990* |
| *Arctic Voyager* | *490* | *990* |
| *Fram* | *490* | *990* |
| *Vesturbúgvin* | *195* | *447* |
| *Eysturbúgvin* | *195* | *0* |
| *Katrin Johanna* | *490* | *990* |
| *Hoyvík* | *490* | *990* |
| ***Tons tilsamans*** | ***2.840*** | ***5.397"*** |

9. desember 2020 leggur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fram lógaruppskot um broyting í sjófeingislógini – Løgtingsmál nr. 69/2020 (málsskjal 7). Endmálið við uppskotinum er m.a. at útseta og flyta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir frá 2020 til 2021.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið verður hetta ført fram um orsøkina til uppskotið:

*"Avgerð er tikin um ikki at luta út kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1, í 2020. Ætlanin er heldur at lýsa eftir vinnuligum royndum og verkætlanum í 2021, har kvotur av svartkjafti verða partur av samlaða kvotugrundarlagnum, ið søkjast kann eftir, eins og møguleiki skal vera fyri at søkja um kvotu í sambandi við ítøkiligt keyp av fiskifari, uttan at seta fiskifarinum treyt um veiðiloyvi, soleiðis at nýggir aktørar við teirra egnu fiskiførum kunnu sleppa framat fiskirættindum, um mett verður, at grundarlag er fyri at ganga tilíkari umsókn á møti. Fiskifør uttan veiðiloyvi kunnu tó bert fiska av kvotum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. og § 50, stk. 1 og 4 (royndarfiskiskapur og vinnuligar fiskiroyndir).*

*Eisini verður heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at loyva størri flytingum enn 10% av ófiskaðum kvotum av makreli hjá einstaka fiskifarinum frá 2020 til 2021, uttan at talan er um serligar umstøður, eins og felags árskvotur av makreli verða fevndar av tíðaravmarkaðu heimildini. Harumframt verður heimilað at flyta ófiskaðar 4 ára menningarkvotur og ískoytiskvotur frá 2020 til 2021."*

Meirilutin í Vinnunevndini í Løgtinginum vísir á í álitinum til lógaruppskotið, at tað er átaluvert, at landsstýrismaðurin hevur drálað í málinum (málsskjal 9):

*"<u>Harumframt hava Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer, Henrik Old og Bjarni Kárason Petersen hesar viðmerkingar:</u>*
*Undirritaðu vísa harumframt á, at landsstýrismaðurin, sum nú biður um heimild at flyta kvotur til royndir og vinnuligar verkætlanir, hevur havt stóran part av árinum til at avgreiða og býta út hesar kvotur. Landsstýrismaðurin valdi at fara frá leistinum, at ein metingarnevnd eftir fakligum og sakligum metingarstøði býtti út kvoturnar, til sjálvur at velja millum umsóknirnar til kvotur. Tað er átaluvert at drála í so stóran mun, og ásannast má, at landsstýrismaðurin ikki hevur megnað at avgreiða mongu umsóknirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir."*

Ein samd Vinnunevnd setti fram broytingaruppskot um m.a. at strika tær broytingar í lógaruppskotinum, ið ikki beinleiðis snúgva seg um at flyta kvotur um ár. Í hesum sambandi vóru broytingarnar til § 49 ikki tiknar við í lógaruppskotið.

Løgtingið samtykti lógaruppskotið 16. desember 2020 við 31-0-0 atkvøðum (málsskjal 8). Talan er um løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020.

5. mars 2021 leggur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, fram lógaruppskot um broyting í sjófeingislógini – Løgtingsmál 100/2020 (málsskjal 10). Lógaruppskotið skal síggjast sum partur av løgtingsmáli nr. 69/2020 í sambandi við, at Løgtingið samtykti í desember 2020 ikki at luta út kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið verður grundgivið soleiðis fyri orsøkini til uppskotið:
"
*1.1. Orsakir til uppskotið*
*Uppskotið var partur av løgtingsmáli nr. 69/2020. Løgtingið samtykti í fjør ikki at luta út kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1, í 2020. Ætlanin er heldur at lýsa eftir vinnuligum royndum og verkætlanum í 2021, har eisini kvotur av svartkjafti verða partur av samlaða kvotugrundarlagnum, ið søkjast kann eftir, eins og møguleiki skal vera fyri at søkja um kvotu í sambandi við ítøkiligt keyp av fiskifari, uttan veiðiloyvi ella fiskiloyvi í bólki 5, soleiðis at nýggir aktørar við egnum fiskiførum kunnu sleppa framat fiskirættindum, um mett verður, at grundarlag er fyri at ganga tílíkari umsókn á møti. Fiskifør uttan veiðiloyvi kunnu tó bert fiska av kvotum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. og § 50, stk. 1 og 4 (royndarfiskiskapur og vinnuligar fiskiroyndir).*

*1.2. Galdandi lóggáva*
*Sambært galdandi løgtingslóg ber ikki til at fáa kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir til egið fiskifar uttan veiðiloyvi, eins og tað er sett sum treyt fyri royndarfiskiskapi og vinnuligum fiskiroyndum, at kvotan*

*verður fiskað við fiskifari við veiðiloyvi, sbr. § 50, stk. 1 og 4. Treytin um veiðiloyvi ger tað sostatt sera avbjóðandi hjá nýggjum aktørum at reka vinnuligan fiskiskap við egnum fiskifari, tí teir mugu hava fiskifar við veiðiloyvi.*

*1.3. Endamálið við uppskotinum*
*Eitt av endamálunum við uppskotinum er, at tað skal bera til at fáa lut í kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir í sambandi við skipakeyp uttan treyt um veiðiloyvi, sbr. § 49, stk. 1, 2. pkt. Hetta merkir tó, at viðkomandi rættindahavari bert kann fiska tær í tilsøgnini nevndu nøgdir við egnum fiskifari uttan veiðiloyvi, uttan so at annað er ásett í løgtingslógini, t.d. at fiska kvotur sambært § 50, stk. 1 og 4.*

*1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum*
*Nýskipanin er, at kvota kann verða latin í sambandi við ítøkiligt keyp av fiskifari uttan veiðiloyvi, sum, við støði í tillutaðum rættindum til vinnuligar royndir og verkætlanir, royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir, kann troyta hesi rættindi uttan veiðiloyvi ella fiskiloyvi í bólki 5 við tí fiskifari, sum nevnt er í tilsøgnini."*

Lógaruppskotið varð samtykt og lýst í Kunngerðarblaðnum 7. mai 2021 (málsskjal 11).

21. mai 2021 kunnar Fiskimálaráðið um í tíðindaskrivi á heimasíðu sínari, at nýtt uppskot til kunngerð um vinnuligar royndir og verkætlanir er sent til hoyringar (málsskjal 15).

Kunngerðin verður lýst í Kunngerðarblaðnum 11. juni 2021. Talan er um kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir (málsskjal 12).

11. juni 2021 verður á heimasíðuni hjá Fiskimálaráðnum lýst alment eftir umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir fyri 2021 (málsskjal 16). Lýsingin er soljóðandi:

*"Sambært kunngerðini er møguligt at søkja um kvotu til trý ymisk endamál, ávikavist til vinnuligar royndir og verkætlanir, verkætlanir í sambandi við ítøkiligt skipakeyp, umframt ískoytiskvotu til verandi skiparakstur.*

*1. <u>Vinnuligar royndir og verkætlanir (§ 49, stk. 1, 1. pkt)</u>*
*Søkjast kann um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýstluni av nevndu fiskasløgum.*
*Umsóknir skulu nágreiniliga lýsa eina vinnuliga roynd ella verkætlan, sum kvotan skal brúkast til, umframt nøgd av fiskaslagnum ella nøgdir av fiskasløgum, ið søkt verður um. Umsóknir skulu lýsa, hvussu vinnuliga royndin ella verkætlanin, sum kvotan skal nýtast til, kann skapa ella stimbra undir menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av fiskaslagnum. Umsóknir kunnu fevna um virksemi á sjógvi eins og virksemi á landi.*

*<u>Gevið gætur,</u> umsóknir um kvotu sambært § 49 stk. 1, 1. og 2. pkt. verða viðgjørdar undir einum. Samlaða tøka nøgdin til vinnuligar royndir og verkætlanir, herundir verkætlanir viðvíkjandi ítøkiligum skipakeypi, er:*

*7.813 tons av makreli*
*10.824 tons av norðhavssild*

*18.961 tons av svartkjafti*

*Oyðublað, vegleiðing og metingarskjal til umsókn um kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir (§ 49, stk. 1, 1. pkt) kann takast niður her.*

*2. Ítøkilig skipakeyp (§ 49, stk. 1, 2. pkt)*
*Møguligt er eisini at søkja um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til verkætlanir, ið snúgva seg um ítøkilig skipakeyp av fiskifari, ið ikki hevur veiðiloyvi ella ikki hevur fiskiloyvi í bólki 5.*
*Í umsóknini skal greiðast frá ítøkiligari verkætlan, ið vísir á ítøkiliga avtalu um keypssáttmála av fiskifari, játtan fyri fígging av skipakeypi og rakstri, umframt rakstrarætlan, ið ber seg fíggjarliga við minstu nøgdum, sum søkt verður um.*

*Gevið gætur, umsóknir um kvotur sambært § 49 stk. 1, 1. og 2. pkt. verða viðgjørdar undir einum. Samlaða tøka nøgdin til vinnuligar royndir og verkætlanir, herundir verkætlanir viðvíkjandi ítøkiligum skipakeypi, er:*

*7.813 tons av makreli*
*10.824 tons av norðhavssild*
*18.961 tons av svartkjafti*

*Oyðublað, vegleiðing og metingarskjal til umsókn um kvotu til ítøkilig skipakeyp (§ 49, stk. 1, 2. pkt) kann takast niður her.*

*3. Ískoytiskvota til verandi skiparakstur*
*Fiskifør, hvørs eigari lýkur treytirnar í § 49, stk. 3 kunnu søkja um ískoytiskvotu at styrkja verandi skiparakstur. Fyri at fáa lut í ískoytiskvotuni skal fiskifarið í 2019 ella 2020 hava fingið útskrivað fiskiloyvi og skal í hesum sambandi vera skrásett at hava avreitt svartkjaft av føroyskum kvotum.*

*Tøka nøgdin til ískoytiskvotur er:*

*12.640 tons av svartkjafti*

*Oyðublað, vegleiðing og metingarskjal til umsókn um ískoytiskvotu (§ 49, stk. 2) kann takast niður her.*
*Umsókn skal sendast Fiskimálaráðnum á fisk@fiski.fo*
*Umsóknarfreistin er týsdagin 6. juli 2021 kl. 12.00.*

*Kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir kann takast niður her.”*

27. september 2021 kunnar Fiskimálaráðið um á heimasíðu sínari, at Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, hevur sambært § 49, stk. 1 í sjófeingislógini tikið avgerð um at játta kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til fimm verkætlanir (málsskjal 17). Tíðindaskrivið er soljóðandi:

*"Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevur sambært § 49, stk. 1 í sjófeingislógini tikið avgerð um at játta kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til fimm verkætlanir.*

*Talan er um tríggjar verkætlanir viðvíkjandi vinnuligum royndum á virkjum á landi og tvær verkætlanir til ítøkilig skipakeyp.*

*Fiskimálaráðið fekk 44 umsóknir um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, harav tær 14 vóru til ítøkilig skipakeyp. Í mun til lógarbundna metingargrundarlagið í løgtingslógini um sjófeingi og í kunngerð um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir, komu fleiri væl undirbygdar umsóknir inn.*

*Nøgdin, sum søkt verður um í teimum 44 umsóknunum, er tó nógv meir, enn hvat er sett av sambært sjófeingislógini, og tí kann kvota ikki verða játtað øllum skikkaðum umsóknum.*

*Játtað er trimum verkætlanum kvotur til <u>vinnuligar royndir til menning og nýskapan</u>. Í heildarmetingini er umframt at meta um, hvussu verkætlanin stuðlar undir menning og nýskapan, dentur lagdur m.a. á fíggjarliga orku hjá umsøkjarunum, eins og hvørjar førleikar grundarlagið fyri vinnuligu royndini ella verkætlanini er bygt á.*

*Harumframt er eisini lagt til grund at lata kvotur til verkætlanir, sum heilt ella í stóran mun eru bygdar á uppsjóvarfisk eina, heldur enn at lata uppsjóvarkvotur til tann partin av vinnuni, ið hevur rímiliga støðugt virksemi grundað á botnfisk.*

*Avgerð landsstýrismansins er, at feløgini Sp/f Tavan í Leirvík, P/F Vestmanna Fiskavirki í Vestmanna og Sp/f 31.01.2011 á Sandi fáa kvotur játtaðar.*

*Talan er um treytaðar játtanir, har feløgini innan 4 vikur skulu vísa á endaligt skjalprógv fyri m.a. avtalu við skip at fiska kvoturnar, fíggjarligari orku og møguligari lánsfígging.*

*Játtaðu kvoturnar (tons) at fiska í 2021 eru:*

| | *2021* | | *Av fluttari 2020 kvotu* | |
|---|---|---|---|---|
| *Felag / fiskaslag* | *Makrelur* | *Norðhavssild* | *Makrelur* | *Norðhavssild* |
| *Sp/f Tavan* | | *1.000* | | *820* |
| *P/F Vestmanna Fiskavirki* | *1.300* | *1.000* | *849* | *820* |
| *Sp/f 31.01.2011* | *500* | *500* | *326* | *410* |

*Avgerð landsstýrismansins er, at feløgini Sp/f Ango í Vági og Sp/f Gráastein í Tórshavn fáa kvotur játtaðar til ítøkiligt skipakeyp.*

*Játtað er tveimum verkætlanum kvotur í sambandi við <u>ítøkiligt skipakeyp</u>. Verkætlanir, ið snúgva seg um ítøkilig skipakeyp, hava tørv á lutfalsliga stórum kvotum, um tær skulu kunna fremjast í verki. Í viðgerðini er dentur lagdur á treytirnar i lóggávuni og í metingarskjalinum. Harumframt hevur landsstýrismaðurin í síni*

*avgerð lagt dent á fíggjarliga styrki í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur.*

*Talan er um treytaðar játtanir, har feløgini innan 4 vikur skulu vísa á endaligt skjalprógv fyri m.a. eginpeningi, lánsfígging og endaligum keypssáttmála.*

*Játtaðu kvoturnar (tons) at fiska í 2021 eru:*

| | *2021* | | | *Av fluttari 2020 kvotu* | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Felag / fiskaslag* | *Svartkjaftur* | *Makrelur* | *Norðhavssild* | *Svartkjaftur* | *Makrelur* | *Norðhavssild* |
| *Sp/f Ango* | *9.480* | *3.007* | *4.162* | *884* | *1.966* | *3.412* |
| *Sp/f Gráastein* | *9.480* | *3.007* | *4.162* | *844* | *1.966* | *3.412"* |

4. oktober 2021 kunnar Fiskimálaráðið um á heimasíðu sínari (málsskjal 18), at Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, hevur tikið avgerð um at játta ískoytiskvotur av svartkjafti til fýra skip. Tíðindaskrivið er soljóðandi:

*"Ískoytiskvotur verða latnar samsvarandi áseting í § 49, stk. 2 í sjófeingislógini fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskifari. Tøka kvotan at søkja um var 12.640 tons av svartkjafti umframt 1.178 tons av svartkjafti, sum eru flutt frá 2020.*

*Ískoytiskvotur av makreli og norðhavssild vórðu í 2020 lutaðar út fyri 5 ár fram, og tí kann í 2021 bert søkjast um svartkjaft.*

*7 umsøkjarar hava søkt um ískoytiskvotu av svartkjafti. Av hesum lúka 4 umsóknir treytirnar sambært sjófeingislógini. Tær umsóknirnar eru:*

1. *P/F Jókin – m/s Arctic Voyager*
2. *P/F Thor Fisheries – m/s Hoyvík*
3. *P/F Jupiter – m/s Jupiter*
4. *P/F Kinnfelli – m/s Katrin Jóhanna*

*Landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um, at kvotuparturin til hvørt fiskifar verður 3.160 tons av svartkjafti.*

*Harumframt skal flutta nøgdin frá 2020 á tilsamans 1.178 tons leggjast afturat at kunna verða veidd í 2021. Av fluttu nøgdini fær hvørt av hesum somu fiskiførum sostatt 294,5 tons at fiska í 2021."*

## Kap. 4 – Útlutan av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020

Í 2020 verða bert ískoytiskvotur sambært § 49, stk. 2 í sjófeingislógini útlutaðar. Landsstýrismaðurin velur ikki at luta út kvotur eftir § 49, stk. 1, men leggur lógaruppskot fyri Løgtingið, har skotið verður upp at broyta sjófeingislógina, soleiðis at kvotur eftir § 49, stk. 1 í sjófeingislógini verða fluttar til at luta út í 2021.

Í kap. 4.1. verður komið inn á avgerðina hjá landsstýrismanninum at flyta kvotur eftir § 49, stk. 1 frá 2020 til 2021. Fyri at kunna svara kanningarsetninginum verður kannað, hvør orsøkin er, at landsstýrismaðurin velur ikki at luta út kvotur sambært tilmælinum frá umsitingini í 2020, men heldur velur at flyta kvoturnar til 2021, og um hetta er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Í kap. 4.2. verður komið inn á avgerðina hjá landsstýrismanninum at luta út kvotur eftir § 49, stk. 2. Her eri eg komin fram á 2 umsóknarmál, sum eg meti eru neyðug at lýsa nærri í hesi frágreiðing fyri at kunna svara kanningarsetninginum, og fyri at kunna taka støðu til, um landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

## 4.1. Flyting av kvotum eftir § 49, stk. 1 í sjófeingislógini frá 2020 til 2021

Í 2020 komu 38 umsóknir inn til Fiskimálaráðið í sambandi við útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 1 í sjófeingislógini.

Í innanhýsis tilmæli til Jacob Vestergaard, dagfest 14. september 2020, mælir umsitingin til at ganga 8 av teimum 38 umsóknunum á møti (málsskjal 20).

Í telduposti (málsskjal 30), dagfestur 15. oktober 2020, skrivar Torkil V. Rasmussen, løgfrøðingur, til Andras Kristiansen, deildarstjóra, og Ólav Dalsgarð, fulltrúa, við avriti til Rógva Reinert, aðalstjóra, at Jacob Vestergaard helst vil sleppa undan at luta út kvotur eftir § 49, stk. 1 í ár. Torkil skrivar soleiðis:

*”…Eg havi tosað við aðalstjóran í morgun, og hann fortaldi mær, at landsstýrismaðurin helst í ár vil sleppa undan at luta kvoturnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1, út sambært tilmælinum, ið umsitingin lat honum 14. sept. 2020. Aðalstjórin hevði sagt honum, at tað er ein skylda sambært lógini at luta út. Landsstýrismaðurin vildi hava aðalstjóran at ”dyrka” spurningin saman við umsitingini. Aðalstjórin og eg tosaðu um møguleikar. Tann eini møguleikin er at broyta tilmælið nakað, so teir, ið eru klárir at fara í gongd beinanvegin, fáa kvotuna í ár – og bert fyri 2020. Sum skilst var landsstýrismaðurin ikki serliga heitur fyri hesi loysn. Hin møguleikin er at gera lógarbroyting… Eg nevndi fyri aðalstjóranum, at tað er hvørki góður lóggávusiður ella góður fyrisitingarsiður at broyta grundarlagið í eini lóg, sum hevur ligið til grund fyri innkomnum umsóknum, og sum er viðgjørt í ráðnum – og tilmælið er enntá skrivað – og so koma til ta politisku avgerð, at mann kortini ikki fer at útluta kvoturnar í ár. Hesum var aðalstjórin samdur við mær í… Síðani er møguliga ætlanin, at innihaldið í § 49, stk. 1 verður broytt soleiðis, at nýggir aktørar kunnu sleppa framat við skipum, sum teir hava keypt uttan treyt um veiðiloyvi…”*

Í telduposti, dagfestur 16. oktober 2020 (málsskjal 31), til Rógva Reinert, svarar Andras Kristiansen uppá teldupostin soleiðis:

*”Við støði í telduposti frá Torkil V. Rasmussen, løgfrøðingi, dagf. 15. okt. 2020, til mín og Ólav Dalsgarð, eftir samrøðu og í samráði við aðalstjóran og landsstýrismannin, skal eg gera vart við, at ætlanin at útseta vinnuligu royndirnar og verkætlanirnar, sambært § 49, stk. 1 í lógini, til 2021 er ikki góður lóggávusiður. Grundarlagið undir umsóknunum í 2020 verður broytt munandi og tillagað onkrum, sum passar betri øðrum umsøkjarum enn teimum, sum standa í tilmælinum, dagf. 14. sept. 2020. Fyrisitingarliga er tað ikki góður siður at lýsa eftir umsóknum til gagnnýtslu av kvotum til ávíst endamál, drála, og so koma til ta niðurstøðu,*

*at kvoturnar ikki vera tøkar kortini. Talan er um nógvar umsøkjarar, sum hava brúkt tíð, orku og møguligan pening upp á at orða umsóknartilfar til fánýtis.*

*Ein lógarbroyting, sum tann, ið ætlanin er at fremja, sí teldupost frá Torkil V. Rasmussen, fer eisini at broyta fortreytirnar fyri umsóknunum, og tískil er sera ivasamt, um verandi umsóknir kunnu verða liggjandi. Talan er um størri nøgdir; onnur endamál; onnur fiskasløg enn í 2020, og tískil má alt forarbeiðið gerast av nýggjum, eins og nýtt tilmæli má gerast við støði í nýggju lógarbroytingini…"*

Tað tykist greitt, at eftir at umsøkjarar hava latið inn umsóknir eftir § 49, stk. 1 í 2020, og eftir at umsitingin í Fiskimálaráðnum hevur skrivað tilmæli til landsstýrismannin, so velur landsstýrismaðurin ikki at luta út viðkomandi kvotur í 2020.

Landsstýrismaðurin velur heldur at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta sjófeingislógina, soleiðis at kvoturnar eftir § 49, stk. 1 verða fluttar til 2021 (LM 69/2020). Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt soleiðis:

*"**1.1. Orsakir til uppskotið***
*Avgerð er tikin um ikki at luta út kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1, í 2020. Ætlanin er heldur at lýsa eftir vinnuligum royndum og verkætlanum í 2021, har kvotur av svartkjafti verða partur av samlaða kvotugrundarlagnum, ið søkjast kann eftir, eins og møguleiki skal vera fyri at søkja um kvotu í sambandi við ítøkiligt keyp av fiskifari, uttan at seta fiskifarinum treyt um veiðiloyvi, soleiðis at nýggir aktørar við teirra egnu fiskiførum kunnu sleppa framat fiskirættindum, um mett verður, at grundarlag er fyri at ganga tílíkari umsókn á møti. Fiskifør uttan veiðiloyvi kunnu tó bert fiska av kvotum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. og § 50, stk. 1 og 4 (royndarfiskiskapur og vinnuligar fiskiroyndir). Eisini verður heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at loyva størri flytingum enn 10% av ófiskaðum kvotum av makreli hjá einstaka fiskifarinum frá 2020 til 2021, uttan at talan er um serligar umstøður, eins og felags árskvotur av makreli verða fevndar av tíðaravmarkaðu heimildini. Harumframt verður heimilað at flyta ófiskaðar 4 ára menningarkvotur og ískoytiskvotur frá 2020 til 2021.*

***1.2. Galdandi lóggáva***
*Sambært galdandi lóggávu skal landsstýrismaðurin, sambært § 14, stk. 1, seta 8,5% av tøku føroysku kvotuni av til vinnuligar royndir og verkætlanir, haruppií eru verandi menningarkvotur. Av tí, at summar menningarkvotur ikki vóru lagdar um til egnar árskvotur, og aðrar ongantíð komu ígongd, og aftur aðrar gingu út, áðrenn lógin kom í gildi 1. jan. 2020, eru nøkur túsund tons av makreli, norðhavssild og svartkjafti tøk fyri at røkka teimum 8,5 prosentunum, sum landsstýrismaðurin hevur skyldu at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Sambært galdandi lóg hevur landsstýrismaðurin skyldu til at seta júst 8,5% av tøku føroysku kvotuni av til endamálið. Avbjóðingin er, at tað í 2020 er tikin avgerð um ikki at lata kvotu út til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1. Gjørt er av, at avlopsnøgdir av norðhavssild, makreli og svartkjafti, sambært § 14, stk. 1, og norðhavssild og makreli, sambært § 15, stk. 1, nr. 2 og 3 og stk. 2, ið sambært galdandi lóg áttu at verið settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1, verða útsettar til 2021. Svartkjafturin, sambært § 15, stk. 1, nr. 1, er longu í 2020 skipaður sambært vanligu reglunum, sbr. § 15 a. Leggjast kann afturat, at í september í 2020 vóru 40% av nøgdunum sambært § 15, stk. 1, nr. 2 og 3 og stk. 2 settar av til at styrkja um verandi skiparakstur, sbr. § 49, stk. 2 í lógini (ískoytiskvotur).*

*Sambært galdandi lóg er ikki heimild at flyta hesar millum ár, eins og heimild ikki er til at flyta menningarkvotur millum ár. Sambært galdandi lóg ber ikki til at fáa kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir til egið fiskifar uttan veiðiloyvi, eins og tað er sett sum treyt fyri royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir, at kvotan verður fiskað við fiskifari við veiðiloyvi, sbr. § 50, stk. 1 og 4. Treytin um veiðiloyvi ger tað sostatt ómøguligt hjá nýggjum aktørum uttan veiðiloyvi at fiska kvoturnar við egnum fiskifari. Sambært galdandi lóg kann landsstýrismaðurin bert loyva størri flytingum enn 10%, um serligar umstøður tala fyri tí.*

***1.3. Endamálið við uppskotinum***

*Eitt av endamálunum er at flyta kvotur til ískoytiskvotur sambært § 49, stk. 2; 4 ára menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1 frá 2020 til 2021. Harumframt er eitt annað endamál, at tað skal bera til at fáa lut í kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir í sambandi við skipakeyp uttan treyt um veiðiloyvi, sbr. § 49, stk. 1, 2. pkt. Hetta merkir tó, at viðkomandi rættindahavari bert kann fiska tær í tilsøgnini nevndu nøgdir við egnum fiskifari uttan veiðiloyvi. Ein kann sostatt ikki uttan veiðiloyvi, ávikavist fiskiloyvi í bólki 5, fiska fyri onnur uttan so, at viðkomandi er fevndur av skiftisreglunum í §§ 8-10, t.v.s., at ein hevur havt rættindi frá løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi við sær inn í lógina frá 1. jan. 2020, sum gevur rættindi til at halda áfram. Eitt triðja endamál er, at skotið verður upp, at tað eisini skal bera til at fiska kvotur í sambandi við royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir uttan veiðiloyvi, sbr. § 50, stk. 1 og 4 í uppskotinum. Um sama fiskifar uttan veiðiloyvi hevur fingið loyvi til at fiska kvotu sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. og § 50, stk. 1 og 4, eru tað bert viðkomandi kvotur, ið kunnu fiskast við tí fiskifarinumuttan veiðiloyvi. Møguleiki verður tó at fáa veiðiloyvi við støði í § 50, stk. 1, um treytirnar í lógini fyri hesum eru loknar, og fiskifarið ikki hevur veiðiloyvi frammanundan. Eitt fjórða endamál er at byrgja upp fyri, at virði ikki fara fyri skeytið, og at ófiskað makrelkvota kann verða flutt frá 2020 til at verða fiskað í 2021 uttan treyt um serligar umstøður.*

***1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum***

*Nýskipanin er, at kvota ætlað til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1 verður flutt frá 2020 til at verða fiskað í 2021. Nýskipanin er eisini, at kvota kann verða latin í sambandi við keyp av fiskifari uttan veiðiloyvi, sum, við støði í tillutaðum rættindum til vinnuligar royndir og verkætlanir, royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir, kann troyta hesi rættindi uttan veiðiloyvi við tí fiskifari, sum er nevnt í tilsøgnini.Til endans er ein onnur nýskipan, at heimilað verður landsstýrismanninum at flyta størri nøgdir enn 10% av egnari árskvotu av makreli hjá ávísum fiskifari og felags árskvotur av makreli sambært § 34, stk. 4 frá 2020 til 2021 uttan treyt um serligar umstøður, eins og tað verður heimilað landsstýrismanninum at flyta ófiskaðar menningarkvotur og ískoytiskvotur av makreli frá 2020 til 2021."*

Í skrivi, dagfest 27. mai 2021 (málsskjal 41), fáa umsøkjararnir fráboðan um, at ongin kvota eftir § 49, stk. 1 varð lutað út í 2020. Í skrivinum stendur:

*"Vísandi til umsókn frá […] dagfest 10-08-2020, um kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir § 49, stk. 1 í løgtinglógini um sjófeingi, skal Fiskimálaráðið boða frá, at í 2020 varð eingin kvota lutað út til vinnuligar royndir og verkætlanir. Í staðin vórðu nøgdirnar fluttar til 2021, tó undantikið svartkjafturin, sum varð skipaður sambært vanligu reglunum í § 22, stk. 1 og § 23, stk. 2.*

*Eftir at Løgtingið við lógarbroyting í løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2021 heimilar landsstýrismanninum eisini at luta út kvotu eftir § 49, stk. 1 til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið snúgva seg um ítøkiligt skipakeyp, er uppskot til nýggja kunngerð um vinnuligar royndir og verkætlanir send til hoyringar. Uppskotið til kunngerð fyri 2021 ásetir sostatt, at møguligt verður at søkja um kvotu til trý ymisk endamál, ávíkavist*

- *til vinnuligar royndir og verkætlanir*
- *í sambandi við ítøkiligt skipakeyp, og sum*
- *ískoytiskvota til verandi skiparakstur*

*Um felagið ynskir at søkja um kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021, er neyðugt at senda Fiskimálaráðnum eina nýggja umsókn ella eina dagførda umsókn samsvarandi oyðubløðum og lýsingartilfarinum, ið verða tøk á heimasíðu Fiskimálaráðsins – www.fisk.fo – tá kunngerðin er lýst, væntandi um miðjan juni 2021."*

### 4.1.1 - Munnligar frágreiðingar

### Jacob Vestergaard

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 greiðir Jacob Vestergaard soleiðis frá viðvíkjandi § 49 kvotunum og útsetan av § 49, stk. 1 kvotunum frá 2020 til 2021:

*"Jacob Vestergaard greiddi frá eftir at vera vegleiddur um sína rættarstøðu, at kjakast varð nógv um puljuna eftir § 49 í tilgongdini til samgongusamráðingar. Tað var umráðandi hjá teimum at broyta fiskivinnulóggávuna sum skjótast og helst áðrenn nýggjár, tá hann kom til í 2019. Teir vóru nokkso samdir um høvuðslinjurnar hetta við at fara burtur frá uppboðssølu til eina loyvisskipan við tryggum rættindum. Tað bleiv so til 12 ára rættindi og so framvegis, hendan puljan, tað sum hevði verið úti sum 1 ára rættindi. Hetta varð til sera nógvkjak alla tíðina, og tann niðurstøðan, sum var, tá ið hann fór undir at gera eitt lógaruppskot aftaná, at hann var komin sum landsstýrismaður, var tað, at alt hetta skuldi seljast á uppboðssølu eina ferð við alla. Tað er so sjálvandi nakað heilt annað, enn tað bleiv til. Men kjak varð tað í viðgerðini seinni aftur um, hvat hendan puljan skuldi brúkast til. Tá ið so lógaruppskotið hevði verið ígjøgnum tingið, og lógin bleiv samtykt, so bleiv í tí lógini ein pulja sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir og so ískoytiskvotur. Tað var enn eitt kjak, eisini aftaná, hvat mann skuldi gera við hetta. Teir hildu uppá, at best hevði verið, at henda puljan bleiv býtt ímillum teir veikaru partarnar í uppisjóvarvinnuni - tað, sum seinni bleiv til ískoytiskvotur fyri ein part. Tað var kanska ikki realistiskt at uppfinna fleiri nýggj, so bleiv grundarlagið ov veikt við tíðini. Men so vóru tað aðrar røddir, sum vildu hava, at mann gjørdi meira við vinnuligar royndir og verkætlanir og royndu at vita, um mann kundi koma longri ávegis við virðisøking og so framvegis, hóast hansara hugsana er, at virðisøking kemur kanska frá teimum, sum hava peningin og evnini og kvotagrundarlagið til eisini at menna tað. Men tað bleiv so fyrsta umfarið til hetta við ískoytiskvotum og til vinnuligar royndir og verkætlanir. Og tað fóru teir so í gongd við aftan á nýggjár at fáa gjørt eina kunngerð tí viðvíkjandi og søktu so eftir umsóknum. Skipanin av arbeiðinum í Fiskimálaráðnum er undir Fiskivinnustovuni, tí deildini, sum Andras Kristiansen er leiðari av. Og hann helt, at tað var rætt eisini fyri hann eftirfylgjandi, kanska at hava aðalstjóran og tey fólkini í ráðnum, sum ikki vóru uppií, at sparra við víðari. Aðalstjórin hevur bakgrund sum fiskivinnufrøðingur og virkisleiðari og kennir føroysku fiskivinnuna væl. Sjálvandi, tá hann hevur sitið sum fiskimálaráðharri tey áramál, sum hann havi sitið, so heldur hann seg kenna rímiliga væl fiskivinnuna bæði so og so. Undir Fiskivinnustovuni er tann parturin, sum hevur við fiskivinnumenning at gera. Jákup Mørkøre sat*

*á tí áðrenn og seinni Símun Grønadal, teir vóru partur av tí. Og so sjálvandi tann løgfrøðiligi parturin av Fiskimálaráðnum var yvir tí viðgerðini eisini. Í fyrstuni var tað Torkil Vestergaard Rasmussen, og so var Rannvá Sólheim eftirfylgjandi og avloysti Torkil. So tann parturin varð so viðgjørdur av teimum fólkunum í Fiskivinnustovuni. Dagfestingarnar minnist hann ikki. Hann hevði ikki havt atgongd til teldupostin aftaná í Fiskimálaráðnum. Okkurt hevur hann avrit av, tí seinnu av avgerðunum ella tilmælunum. Tað fyrsta helt hann vera um ískoytiskvotur, og so eftirfylgjandi kom so eitt tilmæli um vinnuligar royndir og verkætlanir. Tað triðja kom, helt hann, í august mánaði, tá ið fólk kom aftur úr feriu, og tingárið byrjaði. Kjakið var um hesa puljuna, so tað kjakið var als ikki liðugt, tað var framvegis. Tað vóru fleiri í samgonguni, sum vildu hava tað við nýggjum aktørum, sum skuldu sleppa framat. Tað hevur verið øgiliga nógv frammi í politiska umhvørvinum nokkso leingi, at bara teir somu sita á øllum. So tað kjakið var alla tíðina. Tað var eitt kjak, sum hann hevði meira við politiska baklandið og ikki so nógv inni í ráðnum. So hann helt, at tann fyrri parturin, hatta við ískoytiskvotunum, hann segði seg nokkso sjálvt. Tað vóru nøkur skip, sum høvdu ov veikt grundarlag, og tey høvdu ivaleyst rætt til at fáa hesar her ískoytiskvoturnar so ella so. Og so spyrja tit um eitt skip, sum flaggar innaftur, fyri at taka tað.*

*Spurdur, um hann vildi koma inn á málið viðvíkjandi skipi, sum flaggar inn aftur, svarar Jacob, at hann fyrst vil halda fram at greiða yvirskipað frá gongdini í málinum. Hann greiddi frá, at onkur kom inn á gólvið og helt, at tað var betri at lata umsóknina inn persónliga og so framvegis. Summi sendu teldupostar beinleiðis til umsitingina. Tað er ógvuliga nógv, sum hann als ikki veit av, men onkur sendi so teldupostar eisini, so hann sá teir. So varnaðist hann til ein teldupost frá, sum antin varfrá Janusi Rein ella Thor um Hoyvik. Har hevur verið eitt samskifti ímillum Fiskivinnustovuna og Hoyvík um, at Hoyvík var farin út og so hevði flaggað inn aftur. Orsøkin til, at tingini komu í drag, er sjálvandi hetta vælsignaða politiska kjakið, sum er alla tíðina um, hvat mann skal brúka hesa puljuna til. Og hann royndi at byrja við at fáa hesa lóggávuna ígjøgnum skjótt og effektivt, so teir fingu farið í gongd skjótt. Og lógin verður rímiliga smidlig í kjakinum viðvíkjandi, hvat henda puljan kundi brúkast til, sjálvandi innan fyri lógarinnar mark og alt tað, sum hann altíð hevur lagt dent á. So tað kjakið tók seg upp aftur, tá ið fólk komu til arbeiðis aftur á sumri í 2020 aftan á Ólavsøku, um hetta nú var rætt, og um mann ikki eisini skuldi hava tað, sum so bleiv seinni ítøkiligt skipakeyp inn í, og um mann skuldi broyta samansetingina, og tí gekk tíðin nakað. Hann helt rímiliga nógv fast við, at tað, sum teir hildu vera rætt, at styrkja grundarlagið hjá teimum veikuog geva teimum, sum ikki høvdu so sterkt grundarlag, ískoytiskvotur, at tað helt fram. Tíðarskeiðiðv mintist hann ikki ordiliga, men tá tað leið eitt sindur út, tá vórðu teir nokkso samdir um, at tað skuldi halda fram. Og so bleiv tað avgreitt við teimum kvotunum, og so varð kjakið um at broyta lóggávuna í mun til hitt. Og tá hevði hann fingið tilmæli um, hvussu kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir skuldu býtast. Tað lá og kom í lag, tí mann framvegis kjakaðist um puljuna.*

*Spurdur, um kjakast varð um puljuna í ráðnum ella politiskt, svaraði Jacob, at tað var politiskt, ikki í ráðnum. Ráðið gjørdi sítt. Hann sparraði sjálvandi við ráðið og spurdi ráðið, hvat hann kundi gera, og hvat hann skuldi gera sambært lógini. Tí lógin áleggur honum at býta út, og niðurstøðan frá ráðnum var, at um ein lógarbroyting kom í árinum, og løgtingið góðtók at gera eina aðra skipan, so gjørdi løgtingið tað, og so kundu tær umsóknirnar, og tað sum var viðgjørt, liggja. So kundu umsøkjararnir fáa boð um, at mann ætlaði at broyta lógina, og umsóknirnar kundu standa við, ella mann søkti av nýggjum aftur komandi ár. So tað varð niðurstøðan frá ráðnum, at sjálvt um tað var álagt honum at býta tað út, so var møguleiki at taka tað aftur komandi ár, um lógarbroytingin kom. Tað bleiv so niðurstøðan nokkso skjótt í hesum politiska kjakinum. Tí fór ráðið undir at gera eina broyting til § 49 um umstríddu puljuna. Hann rópti hana upprunaliga fyri fjant og*

*fjas puljuna, hann visti væl, at hon fór bara at elvatil politiskt rumbul uppá ein ella annan máta, tá ið ein landsstýrismaður sat við eini pulju, sum skuldi býtast út. Tað var ikki ein góð skipan óansæð. Og tí gjørdu teir eina nýggja lógarbroyting, og tilmælið lá so har, og sjálvandi, um ein lógarbroyting ikki var komin ígjøgnum tingið, so hevði hann havt avgreitt tilmælið, áðrenn árið var úti. Tað boðaði hann eisini teimum frá politiskt, at soleiðis lá landið. Teir komu so í tingið við einum uppskoti um heystið sum kunnigt, har teir fluttu kvotuna, sum skuldi býtast út, yvir um til 2021. Móttøkan í tinginum var rímilig, sum væntað varð. Og tað, at mann skuldi hava møguleikan fyri at hava onkran nýggjan aktør inni, sum kundi keypa skip, sá hann bara ein fyrimun í, um mann flutti kvotur yvir um ár, tí so varð kvotugrundarlagið, byrjunargrundarlagið hjá teimum møguligu aktørunum, sum so komu uppá tal seinni, betri til tað. So yvirskipað var hetta í stuttum frágreiðingin um, tá ið "drálið" var, bæði viðvíkjandi ískoytiskvotum og viðvíkjandi kvotutilmælunum, sum komu tá til vinnuligar royndir og verkætlanir. So tað koyrdi faktiskt í tveimum sporum. Eitt politiskt kjak um hesa vælsignaðu puljuna, sum byrjaði við samráðingum til samgongu, og sum so alla tíðina gekk spakuliga. So tað er í stuttum tað.*

*Spurdur um, hvat hann meinti við, tá hann segði, at hann sparraði við aðalstjóran og tey, sum ikki vóru uppií, greiddi hann frá, at í høvuðsheitinum var tað aðalstjórin.Tá tað vóru juridiskir spurningar, so tosaði hann við øll. Hann tosaði nokkso nógv við Torkil, tá ið hann fekk ein teldupost frá Thor um hetta skipið, sum var flaggað út. Hann meinti, at teir høvdu leigað Hoyvík til Grønlands. Hann fekk avrit av einum telduposti, so sjálvandi prátaði hann við Torkil um tað. Torkil sat við teimum málunum, og hann gekk út frá, at tað bleiv gjørt soleiðis, sum tað skuldi løgfrøðiliga. Tað endaði so við, at Hoyvík fekk ein part av ískoytiskvotunum eisini.*

*Spurdur, um hann var partur av málsviðgerðini í ráðnum, svaraði Jacob nei. Hann royndi at halda seg burtur. Tað vóru fleiri, sum gjørdu vart við, at teir kundu koma inn á gólvið at tosa við teir, og tað gjørdu teir ikki. Altso, tað var ein rein viðgerð av umsóknunum, so hann hevði ikki viðgjørt og havt fundir ella tosað við nakran um nakrar umsóknir, aftaná at tær vóru avgreiddar.*

*Spurdur, um viðgerðin av umsóknunum fór fram í arbeiðsbólkinum á Fiskivinnustovuni, svaraði Jacob játtandi.*

*Spurdur um teldupostin hjá Torkil Rasmussen, dagfestur 15. oktober 2020, har hann skrivar til Andras Kristiansen og Ólav Dalsgarð í strangasta trúnaði og kunnar um, at landsstýrismaðurin í ár helst vil sleppa undan at luta kvotu út eftir § 49, stk. 1, greiddi Jacob frá, at tað var hetta politiska kjakið, sum var um at drála, bíða. Hann visti ikki beinanvegin, hvar tað politiska kjakið gekk,.hvussu leingi tað var. Men sjálvandi, fyri hann var eitt evstamark, tí um ikki lógarbroyting kom, so skuldi tað útlutast. Tað var í øllum førum ta fatanina, hann hevði fingið av tí, sum umsitingin segði. Tí bleiv drálað. Orðingin hjá Torkil um at sleppa undanja, tað var ikki tí, at hann vildi sleppa undan. Men tað var tí, at tað var eitt politiskt kjak í gongd, sum nokk gjørdi tað, at politiska ætlanin var ein onnur. Sjálvt um hetta var púra erligt, so átti mann at avgreitt tað, tá tað kom. Men tað var enn eitt politiskt kjak, og sjálvandi skuldi hann viga ímillum, hvat var politikkur og fyrisiting, og hvat hann kundi. Men hann fekk í øllum førum at vita tað, at um ein lógarbroyting kom í árinum, sum at løgtingið í 2020 kanska helt nakað annað, enn lóggávan segði, men so broytti tað, so var í lagi at flyta alt yvirum og lata so umsóknirnar liggja og viðgera tær saman, um mann vildi tað til komandi ár. So tað er tað, sum liggur í tí. Tað er tað politiska kjakið um hesa vælsignaðu puljuna, hvat mann skuldi gera við hana, sum lá til grundar. Hetta minnist hann.*

*Spurdur um, hvør orsøkin var til, at treytirnar fyri útlutan eftir § 49, stk. 1 eisini skuldu fevna um skip uttan veiðiloyvi, greiddi Jacob frá, at tað var eitt politiskt ynski í samgonguni frá ávísum samgongulimum, , sum lógu tvørir ofta í byrjanini, tá ið teirt gjørdu lóggávuna og fingu uppá pláss fyri at fáa lóggávuna ígjøgnum, har ið hann lovaði at vera rímiliga smidligur viðvíkjandi viðgerðini av hesi vælsignaðu puljuni. Men sjálvandi skuldi hann gera tað, sum rætt var at gera sum landsstýrismaður sambært lógini. Og tað bleiv sagt fyri honum, at um mann í 2020 kundi koma við eini lógarbroyting, har løgtingið segði nakað annað um § 49, so kundi tann puljan liggja til komandi ár. Tað varð undirtøka fyri tí, og so bleiv tað flutt yvirum. Tí bleiv tað ikki avgreitt.*

*Spurdur, um tað gekk upp fyri honum, eftir at tilmælið var handað, at tilmælið ikki júst var tað, sum hann hevði sæð fyri sær, svaraði Jacob ja. Hann visti ógvuliga væl, at tað var ivasamt, um lógin heimilaði nýggjum aktørum, sum var. Tað bleiv so skorið út í papp seinni. Har var onkur í samgonguni, sum avgjørt helt, at tað var ein partur av tí. Og tí helt tað kjakið fram, og tí bleiv ikki útlutað, tí at mann ikki hevði heimild, soleiðis sum orðingin var, til at luta út til ein ella fleiri møguligar nýggjar aktørar.*

*Spurdur um, hvørt tað er ein fyrimunur fyri ávísar umsøkjarar, at kvotur verða fluttar frá 2020 og lagdar aftrat kvotunum, sum skuldu útlutast í 2021, greiddi Jacob frá, at tað var nokkso ringt at meta um. Sjálvandi, um tú fert í gongd við nakað - tað sóu tey, helt hann, við hinum sum fingu menningarkvotur tá at um tú hevur eina góða byrjan við skiparakstri, so kemur tú betri uppundan. Men kvotugrundarlagið er jú tað sama ár fyri ár. Tað kann fara upp, og tað kann fara niður fyri hvønn einstakan. Men tað sigur seg sjálvt, og tað vísti seg so eftirfylgjandi, at tað við skiparakstri krevur øgiliga nógv í mun til eina roynd á einum virki til vinnuligar royndir og verkætlanir. Tað er hvør sítt, mann tosar um. Tað er tað avgjørt. Tá ið alt annars er eins, kann tað broyta nakað. Tað vísti seg eisini sjálvandi, at tá ið hann so fekk tað umrødda tilmælið í 2021, tá var ein stór pulja, meginparturin av henni, settur til ítøkilig skipakeyp og ein minni partur til hitt. So hann gongur út frá, at tilmælið broytist viðvíkjandi fortreytunum, sum løgtingið so leggur í § 49 eftirfylgjandi. Tað ger tað.*

*Jacob fekk síðani ein teldupost frá Andrasi Kristiansen til Rógva Reinert fyrilagdan, dagfestur 16. oktober 2020, har hann varð spurdur um orðingina: "...grundarlagið undir umsóknum í 2020 verður broytt munandi og tillagað onkrum, sum passar betri øðrum umsøkjarum enn teimum, sum standa í tilmælinum...", herundir um Jacob hevði onkran ávísan umsøkjara í huga í sambandi við, at útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 1 vóru fluttar frá 2020 til 2021. Til hetta svaraði Jacob nei, tað hevði hann ikki. Tað hevði hann onga meining um. Hann og Torkil skiftu eitt sindur orð um tað, og hann er ógvuliga fínur at skifta orð við, hann er løgfrøðingur, og teir høvdu sera nógv fín orðaskifti. Hann kundi gott hava støðu til, at tá ið ítøkiligt skipakeyp kemur inn í, so krevur tað eina stóra pulju, sum so aðrir umsøkjarar kanska ikki fáa burturúr. Men hann hevði ikki peikað eftir nøkrum ávísum nakrantíð. Ella um tað er tað, mann vísir á her, um hann skal hava onkran annan inn, sum skal hava okkurt serstakt, tað vil hann reiðiliga vísa frá sær. Men mann kann gott lesa tað út frá hesum, tað kann mann gott.*

*Jacob greiddi víðari frá, at hann kann gott hava støðu til tað, sum hann sigur um henda lóggávusiðin, at mann sjálvandi skuldi gjørt eina lóggávu fullfíggjaða beinanvegin, og so skuldi mann virkað út frá tí. Men eitt politiskt kjak var allan vegin, og hann hevði avgjørt at fara frá løgfrøðini í Fiskimálaráðnum fyri at endurtaka tað, at tók løgtingið undir við, at fortreytirnar skuldu broytast við at broyta § 49, so var tað í lagi. Um hann hevði fingið nakað annað at vita um, at tað ikki var í lagi, so hevði hann sjálvandi virkað út frá tí og útlutað við útgangsstøði í tilmælinum, sum hann fekk. Tað er púra greitt. Men hann hevði ta fatan, ta greiðu fatan,*

*at um løgtingið broytti § 49 í 2020, og tað greiddi hann eisini hinum frá, at um tað ikki bleiv samtykt, so bleiv tað útlutað, um tað so varð millum jól og nýggjár. Tað heldur hann seg kunna siga um tað.*

*Spurdur, um vertíðin fyri makrel var ein orsøk til, at kvoturnar vórðu fluttar frá 2020 til 2021, svarar Jacob nei, høvuðsatlitið var politiska kjakið. Tað var tað. Tað gongur altíð ov seint við politisku viðgerðini, og sjálvandi skuldu teir beinanvegin við fyrsta ársfjórðing í 2020 havt alt klárt. Tí at so høvdu tey, sum møguliga fingu hetta, havt góða tíð at kunnað fyrireika seg. Men bæði í 2020 og 2021 koma vit út á summarið, g tá er "árið" næstan farið óansæð. Tí er trupult at fáa gagnnýtt tað, sum mann fær, í øllum førum fyri tað árið, tí mann skal fyrireika seg og gera íløgur og so framvegis. So tað var eisini ein partur av kjakinum, men við teimum royndunum, sum hann hevur, so veit hann væl, at mann skal vera øgiliga skjótur úti fyrst í árinum, um møguligir nýggir aktørar skulu vera klárir at fara undir nýggja framleiðslu, sum teir ikki hava frammanundan. Tí at tað skal fyrireikast, og amboð og maskinur og annað skal bíleggjast. So tað varð nokkso týðiliga greitt fyri hann, at árið 2020 soleiðis sæð var farið.*

*Spurdur, um ískoytiskvoturnar eftir § 49, stk. 2 vórðu lutaðar út, hóast liðið var langt út á árið, greiddi Jacob frá, at ískoytiskvoturnar vórðu latnar til skip, sum vóru har frammanundan til fiskiskap. Hóast liðið var langt út á árið, vóru hesi skip til fiskiskap og kundu fiska beinanvegin.*

*Spurdur, um tað var greitt fyri allar limirnar í Løgtinginum, at høvuðsgrundgevingin fyri at leggja lógarbroyting fram um at útseta útlutan av kvotu eftir § 49, stk. 1 var, at ætlanin var at fáa nýggjar aktørar inn, og ikki so nógv grundgevingin um, at liðið var so langt út á árið, greiddi Jacob frá, at ásetingin um ítøkilig skipakeyp kom inn í lógarbroytingini í 2020 (LM-69/2020). Hann minnist ikki málið í smálutir, men helt, at tað var so. Tí hann helt, at hann nevndi, at skuldu nýggir aktørar inn, so var tað betri í byrjanini, at teir fiskaðu tað næsta, betri kvotagrundarlag. Hann mintist tað sum um, at mann tók avgerð um, at ítøkiligt skipakeyp kom inn og flutti svartkjaftin. Svartkjafturin var farin. Vertíðin var farin fyri svartkjaft í 2020. Eftir at hava tosað nakað aftur og fram um tíðarskeiðið, tá lógarbroytingin varð løgd fram í tinginum (LM-69/2020), mintist Jacob, at sjálvar ásetingarnar um ítøkiligt skipakeyp vórðu tiknar úr, tí eitt nýtt lógaruppskot skuldi gerast seinni í 2021, har ásetingar um ítøkiligt skipakeyp skuldu setast inn, helst orsakað av, at mann seinast í desember mánaði 2020 ikki var heilt samdur um, hvussu ítøkiligt skipakeyp skuldi skipast. Hann var rímiliga vísur í, at hann minnist seg hava skift orð um ítøkiligt skipakeyp, og at tá kvoturnar skuldu flytast um ár, , fingu teir, ið fingu tillutað kvotu, eitt breiðari grundarlag. Tað helt hann vera ein part av kjakinum. Og tað var, so løgið tað ljóðar, ein nokkso breið semja um tað. Tað var tað. Tað mundu vera 31 atkvøður fyri uppskotinum. Ja, tað undraði hann. Tað var rímiliga breið undirtøka fyri tí partinum, tað var nokkso viðkvæmt, tí vit høvdu jú eisini funnist at undanfarnu samgongu fyri menningarkvoturnar. Tað kom ongantíð í lag, og so sat hann við hesum uppá sama máta. Høgni Hoydal sat so 4 ár í einum politiskum hurlivasa, sum hann ikki kom burturúr, og hann sat við § 49 og royndi at fáa hana ígjøgnum. Tí roknað hann við meiri kjaki, enn tað í roynd og veru varð."*

### Rógvi Reinert

Í sambandi við avhoyringarnar 28. oktober 2022 verður Rógvi Reinert spurdur um orsøkina til, at kvotur eftir § 49, stk. 1 ikki verða lutaðar út í 2020, men fluttar til 2021:

*"Spurdur um orsøkina til, at landsstýrismaðurin valdi at útseta útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 1 í 2020 til 2021, greiddi Rógvi frá, at orsøkin var tann, at Jacob greiddi honum frá, at tað var so nógv útliðið á árið nú, at tað var torført at fáa gagnnýtt kvoturnar í 2020. Men hin orsøkin var, at málið bleiv umrøtt. Tað koma sjónarmið fram í samgonguni um, at skipanin í 2020 eigur at gerast øðrvísi, enn hon er skipað nú í lóggávuni. Tað, sum kemur fram er, at skipanin í 2020 fevnir bara um verkætlanir, sum kunnu setast í samband við framleiðslu á landi. Hann verður kunnaður um, at tað er eitt politiskt ynski og ein politisk hugsjón um, at hesar kvoturnar eiga eisini at verða brúktar til, at nýggj skip kunnu koma inn í flotan. Tá er tað, at hann sigur, at tað er ein ógvuliga stór broyting í øllum tí, sum er, og lógin gevur ikki pláss fyri tí. Tá er tað, og landsstýrismaðurin skilir tað ógvuliga skjótt og beinanvegin sigur: "Ja, ja. Men eri farin í holt við at umhugsa at broyta lógina." Og tað er jú liðið langt út á árið, og tíðarætlanin og annað í løgtinginum byrjar at vera farið. Mann hevur brúk fyri 17 undirskriftum og so framhaldandi. So tað blívur eftir hansara meting ein eitt sindur krevjandi uppgáva at gera tað. Men sjálvandi er landsstýrismaðurin í samskifti við samgonguna og baklandið sannførdur um, at hatta er tað, mann vil, og hatta er tað mann kann. So skal man fara til verka beinanvegin. Og harnæst siga tey: "Jamen, um tú skalt útseta eina ætlan, sum er lógarfest, so er bara ein máti at gera tað uppá, og tað er at fáa eina lógarbroyting, at fáa eina aðra lóg, sum staðfestir, at ætlanin verður løgd í 2021 og ikki í 2020." So orsøkin var hasar báðar, at mann ynskti politiskt, at ætlanin skuldi víðkast til eisini at fevna um skip, og so var mann kanska eisini, tað vil siga politikarar, av tí fatan, at tað kanska var í so seint. Men tað seinna haldi eg ikki, var so avgerandi politiskt. Politiskt var tað tað fyrra, at man ynskti at víðka ætlanina til skip. Embætisverkið fór so beinanvegin í gongd við at fyrireika eitt lógaruppskot. Lógaruppskotið bleiv so samtykt á tingi seint tað árið, í 2020. Tað bleiv umrøtt leysliga, at mann kanska eisini kundi luta kvotuna út til onkran serligan, sum kundi koma skjótt í gongd og kundi brúka eina kvotu bara innan fyri 4 mánaðir, men tað var ikki ein ætlan, sum var góð. Hann helt, at hon bleiv bara umrøtt leysliga munnligt. Hann helt, at niðurstøðan bleiv øgiliga skjót á heysti í 2020, at ætlaði landsstýrið og samgongan nakað heilt annað við hesi skipanini enn at avgreiða hesar kvoturnar í 2020, so mátti tingið gera eina nýggja lóg, sum so avloysti lógina, sum var galdandi. Og tað bleiv tað, sum bleiv gjørt. So tað yvirskipaða var politiskt, at mann ynskti, at skipanin skuldi víðkast eisini til at fevna um skip. Tað var tann stóra orsøkin, og tískil vildi mann útseta við lóg ætlanina til 2021. Tað bleiv sagt, at tað var tann einasti møguleiki, tú hevði.*

*Spurdur um, hvør høvuðsorsøkin var til, at útlutanin varð útsett til 2021, um tað var, tí tað var liðið ov langt út árið, ella um tað var, tí mann politiskt hevði ynski um at fáa nýggjar aktørar inn, svaraði Rógvi, at tað vóru tvær orsøkir, men tann stóra orsøkin var tann politiska. Tað er soleiðis, at hann tulkar málið. Tað vóru so tvær, men at vekta tær báðar ímóti hvør aðrari, tað kundu kanska verið ymiskar meiningar um tað. Men at skipakeyp kom inn, tað var so ið hvussu er tað, sum bleiv umrøtt ímillum hann og landsstýrismannin ella tey og landsstýrismannin. Um at í samgonguni ynskti mann, at skipakeyp var partur av politisku skipanini.*

*Spurdur um teldupost, dagfestur 15. oktober 2020, har Torkil Rasmussen í strangasta trúnaði kunnar Rógva Reinert, Andras Kristiansen og Ólav Dalsgarð um, at landsstýrismaðurin helst vil sleppa undan at luta út kvotu eftir § 49, stk. 1 í 2020, greiddi Rógvi frá, at orðingarnar hjá Torkil 'í strangasta trúnaði', vóru kanska eitt sindur yvirdimensioneraðar. Hetta er bara tað, mann kann siga, at treytin fyri, at ætlanin hjá landsstýrinum skal kunna fremjast, er ófrávíkilig. At mann skal fáa eitt lógaruppskot samtykt undir tíðartrýsti, kann man siga, tá mann er komin heilt út í september-oktober mánað. Og tað er tað, teir siga, at alt annað er ikki rætt. Um landsstýrismaðurin vildi hetta her, mátti hann fáa løgtingið at samtykkja eina aðra lóg, sum staðfesti hansara ætlan. Tað var tað.*

*Spurdur, um hann er samdur í, at grundarlagið í 2021 broytist munandi sammett við 2020, tí nú verða kvotur frá 2020 lagdar aftrat kvotununum í 2021, sum søkjast kann um, greiddi Rógvi frá, at tann trupulleikin er allarhelst sera, sera avmarkaður, tí tað er bara 1 ár, og skulu slíkar verkætlanir kunna gjøgnumførast, so eru ár 2, 3, 4 og 5 kanska týdningarmiklari enn ár 1. So uppá tann mátan er tann trupulleikin øgiliga lítil. Men orsøkin til, at Torkil kanska skrivar hendan postin eitt lítið sindur í trúnaði, er sjálvandi tað, at reint fyrisitingarliga, so er tað sjálvandi ongantíð rætt at útseta eina ætlan til árið eftir. Eisini tá tað kemur til skipað viðurskifti sum heild, so er tað ongantíð rætt, men løggáva og lógarsmíð og ein samtykt lóg er yvir øllum. Og um løgtingið samtykti, at soleiðis er tað, jamen, so er tað tað, sum er galdandi. Men hann kann fara so langt sum at siga, at hóast løgtingið samtykkir tað, so er tað ikki góð fyrisiting, tað er tað ikki. Men mann skal sjálvandi halda seg til lógarbroytingarnar, og tað sum lógarbroytingarnar føra út í lívið, tað er tað, sum skal fremjast. Tað sigur seg sjálvt, tað sum lógarbroytingarnar samtykkja.*

*Spurdur um teldupost frá Andrasi Kristiansen, dagfestur 16. oktober 2020, til Rógva Reinert, har Andras ger vart við, at ætlanin við at útseta vinnuligu royndirnar og verkætlanirnar sambært § 49, stk. 1 í lógini til 2021 er ikki góður lóggávusiður, greiddi Rógvi frá, at hann mintist ikki henda teldupostin. Hann kennir ikki umsóknirnar í smálutum og veit ikki, hvat Andras meinar við. Hann vísir til tað, sum hann áður hevur sagt, at tað er ikki gott fyrisitingarliga at útseta. Mann kann helst finna okkurt hugsað dømi um, at tað ikki er gott mótvegis borgaranum. Men er tað soleiðis, at mann er samdur um at gera eina lógarbroyting, so er tað tann einasti møguleikin, hóast hann reint fyrisitingarliga ikki er tann besti. Tað vildi man politiskt. Teirra boðskapur til landsstýrismannin var, at skuldi landsstýrismaðurin gera nakað annað, enn lógin ásetti, mátti hann broyta lógina.*

*Spurdur um avgerðina at útluta ískoytiskvotur eftir § 49, stk. 2 í 2020, hóast liðið var ov langt út á árið, greiddi Rógvi frá, at tað er orsakað av, at ískoytiskvotur eru til skip, sum eru virkin. Tey fiska aðrar kvotur, og vertíðin fyri makrel og sild er seinna hálvár og seint á árinum, og hesi skipini hava smáar kvotur. Tað er tí, at tey fáa ískoytiskvotur. So har var bæði deyður kapasitetur, og har var kapasitetur, sum kundi fara í fiskiskap beinanvegin. Tað eru skip, sum eru virkin, manning og ja, alt. Tey sigla faktiskt. So tíðin frá tí, at mann fær tilsøgnina, til mann fer at fiska, er ein dagur, at fylla oljutangan og fáa fiskiloyvi og so avstað. Og vertíðin var ikki heilt liðug, tí er tað. Tað er ikki nakað við at gera høli klár, keypa nakrar maskinur og tosa við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og so víðari."*

## Andras Kristiansen

Í sambandi við avhoyringarnar 27. oktober 2022 verður Andras Kristiansen spurdur inn til orsøkina til, at kvotur eftir § 49, stk. 1 ikki verða lutaðar út í 2020, men fluttar til 2021:

*"Spurdur, hvør orsøkin var, at landsstýrismaðurin valdi ikki at luta út kvotur eftir § 49, stk. 1 í 2020, men heldur útseta til 2021, og vístur á teldupost frá Torkil V. Rasmussen, dagfestur 15. oktober 2020, greiddi Andras frá, at, landsstýrismaðurin vildi sleppa undan at luta kvoturnar til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært tilmælinum, sum tey høvdu latið, og so varð tað sagt okkurt um, at tað var við atliti til, hvussu kann mann siga - sum grundarlag undir onkrum størri verkætlanum. Og tað, sum tey so sóu seinni aftur, tá ið mann seinni fór at gera eitt lógaruppskot, legði tað fyri tingið tá seinni í árinum, sum so fór endaliga*

*ígjøgnum árið eftir. Tað fór ikki ígjøgnum í tinginum tá fyri jól. Tað bleiv gjørt eitt nýtt uppskot seinni í februar mánaði árið eftir.*

*Andras greiddi síðani frá, at tey hava ikki havt nakra samrøðu við landsstýrismannin í sambandi við útsetanina. Tað, sum hendir er, at tað er aðalstjórin, sum fer til løgfrøðingin, og boðini koma umvegis løgfrøðingin til hansara, soleiðis fær hann boðini. Hann mintist støðuna soleiðis, at hann sendir ein innanhýsis teldupost til Torkil 16. oktober 2020 og kunnar um, at aðalstjórin hevur verið inni á gólvinum hjá honum. Boðini hjá aðalstjóranum vóru, at hann við prátinum við Torkil hevði latið bóltin víðari til Fiskivinnustovuna at viðgera málið á tí grundarlagið, sum Torkil lýsir í sínum telduposti frá 15. oktober 2020.*

*Spurdur um teldupost frá 16. oktober 2020, har Andras Kristiansen ger Rógva Reinert varigan við, at ætlanin um at útseta útlutanina frá 2020 til 2021 ikki er góður lóggávusiður, og hvat hann hugsar, tá hann sendir teldupostin til Rógva, greiddi Andras frá, at tað er væl, at summi hava søkt í 2020, og nú sigur mann: vit taka onga avgerð. Vit flyta kvoturnar til næsta ár og gera ein nýggjan máta at søkja uppá. Og kanska onkur kundi hugsað sær at keypt eitt skip ella okkurt sovorðið, og sum so verður til tað. Kvoturnar verða latnar til skip.*

*Spurdur, um Andras hugsar um onkran ítøkiligan umsøkjara, greiddi Andras frá, at tað helt hann ikki nakað soleiðis. Tí tær umsóknirnar, sum vóru - altso tað varð lýst eftir verkætlanum, sum liggja á virkjum á landi - tað var ikki skip sum so. Tað var ikki heimild til tað.*

*Spurdur aftur um orsøkina til, at útlutanin varð útsett, greiddi Andras frá, at honum vitandi var orsøkin tann, sum Torkil vísir til í sínum telduposti til hansara og Ólav Dalsgarð 15. oktober 2020. Soleiðis sum hann minnist tað, so var orsøkin, at ynski var um at veita kvotu til ítøkilig skipakeyp og skiparakstur heldur enn til virki, verkætlanir á landi."*

### Torkil V. Rasmussen

Í sambandi við avhoyringarnar 27. oktober 2022 verður Torkil V. Rasmussen spurdur inn til orsøkina til, at kvotur eftir § 49, stk. 1 ikki verða lutaðar út í 2020, men fluttar til 2021:

*"Spurdur um, hvør orsøkin var til, at landsstýrismaðurin valdi ikki at luta út kvotur eftir § 49, stk. 1 í 2020, men útseta útlutanina til 2021, greiddi Torkil frá, at hann kundi greiða frá, hvat er hent í málinum, men hvørjar tankar, ið landsstýrismaðurin hevur havt, og hvørjar orsøkirnar vóru, tað visti hann ikki.*

*Torkil fær fyrilagt avrit av telduposti, dagfestur 15. oktober 2020, sum hann hevur sent til Andras Kristiansen, deildarstjóra, og Ólav Dalsgarð, fulltrúa, við avriti til Rógva Reinert, aðalstjóra, har av sæst, at Jacob Vestergaard helst vil sleppa undan at luta út kvotur eftir § 49, stk. 1 í ár.*

*Spurdur um, hvat liggur í setninginum "vil sleppa undan", greiddi Torkil frá, at hann kann gita. Søkt var eftir umsóknum, og tilmæli verður latið. Tað fer upp til landsstýrismannin, og so er mann ikki serliga heitur fyri at koma til tað tilmælið. Tað, sum hann gitir, at hetta er, er tað, at mann gjarna vil hava nýggj skip í flotan, og so ætlar mann, gitir hann, at broyta lógina soleiðis, at tú kanst sleppa at keypa nýggj skip uttan krav um veiðiloyvi. Tað er tað, sum lógarbroytingin seinni blívur til. Tað verður so aftaná, at hann er farin úr starvi,*

*tikin avgerð um ítøkilig skipakeyp, har hesar kvoturnar eisini verða - verða tær ikki fluttar eisini til næsta ár ella lagdar afturat í 2021? Tað, gitir hann, hevur verið tann politiska ætlanin. Ja, tað er politiska skipanin, sum arbeiðir so og løgtingið. Tað gitir hann. Tí hann dugir ikki at síggja nakra aðra orsøk til ikki at taka undir við einum sovorðnum tilmæli. Men tað, sum stendur her svart uppá hvítt, er, at tað er eitt sindur løgið, at mann lýsir eftir kvotum, ger eitt tilmæli og kemur ikki til eina niðurstøðu. Broytir fyritreytirnar fyri at søkja, størri nøgdir, aðrir møguleikar, og so kemur mann so til eina avgerð einaferð seinni við støði í seinastu lógarbroytingini.*

*Spurdur um, hví svartkjaftur eisini verður nevndur í teldupostinum, greiddi Torkil frá, at tað er tí, at svartkjafturin bleiv jú ikki lutaður út sum nýggjar royndir og verkætlanir í 2020, so verður hann við kunngerð fluttur yvir um ár til næsta ár, har sum tær nøgdirnar koma afturat. Tað vil siga, at teir, sum hava søkt eftir bæði norðhavssild og makreli, fáa høvi til at víðka um umsóknina til eisini at fevna um svartkjaft.*

*Spurdur, um svartkjafturin skuldi brúkast til at geva eitt betri grundarlag fyri at keypa skip, greiddi Torkil frá, at, ja, svartkjafturin verður øgiliga ofta nýttur, fyri ikki at siga altíð, til ídnað og er eitt kapitalinnskot kann man siga. Nógv av tí verður latið serliga til Havsbrún í Fuglafirði og verður gjørt um til fiskamjøl, alifóður og minkafóður og annað. Tað er ikki so lætt at virðisøkja svartkjaft til matnað, líka sum tú kanst við sild og makrel. Tað vóru nokkso stórar nøgdir av svartkjafti, og tað var farið nokkso seint út á árið í 2020, meinti hann, so mann hugsaði, at um mann skuldi til at luta hetta út til nýggjar aktørar og sovorðið Og tað fór eftir øllum at døma ikki at kunna gagnnýtast av kvotunum her, so mann valdi heldur at flyta tað yvirum til næsta ár. Tí at ofta skalt tú hava eina lítla verkætlan, um tú sigur, at "eg ætli mær at nýskapa og nýmenna". "Eg ætli mær at lata svartkjaft til Havsbrún," tað er ikki so nýmennandi og nýskapandi.*

*Spurdur um, hvørt tað var liðið ov langt út á árið, sum var orsøkin til, at kvoturnar eftir § 49, stk. 1 vórðu fluttar til 2021, svaraði Torkil, at tað absolutt kann vera ein orsøk. Altso vertíðirnar kunna fara, og so stendur mann har og skal luta kvotur út til onkran, og har er eingin fiskur at fáa, ella er ikki burðardygt at fiska tað. So sigur mann: Jamen, so er tað betri fyri bæði aktørarnar og fyri gagnnýtsluna av tilfeinginum, og viðvíkjandi - ja hann visti ikki, um mann kann siga: samráðingarstøðuna, tað kann diskuterast, ja, at mann flytir tað yvirum til næsta ár, men tað tekur, sum tað er skjalprógvað her, nakað av tíð frá tí, at tilmælið er latið. Ískoytiskvoturnar eftir § 49, stk. 2 verða lutaðar út. Ja, og tað er eisini tí, at tað er lættari at fara út og fiska ískoytiskvoturnar fyri teir 5-6, sum fingu tillutað tað, og teir høvdu skipini klár og alt. Tað var bara at fara avstað. So hann visti ikki, hvussu nógv mann kann tilleggja vertíðini sæð í tí betraktningi. So tað hevur helst verið ein politisk ósemja um tað tilmælið, mann hevur fingið, sum hevur verið høvuðsorsøkin til, at mann ikki hevur tikið undir við tilmælinum. Bara sagt: "Jamen, farið tit út og fiskið tað, ískoytiskvoturnar eru farnar." Altso, tað gitir hann bara. Tað má tað bara vera. Annars gevur tað ikki meining at snakka um vertíðina, um tað er samstundis.*

*Torkil greiddi víðari frá, at har vóru jú røddir frammi í almenna rúminum eisini í sambandi við - tað er ikki langt frá, at tað eisini stendur nevnt í samgonguskjalinum - at mann gjarna vil hava nýggjar aktørar inn í vinnuna. Og ikki bara sovorðnar, sum koma inn í nøkur ár, og so eru teir úti aftur. Men mann vil hava nýggj skip, og soleiðis sum skipanin bleiv skrúvað saman, so metti hann bara, at tað er gingið upp fyri politisku skipanini, at mann fær ikki nøkur nýggj skip inn uttan treyt um veiðiloyvi, og so fært tú eitt tilmæli, har, sum hann minnist, ongin umsókn um keyp av skipið varð tilmæld. Hann helt ikki, at nakað skip stóð í har, har mann*

*mælti til skipakeyp í tí fyrra tilmælinum undir § 49, stk. 1. So metti hann bara, at mann vildi broyta lógina soleiðis, at teir kundu fáa skipakeyp. Tað broytir so sjálvandi fortreytirnar fyri at søkja og alt tað. Tað var øgiliga skjótt frá tí, at samgongan kom til, til lógaruppskotið bleiv samtykt. Og mintist hann rætt, so var eisini eitt skriv frá umsitingini latið um, at mann líkasum mótmælti eitt sindur.*

*Spurdur, um eitt mótmæli kom frá umsitingini í Fiskimálaráðnum, svarar Torkil: Ja, tí at nógv av hasum hevði kanska avleiðingar, sum mann kanska ikki kundi gjøgnumskoða uppá so stutta tíð. Hann skal ikki siga kollveltir, men tú broytir grundleggjandi eina skipan til eina nýggja skipan, har rættindini ikki eru knýtt at stálinum, sum tað eitur í tí skipanini, sum var áðrenn, til nú aftur at skula knýtast at stálinum. Hvussu ger mann so fyri at tryggja, at tey, sum til dømis hava keypt rættindi á uppboðssølu uttan skip fáa sama møguleika til eisini at kunna avhenda hesa kvotuna aftur? Og so fær mann eitt skotbrá har í skiftistíð. Hann mintist ikki, nær endaliga freistin var. Tað stendur helst í einum av hasum fyrstu paragraffunum, § 14, 15,nær rættindini skulu vera løgd at stálinum í seinasta lagi. So hann veit ikki, um hetta kanska hevur verið eitt úrslit av, at mann ikki hevur verið tilvitaður politiskt um, hvat tann nýggja skipanin í roynd og veru hevði við sær fyri teir nýggju aktørarnar, sum komu inn, og sum ætlaðu sær við skipum.*

*Har skeyt mann so upp, at mann kundi lata tað í 5 ár, og í tí tíðarrúminum kundi mann so javnsetast við aðrar við veiðiloyvi viðvíkjandi flyting og avhending og tað. Tað var ið hvussu er eitt ynski í politisku skipanini, at tað skuldi vera, og tí fór mann so inn og broytti lógina. Tað er eisini tað, sum mann hevur viljað alla tíðina. Tí metir hann, at tað tilmælið, sum teir eru komin við, ikki ordiliga er tað, sum teir høvdu ætlað sær, Tí lógin bleiv jú broytt í skundi, og hetta var øgiliga ringt at hava við at gera, eisini skiftisreglur og alt møguligt, ikki minst stillingar og alt. Hann minnist, at tey sótu langt út á kvøldið eisini, tá lógin bleiv gjørd, millum jól og nýggjár og alt, og kunngerðin skuldi so eisini lýsast. Vørn skuldi umsita tað og hava eftirlit við tí, og tað var ein øgiliga kaotisk tíð soleiðis lóggávuliga."*

## Ólavur Dalsgarð

Í sambandi við avhoyringarnar 27. oktober 2022 verður Ólavur Dalsgarð spurdur um orsøkina til, at kvotur eftir § 49, stk. 1 ikki verða lutaðar út í 2020, men fluttar til 2021:

*"… hvør var orsøkin til, at landsstýrismaðurin valdi ikki at útluta kvotur eftir § 49, stk. 1 í 2020, men heldur útsetur útlutanina til 2021. Her svaraði Ólavur, at tað bert má vera ein meting frá honum. Hann segði, at Sjófeingislógin loyvdi ikki at útluta kvotur til verkætlanir, sum snúðu seg um at fáa nýggj skip inn í flotan, tí tað kundi bert fiskast við skipum, sum høvdu veiðiloyvi. Hetta hevur nokk verið ein feilur, sum tey ikki hava dugað at gjøgnumskoðað, tá tey hava gjørt Sjófeingislógina upprunaliga. Tá ein nýggj lóggáva er komin, har mann ynskir at fáa loyvini knýtt at stálinum, so ynskir mann eisini at fáa nýggj skip inn. Mann vil ikki hava kvotur liggjandi úti á virkjum og annað. Ólavur metir, at tað var tað, sum landsstýrismaðurin hevur sæð ein trupulleika í. Men tað var tað einasta, sum mann fyrisitingarliga kundi mæla til, tí at tað segði lógin. Tað vóru verkætlanirnar hjá teimum feløgunum, sum fingu onnur at fiska fyri seg, og tað gongur jú nokkso nógv ímóti tí, sum endamálið við lóggávuni annars er.*

*Ólavur fær fyrilagt avrit av telduposti, dagfestur 15. oktober 2020, sum Torkil V. Rasmussen hevur sent til Andras Kristiansen, deildarstjóra, og Ólav Dalsgarð, fulltrúa, við avriti til Rógva Reinert, aðalstjóra, harav skilst, at Jacob Vestergaard helst vil sleppa undan at luta út kvotur eftir § 49, stk. 1 í ár.*

*Spurdur um, hvat liggur í setninginum "vil sleppa undan", greiddi Ólavur frá, at hann meinar, at tað liggur í tí, at landsstýrismaðurin vil hava nýggj skip inn. Tað er eisini tað, sum skilst í teldupostinum frá Torkil, sigur Ólavur. Hann greiddi víðari frá, at tey høvdu vrakað allar umsóknirnar, sum snúðu seg um skipakeyp í tilmælinum, tí at lóggávan loyvdi tí ikki. Tað er tað, sum kemur í klemmu, og tað er ikki tað, mann hevur ætlað politiskt.*

*Spurdur um, um tilmælið var ein orsøk til, at mann valdi at útseta útlutanina, svaraði Ólavur, at tað gongur hann út frá. Mann hevur ikki hugsað um tað áðrenn.*

*Í sambandi við orðaskifti í løgtinginum um lógarbroytingina varð kjakast um vertíðina fyri makrelin. Spurdur um, um hetta hevði nakað at gera við broytingina, svaraði Ólavur, at orðaskiftið hevur verið seint á árinum, og at tað ikki hevur verið møguligt at fiska makrelin aftan á hesa viðgerðina, og tí má mann flyta tað tvørtur um ár. Tað stutta av tí langa er, at landsstýrismaðurin hevur í lóggávuni skyldu til at útluta tær kvoturnar, sum standa í lóggávuni. Hann skal útluta hana. Tað vil siga, at um hann ikki útlutar kvoturnar, brýtur hann lógina. Tí má hann gera eina lógarbroyting, sum heimilar honum ikki at útluta alt í ár, og so flytir hann tað til næsta ár, greiddi Ólavur frá.*

*Spurdur um, hví svartkjaftur var við í lógarbroytingini í 2021, svaraði Ólavur, at tað minnist hann ikki. Hann var ikki við frá byrjanini, tá kunngerðin í 2020 varð gjørd. Hann greiðir frá, at tað var ein grund til, at svartkjafturin ikki var við tá, men um tað hava verið nøgdir, sum hava verið knýttar at onkrum øðrum, tað minnist hann ikki. Tað hevur í øllum førum verið ein nøgd, sum er blivin tøk, og so hevur mann vilja fingið hana uppí. Svartkjafturin kom við í ískoytiskvotur, og so kundi mann søkja eftir svartkjafti bæði eftir § 49, stk. 1 og § 49, stk. 2. Ólavur greiddi frá, at onkur annar allarhelst veit fleiri smálutir um, hví svartkjaftur ikki var við í 2020, men so var við í 2021. Tað var eisini okkurt við menningarkvotunum, sum ikki blivu útlutaðar. Tær blivu fluttar yvir í bólkin eisini, sum bleiv umlagdur til eginkvotur.*

*Kvoturnar í 2020 blivu fluttar til 2021, soleiðis at samlaða kvotan varð størri í 2021, enn tær vóru í 2020. Spurdur um, hvørjar avleiðingar hetta hevur fyri umsøkjaran, svaraði Ólavur, at hetta bert var galdandi fyri tað einkulta árið. Tað bleiv lutað út sum ein eingangskvota ella nøgd, sum varð býtt eftir sama lykli ella lutfalli sum tann kvotan, sum mann annars fær í 2021. Tað eru tvær nøgdir, sum verða ein samlað pulja, men grundarlagið fyri árini frameftir tekur støði í teimum tonsunum, sum hoyra til árið 2021. Tað vil siga, at nøgdin, sum teir møguliga fáa, minus tað, sum var í 2020. Tað er kvotugrundarlagið hjá teimum einstøku umsøkjarunum framyvir, greiddi Ólavur frá.*

*Spurdur, um hetta broytir fortreytirnar hjá umsøkjarunum grundleggjandi, at tað nú eru dupult so stórar kvotur árið eftir, svaraði Ólavur, at hann veit ikki, um tað er broyting í grundarlagnum. Tað er meira tað, at umsøkjarar skulu vera meira tilvitaðir um tað, tá teir fara undir eina verkætlan. At teir ikki leggja fíggjarætlan eftir, at teir fáa somu nøgdir framyvir.*

*Ólavur verður spurdur um teldupost frá Andrasi Kristiansen til Rógva Reinert tann 16. oktobur 2020. Teldupósturin er svar til teldupost frá Torkil V. Rasmussen frá 15. oktober 2020. Í teldupostinum skrivar Andras Kristiansen, 'at grundarlagið verður broytt munandi og tillagað onkrum, sum passar betri øðrum umsøkjarum*

*enn teimum, sum standa í tilmælinum dagfest 14. septembur 2020'. Spurdur um, hvat Andras meinar við í hesum føri, svarar Ólavur, at hann gongur út frá, at tað eru skipakeypini. Tey kunnu ikki realiserast eftir tilmælinum, og tað er tað, sum mann vil hava realiserað við hesi lógarbroytingini.*

*Spurdur, um landsstýrismanninumn ikki dámdi, hvør tað var, sum var tilmældur, svarar Ólavur, at tað heldur hann ikki. Landsstýrismaðurin hevur ikki givið úttrykk fyri, at tað snýr seg um nakrar persónar. Tað snúði seg um, at mann ynskti at fáa skip inn, tað var tað, sum hann var misnøgdur um.*

*Man valdi at útluta ískoytiskvoturnar eftir stk. 2. Spurdur um hví, svarar Ólavur, at tær vórðu skjótt avgreiddar, minnist hann rætt. Tað hevði skund, um tað skuldi gerast. Har vóru ikki eins nógvar umsóknir, og tað var øgiliga konkret í lóggávuni, hvør var skikkaður at fáa, og hvør kundi søkja um ískoytiskvotu."*

#### *4.1.1.1 - Meting*

Fyri at kunna taka støðu til, um henda avgerð landsstýrismansins er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina, má hyggjast nærri eftir, hvør orsøkin er til, at kvoturnar verða fluttar frá 2020 til 2021.

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar varð Jacob Vestergaard spurdur um, hvør orsøkin var, at kvoturnar vóru fluttar til 2021, hóast umsóknir vóru komnar inn og tilmæli skrivað. Til tað svarar Jacob Vestergaard:

*"...at tað var hetta politiska kjakið, sum var um at drála, bíða. Hann visti ikki beinanvegin, hvar tað politiska kjakið gekk, hvussu leingi tað var. Men sjálvandi, fyri hann var eitt evstamark, tí um ikki lógarbroyting kom, so skuldi tað útlutast. Tað var í øllum førum ta fatanina, hann hevði fingið av tí, sum umsitingin segði. Tí bleiv drálað. Orðingin hjá Torkil um at sleppa undan, ja, tað var ikki tí, at hann vildi sleppa undan. Men tað var tí, at tað var eitt politiskt kjak í gongd, sum nokk gjørdi tað, at politiska ætlanin var ein onnur. Sjálvt um hetta var púra erligt, so átti mann at avgreitt tað, tá tað kom. Men tað var enn eitt politiskt kjak, og sjálvandi skuldi hann viga ímillum, hvat var politikkur og fyrisiting, og hvat hann kundi. Men hann fekk í øllum førum at vita tað, at um ein lógarbroyting kom í árinum, sum at løgtingið í 2020 kanska helt nakað annað, enn lóggávan segði, men so broytti tað, so var í lagi at flyta alt yvirum og lata so umsóknirnar liggja og viðgera tær saman, um mann vildi tað til komandi ár. So tað er tað, sum liggur í tí. Tað er tað politiska kjakið um hesa vælsignaðu puljuna, hvat mann skuldi gera við hana, sum lá til grundar. Hetta minnist hann."*

Tað tykist soleiðis greitt, eisini út frá vitnisfrágreiðingum hjá embætisfólkunum, at eftir at Jacob Vestergaard fær tilmælið handað, tann 14. september 2020, gongur tað upp fyri honum, at tilmælið ikki samsvarar heilt við tað, sum hann ella politiska baklandið hava sæð fyri sær.

Ásannast má, at Jacob Vestergaard hevur verið undir einum ávísum politiskum trýsti orsakað av tí politiska kjakinum, sum hann sjálvur vísir til. Hetta tykist vera beinleiðis orsøkin til, at hann velur at drála við útlutanini.

Eftir at hava ráðført seg við umsitingina í Fiskimálaráðnum velur Jacob Vestergaard at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið, har m.a. § 49 í sjófeingislógini verður broytt (LM-69/2020). Uppskotið til broyting í sjófeingislógini verður lagt fram í Løgtinginum 9. desember 2020.

Í lógarviðmerkingunum til lógaruppskotið sæst, at samgongan hevur ynski um, at nýggir aktørar fáa part av kvotunum eftir § 49, stk. 1. Hetta má tí metast vera orsøkin til, at Jacob Vestergaard ikki ynskti at luta út kvoturnar eftir § 49, stk. 1 í 2020.

Í orðaskiftinum í Løgtinginum í sambandi við viðgerðina av LM-69/2020 nevnir Jacob Vestergaard eina av orsøkunum til útsetanina vera, at liðið var ov langt út á árið, og at skip bóru ikki við makrel aftur. Frægast var tí at flyta kvotur yvir um ár, sí leinkið https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9422

Hetta tykist tó ikki vera einasta orsøkin. Manglandi heimildin at tilluta kvotu til nýggjar aktørar, m.a. í sambandi við keyp av skipum uttan treyt um veiðiloyvi, tykist eisini at vera ein orsøk. Hetta framgongur eisini beinleiðis av viðmerkingunum til LM-69/2020.

Í álitinum hjá Vinnunevndini mælir meirilutin í nevndini tó til, at ásetingarnar í lógaruppskotinum, sum snúgva seg um annað enn flyting av kvotum til 2021, verða strikaðar. Broytingaruppskot varð lagt fram í hesum sambandi, og varð hetta endaliga samtykt av Løgtinginum.

Spurningurin er so, um avgerðin hjá Jacob Vestergaard at lata vera við at luta út kvotur eftir § 49, stk. 1 í 2020 er í stríð við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Viðvíkjandi sjófeingislógini má staðfestast, at Løgtingið hevur tikið undir við at broyta lógina. Hóast Jacob Vestergaard upprunaliga hevur havt skyldu til at luta út kvotur eftir § 49, stk. 1 í 2020, so fær hann neyðuga heimild til at lata vera við at luta út og ístaðin flyta hesar kvotur til 2021. Í so máta ber ikki til at siga, at brot er framt á sjófeingislógina.

Tað tykist at vera greitt, vísandi til munnligu frágreiðingina hjá Jacob Vestergaard, at hann velur at bíða við at útluta orsakað av tilmælinum, sum umsitingin læt honum 15. september 2020. Andras Kristiansen, deildarstjóri, ger eisini í telduposti til m.a. aðalstjóran vart við, at tað er ikki góður lóggávusiður at lýsa eftir umsóknum og gera eitt tilmæli fyri síðani at drála og lata vera við at luta út. Harumframt at lýsa av nýggjum við nýggjum treytum, sum hóska betri til aðrar umsøkjarar. Andras Kristiansen ger eisini vart við, at hetta ikki er góður fyrisitingarsiður.

Spurningurin reisir seg eisini: Hvussu við teimum umsøkjarum, sum tilmælt verður at fáa kvotu í tilmælinum, dagfest 14. september 2020? Hava hesir umsøkjarar rætt til at fáa kvotu eftir § 49, stk. 1 í 2020?

Sambært tilfarinum í málinum kann staðfestast, at ongin formlig avgerð er send teimum umsøkjarum, sum søktu eftir § 49, stk. 1 í 2020. Umsøkjararnir hava soleiðis hvørki fingið formligt játtandi ella noktandi svar. Umsøkjararnir fingu í skrivi 27. mai 2021 kunning um, at ongin kvota verður lutað út, men verður heldur flutt til 2021. Umsøkjarar fingu møguleika til at lata umsóknina vera liggjandi ella senda inn dagførda ella nýggja umsókn seinni.

Staðfestast kann tí, at ongin umsøkjari hevur fingið nakað lyfti um kvotu eftir § 49, stk. 1 í 2020. Ongin umsøkjari hevur tí fingið nakra grundaða vón um játtandi svar í so máta. Talan er soleiðis ikki um afturkallan

ella broyting av eini fyrisitingarligari avgerð, sí s. 301f, Forvaltningsret, Almindelige emner, Karsten Revsbech v.fl. 7. útg. 2022.

Tó kann sigast, at lógaruppskotið (LM-69/2020) í veruleikanum fær afturvirkandi virknað, við tað at umsøkjarar, sum hava latið inn umsókn, verða beinleiðis raktir av broytingaruppskotinum. Fiskimálaráðið hevur stovnað mál í hesum sambandi, og umsitingin hevur latið landsstýrismanninum tilmæli. Umsøkjararnir søkja í 2020 um kvotur eftir tágaldandi § 49, stk. 1, men umsóknirnar verða ikki viðgjørdar. Umsøkjararnir fáa heldur í boði at søkja umaftur í 2021, nú eftir øðrum fortreytum, tí § 49, stk. 1 er grundleggjandi broytt.

Undir yvirskriftini ”Avleiðingar fyri vinnuna” í lógaruppskotinum (LM-69/2020) framgongur:

*”Uppskotið hevur neiligar avleiðingar fyri tann partin av vinnuni, sum í 2020 hevur fyrireikað umsóknir o.a. við vón um at fáa lut í kvotum settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1. Hesir umsøkjarar mugu bíða til 2021. Hinvegin verður talan um størri nøgdir, eins og møguleiki er fyri at fáa lut í svartkjaftakvotu, samstundis sum møguleiki verður fyri at søkja um kvotu í sambandi við keyp av fiskifari. Tó skulu umsøkjarar helst tillaga verandi umsóknartilfar ella senda inn nýtt umsóknartilfar. Kunnað verður nærri um hetta seinni, verður uppskotið samtykt…”*

Hugtakið ”góður fyrisitingarsiður” er at skilja sum ein normur og aðalregla fyri, hvussu almennir myndugleikar eiga at bera seg at mótvegis borgarum. Almennir myndugleikar skulu bera seg vinarliga at, vísa virðing og bera seg at á slíkan hátt, sum styrkir álitið á almennu fyrisitingina.

Góður fyrisitingarsiður kann somuleiðis hava týdning fyri ítøkiligu málsviðgerðina, tí meginreglurnar í góðum fyrisitingarsiði galda við síðuna av teimum reglum, sum eru ásettar í sjófeingislógini og fyrisitingarlógini. M.a. er góður fyrisitingarsiður, at mál skulu viðgerast innan rímiliga tíð og mugu ikki vera fyri óneyðugum dráli.

Hóast eg í kanningarsetninginum ikki beinleiðis eri biðin um at kanna eftir, um viðgerðin av umsóknunum og tiknu avgerðirnar hjá landsstýrismanninum hava verið í samsvari við góðan fyrisitingarsið, so meti eg tað sum eina sjálvfylgju, at góður fyrisitingarsiður er partur av kanningarsetninginum. Sum víst á omanfyri, so galda reglurnar um góðan fyrisitingarsið við síðuna av teimum reglum, sum ásettar eru í sjófeingislógini og fyrisitingarlógini. Í hesum sambandi kann eisini vísast á, sum eitt ískoyti, at sambært viðmerkingunum til § 38, stk. 2 í stýrissikapanarlógini, kann skipanin við kanningarstjóra sigast at vera eitt avmarkað slag av løgtingsins umboðsmanni fyri hvørt málið sær.

Hugtakið ”góður lóggávusiður” verður vanliga víst til í sambandi við lógarsmíð. Í rundskrivi um lógarsmíð, sum Løgmansskrivstovan hevur givið út í januar mánað 2019, stendur m.a. á s. 136 at:

*”Tað er ein meginregla í einum rættarsamfelagi, at ein borgari bara er bundin av galdandi rætti…*

*Afturvirkandi virknaður gongur ímóti grundleggjandi meginreglum í einum rættarsamfelagi, og tí eiga slíkar ásetingar bara at verða nýttar í undantaksføri. Tað skal altíð verða grundgivið fyri, hví tað verður mett at vera neyðugt, at ásetingar skulu hava afturvirkandi virknað. Eru ásetingarnar tyngjandi fyri borgaran, krevur hetta enn gjøllari grundgeving…”*

Um hugt verður at donsku vegleiðingini um lógarsmíð (Vejledning om lovkvalitet), so stendur m.a.

*" Baggrunden for de anførte retssikkerhedsmæssige betænkeligheder kan noget forenklet beskrives således, at enhver borger i princippet bør være i stand til at sætte sig ind i retsregler, der til enhver tid tilsigter at regulere den enkeltes adfærd, således at vedkommende bliver i stand til at indrette sig herpå…"*

Í sambandi við ætlanir hjá donsku stjórnini í 2015 um at stramma lóggávuna um dansk indfødsret sigur danski professarin í fyrisitingarlóg, Carsten Henrichsen, soleiðis í Information, sí https://www.information.dk/indland/2015/09/stoejbergs-foreslaaede-regler-retspolitisk-betaenkelige:

*"Det er selvfølgelig ubehageligt for borgeren at blive ramt af nye skærpede regler, som finder anvendelse på tidligere handlinger eller undladelser. Det er grundlæggende i et retssamfund, at borgerne kan regne med den lovgivning, der aktuelt er gældende, når de foretager sig noget, der kræver myndighedernes tilladelse, eller ansøger om at blive tillagt en given status eller ret…*

*Hvis forhandlingerne ender med et cirkulære, der skærper kravene til opnåelse af indfødsret med tilbagevirkende kraft, så vil det være i strid med god lovgivningsskik, forstået som en retspolitisk norm for, hvordan der bør lovgives i dette land."*

Hóast lógaruppskotið ikki beinleiðis inniheldur ásetingar, sum verða settar í gildi við afturvirkandi kraft, so fær lógaruppskotið avleiðingar fyri teir umsøkjarar, sum søktu um kvotu í 2020. Avleiðingin er, at teirra umsóknir verða ikki viðgjørdar, hóast umsøkjararnir hava brúkt bæði orku, tíð og pening uppá umsóknirnar.

Harumframt verður grundarlagið broytt m.a. við, at kvoturnar frá 2020 verða fluttar til 2021, umframt at svartkjaftur verður eisini partur av kvotugrundarlagnum. Kvotugrundarlagið fyri 2021 verður soleiðis størri enn kvotugrundarlagið fyri 2020.

Samanumtikið er tað mín meting, at avgerðin um at útseta útlutanina av kvotum eftir § 49, stk. 1 í 2020 til 2021 ikki er í samsvari við góðan lóggávusið. Umsøkjararnir, sum hava latið inn umsókn um kvotu eftir § 49, stk. 1 í 2020, hava ikki kunnað innrættað seg eftir galdandi reglum, soleiðis sum normar um góðan lóggávusið áseta.

Viðmerkjast skal tó í hesum sambandi, at tað er Løgtingið, sum samtykkir lógirnar – ikki landsstýrismaðurin. Ásannast má, at Løgtingið tekur undir við at broyta sjófeingislógina, og tískil fær landsstýrismaðurin neyðugu heimildina at flyta kvoturnar yvir um ár. Eg meti tí ikki, at landsstýrismaðurin hevur framt brot á sjófeingislógina við ikki at luta út kvotur í 2020.

Her skal eisini nevnast, at lógaruppskotið (LM-69/2020) verður lagt fram í Løgtinginum 9. desember 2020. Tá er liðið so langt út á árið, at Løgtingið helst ikki hevur annað í at velja enn at samtykkja uppskotið.

Tó meti eg, út frá fyriliggjandi upplýsingum, at tað kann staðfestast, at landsstýrismaðurin tilvitað hevur drálað við at viðgera umsóknirnar. Spurningurin er so, um tað eru sakligar orsøkir til drálið. Sambært

upplýsingunum í málinum er greitt, at orsøkin til drálið er, at tilmælið frá umsitingini ikki samsvarar heilt við tað, sum landsstýrismaðurin hevur sæð fyri sær. Landsstýrismaðurin velur tí at drála við at taka avgerð í málinum, meðan hann stemmar av við politiska baklandið um, hvat skal gerast. Jacob Vestergaard hevur í munnligu frágreiðingini greitt frá, at tað var eitt politiskt kjak í gongd allatíðina um, hvat puljan eftir § 49 skuldi brúkast til, eisini eftir at lógin kom í gildi 1. januar 2020. Lógin verður eisini broytt aftur longu tann 29. juni 2020 (lóg nr. 106 frá 29. juni 2020), har m.a. ískoytiskvotur verða ásettar í § 49, stk. 2. Tað tykist soleiðis ikki vera avklárað, hvat politiska ynskið er, hóast lóggávan er lýst, og hóast lýst verður eftir umsóknum á sumri 2020. Tað verður heldur ikki tikið nakað fyrivarni í umsóknarblaðnum ella aðrastaðni í sambandi við, at lýst verður eftir umsóknum.

Ikki fyrr enn tilmælið fyriliggur frá umsitingini, tykist koma eitt politiskt ynski frá pørtum av samgonguni um, at nýggir aktørar við skipum uttan treyt um veiðuloyvi, eiga at fáa part av kvotuni eftir § 49. Eg meti ikki, hetta politiska ynskið sæst greitt av samgonguskjalinum ella av upprunaliga lógaruppskotinum, har vinnuligar royndir og verkætlanir koma inn. Eg haldi heldur ikki, hetta sæst greitt av munnligu frágreiðingini hjá Jacob Vestergaard.

Tá talan er um seinkingar í málsviðgerðini hjá almennum myndugleikum, er orsøkin vanliga manglandi starvsfólk ella onnur umsitingarlig viðurskifti. Í hesum føri er orsøkin tó eitt politiskt ynski um eina aðra niðurstøðu enn hana, mælt verður til.

Folketingets Ombudsmand sigur í FOB 88.100, s. 14, at seinkingar, sum verða framdar av fyrisitingini fyri at røkka einum ávísum endamáli, eru at meta sum ”kvalificeret forsinkelse”. Í FOB 88.100 átalar umboðsmaðurin málsviðgerðina í sambandi við viðgerð av umsóknum um familjusamanføring viðvíkjandi tamilskum flóttum, búgvandi í Danmark. Í viðgerðini kemur fram, at ábendingar eru um, at Justitsministeriet og Direktoratet for Udlændinge tilvitað drála við málsviðgerðini við tí endamáli at fáa umsøkjarnar at flyta úr Danmark, áðrenn nøkur avgerð verður tikin. Umboðsmaðurin metir ikki beinleiðis prógv vera fyri hesum, men vísir á, at fyrisitingin átti at havt í huga vandan fyri, at umsøkjarar fóru at flyta av landinum orsakað av drúgvu málsviðgerðartíðini. Umboðsmaðurin metti, at ein málsviðgerð uppá 16 mánaðir er alt ov long, og legði samstundis dent á, at umsøkjarar, sum lúka treytirnar, hava rættarligt krav uppá at fáa uppihaldsloyvi.

Málsviðgerðartíðin í Fiskimálaráðnum hevur ikki verið eins long og omanfyri nevnt, men tað er greitt, at kvoturnar av røttum áttu at verið lutaðar út beinanvegin, tí tær skulu fiskast í 2020. Tá Jacob Vestergaard tilvitað velur at leggja umsóknirnar stillar, er greitt, at tað í roynd og veru ikki verður møguligt at fiska kvoturnar, hóast kvoturnar møguliga vórðu lutaðar út móti ársenda. Tá er liðið ov langt út á árið.

Hóast umsitingin mælir til eina lógarbroyting, so vísa upplýsingarnar í málinum, at umsitingin ávarar um, at ein møgulig útsetan ikki er í samsvari við góðan fyrisitingarsið.

Sum víst verður á í omanfyri nevnda FOB 88.100, so hava umsøkjarar, ið lúka treytirnar, eitt rættarligt krav uppá at fáa tillutað kvotu eftir galdandi reglum. Fiskimálaráðið hevur lýst eftir umsóknum, fingið umsóknir, viðgjørt umsóknir og latið landsstýrismanninum tilmæli. Lógargrundarlagið er soleiðis greitt og klárt er at taka avgerð.

Umsøkjarar hava brúkt bæði tíð og pening uppá at lata umsóknir inn, men til fánýtis.

Eg meti ikki, landsstýrismaðurin hevur sakligar orsøkir til at drála í málinum. Orsøkin til drálið er beinleiðis politiskt, tvs. at ynski er um at fáa nýggjar aktørar inn við skipi, og tað heimilaði lógin ikki. Slíkt drál kann ikki metast vera í samsvari við góðan fyrisitingarsið. Her leggi eg serliga dent á, at politiska skipanin sambært munnligu frágreiðingini hjá Jacob Vestergaard framvegis ikki visti ítøkiliga, hvør ætlanin við § 49, stk. 1 kvotunum skuldi vera, hóast lýst varð eftir umsóknum, og hóast lógin varð broytt so seint sum 29. juni 2020. Her skal eg eisini serliga vísa á, at ásetingarnar í broytingaruppskotinum LM-69/2020, sum snúgva seg um annað enn flyting av kvotum frá 2020 til 2021, ikki verða samtyktar av løgtinginum. Vinnunevndin metir tað ikki vera ráðiligt at skundviðgera málið, og tí verður mælt til at strika hesar ásetingar í lógaruppskotinum (málsskjal 9). Hesum tekur løgtingið undir við.

Umsøkjararnir í 2020 hava ikki kunnað havt tað neyðuga álitið á almennu umsitingina, soleiðis sum meginreglan um góðan fyrisitingarsið áleggur almennum myndugleikum.

Umsøkjararnir hava latið inn umsóknir í august mánaði 2020, men fáa ikki formligt svar uppá sínar umsóknir fyrrenn 27. mai 2021. Ikki fyrr enn tá verður formliga boðað frá, at útlutanin í 2020 er útsett til 2021, og at umsøkjararnir kunnu dagføra sína umsókn ella lata inn nýggja umsókn á sumri 2021.

At umsøkjararnir ikki fáa nakra kunning ella svar uppá sínar umsóknir fyrrenn góðar níggju mánaðir aftaná, at umsóknirnar eru latnar inn, kann heldur ikki metast vera í samsvari við góðan fyrisitingarsið.

Viðmerkjast skal, at avgerðin hjá landsstýrismanninum at broyta sjófeingislógina, ikki er at meta sum ein fyrisitingarrættarlig avgerð. Eg meti tí ikki, at landsstýrismaðurin hevur framt brot á sjófeingislógina ella fyrisitingarlógina í hesum sambandi.

Eg meti tó, at landsstýrismaðurin hevur framt brot á góðan fyrisitingarsið við tilvitað at drála við at viðgera umsóknirnar. Eg meti somuleiðis, tað er brot á góðan fyrisitingarsið ikki at svara formliga uppá umsóknirnar fyrrenn góðar níggju mánaðir aftaná, at umsøkjararnir hava latið umsóknirnar inn til Fiskimálaráðið. Við støði í hesum meti eg ikki, at viðgerðin av umsóknunum hevur verið fullgóð.

## 4.2 - Útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini

Í sambandi við útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 2 læt umsitingin í Fiskimálaráðnum landsstýrismanninum tilmæli 24. august 2022 (málsskjal 19).

Í tilmælinum verður víst á, at 16 umsóknir komu inn og mælt verður landsstýrismanninum til at ganga 6 av umsóknunum á møti.

21. september 2020 fær landsstýrismaðurin handað endurskoðað tilmæli (málsskjal 21) orsakað av, at skipið Hoyvík hjá P/F Thor Fisheries er flaggað innaftur undir føroyskt flagg, sí nærri um hetta niðanfyri undir kap. 4.2.1.

Í tilmælinum framgongur:

*"Av tí at fiskifarið Hoyvík er flaggað inn aftur, og ongar avgerðir eru fráboðaðar enn, er talan um týðandi nýggjar upplýsingar av faktuellum slagi, og tískil fer fyrisitingin í Fiskimálaráðnum at realitetsviðgera umsóknina frá P/F Thor Fisheries um at luta ískoytiskvotu til fiskifarið Hoyvík.*

*Tá ið umsóknarfreistin var úti, vóru 16 umsóknir innkomnar um ískoytiskvotur. Sambært § 49, stk. 2 í sjófeingislógini kann í 2020 av kvotunum av norðhavssild og makreli setast ávís nøgd av fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskifari. Landsstýrismaðurin hevur í kunngerð ásett nøgdirnar at vera 2.840 tons av makreli og 5.397 tons av norðhavssild, sbr. § 5 í kunngerð nr. 118 frá 10. juli 2020 um kvotur av makreli og norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir. Talan er sostatt 60% til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1, og 40% til ískoytiskvotur, sambært § 49, stk. 2 í sjófeingislógini.*

*<u>Treytir fyri at fáa lut</u>*
*Ein grundleggjandi treyt fyri at fáa lut í ískoytiskvotunum er, at talan er um eigara av fiskifari, og kvoturnar skulu brúkast til at styrkja um verandi skiparakstur av tí fiskifari, ið ískoytiskvotan verður løgd á. Harumframt skal fiskifarið hava fingið útskrivað fiskiloyvi og avreitt makrel ella norðhavssild í 2019 ella 2020.*

*Summir av umsøkjarunum áttu ikki nakað fiskifar. Aðrir vístu á onnur fiskifør, ið kvoturnar skuldu leggjast á, sum so skuldi brúkast til íløgur í nýggj skip, og aðrir vildu brúka kvoturnar við øðrum fiskiførum fyri at bøta um raksturin av tí skipinum, har tørvur er á styrki til verandi skiparakstur.*

*Harumframt eru tveir umsøkjarar (…), ið hava søkt um ískoytiskvotu, men mett verður, at hesir sammett við aðrar umsøkjarar hava so mikið stórt kvotugrundarlag, at grundarlag er ikki fyri at geva so sterkum feløgum í fiskivinnuni lut í teimum sera avmarkaðu nøgdunum av makreli og norðhavssild, tá ið aðrir umsøkjarar eru, sum mugu metast at hava munandi størri tørv á ískoytiskvotunum."*

Í tilmælinum verður mælt til at ganga umsóknunum frá fylgjandi umsøkjarum á møti:

1) Arctic Voyager hjá P/F Jókin
2) Fram hjá P/F Jókin;
3) Vesturbúgvin hjá P/F Vesturbúgvin
4) Eysturbúgvin hjá P/F Vørðustíggjur;
5) Jupiter hjá P/F North West Pelagic og
6) Katrin Jóhanna hjá P/F Kinnfelli.
7) Hoyvík hjá P/F Thor Fisheries

Í innanhýsis avgerðarskrivi til umsitingina, dagfest 24. september 2020 (málsskjal 22) velur landsstýrismaðurin at fylgja tilmælinum frá umsitingini og luta út kvotu til omanfyri nevndu umsøkjarar. Tó verður eitt frávik gjørt í innanhýsis býtinum millum skipini. Í hesum sambandi viðmerkir landsstýrismaðurin í síni avgerð:

*"Eystur- og Vesturbúgvin hava lutfalsliga eitt betri grundarlag í rættindum enn hini skipini. Eystur- og Vesturbúgvin eru í fiskidagaskipanini og kunnu hava rímiliga støðugan fiskiskap eftir botnfiski við Føroyar.*

*Umframt fiskidagar, hava hesi skip eisini gulllaksakvotu, ið tryggjar støðugan rakstur í fleiri mánaðir um árið. Harvið kann ein siga, at Eystur- og Vesturbúgvin ikki bert virka í einum vinnubólki – uppisjóvarvinnuna – men í trimum vinnubólkum.*

*Tí er sakligt og rætt at taka avgerð um at lata hesum skipum minni ískoytiskvotu enn hinum.*

*Eysturbúgvin hevur ikki søkt um annað enn makrel.*

*Leggjast skal afturat, at landstýrismaðurin er samdur við orðingunum í tilmælinum um, at kvoturnar hjá einstøkum skipum kunnu metast at vera nakað veikari enn hjá øðrum.*

*Mett verður tó, at tað er torført ítøkiliga og neyvt at meta um munin millum raksturin hjá skipum í sama vinnubólki, ið øll hava tørv á ískoyti.*

*Tí er avgerð tikin um at býta kvotuna javnt millum øll skip, ið eru at javnmeta sum uppisjóvarskip eina…"*

Í sambandi við gjøgnumgongdina av málunum eri eg komin fram á tvær umsóknir, sum eg meti eru viðkomandi at lýsa nærri fyri at kunna svara kanningarsetninginum.

Talan er um umsóknir frá P/F Thor Fisheries og P/F Ocean Group Faroes, ltd. Felags fyri hesar báðar umsøkjarar er, at hvørgin teirra, tá umsóknirnar verða viðgjørdar, er eigari av skipi, sum ískoytiskvota verður søkt til. Tó verður skipið hjá P/F Thor Fisheries, Hoyvík, flaggað innaftur undir føroyskt flagg, áðrenn umsóknirnar endaliga eru viðgjørdar.

Viðvíkjandi avgerðini hjá landsstýrismanninum lutvíst at víkja frá tilmælinum viðvíkjandi býti av kvotum millum skipini, meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin ikki er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

### 4.2.1 - Umsókn frá P/F Thor Fisheries

#### *4.2.1.1 - Gongdin í málinum*

P/F Thor Fisheries sendir inn umsókn um kvotu til skipið M/tr Hoyvík eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini í telduposti tann 6. august 2020 (málsskjal 42)

Tann 10. august 2020 ger Thor Fisheries avtalu við grønlendskt reiðarí, har Hoyvík flaggar undir grønlendskt flagg (málsskjal 43).

24. august 2020 fær landsstýrismaðurin handað tilmæli, har m.a. framgongur, at orsakað av, at Hoyvík er skrásett sum selt til útlandið, mælir umsitingin frá, at umsóknin frá Thor Fisheries verður gingin á møti.

3. september 2020 (málsskjal 44) sendir Thor Fisheries inn eina dagføring viðvíkjandi síni umsókn til Fiskimálaráðið, har kunnað verður um, hvør orsøkin er til, at Hoyvík er selt til grønlendskt reiðarí, og at talan bert er um eina fyribilssølu, tí Hoyvík skal flagga inn aftur undir føroyskt flagg í seinasta lagi 1. november 2020. Thor Fisheries greiðir frá, at talan er um eina proforma avtalu, tí teknisk viðurskifti millum Føroyar og

Grønland viðvíkjandi fiskiskapi ikki gjørdu tað møguligt hjá føroyskum uppisjóvarskipum at fiska grønlendska kvotu eftir tí leisti, sum fyrr hevur verið nýttur. Tískil var neyðugt at flagga Hoyvík undir grønlendskt flagg.

Thor Fisheris heitir soleiðis í skrivinum á Fiskimálaráðið um at realitetsviðgera umsóknina og í øðrum lagi at kunna Thor Fisheries beinanvegin, um Fiskimálaráðið metir, at umsóknin ikki kann realitetsviðgerast, tí so verður alt fyri eitt skipað fyri, at Hoyvík verður flaggað aftur.

7. september 2022 (málsskjal 45) svarar Andras Kristiansen, deildarstjóri, skrivinum frá Thor Fisheries og vísir á, at tá umsóknin hjá Thor Fisheries var viðgjørd, varð staðfest, at Hoyvík ikki er skrásett í føroysku skipaskrásetingini og tí ikki undir føroyskum flaggi. Andras Kristiansen greiðir frá, at Fiskimálaráðið hevur gjørt tilmæli til landsstýrismannin. Eisini greiðir hann frá, at um Hoyvík er skrásett undir føroyskt flagg innan avgerðirnar um ískoytiskvotur eru tiknar og fráboðaðar, kann Fiskimálaráðið realitetsviðgera umsóknina. Fiskimálaráðið kann tó ikki geva nakrar ábendingar um, hvørt umsóknin verður eftirlíkað.

Av fundarnotati, dagfest 8. september 2020 (málsskjal 32), sum Andras Kristansen hevur skrivað, framgongur, at Andras Kristiansen av aðalstjóranum sama dag var biðin um at koma á skrivstovuna hjá landsstýrismanninum at umrøða viðurskiftini í sambandi við umsóknina frá Thor Fisheries.

Av fundarnotatinum framgongur m.a.:

*"Eg var fyrst spurdur um avgreiðsluna av skrivinum frá… vegna m/s Thor Fisheries, har spurt verður um, hvønn týdning tað hevði havt fyri viðgerðina av umsóknini um royndarkvotur, um m/s Hoyvík verður flaggað inn aftur undir føroyskt flagg. Eg greiddi frá skrivinum og svarinum, sum varð sent seinnapartin í gjár…*

*Síðani varð komið inn á grundgevingarnar hjá umsitingini fyri <u>ikki</u> at ganga umsóknini frá P/F Thor Fisheries um ískoytiskvotur á møti. Eg greiddi frá hesum – at P/F Thor Fisheries ikki eigur m/s Hoyvík, sum nú er undir grønlendskum flaggi. Ískoytiskvoturnar eru ætlaðar føroyskum skipum, og tí kunnu vit ikki mæla til, at kvota verður latin einum skipi, sum er undir grønlendskum flaggi. Tí var umsóknin hjá P/F Thor Fisheries løgd til síðis – saman við øðrum umsóknum, sum heldur ikki luku treytirnar fyri at fáa ískoytiskvotur.*

*Landsstýrismaðurin og fyri ein part aðalstjórin søgdu seg hava trupult at skilja, at umsóknin frá P/F Thor Fisheris um ískoytiskvotu til m/s Hoyvík varð løgd til síðis á hesum grundarlagnum – serstakliga tá tað [nú] í skjølunum verður upplýst, at skipið kemur aftur undir føroyskt flagg seinni í heyst.*

*Eg vísti á, at vit ikki mettu, at tað er grundarlag fyri at geva eina treytaða tilsøgn, har lagt verður til grund, at um ella tá skipið kemur aftur undir føroyskt flagg, fer tí at verða játtað ískoytiskvotu, men at svarið til… [Thor] í gjár letur upp fyri, at um skipið nú verður flaggað innaftur undir føroyskt flagg, verður umsóknin realitetsviðgjørd – tó uttan at geva ábendingar um, hvørja niðurstøðu viðgerðin kann hugsast at koma til.*

*Landsstýrismaðurin tókti tað vera løgið, at hálvavegna krevja skipið úr samstarvsavtaluni við grønlendska felagið, fyri at umsóknin kann verða viðgjørd. Heldur átti tað at kunna borið til at givið felagnum eina treytaða tilsøgn um ískoytiskvotu, hóast skipið verður verandi undir grønlendskum flaggi eina tíð afturat í heyst…*

*Á hesum grundarlagi heitti landsstýrismaðurin á umsitingina sum skjótast at umrøða/umhugsa grundgevingarnar fyri at leggja umsóknina til síðis, og um tað ikki ístaðin er grundarlag fyri at viðgera umsóknina, har lagt verður til grund, at skipið kemur aftur undir føroyskt flagg í heyst – og tí kunna veita felagnum eina tilsøgn, har tilskilað verður, at hon er treytað av og ikki fær virknað, fyrr enn m/s Hoyvík aftur í heyst er undir føroyskum flaggi.*

*Eg tók hesa áheitanina til eftirtektar og segði meg fara at taka málið til umrøðu í morgin."*

Í telduposti, dagfestur 9. september 2020 kl. 14.06, til Rógva Reinert (málsskjal 33) svarar Andras Kristiansen uppá áheitanina frá landsstýrismanninum tann 8. september. Andras hevur havt fund við umsitingina, sum er komin til, at:

*"Semja var um, at tað ikki er grundarlag fyri at broyta tilmælið – m/s Hoyvík er ikki undir føroyskum flaggi og lýkur tí ikki treytirnar fyri at fáa játtað ískoytiskvotu eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini og sambært treytunum, ið eru settar í § 6 í kunngerð nr. 118 frá 10. juli um kvotur av makreli og norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir.*

*Tekur landsstýrismaðurin kortini avgerð um at ganga á møti umsóknini frá P/F Thor Fisheries um ískoytiskvotur til m/s Hoyvík við eini treyt um, at skipið verður skrásett undir føroyskum flaggi seinni í heyst, skal verða gjørt vart við, at aðrar umsóknir, har umsøkjarin ikki eigur skipið, ið søkt verður um ískoytiskvotur til, so eisini eiga at verða viðgjørdar av nýggjum. Verða treytirnar fyri at fáa játtað ískoytiskvotu broyttar, lúka aðrar umsóknir, ið eins og tann frá P/F Thor Fisheries vórðu lagdar til síðis, eisini treytirnar fyri at verða viðgjørdar. Landsstýrismaðurin kann ikki taka eina umsókn burturúr og geva hesi umsóknini sersømdir fram um aðrar umsóknir, ið eru í somu støðu sum umsóknin fyri m/s Hoyvík við atliti at skráseting undir føroyskum flaggi.*

*Við hesum er áheitanin, ið varð sett fram á fundinum í gjár, avgreidd."*

Kl. 16.40 sama dag, 9. september (málsskjal 46), sendir Thor Fisheries teldupost til Fiskimálaráðið, har upplýst verður:

*"Góði Andras*

*Takk fyri tín teldupost og kunning.*

*Vegna P/F Thor Fisheries verður við hesum sagt frá, at arbeiði við at flagga M/Tr Hoyvík inn undir føroyskt flagg aftur er sett í gongd, og verður viðgjørt sum skundmál, soleiðis at skipið kemur undir føroyskt flagg alt fyri eitt.*

*Heitt verður tí á Fiskimálaráðið um, at bíða við at taka og fráboða endaligu avgerðirnar um ískoytiskvotur, inntil M/Tr Hoyvík er komin undir føroyskt flagg aftur. Arbeiðið við umflaggingini er sum sagt sett í gongd, og allir partar arbeiða so skjótt sum gjørligt."*

17. september (málsskjal 47) fráboðar Thor Fisheris í teldupost til Fiskimálaráðið, at M/Tr Hoyvík er nú aftur skrásettur í Føroyum við P/F Thor Fisheries sum eigara:

*"Í sambandi við umsóknina hjá P/F Thor Fisheries um ískoytiskvotu til M/Tr Hoyvík og tað samskifti partarnir eftirfylgjandi hava havt, verður tykkum við hesum upplýst, at M/Tr Hoyvík aftur er skrásett í Føroyum við P/F Thor Fisheries sum eigara…*

*Við hesum verður heitt á Fiskimálaráðið um at realitetsviðgera umsóknina frá P/F Thor Fisheries til Fiskimálaráðið um ískoytiskvotu til M/Tr Hoyvík."*

Andras Kristiansen sendur fráboðanina (málsskjal 34) frá Thor Fisheries víðari til Rógva Reinert í telduposti 17. september 2020.

18. september 2020 (málsskjal 35) sendir Rógvi Reinert soljóðandi teldupost til Fiskivinnustovuna:

*"Til Fiskivinnustovuna.*

*Málið um ískoytiskvotur § 49, stk. 2.*

*Eitt tilmæli er latið. Ongin avgerð er tikin og ei heldur fráboðað.*

*Vísandi til nevndu fráboðan verður heitt á Fiskivinnustovuna um at viðgera tilmælið av nýggjum…"*

Seinni sama dag verður eitt endurskoðað tilmæli gjørt av umsitingini og sent til Andras Kristiansen (málsskjal 21). Andras Kristiansen sendir endurskoðað tilmæli við telduposti til Rógva Reinert tann 21. september 2020. Sama dag sendir Rógvi Reinert tilmælið til Jacob Vestergaard.

Í endurskoðaða tilmælinum verður P/F Thor Fisheries nú tikið við, tí Hoyvík er flaggað innaftur.

Í skrivi, dagfest 28. september 2020 (málsskjal 48), verður umsóknin hjá P/F Thor Fisheries gingin á møti við hesi frágreiðing:

*"Sambært lóggávuni verður ískoytiskvota latin eigara av ávísum fiskifari. Endamálið er at veita kvotustyrk til teir skipaeigarar í vinnuni, ið ikki hava eitt nóg stórt kvotugrundarlag til at skipa verandi rakstur. Sambært lóggávuni skal talan vera um stuðul til egnan skiparakstur, jbr. bls. 12 í løgtingsmáli 142/2019.*

*Fiskifar, ið søkt verður um ískoytiskvotu til, skal hava fingið útskrivað fiskiloyvi og avreitt norðhavssild ella makrel í 2019 ella 2020, jbr. § 6, stk. 1 í kunngerð um kvotur av makreli og norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir.*

*P/F Thor Fisheries eigur fiskifarið, M/Tr Hoyvík, sum hevur avreitt norðhavssild og makrel í nevnda tíðarskeiði, og lýkur tí treytina sambært § 6, stk. 1 í nevndu kunngerð, eins og talan er um stuðul til eigara av fiskifari til verandi skiparakstur.*

*Mett verður, at kvotugrundarlagið hjá M/Tr Hoyvík er veikt og javnlíkt kvotugrundarlagnum hjá øðrum umsøkjarum, ið hava fingið játtandi svar. Mett verður, at tað er torført ítøkiliga og neyvt at meta um munin millum raksturin hjá teimum umsøkjarum, hvørs skip er at javnmeta sum uppisjóvarskip eina, og hevur landsstýrismaðurin tí valt at býta ískoytiskvotuna javnt millum hesi skip.*

*Avgerð er tí tikin um at luta M/Tr Hoyvík 490 tons av makreli og 990 tons av norðhavssild at fiska árini 2020-2024…"*

#### 4.2.1.1.1 - Munnligar frágreiðingar

Í sambandi við avhoyringarnar 28. oktober 2022 verður Jacob Vesterggard spurdur um málið viðvíkjandi lutan av kvotu til P/F Thor Fisheries:

#### Jacob Vestergaard

Spurdur um málið um útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 2 í 2020 og um málið hjá P/F Thor, har skipið Hoyvík er undir grønlendskum flaggi, meðan umsóknirnar verða viðgjørdar, men endar við at fáa tillutað kvotu, greiddi Jacob frá, at hann fekk ein teldupost frá Hans Andriasi. Hann spyr so Torkil um málið.

*"Spurdur um fundarnotat, sum Andras Kristiansen hevur gjørt í sambandi við ein fund inni á skrivstovuni hjá Jacob um júst skipið Hoyvík, og sum verður lisið upp: "Eg var í dag seinnapartin av aðalstjóranum biðin um at koma á skrivstovuna hjá landsstýrismanninum at umrøða viðurskiftini í sambandi við, at Thor hevur søkt um ískoytiskvotu til Hoyvík. Til staðar vóru, umframt undirritaði, landsstýrismaðurin og aðalstjórin. Eg var fyrst spurdur um avgreiðsluna av skrivinum til Janus Rein vegna Thor Fisheries, har spurt verður um, hvønn týdning tað hevði havt fyri viðgerðina av umsóknini um royndarkvotur, um Hoyvík verður flaggað innaftur undir føroyskt flagg. Eg greiddi frá skrivinum og svarinum, sum varð sent seint seinnapartin í gjár. Síðani varð komið inn á grundgevingarnar hjá umsitingini fyri ikki at ganga umsóknini frá Thor Fisheries um ískoytiskvotu á møti. Eg greiddi frá hesum, at Thor ikki eigur Hoyvík, sum nú er undir grønlendskum flaggi. Ískoytiskvoturnar eru ætlaðar føroyskum skipi, og tí kunnu vit ikki mæla til, at kvota verður latið einum skipi, sum er undir grønlendskum flaggi. Tí varð umsóknin frá Thor løgd til síðis saman við øðrum umsóknum, sum heldur ikki luku treytirnar fyri at fáa ískoytiskvotur. Landsstýrismaðurin, og fyri ein part aðalstjórin, søgdu seg hava trupult at skilja, at umsóknin frá Thor um ískoytiskvotu til Hoyví, varð løgd til síðis á hesum grundarlagi. Serstakliga tá tað nú í skjølunum verður upplýst, at skipið kemur aftur undir føroyskt flagg seinni í heyst. Eg vísti á, at vit ikki mettu at tað er grundarlag fyri at geva eina treytaða tilsøgn, har lagt verður til grund, at um ella tá skipið kemur aftur undir føroyskt flagg, fer tí at vera játtað ískoytiskvotu, men at svar til Janus Rein í gjár letur upp fyri, at um skipið nú verður flaggað innaftur undir føroyskt flagg, verður umsóknin realitetsviðgjørd. Tó uttan at geva ábendingar um, hvørja niðurstøðu viðgerðin kann hugsast at koma til. Landsstýrismaðurin tókti tað vera løgið at hálvavegna krevja skipið úr samstarvsavtaluni við grønlendska felagið fyri at umsóknin kann verða viðgjørd. Heldur átti tað at kunna borið til at givið felagnum eina treytaða tilsøgn um ískoytiskvotu, hóast skipið verður verandi undir grønlendskum flaggi eina tíð afturat í heyst. Mær tókti at aðalstjórin stuðlaði honum í hesum sjónarmiðnum. Á hesum grundarlagi heitti landsstýrismaðurin á umsitingina sum skjótast at umrøða og umhugsa grundgevingarnar fyri at leggja umsóknina til síðis, um tað ikki ístaðin er grundarlag fyri at viðgera umsóknina, har lagt verður til grund at skipið kemur aftur undir føroyskt flagg í heyst, og tí at kunna veita felagnum eina tilsøgn, har tilskilað verður at hon er treytað av og*

*ikki fær virknað fyrr enn Hoyvík aftur í heyst er undir aftur føroyskum flaggi. Eg tók hesa áheitan til eftirtektar og segði meg fara at taka málið til umrøðu í morgin." greiddi Jacob frá, at hann má viðganga, at hann ikki mintist ordiliga fundin.*

*Spurdur, um avgerðin um at játta kvotu til Hoyvík veruliga longu var tikin á fundinum 8. september 2020, svaraði Jacob nei. Tað, sum útgangspunktið hjá honum var, var, at hann visti, hvørji skip møguliga kundu fáa ískoytiskvotur, tí tað segði seg næstan sjálvt. Hann visti ikki, hví advokaturin hjá Thor skrivaði hatta ella legði upp til tað. Men hatta samskiftið mintist hann ikki ordiliga, men hann mintist seg hava tosað við Torkil um, og tað var púra greitt, at var Hoyvík ikki í flotanum, so var Hoyvík ikki í flotanum, og so fekk hann onga ískoytiskvotu. Hann skifti orð við Torkil um leiguavtalur. Hvør eigur skipið og leiguavtalur og so framvegis. Tað var tann vinkulin, hann hevði. Tí teir høvdu fyrr skift orð um fiskivinnu- og leiguavtalur og annað. Og hvør eigur eitt skip, er tað eitt skip hjá felagnum Thor til leigu/útlán millum annað? Hann helt, at hann hevði tað orðaskiftið við Torkil meira enn til handan fundin um tann løgfrøðiliga partin í tí. Er tað ikki eitt skip hjá Thor, tað kemur jú aftur í morgin ella í heyst? Hann mintist ikki, hvønn dag, tað varð flaggað út.*

*Í sambandi við spurningin fær landsstýrismaðurin upplýst, at Hoyvík er undir grønlendskum flaggi frá 13. august til 17. september 2020. Í tí sambandi greiddi Jacob frá, at hann mintist seg hava sagt við Torkil, at viðgjørdu teir málið eitt sindur skjótari, var Thor í lagi, men nú leiga teir skipið í eitt tíðarskeið, og so detta teir út og so framvegis. Men niðurstøðan var nokkso greið frá Andrasi og Torkil: nei. Hann mintist væl, at hann hevði hasar spurningarnar, akkurát hatta sum hann sigur, tí hann helt, hann mintist, at hann segði, at tað bara var rein tilvild, at Hoyvík akkurát tá var úti. Tí hann kundi havt fingið ískoytiskvotur og so verða leigaður út, tilsøgn í øllum førum og so framvegis. Hann mintist hatta kjakið, hann mintist ikki handa fundin. Tað er kanska tí, hann hevur skift orð við Rógva um tað. Hann hevur heldur ikki sæð hatta notatið, sum Andras hevur skrivað. Tað er kanska tí, at hann hevur skift orð við Rógva um tað áðrenn, og so sendir hann boð eftir Andrasi at spyrja. Men hann mintist at hava havt nøkur prát við Torkil um hatta. Men niðurstøðan var nokkso greið.*

*Spurdur um teldupostsamskifti millum Andras Kristiansen og Rógva Reinert tann 9. september 2020, har Andras skrivar til Rógva kl. 14.06, at Hoyvík ikki lýkur treytirnar fyri at fáa kvotu tillutaða, tí Hoyvík er undir grønlendskum flaggi, og síðani til teldupost frá Thor sama dag kl. 16.40, har boðað verður frá, at Hoyvík er á veg at verða flaggað innaftur undir føroyskt flagg, greiddi Jacob frá, at hann ikki hevur havt nakað samband við Thor ella umboð frá Thor henda dagin. Hann royndi at halda seg burtur frá at hava sambandi við nakran, meðan alt hetta varð viðgjørt. Men hann minnist seg tó hava fingið ein teldupost um niðurstøðurnar hjá Andrasi, sum er frá 7. september 2020. Ja, hann hevur fingið avrit av einum telduposti frá Andrasi umvegis ein teldupost frá Hans Andriasi Kelduberg. Hetta er tveir dagar áðrenn teldupostsamskiftið millum Andras og Rógva. Hann hevði ikki ímeðan havt samskifti við nakran. Hann gongur út frá, at teir hava tikið tað fyri góða vøru, sum Andras hevur skrivað tann 7. Tað roknar hann við. Viðvíkjandi øllum øðrum umsóknumr hevur hann hildið seg frá at tosa við umsøkjararnar. Hann hevur fingið nógvar fyrispurningar yvir teldupost, sms, Messenger, ella hvat alt eitur í dag. Hann hevur bara svarað stutt og greitt, at umsóknirnar verða viðgjørdar, og at teirfingu svar, tá viðgerðartíðin var liðug. Tað hevur verið tað vanliga svarið til øll, sum sjálvandi hava longst eftir at fáa svar. Bíðitíð hevur verið og dyrgt eftir at fáa ábending og ymiskt. So tað hevur verið tað vanliga svarið. Hann hevur ikki samskift við Hans Andreas ella Janus Rein. Hans Andreas hevur verið firtin um ymiskt í Fiskimálaráðnum. Men viðvíkjandi ískoytiskvotum metti hann sum útgangspunkt, at Hoyvík var ein partur av tí. Hitt orðaskiftið um, hvør átti skip, sum var leigað og alt tað, tað mintist hann seg meira hava*

*havt við Torkil enn við Andras. Hann hevur tosað við aðalstjóran um tað, aftaná at hava fingið handan teldupostin, roknar hann við*

*Spurdur, um landsstýrismaðurin valdi at bíða eftir at taka avgerð í málinum, til Hoyvík varð flaggað innaftur, svarar Jacob nei, tað sum hann framvegis bíðar eftir her, er tí politiska kjakinum um, hvat henda puljan skuldi brúkast til. Nógv politiskt kjak var í roynd og veru tá, og hann helt framvegis rímiliga nógv fast við, at vit skuldu hava ein part til at styrkja grundarlagið hjá teimum, sum høvdu eitt veikt grundarlag, sum so bleiv til hetta við ískoytiskvotum. Men tað politiska kjakið var líka frá tí, at tingið kom saman aftur í august og út á heystið, og til mann so endaliga tók avgerð um, hvat mann skuldi gera við § 49 generelt. Jacob spurdi síðani, nær tað var, hann flaggaði inn aftur.*

*Landsstýrismaðurin fær upplýst, at Hoyvík flaggar inn aftur 17. september 2020. Jacob greiddi frá, at hann mintist ikki, hvønn dag Hoyvík flaggaði inn aftur, men hann mintist at hava fingið kunning um tað.*

*Spurdur um umsóknina frá P/F Ocean Group Faroes Ltd. og um telefonnotat, sum Torkil Rasmussen sendir til Rógva Reinert og Andras Kristiansen viðvíkjandi eini telefonsamrøðu við advokat hjá felagnum, greiddi Jacob frá, at hann kennir til málið eftirfylgjandi frá eini samrøðu við Alex. Tað er tí, teir ikki fingu kvotu.*

*Spurdur nærri um telefonnotatið, serliga tí viðvíkjandi, at felagið metir ikki grundarlag vera fyri at nokta kvotu vísandi til, at skipið, sum teir ætla at brúka, er skrásett í Danmark, greiddi Jacob frá, at hann mintist hetta málið frá einum kjaki við Alex. Tað má so hava verið aftaná, roknar hann við. Alex spurdi hann inni í handlinum á Gørðunum, hví teir ikki fingu ískoytiskvotu. Og hann hevði onkursvegna sagt, at tað man vera tí, at teir ikki høvdu nakað skip. So hann kendi ikki so nógv hatta kjakið, tað mátti hann siga. Hann veit væl alt um, ella alt, hvat hevur gingið fyri seg við Nýborg og tí.*

*Spurdur, um hann metti, umsóknirnar hjá P/F Thor og P/F Ocean Group Faroes Ltd. kunnu samanberast ella eru nøkulunda eins, greiddi Jacob frá, at Nýborg hevur verið ógvuliga lítið virkin, og tað hevur ikki verið við í metingini í realitetsviðgerðini annars, men felagið hevur ikki megnað skiparakstur yvirhøvur. Skipið fór av landinum aftur, og felagið royndi ymiskt, so hvat realitetsviðgerðin hevði ført til, tað veit hann ikki.*

*Landstýrismaðurin fær sum framhald av spurninginum upplýst, at sambært Vørn og Sjóvinnustýrinum er Nýborg selt til danskt felag tann 26. september 2019 og hevur einki avreitt síðani 4. januar 2019, og tað er eisini grundgevingin í avgerðarskrivinum til P/F Ocean Group Faroes Ltd. Jacob greiddi í hesum sambandi frá, at tað var hálvavegna tað, sum hann royndi at siga. Alt hatta við Nýborg og Ocean Group er ein keðilig og syrgilig søga. Teir hava manererað og spent seg fyri á ymiskan hátt. Førleikarnir til at reka virksemið, tað veri seg bæði á landi og sjógvi, hava teir nokk ikki havt. Tí persónarnir aftanfyri hava yvir áramál roynt ymiskt, sum so ikki hevur borið til. So hann var rættuliga samdur í hasi niðurstøðuni, at har hevur eingin skiparakstur verið í langa tíð. Men teir hava alla tíðina havt ætlanir um ymiskt. Teir hava eisini havt rættindi í hasi tíðini, teir høvdu ymisk feløg. Teir fingu menningarkvotur av svartkjafti, sum hann aftur - hóast tilmælið frá Torkil var, at teir ikki skuldu hava tað - helt, at teir framhaldandi vóru í eini tilgongd og søgdu seg kunna prógva virðisøking av svartkjafti. Men kortini fer hatta skipið av landinum, og teir selja tær kvoturnar víðari til onkran annan fyri eitt ár í senn tá. So hann var rættuliga samdur í tí niðurstøðuni, at ongin skiparakstur hevði verið í longri tíð. Var Nýborg inni, so hevði Nýborg fingið, gekk hann út frá. Ella tað er ikki vist, tí teir høvdu ikki*

*skiparakstur. Altso spurningurin var um skiparaksturin, og at teir ikki høvdu verið aktivir serliga leingi. Nýborg og Thor kunnu ikki javnsetast, men líkaregluna hevur hann gingið øgiliga høgt uppí. Hann heldur tískil ikki, at umsóknirnar kunnu samanberast. Thor er eitt breitt felag við ymiskum rakstri, ymiskum skiparakstri, bæði í fiskivinnuni og aðrastaðni. Eru vanir við at arbeiða, kann man siga, eisini við at gera leiguavtalur, leiga skip út og øðrum, meðan hinir tíverri ikki hava megnað skiparakstur soleiðis sæð. Men tá ið hann hugsaði menningarkvotur ella ískoytiskvotur tá, visti hann, at Nýborg var eitt skip, sum hevði verið í flotanum ella var har. Seinasta avreiðingin 4. januar í 2019? Hann trúði at teir høvdu verið longri á banangum. Men at tað var so leingi, tað mátti hann erligt siga beint her og nú, at tað visti hann ikki. Hann trúði, at teir høvdu verið eitt sindur longur á bananum. Skipið lá við kai, tað er kanska, tí hann hevði sæð tað. Skipið lá við kai í Vági nokkso leingi, helt hann, áðrenn tað fór avstað. Forholdini millum hatta felagið í Vági og eitt felag í Hirtshals, felagið Asbjørn. Tann, sum nú stendur aftanfyri Asbjørn, búði í Lopra. Hann, sum eitur Fríði Magnussen, var vaksin, áðrenn hann fór úr Lopra. Pápi hansara sigldi við donskum uppisjóvarskipum, og so fóru teir fyri seg sjálvan. Og tað sambandi við Lopra og Suðuroynna hevur so gjørt tað, at teir eru komnir inn við skipi, uttan at felagið í Vági hevur lagt eginpening ella nakað inn. So var tað eitt skip, um hann mintist tað rætt, , sum var fíggjað alt, sum tað var. Tað var eitt mál í Fiskimálaráðnum á heysti í 2015, har ið Fiskimálaráðið, tá ið Høgni Hoydal kom har, kannaði eigaraviðurskiftini hjá felagnum, har ið tað stóð okkurt í grannskoðaraprotokollini um, at ræðisrættindini lógu í Danmark. So teir sluppu als ikki at fiska svartkjaft um heystið í 2015. Eftirfylgjandi broytti mann so viðtøkurnar í felagnum, ella teir tvíhildu um, at grannskoðaraprotokollin var skeiv, og so onkursvegna kundu teir koma á banan aftur. Hatta felagið hevur ongantíð havt ein ordiligan skiparakstur uppá nakran máta, um mann fer aftur, líka frá tí, at teir byrjaðu við royndarloyvi at fiska svartkjaft fyri nógvum árum síðani. So, nei, hann trýr, at niðurstøðan, vísandi til allar upplýsingarnar og tí svarskrivinum, teir hava fingið, er ein røtt niðurstøða. Men líkareglan er sera týdningarmikil, og hvussu Thor og Janus og Hans Andreas hava uppsnúsað tað um, at teir ikki eru partur av ískoytiskvotunum, tað hevur hann onkuntíð filosoferað um. Hann hevði ikki samskift. Hann hevði valt ta aðalreglu, at hann hevði ikki samskift við nakran í samband við málið, tí tað er øgiliga skjótt, at tú sigur okkurt skeivt. Tað er øgiliga skjótt, at tú sigur okkurt, har onkur fer at vænta, at viðkomandi er partur av einum ella øðrum. So hann hevði frammanundan vitað, at alt hetta var rættiliga eldfimt, tí tú skalt taka dagar ímillum ymiskar umsóknir og persónar, og tí hevði hann valt ikki at samskifta við nakran um nakrar umsóknir uppá nakran máta, hvørki so ella so. Sjálvt um teir hava biðið um fundir og greitt honum frá meira og minni, so hevur hann víst tað frá sær. Teir kundu senda tað, teir vildu, til Fiskimálaráðið av skrivligum tilfari ella lagt afturat umsóknini, men ikki samskifta við nakran."*

### Rógvi Reinert

Í sambandi við avhoyringarnar 28. oktober 2022 verður Rógvi Reinert spurdur um málið viðvíkjandi lutan av kvotu til P/F Thor Fisheries:

*"Spurdur um teldupost frá Andrasi Kristiansen til advokatin hjá P/F Thor tann 7. september 2020 og til fundarnotat, dagfest 8. september 2020, har Andras greiðir frá fundi, hann hevði verið á við landsstýrismannin og Rógva Reinert, og spurdur, um avgerð er tikin á hesum fundi um at geva P/F Thor kvotu eftir § 49, stk. 1, svaraði Rógvi nei. Tað var ikki hansara fatan av málinum, nei, avgjørt ikki. Mann hevur ikki tikið avgerð um at lata teimum kvotu. Aftur her, bygnaðarliga, so var hann ikki í smálutum í málinum, og hann segði: "Misskil meg ikki, smálutir kunnu vera týdningarmiklir." Tað er ikki tað, at tað ikki er týdningarmikið. Men smálutir er at senda brøv út til advokatar, at ringja til reiðarí og at viðgera málið. Hann var bara við yvirskipað, men hevur sjálvandi alla tíðina sína ábyrgd. Altso yvirskipað er málið soleiðis, at hann*

*fekk kunnleika frá starvsfólkunum, akkurát hvør tað var, tað visti hann ikki, í sambandi við, at tilmælið varð umrøtt munnliga, og at nú var tilmælið latið, og í tí kom tað honum til kunnleika, at tilmælið fevndi um eitt skip minni, enn mann í útgangsstøðinum kanska kundi rokna við. Tí har var eitt skip, sum hevði so mikið lítla kvotu, og sum var so mikið líkt øllum hinum, sum vóru tilmæld, og var í somu vinnu, at út frá almennari vitan, so var tað eyðsýnt, at Hoyvík eisini skuldi vera við. Tað var eisini hansara almenna vitan, tí hann visti, at í 2020 hevði Hoyvík verið í fiskiskapi, og teir høvdu fiskað heilt fram ímóti sumri í 2020. Og so kom tað til hansara kunnleika. Hann var fullkomiliga óvitandi um tað, og tað var tað, at akkurát í dag ella hesum døgum er Hoyvík í einum samstarvi í Grønlandi. Tað var sum so ikki nakað løgið í tí, men tað at Hoyvík var í samstarvi uppi í Grønlandi í nakrar dagar, kundi so falla á tað mundið, tá ið landsstýrismaðurin tók avgerð. Hetta samstarvið kundi so hava við sær, at ein kvota, sum reiðaríið í øllum øðrum metingargrundarlagi hevði fullan rætt til, glapp teimum av hondum. Tí er tað, at hann bara líkasum hugsaði: Jamen, so er tað ikki løgið, at landsstýrismaðurin steðgar á og spyr: "Kunnu tit kanna hetta málið nærri, hvat liggur í hesum málinum?". So bleiv ikki tosað so nógv um málið, onkur heilt einstakur dagur fellur á degi 1,2,3,4 dagar, og nú fekk hann at vita tað, at tað er einki í hesum málinum longur. Tí avgerandi og nýggir upplýsingar eru komnir í málið um, at skipið er føroyskt, og tí verður tað tikið uppaftur av nýggjum, og tilmælið bleiv víðkað frá einum skipi í annað skip. Hann hevur so bara fyri at eftirkanna sítt minni tosað við Skipaskrásetingina og spurt, og har hava tey upplýst, at tað er rætt, at har var eitt ógvuliga stutt samstarv í Grønlandi. Skipið fór til Grønlands umleið hálvan august, tá er tað skrásett út, og kom aftur umleið hálvan septembur. So tað var ikki meir í tí. Ein ivaspurningur liggur í einum máli, og ivaspurningurin ger, at avgerðin viðvíkjandi tilmælunum verður útsett nakrar dagar, og ivaspurningurin verður broyttur ella verður burtur, og avgerðin fellur. Tað var soleiðis, at hann mintist málið.*

*Spurdur, um bíðað varð eftir at taka avgerð í málinum, til Hoyvík var flaggaður inn aftur undir føroyskt flagg, greiddi Rógvi frá, at tað føldi hann ikki sum um, at mann bíðaði, nei. Hann føldi bara, at her liggur ein ivaspurningur um eitt tilmæli, meðan ivaspurningurin verður viðgjørdur og greinaður, og sum Andras á Fiskivinnustovuni sigur: Tað er einki løgið í tí. Satt at siga, so visti hann ikki av, at skipið var í Grønlandi."*

### Torkil V. Rasmussen

Í sambandi við avhoyringarnar 27. oktober 2022 verður Torkil V. Rasmussen spurdur um málið viðvíkjandi lutan av kvotu til P/F Thor Fisheries:

*"Síðani varð Torkil spurdur um tvey mál viðvíkjandi umsókn um kvotu eftir § 49, stk. 2 í 2020. Talan er um umsóknir frá P/F Thor og P/F Ocean Group Faroes Ltd. Í hesum sambandi varð Torkil spurdur um teldupostin, dagfestur 3. september 2020 frá P/F Thor, har P/F Thor kemur við eini ískoytisfrágreiðing til umsóknina, sum greiðir frá, at skipið Hoyvík er flaggað inn undir grønlendskt flagg. Torkil varð í hesum sambandi spurdur um, hvussu tað ber til, at P/F Thor veit, at tað er ein trupulleiki, at Hoyvík er undir grønlendskum flaggi. Til tað svarar Torkil, at tað veit hann ikki. Hann hevur ikki havt nakað samskifti við P/F Thor hesum viðvíkjandi.*

*Spurdur um teldupostin frá Andrasi Kristiansen til P/F Thor, dagfestur 7. september 2020, har av framgongur, at umsóknin hjá P/F Thor ikki kann realitetsviðgerast, um skipið ikki flaggar inn aftur undir føroyskt flagg, umframt fundarnotat frá 8. september 2020, har Andras verður kallaður inn til fund við landsstýrismannin um málið, greiddi Torkil frá, at tað er eitt grundleggjandi krav, at skipið er undir føroyskum flaggi, tá umsóknirnar verða viðgjørdar.*

*Spurdur, vísandi til fundarnotatið frá 8. september 2020, um tað longu tá varð tikin avgerð um at veita Hoyvík eina tilsøgn, greiddi Torkil, at tá mann sigur - um avgerð er tikin, avgerð ikki tikin - munurin er tann, at hendan avgerðin, ella hvat man kallar tað - hetta er ein fundur, og tað vísir ein vilja, og tað er tí, at Hoyvík, sum skip hjá Thor hevur alla tíðina verið virkandi í Føroyum, hevur alla tíðina virkað undir føroyskum flaggi, men orsakað av nøkrum serligum grønlendskum treytum, so er tað akkurát nú undir grønlendskum flaggi, tá teir søkja, og lýkur tí ikki grundleggjandi krav um at vera skrásett í føroysku skipaskránni, soleiðis sum lógin stillar sum grundleggjandi treyt.*

*Tað er eingin loyna í føroysku fiskivinnuni ella í umsitingini av fiski, hvørji uppisjóvarskip eru í veikara endanum. So stórt er Føroyar jú heldur ikki. Tað hevur ivaleyst verið grundin til, at man gjarna sær, at Hoyvík fær eina ískoytiskvotu, og so spyr mann, um møguleiki er fyri at treyta. So veit hann, at hann fer at verða spurdur um, hvat munurin so er ímillum Nýborg og Ocean Group Faroes og støðuna hjá Hoyvík. Tað er, at Hoyvík hevur alla tíðina virkað í Føroyum, meðan Nýborg hevur als yvirhøvur ikki verið virkin í føroyskari fiskivinnu og hevur heldur ikki verið tað fyrr og bleiv seldur kanska longu einaferð fyrst í 2019 til okkurt danskt reiðarí og er uppá ongan máta sambæriligur við Hoyvík, sum noyðist at gagnnýta sínar kvotur, men har tað er treyt um at fara undir grønlendskt flagg, um tú skal gera tað í Grønlandi, og so tíverri fyri teir, eru teir akkurát har um hetta umsóknarmundið. So tað er tann stóri munurin millum Nýborg og Hoyvík, tá Hoyvík so fær. Men tú kanst gott siga, at avgerðin er longu tikin her, men vit krevja framvegis, at hann kemur undir føroyskt flagg, áðrenn vit vilja yvirhøvur fráboða avgerðirnar.*

*Torkil varð spurdur um gongdina í málinum, har Andras Kristiansen tann 9. september 2020 kl. 14.06 sendir landsstýrismanninum ein teldupost við frágreiðing um, at umsitingin ikki metir, at umsóknin frá P/F Thor kann realitetsviðgerast, um Hoyvík er undir grønlendskum flaggi, og har P/F Thor sama dag kl. 16.40 sendir inn teldupost til Fiskimálaráðið og boðar frá, at P/F Thor er farið í gongd at flagga Hoyvík aftur undir føroyskt flagg. P/F Thor biður umsitingina bíða við at taka avgerð, til skipið er flaggað inn aftur. Torkil svarar, at tað kann vera tilvildarligt, at gongdin er soleiðis, og at hann onki samskifti hevur havt við P/F Thor um hetta.*

*Spurdur, um umsitingin bíðaði at taka avgerð, til Hoyvík var flaggað inn aftur undir føroyskt flagg, greiddi Torkil frá, at eitt endurskoðað tilmæli varð gjørt, har P/F Thor nú knappliga lýkur nøkur grundleggjandi krøv eftirfylgjandi. Hoyvík verður tikið við í viðgerðina aftur, tá umsitingin fær at vita, at Hoyvík er komið aftur undir føroyskt flagg. Í endurskoðaða tilmælinum verður mælt til at luta kvotu til Hoyvík."*

### Andras Kristiansen

Í sambandi við avhoyringarnar 27. oktober 2022 verður Andras Kristiansen spurdur um málið viðvíkjandi lutan av kvotu til P/F Thor Fisheries:

*"Spurdur um útlutan av kvotu í 2020 eftir § 49, stk. 2 og um skip, sum "flagga innaftur", serliga málini hjá P/F Thor Fisheries og P/F Ocean Group Faroes Ltd., og til teldupost frá P/F Thor Fisheries tann 3. september 2020, har P/F Thor Fisheries kemur við eini ískoytisfrágreiðing, og tað tykist, sum teir vita, at tað er ein trupulleiki, at Hoyvík er undir grønlendskum flaggi, greiddi Andras frá, at tað visti hann ikki. Hann hevur sett sær sama spurning og kannað teldupostar og annað, men hann dugir ikki at síggja seg hava havt nakað samskifti við P/F Thor Fisheries.*

*Spurdur um teldupost, sum Andras Kristiansen sendir til P/F Thor Fisheries 7. september 2020, har upplýst verður, at umsóknin hjá teimum kann realitetsviðgerast, um Hoyvík flaggar innaftur, og til fund 8. september 2020 við landsstýrismannin, har landsstýrismaðurin biður umsitingina umhugsa málið og kanna, um tað ikki ber til at geva eina tilsøgn, treytað av at Hoyvík flaggar innaftur í heyst, greiddi Andras frá, at ongin avgerð varð tikin á fundinum við landsstýrismannin. Tað, sum hendir, er, at umsitingin á fundinum 8. september verður biðin um at umhugsa málið. Málið verður viðgjørt í bólkinum á Fiskivinnustovuni, og semja var um, at tað ikki er grundarlag fyri at broyta tilmælið til eisini at fevna um Hoyvík. Hoyvík er ikki undir føroyskum flaggi og lýkur tí ikki treytirnar fyri at fáa játtað ískoytiskvotu. Hetta er sambært treytini, ið er ásett í § 6 í kunngerðini. Hann mintist okkurt um, at P/F Thor Fisheries í onkrum skjali hevði upplýst, at Hoyvík var undir føroyskum flaggi, tá umsóknin varð latin inn. Men Andras metti ikki. tað broytti nakað. Vísandi til, at Andras sendir teldupost til Rógva Reinert 9. september 2020 kl. 14.06, har hann greiðir frá niðurstøðuni hjá bólkinum, og at P/F Thor Fisheries kl. 16.37 sama dag skrivar til Fiskimálaráðið og kunnar um, at Hoyvík er flaggað innaftur undir føroyskt flagg, verður Andras spurdur, um tað hevur verið nakað samskift við P/F Thor Fisheries í hesum sambandi. Andras svaraði, at tað minnist hann ikki.*

*Spurdur, um umsitingin bíðaði við at taka avgerð í málinum, til Hoyvík varð flaggað innaftur, greiddi Andras frá, at tað visti hann ikki. Tað var ikki umsitingin, sum tók avgerðina. Tað var landsstýrismaðurin.*

*Spurdur um telefonsamrøðuna millum Torkil V. Rasmussen og advokatin hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. tann 22. september 2020 og telefonnotat um tað sama, greiddi Andras frá, at fyri at sleppa upp í part skal mann vera verandi aktørur. Og tí var tað sjálvandi soleiðis, at Hoyvík var ikki eitt verandi skip, og tí kundu teir ikki fáa. Men so koma teir aftur undir føroyskt flagg og hava so ein rakstur at vísa á í 2019 og 2020. Sum Torkil greiðir frá her, og sum hann gongur út frá, at Torkil hevur nevnt fyri Rúna eisini, so er Nýborg ikki skrásett í Føroyum. Hann helt, at tað bleiv selt á sumri í 2019, og mintist hann rætt, so hevði tað havt sína seinastu last í januar í 2019. So har var eingin rakstur at vísa á í 2019 og 2020, og skipið var altso ikki undir føroyskum flaggi. Advokaturin hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. gjørdi eitt sindur burturúr tí, at hann var ikki samdur við tí sjónarmiðinum.*

*Andras fær lisið teldupostin upp, sum hann sendir til Rógva Reinert við avriti til Torkil V. Rasmussen og Ólav Dalsgarð tann 22. september 2020: "nú hevur Rúni Joensen advokatur vent sær til Fiskimálaráðið um Nýborg, sum Ocean Group hevur søkt um ískoytiskvotu til, men sum ikki er skrásett í Føroyum. Í skrivinum ger Rúni Joensen vart við, at skipið kemur aftur undir føroyskt flagg, um tí verður játtað ískoytiskvotu. Eftir mínum tykki eru vit nú í somu støðu, sum vit vóru við Hoyvík og Thor Fisheries, har málið endar við, at vit søgdu okkum fara at realitetsviðgera umsóknina, um skipið kom aftur undir føroyskt flagg, innan avgerðirnar um ískoytiskvotur vórðu tiknar og fráboðaðar. Tí meti eg, at tað er rættast, at Rúni Joensen vegna Ocean Group fær somu boð, sum Janus Rein fekk vegna Thor. Niðanfyri er uppskot til teldubræv at senda til Rúna."*

*Spurdur um, hvørt P/F Ocean Group Faroes Ltd. fekk somu boð sum P/F Thor Fisheries, og um hesar umsóknir kunnu samanberast, greiddi Andras frá, at tað varð ongantíð sent. Tað var hann eitt sindur keddur um. Hann veit ikki, um hann ger eitt uppskot, og Torkil er samdur, og so eru teir báðir samdir. So verður tað ikki sent. Tað er so tað eina. Men nei, hann helt altso at Hoyvík kundi vísa á, at tey høvdu havt ein rakstur bæði í 2019 og 2020, men Nýborg, tað skipið varð selt á sumri og hevði seinastu avreiðing, helt hann tað var, í januar*

*2019. Og fyri at fáa eina ískoytiskvotu, so skuldi tú vísa á, at hetta fór at bøta um verandi rakstur av skipinum, og har var eingin rakstur av skipinum. Tí teir høvdu ikki havt nakran rakstur tað tíðarskeiðið, sum mann skuldi vísa á ein rakstur. So hann helt ikki, at teir vóru í somu støðu soleiðis, tá mann nú skuldi fara at viðgera tað. Tað hava teir ikki verið.*

*Spurdur, um P/F Ocean Group Faroes Ltd. ikki áttu ella kundu fingið eina freist at flagga Nýborg innaftur undir føroyskt flagg, greiddi Andras frá, at tað metti hann ikki. Á tí fundinum, har tey viðgjørdu áheitanina frá landsstýrismanninum um at umhugsa at lata Hoyvík fáa eina ískoytiskvotu við eini treyt um, at teir komu aftur undir føroyskt flagg innan eina freist, mettu tey ikki, at grundarlag var fyri tí, og tí mæltu tey frá at gera tað. Tí hevði mann heldur ikki kunnað gjørt tað við Nýborg.*

*Spurdur um ásetingina í § 6 í kunngerðini, har ásett er, at fiskifarið skal hava avreitt norðhavssild ella makrel í 2019 ella 2020, og at har ikki stendur, hvussu nógvar lastir skulu vera avreiddar, greiddi Andras frá, at tað er rætt, at onki stendur um, hvussu nógvar lastir skulu vera avreiddar. Umsitingin hevur tó lagt dent á verandi rakstur. Mann metti ikki, at P/F Ocean Group Faroes Ltd. kundi vísa á verandi rakstur."*

###### 4.2.1.1.1.1 - Meting

Út frá upplýsingunum í málinum, serliga út frá teimum munnligu frágreiðingunum, tykist greitt, at bæði landsstýrismaðurin og umsitingin í Fiskimálaráðnum hava frammanundan eina ávísa fatan av, hvørjir umsøkjarar helst eiga at fáa tillutað ískoytiskvotur.

Tað tykist greitt, at landsstýrismaðurin er av tí fatan, at Hoyvík er eitt av teimum skipum, sum helst lýkur treytirnar um at fáa ískoytiskvotu, og tískil hevur hann ilt við at skilja, at Hoyvík ikki kann fáa eina tilsøgn um kvotu við eini treyt um, at skipið kemur innaftur undir føroyskt flagg.

Eg kann bara staðfesta, at landsstýrismaðurin fær handað eitt tilmæli 24. august 2020, har Hoyvík ikki verður mælt til at fáa kvotu, tí skipið er ikki skrásett í Føroyum. Tann 3. september 2020 sendir P/F Thor Fisheries eina dagføring av sínari umsókn til Fiskimálaráðið, har greitt verður frá, at Hoyvík fyribils er undir grønlendskum flaggi.

Tað kann tykjast sum um, at P/F Thor Fisheries hevur fingið onkra kunning um, at teirra umsókn fer ikki at verða gingin á møti, tí Hoyvík er ikki skrásett í føroysku skipaskránni.

Eg kann eisini staðfesta, at landsstýrismaðurin á fundi við Andras Kristiansen biður umsitingina kanna, um tað ikki ber til at geva Hoyvík eina tilsøgn um kvotu treytað av, at skipið verður skrásett aftur í føroysku skipaskránni. 9. september 2020 svarar Andras í telduposti, at umsitingin ikki metir løgfrøðiligt grundarlag vera fyri at geva Hoyvík eina slíka tilsøgn. Seinni sama dag kemur ein fráboðan frá P/F Thor Fisheries, at felagið er farið í gongd við at flagga Hoyvík innaftur undir føroyskt flagg.

Ein kann fáa ta fatan, at okkurt samskifti hevur verið millum landsstýrismannin og P/F Thor Fisheries í sambandi við málið, tí tað tykist, sum um P/F Thor Fisheries er vitandi um, at tað er ein trupulleiki, at Hoyvík fyribils er undir grønlendskum flaggi, hóast ongin avgerð ella fráboðan er send nøkrum umsøkjara.

Eg havi spurt bæði landsstýrismannin og embætisfólk í Fiskimálaráðnum, um nakað samskifti ella kunning hevur verið send til P/F Thor Fisheries, men svarið er, at tað er tað ikki. Eg havi tí ikki grundarlag fyri at siga, at P/F Thor Fisheries hevur fingið nakra kunning ella fráboðan í hesum sambandi.

Í fráboðan til Fiskimálaráðið tann 9. september 2020, har kunnað verður um, at Hoyvík er á veg aftur undir føroyskt flagg, biður P/F Thor Fisheries eisini Fiskimálaráðið um at bíða við at taka nakra avgerð, til skipið er aftur undir føroyskum flaggi. Eg havi í hesum sambandi spurt bæði landsstýrismannin og embætisfólk, um tað á nakran hátt varð bíðað við at taka avgerð. Svarið er, at tað varð tað ikki. Eg havi tí ikki grundarlag fyri at siga, at Fiskimálaráðið hevur givið P/F Thor Fisheries nakra serviðgerð framum aðrar umsøkjarar í so máta.

Sum lýst verður niðanfyri, er P/F Ocean Group Faroes Ltd. í líknandi støðu sum P/F Thor Fisheries, men felagið fær ikki nakra freist til at flagga skipið Nýborg innaftur undir føroyskt flagg, sí niðanfyri undir kap. 4.2.2.

### 4.2.2 - Umsókn frá P/f Ocean Group Faroes Ltd.

#### *4.2.2.1 - Gongdin í málinum*

P/F Ocean Group Faroes Ltd. sendir inn umsókn um kvotu til skipið Nýborg TG 773 eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini í telduposti tann 9. august 2020 (málsskjal 49).

22. september 2020 ringir advokaturin hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. til Fiskimálaráðið, Torkil Rasmussen, fulltrúa, og spyr um málið og hvar tað stendur í lógini, at mann skal vera eigari av fiskifari fyri at fáa lut í ískoytiskvotunum.

Torkil skrivar telefonnotat av samrøðuni og sendir í telduposti 22. september notatið til Andras Kristiansen og Rógva Reinert til kunningar (málsskjal 36 og 37). Í teldupostinum stendur:

*"Telefonnotat eftir samrøðu við [advokat] vegna Alex Vilhelm, sum nú vil hava umsóknina hjá Ocean Group Faroes realitetsviðgjørda og gingna á møti, hóast hann ikki er eigari av fiskifari".*

Av telefonnotatinum framgongur:

*"[Advokatur] ringdi vegna Alex Vilhelm og spurdi um ískoytiskvoturnar, og hvar málið lá. Svarað var, at tilmæli eru latin landsstýrismanninum og aðalstjóranum, og umsitingin bíðar nú eftir aftursvari. [Advokaturin] spurdi, hvar í lógini tað stendur, at mann skal vera eigari av fiskifari fyri at fáa lut í ískoytiskvotunum. Undirritaði vísti til § 49, stk. 2, ið ásetir:*

> *Av kvotunum av svartkjafti, norðhavssild og makreli, sambært § 14, stk. 1, §§ 15-16 og rættindi sambært § 17, verður írestandi nøgdin í mun til stk. 2 í mun til stk. 1 latin fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskifari, hvørs eigari lýkur treytirnar ásettar í stk. 3.*

*Hesum var [advokaturin] als ikki samdur í og segði seg vilja fara víðari við málinum, um umsóknin hjá Alex Vilhelm ikki bleiv gingin á møti á tí grundarlagnum. Undirritaði segði, at tað liggur rættiliga implisitt í lógargreinini og stuðlað av serligu viðmerkingunum til lógarbroytingina, at mann skal vera eigari av fiskifari fyri at fáa ískoytiskvotu til egnan skiparakstur, og hetta var eisini greitt tann politiski viljin.*

Í notatinum verður eisini viðmerkt, hóast tað ikki er partur av telefonsamrøðuni, at:

*"Leggjast skal afturat, at eg giti, at spurningurin frá [advokatinum] kemur í kjalarvørrinum á, at Hoyvík… er flaggað inn aftur í føroyskan sjógv, og umsóknin verður nú eftir áheitan frá aðalstjóranum og landsstýrismanninum realitetsviðgjørd. Eg skal í hesum sambandi vísa til teldupost frá Andrasi Kristiansen, deildarstjóra…til Rógva Reinert, dagf. 9. sept. 2020, eftir fund við umsitingina um málið viðvíkjandi treytini um at vera eigari av fiskifari…*

Í telduposti 22. september 2020 (málsskjal 50) til Fiskimálaráðið skrivar advokatur hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. soleiðis:

*"Hastar.*

*Góðan dagin tit í Fiskimálaráðnum.*

*P/F Ocean Group v/Alex Vilhelm hevur biðið meg um at umboða seg í hesum máli, um ískoytiskvotu.*

*Eg skilji, at Fiskimálaráðið hevur tað sjónarmið, at ein treyt fyri at fáa ískoytiskvotu er, at umsøkjarin p.t. hevur skip.*

*Hesum eri eg ikki samdur í.*

*Fiskimálaráðið hevur fulla heimild til at geva P/F Ocean Group eina freist til at útvega sær skip til endamálið, um felagið annars lýkur allar aðrar treytir í lógini.*

*Tað ger P/F Ocean Group.*

*Fiskimálaráðið kann tí gott treytað loyvi um ískoytiskvotu av, at umsøkjarin gerst eigari av skipi innan eina freist uppá t.d. 1 viku.*

*Felagið hevur fiskað við Nýborg í 2019 og 2020, og Nýborg kemur aftur til Føroyar, um felagið fær ískoytiskvotu.*

*Orsøkin til at skipið fór av Oynni var júst tann, at kvotan hjá felagnum var ov lítil til at skipið kundi bera seg.*

*Um logikkurin hjá Fiskimálaráðnum skuldi hildið, so kundi eitt felag, sum hevði selt sítt skip, og sum samstundis var í holt við at útvega sær eitt nýtt skip, men har keypssáttmáli ikki var undirskrivaður, ikki fingið lut í ískoytiskvotuni.*

*Eisini í slíkum føri hevði Fiskimálaráðið havt heimild at geva loyvi við freist til at útvega sær skip."*

Seinni sama dag, tann 22. september, sendir Andras Kristiansen soljóðandi teldupost til Rógva Reinert (málsskjal 38):

*"Rógvi,*

*Nú hevur [advokatur] vent sær til Fiskimálaráðið um Nýborg, sum Ocean Group hevur søkt um ískoytiskvotu til, men sum ikki er skrásett í Føroyum. Í skrivinum ger [advokaturin] vart við, at skipið kemur aftur undir føroyskt flagg, um tí verður játtað ískoytiskvota.*

*Eftir mínum tykki eru vit nú í somu støðu, sum vit vóru við Hoyvík… har málið endaði við, at vit søgdu okkum fara at realitetsviðgera umsóknina, um skipið kom aftur undir føroyskt flagg, innan avgerðirnar um ískoytiskvotur vóru tiknar og fráboðaðar.*

*Tí meti eg tað er rættast, at… Ocean Group fær somu boð, sum… Thor Fisheries.*

*Um so er, at landsstýrismaðurin fer at taka avgerð í morgin ella hósdagin, er kortini nokk ongin møguleiki hjá Ocean Group at skráseta Nýborg undir føroyskt flagg innan ta tíð. Innan vit svara, haldi eg tann spurningurin eigur at verða vendur… Senda vit hetta svarið og avgerðin kortini verður tikin sama dag ella dagin eftir, kann man siga, at svarið bara er sent "upp á kvamsvís" Eiga vit at geva felagnum eina rímiliga tíð at fáa skipið skrásett?"*

Torkil V. Rasmussen sendir 23. september 2020 soljóðandi teldupost til Rógva Reinert, Andras Kristiansen og Ólav Dalsgarð (málsskjal 39):

*"Góðu tit,*

*Eg havi verið í sambandi við Vørn og kannað, nær Nýborg bleiv selt, og hvat Nýborg hevur avreitt fyri, jbr. viðheftu uppgerðir. Tað vísir seg, at Nýborg bleiv selt tan 26. sept. 2019, og fram til tá hevði Nýborg bert eina avreiðing – tann 4. januar 2019. Av tí sama haldi eg tað vera rættiliga ivasamt, hvørt tað er sakligt at geva kvotustyrk til ein umsøkjara, ið ikki hevur havt nakran skiparakstur í eitt ár. At veita kvotustyrk til verandi skiparakstur er sambært viðmerkingunum til lógargreinina endamálið við ískoytiskvotunum".*

Í teldupostinum er viðheft eitt upprit, ið tekur støðu til umsóknina frá P/F Ocean Group Faroes Ltd.

*"<u>Upprit í sbv. við umbønina frá [advokatinum] hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd.</u>*
*…Um hugt verður eftir orðingini í lógartekstinum, skal talan vera um nøgd av svartkjafti, norðhavssild og makrel fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskifari, <u>hvørs</u> eigari lýkur treytirnar ásettar í § 49, stk. 3.*

*Sostatt skal talan vera um ávíst fiskifar, tvs. at eigarin, um hann eigur fleiri fiskifør, skal vísa á eitt ávíst fiskifar, sum hann ynskir kvotustyrk til, og sum hann ynskir at leggja ískoytiskvotuna á. Fiskimálaráðið metir, at tað er rættuliga implisitt (forútsetningsvíst), at kvotustyrkurin verður latin <u>eigara</u> av ávísa fiskifarinum, jbr. orðingina <u>hvørs eigari</u>. Hetta verður tí mett sum ein grundleggjandi treyt fyri at fáa lut í ískoytiskvotunum.*

*Eisini stendur í viðmerkingunum til lógina, at ískoytiskvota verður latin til verandi skiparakstur, tvs. meiningin er ikki at fáa nýggj skip inn í føroyska flotan, men at styrkja um verandi skiparakstur. Í hesum sambandi havi eg fingið váttan frá Skipaskránni hjá Sjóvinnustýrinum, at Nýborg bleiv selt til Danmarkar tann 26. september 2019, og tískil er torført at tosa um nakran verandi skiparakstur hjá OGF. Harumframt hevur Nýborg bert havt eina avreiðing í fjør, tann 4. jan. 2020, jbr. uppgerð frá Vørn.*

*…Hóast vit eru í eini skiftistíð, ber í ein ávísan mun til at lata onnur fiska fyri seg, jbr. §§ 8-10. Skiftireglurnar eru grundaðar á, at farið verður frá einari skipan, har rættindini ikki vóru knýtt at "stálinum" til eina skipan, har rættindini í skiftistíðarskeiðinum so hvørt verða knýtt at "stálinum".*

*Skipanin við ískoytiskvotum er nýggj og stavar frá galdandi lóg. Tískil skal talan vera um kvotustyrk til teir skipaeigarar í vinnuni, ið ikki hava eitt nóg stórt kvotugrundarlag til at skipa verandi rakstur. Talan skal vera um stuðul til egnan skiparakstur, og sostatt má umsøkjarin skjalprógva yvir fyri myndugleikanum, hví viðkomandi eigur at fáa lut í kvotunum, ið eru settar av til endamálið, jbr. løgtingsmál nr. 142/2019, bls. 12.*

*Tað er ikki ein avgjørd treyt fyri at fáa lut í ískoytiskvotunum, at fiskifarið hevur veiðiloyvi, jbr. løgtingsmál nr. 142/2019, bls. 12. Hetta kemst av, at tað kunnu vera fiskifør, ið ikki hava veiðiloyvi ella lúka kravið fyri at fáa veiðiloyvi. Hesir skipaeigarar kunnu sostatt eisini søkja um ískoyti til verandi skiparakstur. Mett verður tí ikki, at tað ber til at søkja um ískoyti til verandi skiparakstur, um mann ikki er eigari av tí fiskifari, ið søkt verður um ískoytiskvotu til.*

*…Sambært § 49, stk. 10 í lógini hevur landsstýrismaðurin heimild at áseta treytir. Nærri treytirnar eru eisini ásettar í kunngerð nr. 118 frá 10. juli 2020 um kvotur av makreli og norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir. Sambært hesi kunngerð er eisini ásett í § 6, stk. 2, at eigarin av fiskifarinum tilskilað í umsóknini skal við støði í roknskapi, fiskiskapi higartil og øðrum viðkomandi tilfari skjalprógva yvirfyri Fiskimálaráðnum, hví viðkomandi ikki metir seg, við verandi kvotugrundarlagi, hava eitt nóg stórt kvotugrundarlag til at skipa verandi skiparakstur, jbr. eisini metingarskjal 2 til nevndu kunngerð.*

*Í oyðublaðnum, sum landsstýrismaðurin hevur gjørt og er nýtt av øllum umsøkjarum í sambandi við umsóknir, stendur undir pkt. 1: Umsøkjari (eigari av fiskifari). Undir pkt. 6 stendur: Lýsing av skiparakstrinum pr. umsóknardag og greið frá, hví mett verður, at verandi kvotugrundarlag ikki er nóg stórt undir rakstrinum av fiskifarinum. Lýs verandi kvotugrundarlag hjá fiskifarinum fyri tað árið ella tey árini, ið søkt verður um ískoytiskvotu til.*

*Harumframt er ein leiðbeining til einstøku teigarnar aftast á sjálvum umsóknarblaðnum, og tí kann tað ikki koma óvart á nakran, at talan skal vera um ískoyti til skipaeigarar av verandi rakstri av fiskifari hjá viðkomandi eigara.*

*…Mett verður, at tað er púra greitt ásett í lógartekstinum, at talan skal vera um kvotustyrk til eigarar av fiskifari til verandi skiparakstri. Harumframt verður mett, at viðmerkingarnar greitt lýsa endamálið við skipanini, eins og kunngerðatekstur, oyðiblað og leiðbeining hava givið umsøkjarum eina greiða vegleiðing um, hvat endamálið er við skipanini, og hvørji krøv skulu vera lokin fyri at fáa lut í ískoytiskvotunum.*

*Upplýsingar frá Fiskiveiðieftirlitinum vísa, at Nýborg bleiv selt til Asbjørn A/S tann 26. sept. 2019, og fiskifarið hevði bert eina avreiðing tann 4. januar 2019. Ivasamt er tí, um tað yvirhøvur hevði verið grundarlag í einari realitetsviðgerð at givið Nýborg ískoytiskvotu, uttan samstundis at kvalifisera nýggj fiskifør í flotanum til tað sama. Tað er valla endamálið við skipanini, ið skal stuðla undir verandi skiparakstri."*

28. september 2020 (málsskjal 51) sendir Fiskimálaráðið skriv til P/F Ocean Group Faroes Ltd., har boðað verður frá, at umsóknin ikki verður gingin á møti:

*"Sambært lóggávuni verður ískoytiskvota latin til eigara av fiskifari. Endamálið við skipanini er at veita kvotustyrk til teir skipaeigarar í vinnuni, ið ikki hava nóg stórt kvotugrundarlag til at skipa verandi skiparakstur.*

*Við tað at fiskifarið Nýborg, sambært Vørn og Sjóvinnustýrinum, er selt til danskt felag tann 26. sept. 2019, og einki hevur avreitt síðani 4. januar 2019, verður ikki mett, at talan kann verða um stuðul til verandi skiparakstur hjá P/F Ocean Group Faroes sum eigara av Nýborg.*

*Vísandi til omanfyri standandi verður umsókn tykkara ikki gingin á møti."*

#### 4.2.2.1.1 - Munnligar frágreiðingar
Víst verður til munnligu frágreiðingar í málinum hjá P/F Thor Fisheries undir kap. 4.2.1.1.1

##### 4.2.2.1.1.1 - Meting
Málið hjá P/F Ocean Group Faroes er rættuliga meinlíkt málinum hjá P/F Thor Fisheries. Í sambandi við at umsóknirnar verða viðgjørdar í Fiskimálaráðnum, eru bæði feløgini í tí støðu, at tey ikki hava viðkomandi skip skrásett undir føroyskum flaggi.

Fyrisitingarrættarliga líkameginreglan áleggur almennum myndugleikum at viðgera mál, ið eru lík, líka.

Advokaturin hjá P/F Ocean Group Faroes ger bæði munnliga og skrivliga vart við yvir fyri Fiskimálaráðnum, at felagið eigur at fáa eina freist til at flagga skipið innaftur undir føroyskt flagg.

Í sambandi við málið hjá P/F Thor Fisheries kann staðfestast, at Andras Kristiansen í telduposti 7. september 2020 kunnar P/F Thor Fisheries um, at um felagið skrásetur Hoyvík undir føroyskt flagg, innan avgerðirnar um ískoytiskvotur eru tiknar og fráboðaðar, kann Fiskimálaráðið realitetsviðgera umsóknina. Fiskimálaráðið kann tó ikki geva nakrar ábendingar um, hvørt umsóknin verður eftirlíkað.

Út frá tøkum tilfari kann staðfestast, at P/F Ocean Group Faroes ikki hevur fingið nakað tílíkt skriv ella kunning frá Fiskimálaráðnum.

Andras Kristiansen skrivar í telduposti 22. september 2020 til Rógva Reinert og boðar frá, at hann metir, at P/F Ocean Group Faroes eigur at fáa líknandi kunning, sum P/F Thor Fisheries hevur fingið 7. september 2020. Slík kunning er tó ongantíð send.

Torkil Rasmussen hevur tó í telefonsamrøðu tann 22. september 2020 við advokatin hjá P/F Ocean Group Faroes greitt frá, at Fiskimálaráðið ikki metir, at felagið lýkur treytirnar um at fáa kvotu, tí felagið ikki eigur nakað skip. Tó verður ikki í hesi samrøðu givin felagnum nakra freist til at flagga skipið innaftur.

Í løgfrøðiligum uppriti, sum Torkil Rasmussen ger, verður víst á, at skipið Nýborg er selt til danskt felag 26. september 2019, umframt at skipið bert hevur havt eina avreiðing 4. januar 2019. Hann metir tað tískil vera ógvuliga ivasamt, um Nýborg lýkur treytina um at fáa kvotu, hóast umsóknin hevði verið realitetsviðgjørd.

Við at samanlíkna upplýsingarnar í málunum hjá P/F Thor Fisheries og P/F Ocean Group Faroes Ltd. kann eg bara staðfesta, at P/F Ocean Group Faroes Ltd. ikki hevur fingið nakra kunning frá Fiskimálaráðnum um, at um felagið flaggar Nýborg innaftur undir føroyskt flagg, so kann umsóknin realitetsviðgerast, tó uttan at geva nakrar ábendingar um, hvørt umsóknin verður eftirlíkað.

Spurnartekin kann tí setast við, um P/F Ocean Group Faroes Ltd. hevur fingið somu viðgerð sum P/F Thor Fisheries. Hóast tað út frá avgerðini hjá Fiskimálaráðnum tykist sum um, at umsóknin frá P/F Ocean Group Faroes Ltd. verður realitetsviðgjørd, so meti eg ikki, tað framgongur greitt og týðuliga av avgerðini. Í avgerðini verður víst á, at P/F Ocean Group Faroes Ltd. hevur selt skipið í september mánaði 2019 og onki hevur avreitt síðani januar mánað 2019 og tí verður ikki mett, at talan kann verða um stuðul til verandi skiparakstur hjá P/F Ocean Group Faroes sum eigara av Nýborg. Høvuðsatlitið í avgerðini tykist vera, at Nýborg ikki er undir føroyskum flaggi.

Eg eri samdur við Fiskimálaráðnum í, at tað er ivasamt, um umsóknin kann gangast á møti, hóast Nýborg flaggaði innaftur, vísandi til at skipið bert hevur havt eina avgreiðing síðani januar mánað 2019, men eg meti tað vera óheppið, at P/F Ocean Group Faroes Ltd. ikki hevur fingið somu kunning sum P/F Thor Fisheries fekk í telduposti frá Andras Kristiansen, tann 7. september 2020. Eg eri greiður yvir, at liðið er langt út á árið, og at neyðugt er at taka avgerð í málinum skjótast gjørligt.

Hóast spurnartekin kann setast við, um fyrisitingarrættarliga líkameginreglan hevur verið hildin í hesum máli, umframt at viðgerðin av málinum møguliga ikki hevur verið fullgóð, meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at landsstýrismaðurin ikki hevur umsitið sítt málsøki á lógligan hátt í hesum sambandi.

Umsóknin hjá P/F Thor Fisheries lýkur allar treytir, áðrenn endalig avgerð verður tikin. Viðvíkjandi umsóknini hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. er tað umsitingin í Fiskimálaráðnum og ikki landsstýrismaðurin sjálvur, sum metir, at umsóknin ikki lýkur treytirnar. Tað er soleiðis serliga umsitingin, sum hevur eitt samskifti við P/F Ocean Group Faroes Ltd. og ikki landsstýrismaðurin sjálvur. Vísandi til munnligu frágreiðingina hjá landsstýrismanninum tykjast ongar ábendingar vera um, at landsstýrismaðurin hevur verið við í viðgerðini av umsóknini hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd.

Endaliga avgerðin hjá Fiskimálaráðnum byggir soleiðis á løgfrøðiligu metingina hjá umsitingini sjálvari. Landsstýrismaðurin velur at fylgja niðurstøðuni hjá ráðnum. Landstýrismaðurin víkur soleiðis ikki frá tilmælinum hjá umsitingini.

## Kap. 5 – Útlutan av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021

Umsitingin í Fiskimálaráðnum handaði landsstýrismanninum tilmæli viðvíkjandi kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. og 2. pkt. í sjófeingislógini við telduposti 2. august 2021 (málsskjal 23).

Í tilmælinum verður upplýst, at inn komu 30 umsóknir um vinnuligar royndir og verkætlanir eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. og 14 umsóknir um ítøkiligt skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt.

Í tilmælinum framgongur fylgjandi:

*"…Lýsing av metingargrundarlagi:*

*Sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. í sjófeingislógini kann í 2021 av kvotunum av makreli, norðhavssild og svartkjafti setast ávís nøgd av til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgum. Harumframt kann kvota eisini verða latin umsøkjarum í sambandi við verkætlan, ið fevnir um ítøkiligt skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt.*

*44 umsóknir eru innkomnar um kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1. Av hesum fevna:*

- *30 umsóknir um vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1, 1. pkt.*
- *14 umsóknir um ítøkiligt skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt.*

*Landsstýrismaðurin hevur í kunngerð ásett nøgdirnar, ið søkjast kann um, at vera 7.813 tons av makreli, 10.824 tons av norðhavssild og 18.961 av svartkjafti, jbr. § 2, stk. 1 í kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir. Tilmælið tekur støði í nevndu nøgdunum. Viðvíkjandi nøgdunum, ið eru fluttar frá 2020 at verða fiskaðar í 2021, jbr. § 2, stk. 2 og 3, verður mælt til, at fluttu nøgdirnar verða latnar játtaðu umsóknunum í sama lutfalli, sum nøgdirnar í § 2, stk. 1 í kunngerðini verða játtaðar umsøkjarum.*

*<u>Viðvíkjandi meting av umsóknunum sambært § 49, stk. 1, 1. pkt.</u>*
*Í metingini av innkomnu umsóknunum sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. er mett um, hvussu verkætlanin, royndin ella virksemið stuðlar undir menning og nýskapan; tað veri seg innan tøkniligan útbúnað og mannagongdir, eins og mett er um útlitini fyri vørumenning, virðisøking, tvs. møguleikar fyri virðisøking, ið verkætlanin hevur til endamáls at fremja, eins og hugt verður eftir, um veiðan verður virkað umborð og/ella á virkjum á landi.*

*Í heildarmetingini verður eisini dentur lagdur á, at fíggjarlig orka er tøk hjá umsøkjarunum til vinnuligu royndina ella verkætlanina, og hvørjar førleikar grundarlagið fyri vinnuligu royndini ella verkætlanini er bygt á. Skipanin við vinnuligum royndum og verkætlanum verður eisini skilmarkað í mun til royndarfiskiskap o.a. sambært § 50 í lógini, tvs. verkætlanir, ið líkjast mest royndarfiskiskapi fella vanliga uttanfyri § 49, stk. 1, 1. pkt., tí myndugleiki eigur ikki at blanda ymiskar skipanir og ymisk endamál saman. Á sama hátt verður eisini skilmarkað í mun til verkætlanir, ið líkjast mest skipakeypi ella endurnýggjan/umbygging av verandi veiðitóli – t.d. sambært § 49, stk. 1, 2. pkt.*

*Eisini verður hugt eftir, um umsøkjari longu hevur nógva atgongd til sjófeingi, tí eitt av endamálunum við skipanini er, at bert smærri aktørar í føroysku fiskivinnuni skulu fáa lut í skipanini, jbr. løgtingsmál nr. 142/2019, bls. 12. Verkætlanir, ið byggja á alt ov stórar nøgdir, fella í raðfestingini, tí eitt av endamálunum er at tryggja eina fjøltáttaða framleiðslu á landi, jbr. løgtingsmál nr. 15/2019, bls. 100. Hugt verður eisini eftir, um umsøkjarar hava karmar, førleikar og styrki annars til tess at gagnnýta tillutaðu kvoturnar innanfyri verkætlanina, soleiðis at kvoturnar ikki fara til onnur endamál, ella kvoturnar fara fyri skeyti, jbr, løgtingsmál nr. 100/2020, bls. 9. Onkrar umsóknir verða mettar ikki at lúka kravið í § 49, stk. 3, tí feløg við størri ræði enn 8% av heildarkvotuni av ávísa fiskaslagnum, umboða avgerandi partar av verkætlanini við serligum denti á nýmenningina og virðisvøksturin í verkætlanini, og tí verða hesi feløg identifiserað við umsøkjaran.*

*<u>Viðvíkjandi meting av umsóknunum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. – ítøkiligt skipakeyp</u>*
*Í metingini av innkomnu umsóknunum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. er mett um, í hvønn mun verkætlanin er klár at førast út í lívið. Metingin tekur støði í ítøkiligum upplýsingum í oyðubløðunum og viðlagda tilfarinum. Serliga er hugt eftir, um verkætlanin inniheldur skjalprógvaðan keypssáttmála, játtan um fígging og rakstur umframt rakstrarætlan, ið ber seg við minstu nøgdum, sum søkt verður um, jbr. metingarskjal 2, 1. pkt., ið er partur av metingargrundarlagnum. Í metingini verður eisini hugt eftir nøgdunum, ið søkt verður um. Í hesum sambandi hevur serligur dentur verið lagdur á, at rakstrarætlan skal bera seg við minstu nøgdum og at minstu nøgdirnar ikki eru so stórar, at ov lítlar nøgdir eru eftir til aðrar umsøkjarar, jbr. løgtingsmál nr. 100/2020, bls. 9.*

*Í heildarmetingini av øllum umsóknunum sambært § 49, stk. 1 verður mett um, hvørt umsóknin í sjálvum sær er antin:*

1. *Stuðulsverd – hetta eru umsóknir, ið <u>verða</u> tilmæltar, tí tær, umframt at lúka allar treytir og ásetingar í lóggávuni, eru serliga væl undirbygdar, og verða mettar at hava best útlit at verða framdar.*
2. *Helst stuðulsverd, tó við fyrivarni – hetta eru umsóknir, sum við ávísum fyrivarnum lúka treytir og ásetingar í lóggávuni, og tí <u>kunnu verða</u> tilmæltar í tann mun, at nøgdir eru tøkar.*
3. *Helst ikki stuðulsverd – hetta eru umsóknir, ið verða frámæltar, tí tær bert partvís lúka treytir og ásetingar í lóggávuni.*
4. *Ikki stuðulsverd – hetta eru umsóknir, ið ikki lúka avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni.*

*<u>Tilmæli</u>*

*Allar innkomnar umsóknir eru viðgjørdar við støði í metingargrundarlagnum omanfyri, og eru niðurstøðurnar fyri hvørja einstaka umsókn lýstar í fylgiskjølunum 1 til 4. Við støði í hesum niðurstøðum verður mælt til at stuðla 3 umsóknum um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. og 2 umsóknum um kvotur til ítøkiligt skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt.*

*Í heildarmetingini av øllum umsóknunum verður mett, at 4 umsóknir eru serliga væl undirbygdar og hava serliga góð útlit at verða framdar. Hesar umsóknir eru mettar at verða stuðulsverdar:*

*<u>Sambært § 49, stk. 1, 1. pkt.:</u>*
1) *Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait*

*2) Sp/f Vaðhorn*
*3) Sp/f Tavan*

*<u>Sambært § 49, stk. 1, 2. pkt.:</u>*

*4) Sp/f Mót – at keypa m/s Norðing*

*Niðurstøðurnar í metingunum av hesum umsóknum kunnu lesast í <u>Fylgiskjali 1.</u>*

*Umframt omanfyri nevndu umsóknir, verður mælt til at stuðla <u>einari</u> umsókn um kvotu sambært § 49, stk. 1, 2. pkt., hereftir kallað **skip 2**.*

*Mælt verður til, at nøgdirnar til Skip 2 verða tillutaðar einari umsókn, ið er mett at vera <u>helststuðulsverd, tó við fyrivarni</u>. Talan er sostatt um eina av fylgjandi umsóknunum:*

- *Sp/f Ango – at keypa m/s Bjarna Olafsson*
- *Sp/f JKS Impex – at keypa m/s Santiago*
- *Sp/F Gráastein – at keypa m/s Santiago*
- *Sp/f Ocean Group Faroes ltd. – at keypa m/s Nýborg/Junior*

*<u>Fylgiskjal 2</u> lýsir niðurstøðurnar og ymsu fyrivarnini, ið viðvíkja hesum umsóknum. Vísandi til ymsu fyrivarnini, ið viðvíkja hesum umsóknum, er tað trupult at vísa á fyrisitingarliga saklig viðurskifti, ið kunnu lyfta eina umsókn fram um aðrar. **Tí verður mælt til, at landsstýrismaðurin avgerð, hvør av omanfyrinevndu umsøkjarum kann fáa tilluta nøgdirnar, ið eru tøkar til Skip 2**.*

*Vísandi til niðurstøðurnar í <u>Fylgiskjal 3</u>, verður mælt frá at stuðla fylgjandi umsóknum, ið bert partvís lúka treytir og ásetingar í lóggávuni…*

*Vísandi til niðurstøðurnar í <u>Fylgiskjal 4</u>, verður mælt frá at stuðla fylgjandi umsóknum, ið ikki lúka avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni…"*

Landsstýrismaðurin tekur avgerð um útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. og 2. pkt. í skrivi, dagfest 14. september 2021, til Fiskivinnustovuna (málsskjal 25).

Í skrivinum framgongur, at landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um at tilluta kvotu sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. til Sp/f Tavuna, Sp/f 31.01.2011 og P/F Vestmanna Fiskavirki.

Harumframt tekur landsstýrismaðurin avgerð um at tilluta kvotu sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. til Sp/f Ango og Sp/f Gráastein.

Staðfestast kann, at landsstýrismaðurin partvíst velur ikki at fylgja tilmælinum frá umsitingini.

Niðanfyri verða einstøku umsóknirnar lýstar og viðgjørdar hvør sær viðvíkjandi at svara kanningarsetninginum, herundir um avgerðin hjá landsstýrismanninum at víkja frá tilmælinum frá umsitingini er grundað á saklig atlit og um avgerðin er lóglig.

Eg havi eisini gjøgnumgingið og kannað umsóknirnar, sum verða frámæltar og sum framganga av fylgiskjal 3 og 4 til tilmæli frá umsitingini. Eg eri samdur við metingini hjá umsitingini, at viðkomandi umsóknir ikki lúka grundleggjandi treytir fyri at kunna fáa tillutað kvotu. Eg fari tí ikki at lýsa hesar umsóknir nærri í hesi frágreiðing.

## 5.1 - Útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. í sjófeingislógini

### 5.1.1 - Lógargrundarlagið

§ 49, stk. 1, 1. pkt. í sjófeingislógini (LM-100/2020) er soljóðandi:

*"Av kvotunum av svartkjafti, norðhavssild og makreli, sambært § 14, stk. 1 og § 15 og rættindum sambært § 17, verða í minsta lagi 50% latin til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgum."*

Í kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir framgongur:

*"Treytir til umsóknir eftir kvotum sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. í løgtinglógini*

*§ 4. Umsókn um kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir skal sum minstamark hava hesar upplýsingar:*
*1) umsóknin skal nágreiniliga lýsa eina vinnuliga roynd ella verkætlan, sum kvotan skal nýtast til,*
*2) umsóknin skal lýsa, hvørja nøgd av fiskaslagnum ella nøgdir av fiskasløgum søkt verður um og fyri hvat áramál,*
*3) umsóknin skal lýsa, hvussu vinnuliga royndin ella verkætlanin, ið kvotan skal nýtast til, kann skapa ella stimbra undir menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av fiskaslagnum,*
*4) umsóknin skal lýsa virkisætlan og fíggjarætlan og ymsu tættirnar í verkætlanini, harundir hvat fer fram umborð, hvat fer fram á landi, og hvussu sølan fer fram,*
*5) virkisætlanin, sambært nr. 4, skal fevna um sølu og marknað, og virkisætlanin skal ítøkiliga vísa møguliga gongd frá rávøru til hálvlidna vøru til liðugvøru,*
*6) umsóknin skal neyvt upplýsa, hvussu vinnuliga royndin ella verkætlanin er fyrireikað, og nær ítøkiliga verður byrjað, og*
*7) um umsøkjari og eigari av fiskifari ikki er tann sami, er endalig tilsøgn treytað av, at umsøkjari innan ávísa tíðarfreist skjalprógvar avtalu við eigara av fiskifari við veiðiloyvi ella við fiskiloyvi í bólki 5, ið skal veiða tillutaðu rættindini fyri umsøkjaran. Avtalan gerst tá partur av umsóknargrundarlagnum.*
*Stk. 2. Umsóknin kann fevna um virksemi á sjógvi eins og virksemi á landi.*
*Stk. 3. Um umsøkjari og eigari av fiskifari ikki er tann sami, skal bert umsøkjarin lúka treytirnar sambært § 49, stk. 3 í løgtingslógini.*

Harumframt framgongur hetta av skjali 1 til kunngerðina:

*"Metingarskjal í sambandi við kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 4 í kunngerðini*

*Umsóknir skulu viðgerast og metast við grundarlagi í teimum ítøkiligu upplýsingunum, ið umsóknin hevur um vinnuligu royndina ella verkætlanina og tí virksemi, ið er grundarlag undir teimum.*

*Ítøkiliga verður metingin serliga grundað á hesi fyrilit:*

*1) Í hvussu stóran mun stuðlar verkætlanin, royndin ella virksemið, ið umsóknin fevnir um, undir:*
*a) menning og nýskapan, tað veri seg innan tøkniligan útbúnað og mannagongdir, eins og vørumenning,*
*b) virðisøking, tað merkir teir møguleikar fyri virðisøking, ið verkætlanin hevur til endamáls,*
*c) at virka veiðuna umborð, og*
*d) at virka veiðuna á virkjum á landi.*

*2) Í heildarmetingini verður dentur lagdur á, at fíggjarlig orka er tøk hjá umsøkjarunum til vinnuligu royndina ella verkætlanina, eins og hvørjar førleikar grundarlagið fyri vinnuligu royndini ella verkætlanini er bygt á.*

*3) Treytina í § 49, stk. 3 í løgtingslógini, ið m.a. tilskilar at "Bert feløg ella persónar, sum hvør sær ella saman við nærstandandi ella øðrum, beinleiðis ella óbeinleiðis, og sum í mesta lagi hava ræði á 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær, sambært stk. 1 og 2, kunnu fáa lut í kvotu sambært stk. 1 og 2...". (Um umsøkjari og eigari av fiskifari ikki er tann sami, skal bert umsøkjarin lúka hesa treyt).*

*Týðandi partur av metingini eru upplýsingar um, nær verkætlanin ella royndin byrjar, eins og útlitini fyri, at verkætlanin gerst virkin og sjálvberandi, tá tíðarskeiðið er farið.*

*Niðurstøðan í viðgerðini skal byggja á eina heildarmeting av vinnuligu royndini ella verkætlanini, nevnd í punktunum omanfyri, umframt onnur atlit sambært lóggávuni annars."*

### 5.1.1 - Umsókn frá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait

Umsóknin er latin Fiskimálaráðnum í telduposti 5. juli 2021 (málsskjal 52).

Í umsóknini verður á s. 3, punkt 6 (Lýsing av verkætlanini), víst á, at:

*"Endamálið við verkætlanini er at menna fráskilda makrelin vegna stødd og brot til virðismikið agn.*

*Nýtslustigini á makreli og sild eru eftir mínari metan trý í talið.*

1. *Matvøra*
2. *Agn*
3. *Ídnaðarfiskur (mjøl og lýsi)*

*Í Føroyum gera vit bert nýtslu av eitt og trý. Antin verður makrelurin og sildin brúkt til matnað ella so fer hann til ídnað. Og síðan verður matmakrelur brúktur sum agn. Hetta er stór resursuspilla.*

1. *Tí at fyri tað fyrsta verður agni alt ov dýrt hjá bátunum at keypa og*

2. *Tí at ídnaðarfiskurin í rættuliga stóran mun kann virðisøkjast til virðismikið agn…"*

Á s. 4, punkt 8 (Virðisvøkstur), verður víst á:

*"Virðisvøksturin er eyðsýndur og væl lýstur í viðløgdu ætlan.*

*Søluprísurin á makrel og sild liggur um eina og tvær krónur í sølu til ídnað. Verður fiskurin harafturímóti seldur til agn soleiðis sum ætlanin leggur upp til er søluprísurin um […] kr. Kanska […] kr."*

Á s. 4, punkt 9 (Menning og nýskapan), verður víst á:

*Meiningin er, at hetta skal verða grundarlag fyri eini størri ætlan til at fáa alt og allan avskurð av fiski til lands. Tað er av allar stórsta týdningi, at vit fáa sum frægast burturúr okkara tilfeingi. Hóast mangar royndir eru gjørdar og nógvar miseydnast, so er neyðugt at halda á. Virði er har. Ongin ivi um tað.*

*Men tað spesifikka í hesi ætlan er at menna ein millummarknað í virðisketuni á sild og makreli. At fáa meir burturúr tí fiskinum, sum ikki dugur til matmarknaðinum, men er ov góður til at fara í kvørnina til ídnað.*

Á s. 5, punkt 13 (Lýsing av ætlanini), verður víst á:

*"Fyrireikingarnar hava verið drúgvar. Havi brúkt seinastu 10 árini til hetta. Eg eri í hesum og líknandi í sambandi við kongafisk og steinbít til dagligt. Tí eri eg púra klárur.*

*Hetta við sildini og makrelinum liggur beint til høgrabeinið. Bert spurningur um at fáa fatur á ráwøruni og at koma í gongd."*

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin er stuðulsverd við hesi grundgeving:

*"<u>Umsóknin er stuðulsverd viðvíkjandi makreli og norðhavssild</u> – Talan er um menning, nýskapan og virðisøking, tá talan er um makrel og norðhavssild. Verkætlanin byggir á at framleiða agn burtur úr brotnum og/ella ov smáum makreli og norðhavssild, sum vanliga fer til mjøl- og lýsiframleiðslu. Tað framgongur ikki nóg ítøkiliga, hvussu svartkjaftur skal virðisøkjast, og tí verður ikki mælt til at stuðla verkætlanini við svartkjafti. Hóast víst verður á avbjóðingar at sleppa av við smáar nøgdir av slógvi, er ivasamt, um grundarlag er fyri fleiri mjøl- og lýsiverksmiðjum. Viðvíkjandi nøgdum, verður upplýst, at allar nøgdir kunnu brúkast, men fyri at fáa avtalu um at fiska í lag, má nøgdin vera rímulig."*

Í heildarmetingini av øllum umsóknunum metir umsitingin, at umsóknin hjá umsøkjara er ein av 4 umsóknum, sum eru: *"Serliga væl undirbygdar og hava serliga góð útlit fyri at verða framdar…"*.

Í avgerðarskrivi til Fiskivinnustovuna, dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin ikki at ganga umsóknini frá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait á møti við hesi grundgeving:

*"Í tilmælinum verður mælt til at lata kvotu til verkætlan, ið hevur til endamáls at frysta uppisjóvarfisk til agn. Eg eri ivasamur í, um frysting av agni møtir ásetingum um menning, nýskapan av virðisøking í nøktandi mun. Tí verður avgerð ikki tikin um at lata kvotu til slíkar verkætlanir í hesum umfari."*

Í skrivi, dagfest 24. september 2021 (málsskjal 53), tekur Fiskimálaráðið avgerð um at ikki at ganga umsóknini á møti við hesi grundgeving:

*"Sum nevnt komu 30 umsóknir inn um vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. Hóast talan er um fleiri góðar verkætlanir, sum kundu verið játtaðar, so eru avmarkingar í samlaða karminum í tøku kvotuni. Hetta ber við sær, at tað bert er rúm fyri at játta trimum verkætlanum.*

*Í umsóknini verður upplýst, at verkætlanin byggir á at framleiða agn burtur úr brotnum og/ella ov smáum makreli og norðhavssild, sum vanliga fer til mjøl- og lýsiframleiðslu.*

*Ætlanin er at menna ein millummarknað í virðisketuni á sild og makreli. At fáa meira burturúr tí fiskinum, sum ikki dugur á matmarknaðinum, men er ov góður til at fara í kvørnina til ídnað.*

*Víst verður á, at verkætlanin hevur fingið kr. […] í stuðli frá Fiskivinnuroyndum yvir 2 ár.*

*Fiskimálaráðið metir tað vera ivasamt, um framleiðsla av agni møtir ásetingunum um menning, nýskapan og virðisøking í nøktandi mun, samanborið við aðrar verkætlanir. Eftir einari samlaðari meting er avgerð tí tikin um ikki at ganga umsókn tykkara á møti."*

##### *5.1.1.1 - Munnligar frágreiðingar*

###### *Jacob Vestergaard*

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 svarar Jacob Vestergaard soleiðis uppá málið um Sp/f Glyggur Fish Proteins and Bait:

*"Spurdur um avgerðarskrivið, sum verður sent til umsitingina í Fiskimálaráðnum at avgreiða, og sum víkur frá tilmælinum frá umsitingini, og spurdur ítøkiliga um tað, at Sp/f 31.01.2011 og Vestmanna Fiskivirki fáa fram um Vaðhorn og Glyggur Fishproteins, og hví hann tók hesa avgerð, greiddi Jacob frá, at hann skilti ongantíð, hví Glyggur var við. Tí hann dugdi ikki ordiliga at skilja, at tað fall inn undir ásetingina. Glyggur, um hann mintist rætt, tosaði um at brúka uppisjóvarfisk til agn. Og Glyggur hevði verið í ráðnum eitt ár ella tvey frammanundan, og hann fekk onkra kvotu ella stuðul. Hann helt, at Glyggur fekk kvotur frá fiskivinnuroyndum til at royna hetta við agni til fiskarar í Kanada og sovorðið. Hvørja ferð eitt skip landar á einum virki, makrel til dømis, so verður eitt ávíst spillprosent, tí at makrelurin er brotin. Brotin makrelur er fínur til agn, og tú fært hann fyri ongan prís, tí at hann verður koyrdur frá Varðanum til dømis, fraktaður við Smyril norður til Havnar og koyrdur til Fuglafjarðar. Varðin hevur undirskot av tí, bara fyri at nevna tað. Og tí skilti hann ikki ordiliga, at ein, sum ætlar sær at hava útflutning av agni, ikki skal bara standa har og fáa fatur í einum sindri av brotnum makreli, tí tú fært hann til ídnaðarprís ella næstan fyri einki. Hann meinar, at hann las í har, at umsitingin eisini kemur við ábendingum um, at mann hevur nokk av lýsi- og mjølframleiðslu í Føroyum. Tað er hann als ikki samdur í, tað hava vit ikki. Vit hava, sum viðurskiftini eru, væl brúk fyri einum lýsi- og mjølvirki afturat. Tí grundgevingini var hann ósamdur í. Hann helt ikki, at tað ordiliga fall innundir. Tað meinti hann.*

*Hann helt ikki, at tað var so øgiliga stórur munur á nógvum av hesum ymisku umsóknunum. Tað mátti hann eisini siga. At mann valdi eina frá og valdi aðra, helt hann ikki- ja, tann eina avgerðin var ikki skeiv fyri tað, um mann tók eina aðra framum. Soleiðis metti hann tað, tá ið hann hugdi at hesum, eisini út frá tilmælinum. Altso, tað var ikki stórur munur á í so máta.*

*Spurdur um eina kladdu, sum Rógvi Reinert hevur sent landsstýrismanninum, har skotið verður upp at játta 4 umsóknum kvotu eftir § 49, stk. 1, men har Glyggur Fishproteins and Bait fellur út, greiddi Jacob frá, at Glyggur var inni við einum pinkalítlum parti, hann var ein øgiliga lítil partur av tí. Tað, sum fylti ógvuliga nógv akkurát tá, tað var, hvat var tað rætta grundarlagið fyri skiparakstur, fyrst og fremst. Her verður hugsað um tonsatalið. Sjálvandi, tað tú fært av tonsum í dag, tað speglar seg aftur í einum møguligum kvotabýti, um tað blívur til varandi rættindi. Og tá ið mann frá umsitingini valdi tvey, so helt hann seg til tað. So bleiv øgiliga lítið til hitt, og tey bæði skuldu hava nokk til, at skiparaksturin bar seg, og nær ger hann tað? Tað vigar øgiliga nógv, helt hann, hvar tað er, at tað ikki ber seg, heldur enn tað ber seg. So tað vóru tær spekulatiónirnar, sum fyltu rættiliga nógv, eisini millum Rógva og hann, hvat var tað rætta grundarlagið. Tað vóru útrokningar við prísi, miðalprísi, og hvat hetta kvotagrundarlagið gav um árið viðvíkjandi skiparakstri og øðrum, og hvussu stór handan íløgan var í mun til kvotagrundarlagið, sum teirhøvdu. Hetta við skiparakstri var meiri viðkvæmt enn hitt, helt hann. Tí tað var tað, sum fylti, at tað kanska sá út til, at mann flutti tølini nakrar ferðirnar. Tað vóru spekulatiónirnar um onkursvegna at fáa skiparaksturin at vera rímiliga støðugan. Tað býtið var ikki nakað knívskorið. Tað var ein pulja, og eitt sindur fór til 2 og eitt sindur fór til 1, og í mun til áðrenn, so fór øgiliga nógv til ítøkiligt skipakeyp. Tí tað var tann stóra puljan, sum fór til tað. Onkursvegna skuldi tað so hanga saman, so bleiv tað hugt eftir, hvat var rímiligt í hinum pørtunum."*

### Rógvi Reinert

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 svarar Rógvi Reinert soleiðis uppá málið um Sp/f Glyggur Fish Proteins and Bait:

*"Spurdur um kladduna, har Glyggur Fishproteins and Bait fyrst er inni, men fellur út í endaligu avgerðini, greiddi Rógvi frá, at tað er grundað á, at nøgdin, sum eftir er, er ómetaliga lítil. Altso, 700 tons av sild og 700 tons av makreli er í útgangsstøðinum ein ómetaliga lítil nøgd. Mann kundi næstan grundgivið við, at hasar restirnar kundu farið oman á Vestmanna og Leirvík til at menna teirra ætlanir, sum teir vóru byrjaðir uppá. Men tað er eisini nakað í lógini um fjølbroytni og um menning av fiskivinnu á landi og nýskaparaendamál. So at halda seg til viðmerkingarnar í lóggávuni um eina fjølbroytta vinnu á landi, var tað kanska óheppið at slaka úr trimum og niður í tveir. Men tað, sum hendir, er, at landsstýrismaðurin verður kunnaður um í tilfarinum í tilmælinum, at tað er ein onnur verkætlan, sum hevur ætlanir um at roykja makrel til serligar nissjuvørur og útflutning. Nú bleiv tað eitt sindur framleiðslutekniskt, men agn blívur so sett saman við framleiðslu av royktum makreli til nisjuframleiðslu til útflutnings. Tí grundarlagið hjá Glyggi er at frysta makrel og sild til agn, og tað framleiðslutekniska, sum liggur í tí, er, at agn er bara rávøra, sum er fryst. Tað er ein heilur fiskur, sum verður frystur, og tað er tað. Agn er so kanska rávøra til skip at fiska annan fisk við. Tað er eisini, ið hvussu er fyri hann, almenn vitan um, at agn verður í ávísan mun longu fryst í Føroyum, og skip keypa agn úr Føroyum.*

*Pelagos hevur fryst eitt sindur, tey hjá Christian í Grótinum hava fryst eitt sindur, og so eru eisini uppisjóvarbátar, sum hava fryst. So tað er komið honum til kunnleika við at tosa við línumenn, at mann kann*

*keypa nakað av agni í Føroyum. Kanska ikki alt, men nakað. Hann veit eisini, at bátarnir, sum fiska makrel og sild og svartkjaft, sum frysta hann umborð, teir hava eisini onkuntíð avlopsagn, sum mann kann keypa. Millum annað grønlendskir fiskibátar, sum fiska við Føroyar. So tá tað kemur til menningar- og nýskapanarendamál og til virðisøking, so stendur agn nokkso veikt, tí agn er ikki framleiðsla sum so, men tað er frysting. Síðani er tað eitt annað, sum hann skal standa inni fyri sum fakpersónur við 15 ára royndum í flakaframleiðslu og virkisframleiðslu og øðrum, at vegurin frá tí, sum tey stóru virkini gera í dag við at frysta 1.000 tons av makreli ella sild um samdøgrið til at levera eitt lítið sindur av agni er øgiliga lítil. Hansara pástandur er, at tey kunnu gera tað, um tey vilja. So í mun til nýskapanarendarmál, so halda vit, at agnframleiðsla stendur eitt lítið sindur veik samanborin við makrel og sild, sum verður royktur og útfluttur til matvøruketur. Viðvíkjandi endamálsorðingunum í lógini, so stendur royktur makrelur og nissjuframleiðslur betri í mun til endamálsorðingarnar í lógini og í sambandi við orðingar í kunngerð og viðmerkingar til lóg heldur enn agn. Tað er líkasum tað fyrisitingarliga grundarlagið, sum man byggir hetta á. Mann samanber slag av framleiðslu í mun til endamálsorðingarnar í lógarteksti, og har er tað, at serframleiðslur, nisju-framleiðslur úr royktum makreli millum annað, standa nærri tekstinum, enn agn ger. Tað var líkasum orsøkin.*

*Spurdur um hansara bakgrund sum fakpersónur, greiddi Rógvi frá, at hann hevur eina fortíð sum stjóri á flakavirki og virkisleiðari í 15 ár, og so er hann fiskivinnukandidatur og hevur eisini arbeitt nógv við fiskasølu. Hann er fiskivinnukandidatur úr Tromsø. So tað er eisini við hesum í huga, hann átekur sær leiklutin at vera tann, sum sparrar við landsstýrismannin.*

*Spurdur nærri um grundgevingarnar í tilmælinum at játta kvotu til Glyggur, har víst verður á menning, nýskapan og virðisøking av brotnum makreli, sum annars vanliga fer til mjøl og lýsiframleiðslu, og at felagið hevur ætlanir um at optimera, men kortini ikki fær játtað kvotu, greiddi Rógvi frá, at hann als ikki var ósamdur við tilmælinum og grundreglurnar, tí sum tað verður skrivað í onkrum svari til onkran, sum hevur spurt nærri um hetta, so er tað soleiðis, at tá ið orðingarnar verða so breiðar í lóggávu og øðrum, so er tað soleiðis, at onkur umsøkjari kann gott fáa noktandi svar, hóast umsóknin grundleggjandi lýkur treytirnar í lógini. Og so skal mann fara ígjøgnum eina aðru viðgerð og siga ókey. Hann helt eisini, at agnprojektið líkur grundtreytirnar, men av tí at nøgdin er so lítil, so má mann spyrja: "Er tað onkur annar, sum í meting liggur lógartekstinum nærri?" Tú kanst gott hava tveir, tríggjar, tú kanst hava 10, sum lúka grundreglurnar, men av tí at nøgdin er so lítil, so má mann velja tríggjar burturúr, sum dømi, og so má mann gera eina aðra meting um, hvør liggur nærri. Og tað er har, tað er, at mann heldur tað, sum hann nevndi í áðni. Men hann er ikki ósamdur við bólkinum sum so, men mann kann siga, báðir partar hava grundgevingarnar, og tí bleiv tað handan avgerðin."*

##### 5.1.1.1.1 - Meting

Landsstýrismaðurin hevur ikki skyldu til at fylgja einum tilmæli frá umsitingini. Eitt tilmæli frá umsitingini er, sum meginregla, ikki at skilja sum ein fyrisitingarrættarlig avgerð. Velur landsstýrismaðurin tó at víkja frá tilmælinum, skal hann sakliga grundgeva fyri hesum.

Sambært § 23 í fyrisitingarlógini skal ein grundgeving vísa til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun, avgerðin eftir hesum reglum hvílir á eini fyrisitingarrættarliga meting, skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini.

Í avgerðarskrivinum til umsøkjara verður sum grundgeving víst á at: *"Sum nevnt komu 30 umsóknir inn um vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. Hóast talan er um fleiri góðar verkætlanir, sum kundu verið játtaðar, so eru avmarkingar í samlaða karminum í tøku kvotuni. Hetta ber við sær, at tað bert er rúm fyri at játta trimum verkætlanum… Fiskimálaráðið metir tað vera ivasamt, um framleiðsla av agni møtir ásetingunum um menning, nýskapan og virðisøking í nøktandi mun, samanborið við aðrar verkætlanir. Eftir einari samlaðari meting er avgerð tí tikin um ikki at ganga umsókn tykkara á møti."*

Tað, at víst verður á, at støddin á kvotuni er orsøkin til, at bert tríggjar umsóknir kunnu játtast, meti eg er eitt sakligt atlit at taka. Talan er um eitt avmarkað tilfeingi, og tað er greitt, at tað ikki er møguligt hjá landsstýrismanninum at ganga øllum umsóknum á møti.

Í skjalatilfarinum, ið eg havi fingið frá Fiskimálaráðnum, framgongur, at tilmælt verður, at Sp/f Glyggur Fish Proteins and Bait, saman við trimum øðrum umsøkjarum, fáa kvotu. Hetta framgongur í einum kladdu uppskotið til landsstýrismannin, sum hann fær sendandi frá Rógva Reinert, ið ráðgevur honum í málinum (málsskjal 29). Í endaligu avgerðini velur landsstýrismaðurin tó bert at luta út kvotu til tríggjar umsøkjarar, har Sp/f Glyggur Fish Proteins and Bait ikki fær nakra kvotu. Orsøkin skal finnast í, at nøgdin av kvotu er avmarkað.

Tað, at avmarkaða nøgdin av kvotu hevur við sær, at pláss bert er fyri at játta trimum umsóknum, meti eg í sjálvum sær vera eitt sakligt atlit at taka. Eg havi ikki grundarlag fyri at seta spurnartekin við metingina hjá landsstýrismanninum viðvíkjandi støddini av kvotuni, sum skal til fyri at umsøkjarar kunnu fáa verkætlanina at hanga saman fíggjarliga. Eg má tí leggja til grund, at tað er ikki rúm fyri at játta meira enn tríggjar umsóknir.

Her skal tó viðmerkjast, at avgerðin hjá landsstýrismanninum at útseta útlutanina av kvotum eftir § 49, stk. 1 frá 2020 til 2021 hevur havt við sær, at partur av kvotuni eftir § 49, stk. 1 skal nýtast til ítøkiligt skipakeyp. Avleiðingin av hesum er, at størri parturin av kvotuni verður settur av til ítøkiligt skipakeyp. Harvið fáa virkir á landið minni part av kvotuni. Fyritreytirnar fyri virkir á landi eru soleiðis broyttar í mun til 2020.

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar av landsstýrismanninum og Rógva Reinert kom fram, at býtið av kvotu til verkætlanir eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. og til ítøkiligt skipakeyp eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. fylti nógv í samskiftinum teirra millum. Landsstýrismaðurin vísti í hesum sambandi á:

*"Tað býtið var ikki nakað knívskorið. Tað var ein pulja, og eitt sindur fór til 2 og eitt sindur fór til 1, og í mun til áðrenn, so fór øgiliga nógv til ítøkiligt skipakeyp. Tí tað varð tann stóra puljan, sum fór til tað. Onkursvegna skuldi so tað hanga saman ha, so bleiv tað hugt eftir, hvat var rímiligt í hinum pørtunum."*

Orsakað av, at størri parturin av kvotuni eftir § 49, stk. 1 fer til ítøkiligt skipakeyp eftir § 49, stk. 1, 2. pkt., so er ikki pláss fyri at játta fýra umsóknir eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. Sum víst á omanfyri undir pkt. 4.1.1. meti eg tað ikki vera í samsvari við góðan lóggávusið at broyta grundarlagið á henda hátt, men tá Løgtingið hevur tikið undir við lógarbroytingini, ber ikki til at siga, at avgerðin hjá landsstýrismanninum á hesum grundarlagi er skeiv.

Viðvíkjandi treytunum um menning, nýskapan og virðisøking, metir landsstýrismaðurin, at framleiðsla av agni ikki lýkur hesar treytir. Henda meting verður eisini gjørd av hinum umsøkjarunum, herundir Sp/f Vaðhorn, Sp/f Tavan, Sp/f 31.01.2011 og P/F Vestmanna Fiskavirki. Her skal viðmerkjast, at umsitingin mælti til, at Sp/f Tavan fekk kvotu, umframt at umsitingin læt landsstýrismanninum nýtt upprit viðvíkjandi P/F Vestmanna Fiskavirki, har víst verður á, at umsóknin frá P/F Vestmanna Fiskavirki lutvíst kann gangast á møti, sí kap. 5.1.5. niðanfyri.

Landsstýrismaðurin vísir undir munnligu avhoyringini á:

*"...at hann skilti ongantíð, hví Glyggur var við. Tí hann dugdi ikki ordiliga at skilja, at tað fall inn undir ásetingina. Glyggur, um hann mintist rætt, tosaði um at brúka uppisjóvarfisk til agn. Og Glyggur hevði verið í ráðnum eitt ár ella tvey frammanundan, og hann fekk onkra kvotu ella stuðul. Hann helt, at Glyggur fekk kvotur frá fiskivinnuroyndum til at royna hetta við agni til fiskarar í Kanada og sovorðið. Hvørja ferð eitt skip landar á einum virki, makrel til dømis, so verður eitt ávíst spillprosent, tí at makrelurin er brotin. Brotin makrelur er fínur til agn, og tú fært hann fyri ongan prís, tí at hann verður koyrdur frá Varðanum til dømis, fraktaður við Smyril norður til Havnar og koyrdur til Fuglafjarðar. Varðin hevur undirskot av tí, bara fyri at nevna tað. Og tí skilti hann ikki ordiliga, at ein, sum ætlar sær at hava útflutning av agni, ikki skal bara standa har og fáa fatur í einum sindri av brotnum makreli, tí tú fært hann til ídnaðarprís ella næstan fyri einki. Hann meinar, at hann las í har, at umsitingin eisini kemur við ábendingum um, at mann hevur nokk av lýsi- og mjølframleiðslu í Føroyum. Tað er hann als ikki samdur í, tað hava vit ikki. Vit hava, sum viðurskiftini eru, væl brúk fyri einum lýsi- og mjølvirki afturat. Tí grundgevingini var hann ósamdur í. Hann helt ikki, at tað ordiliga fall innundir. Tað meinti hann. Hann helt ikki, at tað var so øgiliga stórur munur á nógvum av hesum ymisku umsóknunum. Tað mátti hann eisini siga. At mann valdi eina frá og valdi aðra, helt hann ikki, ja, tann eina avgerðin var ikki skeiv fyri tað, um mann tók eina aðra framum. Soleiðis metti hann tað, tá ið hann hugdi at hesum, eisini út frá tilmælinum. Altso, tað var ikki stórur munur á í so máta.*

*Spurdur um eina kladdu, sum Rógvi Reinert hevur sent landsstýrismanninum, har skotið verður upp at játta 4 umsóknum kvotu eftir § 49, stk. 1, men har Glyggur Fishproteins and Bait fellur út, greiddi Jacob frá, at Glyggur var inni við einum pinkalítlum parti, hann var ein øgiliga lítil partur av tí. Tað, sum fylti ógvuliga nógv akkurát tá, tað var, hvat var tað rætta grundarlagið fyri skiparakstur, fyrst og fremst. Her verður hugsað um tonsatalið."*

Rógvi Reinert greiðir soleiðis frá undir munnligu avhoyringini:

*"Spurdur inn til kladduna, har Glyggur Fishproteins and Bait fyrst er inni, men fellur út í endaligu avgerðini, greiddi Rógvi frá, at tað er grundað á at nøgdin, sum eftir er, er ómetaliga lítil. Altso, 700 tons av sild og 700 tons av makreli er í útgangsstøðinum ein ómetaliga lítil nøgd. Mann kundi næstan argumenterað við, at hasar restirnar kundu fari omaná Vestmanna og Leirvík til at menna sínar ætlanir, sum teir vóru byrjaðir á. Men tað er eisini nakað í lógini um fjølbroytni og um menning av fiskivinnu á landi og nýskaparaendamáli. So at halda seg til viðmerkingarnar í lóggávuni um eina fjølbroytta vinnu á landi, so var hatta kanska óheppið at slaka úr trimum og niður í tveir. Men tað, sum hendi var at landsstýrismaðurin verður kunnaður um í tilfarinum í tilmælinum, at tað er ein onnur verkætlan, sum hevur ætlanir um at roykja makrel til serligar niche vørur og útflutning. Nú bleiv tað eitt sindur framleiðslutekniskt, men agn blívur so sett saman við framleiðslu av*

*royktum makreli til niche framleiðslu til útflutnings. Tí grundarlagið hjá Glyggur er at frysta makrel og sild til agn, og tað framleiðslutekniska, sum liggur í tí er, at agn er bara ráðvøra, sum er fryst. Tað er ein heilur fiskur, sum verður frystur, og tað er tað. Agn er so kanska ráðvøra til skip at fiska annan fisk við. Tað er eisini, í hvussu er fyri hann, almenn vitan um, at agn verður í ávísan mun longu fryst í Føroyum, og skip keypa agn úr Føroyum.*

*Pelagos hevur fryst eitt sindur, tey hjá Christian í Grótinum, hava fryst eitt sindur og so eru eisini uppisjóvarbátar, sum hava fryst. So tað er komið honum til kunnleika við at tosa við línumenn, at mann kann keypa nakað av agni í Føroyum. Kanska ikki alt, men nakað. Og so veit hann eisini, at bátarnir, sum fiska makrel og sild og svartkjaft, sum frysta hann umborð, teir hava eisini onkuntíð restpartíir við agni, sum mann kann keypa. Millum annað grønlendskir fiskibátar, sum fiska við Føroyar. So tá tað kemur til menningar- og nýskapanarendamál og til virðisøking, so stendur agn nokkso veikt, tí agn er ikki framleiðsla sum so, men tað er frysting. Og so er tað eitt annað, sum hann skal standa inni fyri, sum mín fakpersónur við hansara royndum sum 15 ár innanfyri flakaframleiðslu og virkisframleiðslu og annað, at vegurin frá tí, sum tey stóru virkini gera í dag við at frysta 1000 tons av makreli ella sild um døgni til at levera eitt lítið sindur av agni, hann er øgiliga lítil. Mín pástandur er, at tey kunnu gera tað, um tey vilja. So í mun til nýskapanarendarmál, so halda vit, at agnframleiðsla stendur eitt lítið sindur veik samanborðið við makrel og sild, sum verður royktur og útfluttur til matvøruketur. So í mun til endamálsorðingarnar í lógini, so stendur royktur makrelur og niche framleiðslur í betri mun í samband við endamálsorðingarnar í lógini í samband við orðingar í kunngerð og viðmerkingar til lóg heldur enn agn. Tað er líkasum tað fyrisitingarliga grundarlagið, sum man byggjur hetta á. Mann samanber slag av framleiðslu í mun til endamálsorðingarnar í lógarteksti, og har er tað at serframleiðslur, niche framleiðslur úr royktum makreli millum annað standa nærri tekstinum enn agn ger. Tað var líkasum orsøkin."*

Tað tykist greitt, at fyrisitingarliga grundarlagið undir avgerðini ikki at ganga umsóknini frá Sp/f Glyggur Fish Proteins and Bait á møti er, at umsóknin verður hildin beinleiðis upp at øðrum umsøkjara – talan er helst um Sp/f 31.01.2011 – har mett verður, at framleiðsla av agni stendur veikari enn framleiðsla av royktum makreli og sild.

Eg havi ikki fakligan førleika til at meta um, hvørt framleiðsla av agni er meira ella minni nýskapandi enn framleiðsla av royktum makreli og sild. Eg meti tó, at grundgevingarnar fyri avgerðini, sum verða førdar fram av landsstýrismanninum og eisini Rógva Reinert, eru sakligar og viðkomandi. Eg meti tí ikki grundarlag verða fyri at siga, at avgerðin um ikki at ganga umsóknini hjá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait á møti, er brot á sjófeingislógina ella fyrisitingarlógina.

Eg meti, at bæði Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait og Sp/f 31.01.2011 lúka grundleggjandi treytir fyri at kunna fáa tillutað kvotu. Eg meti tó ikki grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin hjá landsstýrismanninum at víkja frá tilmælinum ikki er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina. Eg meti, avgerðin er bygd á saklig og viðkomandi atlit.

Tó er at viðmerkja, at umsitingin í Fiskimálaráðnum mælti frá at ganga umsóknini frá Sp/f 31.01.2011 á møti, tí tað m.a. var ógreitt, nær verkætlanin kundi byrja, sí kap. 5.1.4. niðanfyri.

### 5.1.2 - Umsókn frá Sp/f Vaðhorn

Umsóknin er latin Fiskimálaráðnum í telduposti 6. juli 2021 (málsskjal 54).

Í umsóknini verður á s. 3, punkt 9 (Lýsing av ætlanini) víst á, at:

*"Virðisøkingin í okkara ætlan liggur í, at vit byggja víðari uppá eina framleiðslu, sum vit longu kenna, og kanska eru allarbest til í Føroyum....*

Á s. 4, punkt 13 (Lýsing av ætlanini), verður víst á, at:

*"Framleiðslan kann byrja, mestsum beinanveg. Vit kunnu móttaka frystu vøruna og tiðnað hana við teimum møguleikum vit hava í dag. Vit hava veitarar til pakning, sum vit meta verða passaligan til framleiðsluna. Restina til… framleiðsluna hava vit longu á staðnum…"*

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin er stuðulsverd við hesi grundgeving:

*"<u>Umsóknin er stuðulsverd</u> – Umsóknin fevnir um eina ítøkiliga verkætlan, ið væl kann førast út í lívið. Verkætlanin fevnir um at […] og eftir tíð eisini víðari virkaðar vørur – […] verður nevnd, tó at víst verður á, at tollforðingar eru fyri hesum. Verkætlanin snýr seg um, at núverandi førleikar innan salting verða yvirførdar á makrel- og sildaframleiðslu. Umsøkjarin hevur bæði karmar og førleikar at byrja verkætlanina, ið fevnir um menning, nýskapan og virðisøking. Harumframt verður víst á, at verkætlanin kann gerast grundarlag fyri íløgu, ið fevnir um útbygging, nýggjar maskinur og upp til 20 nýggj størv á virkinum."*

Í avgerðarskrivi til Fiskivinnustovuna, dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin ikki at ganga umsóknini frá Sp/f Vaðhorn á møti við hesi grundgeving:

*"Tvær tær seinnu kvoturnar verða latnar til verkætlanir, ið ikki eru tilmæltar. Hesar kvotur verða latnar til verkætlanir, sum heilt ella í stóran mun eru bygdar á uppisjóvarfisk eina. Í míni avgerð havi eg valt at raðfesta slíkar verkætlanir, heldur enn at lata uppisjóvarkvotur til tann partin av vinnuni, ið hevur rímiliga støðugt virksemi grundað á botnfisk eina."*

Í skrivi, dagfest 24. september 2021 (málsskjal 55), tekur Fiskimálaráðið avgerð um ikki at ganga umsóknini á møti við hesi grundgeving:

*"Í umsóknini verður upplýst, at verkætlanin fevnir um at… tó at víst verður á, at tollforðingar eru fyri hesum. Verkætlanin snýr seg um, at núverandi førleikar… verða yvirførdir á makrel- og sildaframleiðslu. Harumframt verður víst á, at verkætlanin kann gerast grundarlag fyri íløgu, ið fevnir um útbygging, nýggjar maskinur og upp til 20 nýggj størv á virkinum.*

*Talan er um eina verkætlan, sum í ávísan mun fevnir um menning, nýskapan og virðisøking av sild og makreli. Vísast skal tó á, at umsøkjarin hevur longu rímiliga støðugt virksemi grundað á botnfisk.*

*Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum er dentur lagdur á at raðfesta verkætlanir frá umsøkjarum, sum heilt ella í stóran mun longu hava sítt virksemi innan fyri uppsjóvarfisk, heldur enn at lata uppsjóvarkvotur til tann partin av vinnuni, ið hevur rímiliga støðugt virksemi grundað á botnfisk.*

*Tí fellur umsókn tykkara í raðfestingini og verður sostatt ikki gingin á møti."*

### 5.1.2.1 - Munnligar frágreiðingar

#### Jacob Vestergaard

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 svarar Jacob Vestergaard soleiðis uppá málið um Sp/f Vaðhorn:

*"At mann valdi eina frá og valdi aðra, helt hann ikki, ja, tann eina avgerðin var ikki skeiv fyri tað, um mann tók eina aðra framum. Soleiðis metti hann tað, tá ið hann hugdi at hesum, eisini út frá tilmælinum. Altso, tað var ikki stórur munur á í so máta. Vaðhorn er eitt væl virkandi virki, sum burturav tekur sær av botnfiski. Og aftur hetta við at blanda tingini saman, Vaðhorn hevði ikki roynt hetta fyrr, og tað høvdu aðrir umsøkjarar heldur ikki. So tá ið hann mettium hatta, so metti hann tryggleikan í tí, sum Vestmanna hevði framleittog hevði gjørt. Og Vestmanna Fiskavirki tók sær burturav av at viðgera uppisjóvarfisk, so tað var tað, sum vigaði tyngri enn Vaðhorn. Ikki tí, Vaðhorn og onkrar aðrar umsóknir eisinir sóu fínar út. Tað er ikki har, tað er. Nøgdirnar vóru lutfalsliga til tann partin, sum bleiv eftirfylgjandi til pkt. 1.*

*...tilmælið, sum hann hevði lisið ígjøgnum nakrar ferðir, og so metti hann út frá tí. Eftir pkt. 1 helt hann fast við Tavuna í Leirvík. Sjálvandi hevði hann verið og vitjað øll virki í Føroyum hann hevði kanska verið fleiri ferðir hesi árini og kendi rímiliga væl, hvat tey gjørdu. Hann brúkti ógvuliga nógv Rógva í sparringini av hesum, tá ið tilmælið kom í 2021. So hann gekk og grundaði á hetta tilmælið og hvørja heimild, hann hevði og tugdi uppá, hvat var rímilig og saklig grundgeving. Í høvuðsheitinum helt hann, at hann valdi eina meira trygga gongd, helt hann í øllum førum. Tavan í Leirvík hevði arbeitt næstan bara við uppisjóvarfiski ella gullaksi og hevði havt eina fína framleiðslu av sild, sildabitum og øðrum. Og tað var fyri honum rættiliga greitt, at teir vóru partur av tí. Hann kagaði í umsóknina úr Vestmanna, hon var ógvuliga undarliga samansett, umsóknin sjálv, tað kundi hann viðganga. Men Vestmanna hevði, síðani alt tað við makreli byrjaði, fingið onkrar royndarkvotur frá Jákupi Mørkøre, hevði burturav roynt at fáa spesialiserað seg sum eitt lítið virki til at viðgera uppisjóvarfisk. Og í 2021 var tað kanska tað virkið við tí nøgdini, teir hóast alt fingu, sum fekk besta prísin fyri makrel. Teir fingu fyrst makrel og høvdu ymiskar ætlanir um at útbyggja bæði til makrel og sild."*

#### Símun Grønadal

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 27. oktober 2022 svarar Símun Grønadal soleiðis uppá málið um Sp/f Vaðhorn:

*"P/f Vaðhorn Seafood skuldi fara undir eina framleiðslu við salting, og eru eisini eitt servirki til salting. Tí varð mett, at tey høvdu førleikarnar til at koma ígongd, og tað var eisini ein væl lýst verkætlan, sum var mennandi og nýskapandi."*

### 5.1.2.1.1 - Meting

Í avgerðini til Sp/f Vaðhorn framgongur beinleiðis, at: *"Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum er dentur lagdur á at raðfesta verkætlanir frá umsøkjarum, sum heilt ella í stóran mun longu hava sítt virksemi innan fyri uppsjóvarfisk, heldur enn at lata uppsjóvarkvotur til tann partin av vinnuni, ið hevur rímiliga støðugt virksemi grundað á botnfisk."*

Í munnligu frágreiðingini hjá Jacob Vestergaard verður eisini greitt frá, at umsóknirnar frá P/F Vestmanna Fiskavirki og P/F Tavuni verða raðfestar fram um Sp/f Vaðhorn. Tað er tí greitt, at umsóknin hjá Sp/f Vaðhorn verður mett beinleiðis í mun til umsóknirnar hjá P/F Vestmanna Fiskavirki og P/F Tavuni.

Út frá munnligu frágreiðingini kemur eisini fram, at Jacob Vestergaard metir tað vera tryggari at tilluta kvotu til virkir, sum longu hava sítt virksemi innan uppisjóvarvinnuna heldur enn at tillutað kvotu til virkir, sum ikki hava roynt hetta fyrr.

Símun Grønadal vísir í síni munnligu frágreiðing á, at Sp/f Vaðhorn ætlaði sær undir framleiðslu av uppisjóvarfiski við salting, og at Vaðhorn var eitt servirki til salting.

Jacob Vestergaard er ikki ósamdur við umsitingini í, at umsóknin frá Sp/f Vaðhorn er ein góð umsókn, sum lýkur grundleggjandi treytirnar. Hann metir tó ta tryggaru loysnina vera at raðfesta umsøkjarar, sum longu hava sítt virksemi við uppisjóvarfiski.

Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at umsitingin í Fiskimálaráðnum, mælir til, at P/F Tavan fær tillutað kvotu. Harumframt biður Jacob Vestergaard umsitingina í Fiskimálaráðnum kanna, um tað er lógarbrot at luta út kvotu til P/F Vestmanna Fiskivirki. Umsitingin í Fiskimálaráðnum ger í hesum sambandi nýtt upprit, har niðurstøðan er, at grundarlag er fyri at játta P/F Vestamanna Fiskavirki part av makreli og sild, men ikki av svartkjafti, sí kap. 5.1.5.

Staðfestast kann tí, at Jacob Vestergaard skal taka støðu til P/F Tavuna, Sp/f Vaðhorn og P/F Vestmanna Fiskavirki, og umsitingin í Fiskimálaráðnum endar við at mæla til, at øll fáa kvotu.

Jacob Vestergaard vísir í munnligu frágreiðingini á, at tað er ikki stórur munur á hesum umsóknum. Øll hesi virki eru væl rikin, men ikki øll virkini hava royndir við uppisjóvarfiski. Tá Jacob Vestergaard tekur avgerð í málinum, velur hann at raðfesta P/F Vestmanna Fiskavirki fram um Sp/f Vaðhorn við tí grundgeving, at P/F Vestmanna Fiskavirki longu hevur royndir við uppisjóvarfiski.

Eg havi ikki grundarlag fyri at siga, at avgerðin at tilluta P/F Vestmanna Fiskavirki kvotu fram um Sp/f Vaðhorn ikki er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina. Hóast umsitingin í Fiskimálaráðnum ikki upprunaliga mælti til, at P/F Vestmanna Fiskavirki fekk kvotu, so mælti umsitingin í nýggjum uppriti til, at P/F Vestmanna Fiskavirki fekk kvotu, ella umsitingin vísir í uppriti á, at tað er ikki lógarbrot at tilluta P/F Vestmanna Fiskavirki part av kvotu av makreli og norðhavssild. Tað eru soleiðis í síðsta enda smávegis marginalar, sum avgera, um ein umsøkjari skal raðfestast fram um ein annan.

Eg meti, Sp/f Vaðhorn lýkur grundleggjandi treytirnar fyri at fáa tillutað kvotu. Eg meti tó grundgevingarnar, sum Jacob Vestergaard vísir á, bæði munnliga og skrivliga, eru sakligar og viðkomandi fyri at kunna taka eina fyrisitingarrættarliga avgerð. Eg meti soleiðis ikki, at grundarlag er fyri at siga, at avgerðin um at víkja frá tilmælinum og ikki tilluta kvotu til Sp/f Vaðhorn ikki er lóglig.

### 5.1.3 - Umsókn frá Sp/f Tavan

Umsóknin er latin Fiskimálaráðnum í telduposti tann 6. juli 2021 (málsskjal 56).

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin er stuðulsverd við hesi grundgeving:

*"Umsóknin er stuðulsverd – Umsóknin fevnir um eina ítøkiliga verkætlan, ið væl kann førast út í lívið. Verkætlanin fevnir um menning, nýskapan og virðisøking av makreli og norðhavssild. Fyri sild snýr verkætlanin seg um at framleiða […]. Fyri makrel snýr verkætlanin seg um at […]. Seljast skal til […]. Umsøkjarin hevur áður fingið játtað kvotu eftir § 50 til sama endamálið. Men við hesum verður rávørugrundarlagið tryggari. Harumframt verður søkt um rímiligar nøgdir."*

Í skrivi, dagfest 24. september 2021 (málsskjal 57), tekur Fiskimálaráðið avgerð um at ganga umsóknini lutvíst á møti við hesi grundgeving:

*"Í umsóknini verður upplýst, at fyri sild fevnir verkætlanin í høvuðsheitum um […] á landi. Kvotan verður fiskað av einum av verandi aktørum í vinnuni. Síðani verður fiskurin fluttur til Leirvíkar í tangabilum og førdur inn á virkið. Á virkinum verður sildin […] og avskipað.*

*Fyri makrel snýr verkætlanin seg í høvuðsheitum um at […]. Framleiðslan er ætlað framleiðarum av […].*

*Fiskimálaráðið metir, at talan er um eina áhugaverda verkætlan, ið fevnir um menning, nýskapan og virðisøking av norðhavssild og í ávísan mun eisini av makreli. Harumframt verður søkt um rímiligar nøgdir.*

*Vísast skal á, at umsøkjarin hevur fingið tillutað 350 tons av makreli fyrr í ár í sambandi við vinnuligar fiskiroyndir.*

*Fiskimálaráðið hevur eftir eini samlaðari meting tikið avgerð um partvís at ganga umsóknini á møti.*

*Nøgdirnar, sum Sp/f Tavan fær tillutað í 2021, eru hesar… 1.000 tons… flutt kvota frá 2020, 820 tons…"*

Sp/f Tavan fær soleiðis tillutað tilsamans 1.820 tons av norðhavssild í 2021. Sp/f Tavan fær ikki tillutað makrel.

#### *5.1.3.1 - Meting*

Umsóknin frá Sp/f Tavuni, er einasta umsókn eftir § 49, stk. 1, 1. pkt., sum beinleiðis verður tilmæld og fær tillutað kvotu partvíst í samsvari við tilmæli frá umsitingini í Fiskimálaráðnum.

Jacob Vestergaard velur í hesum føri at fylgja tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum. Tó fær Sp/f Tavan ikki tillutað makrel vísandi til, at Sp/f Tavan hevur fingið tillutað 350 tons av makreli fyrr í ár í sambandi við vinnuligar fiskiroyndir.

Umsitingin í Fiskimálaráðnum metir, at Sp/f Tavan lýkur allar grundleggjandi treytir fyri at kunna fáa tillutað kvotu eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. Eg havi ikki grundarlag fyri at seta spurnartekin við hetta.

Mín meting er tí, at avgerðin um at tilluta kvotu til Sp/f Tavuna er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina og er tí lóglig.

### 5.1.4 - Umsókn frá Sp/f 31.01.2011

Umsóknin er latin Fiskimálaráðnum í telduposti 6. juli 2021 (málsskjal 58).

Í umsóknini verður á s. 3, punkt 6 (Lýsing av verkætlanini), víst á, at:

*”Vit hava kanna møguleikarnar at menna eina […] av royktum makreli og sild…*

*Vit hava gjørt kanningar av teimum ymisku framleiðslunum, og serliga […] hava smá roykivirki langa siðvenju at […] sum […] framleiðslu fyri góðan prís.*

*Umboð fyri Sp/f 31.01.2011 hava verið […] og hava sæð framleiðsluna, sum er merkt av nærlagni og servitan, sum vit fáa nærri innlit í, um vit fáa kvotur at arbeiða við.*

*Í Føroyum hava onnur feløg gjørt royndir í smáum nøgdum, […], og hetta ætla vit at gera virkinum á landi, sum ætlanin er at seta á stovn í hølunum, har gamla flakavirkið á Sandi var áður.*

*Vit hava ítøkiliga keypsætlan og váttan frá seljara, at hølini eru tøk, um vit fáa kvotur til okkara verkætlan. Hesi hølini hava frystiútgerð frá tíðini, tá flakavirki var á staðnum, og ein frystigoymsla hoyrir eisini til bygningin…”*

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin er helst ikki stuðulsverd við hesi grundgeving:

*”<u>Umsóknin er helst ikki stuðulsverd</u> – Verkætlanin fevnir um menning, nýskapan og virðisøking – serliga innan royking av fiskavørum. Ætlanin er at […] framleiða royktan makrel og sild […]. Virkið, ið ætlanin er at brúka, skal gerast klárt áðrenn verkætlanin kann byrja. Tað er ivasamt, nær løggilding til hesa framleiðslu er klár, og tí er ivasamt, nær verkætlanin kann byrja. Tað er ikki greitt, um hædd er tikin fyri møguligum tollforðingum á ES marknaðinum fyri liðugt framleidda vøru.”*

Í avgerðarskrivi til Fiskivinnustovuna, dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin at ganga umsóknini frá Sp/f 31.01.2011 á møti við hesi grundgeving:

*"Í tilmælinum verður skrivað, at umsóknin helst ikki er stuðulsverd. Hóast hetta verður skrivað í tilmælinum, at verkætlanin fevnir um menning, nýskapan og virðisøking serliga innan royking av fiskavørum – í […] framleiðslu.*

*Um fígging og íløgu er upplýst (tó ikki í tilmælinum), at íløgan er lutfalsliga lítil, og eginfíggingin er lutfalsliga stór, […]*

*Ivasemi í tilmælinum verður reist í sambandi við, nær løggilding til hesa framleiðslu er klár, nær verkætlanin kann byrja, og um hædd er tikin fyri møguligum tollforðingum á ES-marknaðinum.*

*Hóast nevnda ivasemi, so meti eg, at grundarlag er fyri at tilluta nevndu verkætlan kvotu undir tí treyt, at umsøkjarin skal – í ítøkiligari ætlan – vísa á, nær ivaspurningarnir eru avgreiddir. Leggjast skal afturat, at minstu nøgdirnar, ið verkætlanin kann bera, eru rímiliga smáar og rúmast innan karmin av tøkari kvotu."*

Í skrivi, dagfest 24. september 2021 (málsskjal 59), tekur Fiskimálaráðið avgerð um at ganga umsóknini lutvíst á møti við hesi grundgeving:

*"Í umsóknini verður upplýst, ætlanin er at menna eina […]-framleiðslu av royktum makreli og sild. Umframt royking […] Víst verður á, at umsøkjarin hevur gjørt kanningar av teimum ymisku framleiðslunum, og serliga […] hava smá roykivirki langa siðvenju at […] og selja hann sum […]-framleiðslu fyri góðan prís.*

*Ætlanin er at brúka hølini, har gamla flakavirkið á Sandi var áður. Hetta virki skal gerast klárt, áðrenn verkætlanin kann byrja. Upplýst er, at serkøn fólk hava kannað, um hølini kunnu góðkennast til matvøruframleiðslu, og tað kunnu tey uttan stórvegis krøv.*

*Tað gongur ikki greitt fram av umsóknini, um hædd er tikin fyri møguligum tollforðingum á ES marknaðinum fyri liðugt framleidda vøru.*

*Fiskimálaráðið metir tó, at talan er um eina áhugaverda verkætlan, ið fevnir um menning, nýskapan og virðisøking av norðhavssild og makreli, í meðan hetta bert í avmarkaðan mun ger seg galdandi fyri svartkjaft.*

*Fiskimálaráðið hevur eftir eini samlaðari meting tikið avgerð um partvíst at ganga umsóknini á møti.*

*Sp/f 31.01.2011 fær játtað part av kvotu av norðhavssild og makreli at fiska árini 2021-2025, treytað av, at:*

- *Skjalprógv er fyri, at avtala er gjørd við ávíst fiskifar/ávís fiskifør um at fiska tillutaðu kvoturnar fyri umsøkjaran,*
- *Skjalprógv er fyri, at fíggjarlig orka er tøk hjá umsøkjaranum til verkætlanina, herundir játtan um møguliga lánsfígging,*
- *Frágreiðing verður latin Fiskimálaráðnum, sum ítøkiliga lýsir, nær virkið er klárt og løggilt at taka ímóti og at virka fiskin samsvarandi verkætlanini. Frágreiðingin skal eisini lýsa, at hædd er tikin fyri møguligum tollforðingum á ES marknaðinum fyri liðugt framleidda vøru…*

*Sp/f 31.01.2011 skal í seinasta lagi 25. oktober 2021 boða Fiskimálaráðnum frá, um hesar treytir eru loknar. Eru treytirnar ikki loknar innan hesa freist, fellur tilsøgnin burtur."*

Eg havi í telduposti, dagfestur 17. januar 2023, sent fyrispurning til Fiskimálaráðið fyri at vita, um endalig avgerð er tikin í málinum. Fiskimálaráðið hevur í telduposti 23. januar 2023 upplýst fyri mær, at endalig avgerð ikki er tikin í málinum. Umsóknin er framvegis til viðgerðar hjá Fiskimálaráðnum.

### 5.1.4.1 - Munnligar frágreiðingar

#### Jacob Vestergaard

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 svarar Jacob Vestergaard soleiðis uppá málið um Sp/f 31.01.2011:

*"Spurdur til seinast um avgerðina at tilluta kvotu til Sp/f 31.01.2011, hóast tilmælið frá umsitingini mælti frá, greiddi Jacob frá, at tilmælið um hatta felagið av Sandi møguliga var stuðulsvert, ella hvat tað var, og at vørurnar, sum teir skuldu framleiða, var nakað tað sama sum við Vaðhorn, at tað var ikki vist, at tað var marknaðaratgongd til tað á ES-marknaðinum og sovorðnum. Tað sama stóð í tilmælinum um Vaðhorn, at ein partur av tí var ikki. Men puljurnar vóru øgiliga lítlar, tað sum var, og so hugdu teir at umsóknunum, og umsóknin hjá Sandi var, kann man siga, innan fyri lógarinnar karmar, metti hann. Lítil íløga og rímiliga stór eginfígging, og teir høvdu kunngjørt og ætlanir um at brúka virkið á Sandi til [...] framleiðslu av fiskavørum har, ið hetta so skuldi innganga til tað. Og tá ið  nøgdirnar vóru tiknar við í metingina, so helt hann, at eitt felag, sum hevði ætlað sær í gongd við tað, tað kundi liggja innan fyri karmarnar um virðisøking og meirvirði, so tað helt hann vera í lagi. Og Sandoyggin hevur einki, sum hevur við uppisjóvarfisk at gera yvirhøvur. Tað er møguligt, at tað kanska hevur ligið eitt sindur í bakhøvdinum. Men hann helt eisini, at mann viðmerkti, at so skuldi mann onkursvegna skjalprógva, at teir kláraðu hetta, áðrenn nakað fór út. Og í hansara tíð í Fiskimálaráðnum kom ongantíð so langt, at teir fingu nakað út. Hann veit ikki heldur, hvussu er nú, um teir hava lokið treytirnar við tí. Men hann helt, at Sandshav, tað virkið, var ein verkætlan, sum kundi gingið í einum øki, har ið lítið 'virksemi' var, og at tað avgjørt fall inn undir tað, sum ætlanin var við hesum. So tað var í stuttum tað. Og tað virkið ætlaði bara at meirvirka, kann mann siga."*

#### Rógvi Reinert

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 svarar Rógvi Reinert soleiðis uppá málið um Sp/f 31.01.2011:

*"Spurdur um Sp/f 31.01.2011, har umsitingin mælti frá, tí virkið var ikki klárt, og har manglaði løggilding, greiddi Rógvi frá, at har vórðu forðingar, men at eingin, áðrenn játtandi svar er latið, kann fremja øll krøvini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Tí hvat nú, um tú fært noktandi svar? Í hesum førinum eru fimm umsóknir gingnar á møti av kanska 50. So tað er í prosentum bara 10. part sannlíkindi fyri at fáa positivt svar. Men har skal eisini sigast, at landsstýrismaðurin, tað var eisini við tilmæli frá honum, ikki kundi lata eina tilsøgn uttan viðmerkingar. Og beinleiðis treytin er, at mann vísir eina ítøkiliga ætlan, soleiðis at forðingarnar kunnu fara burtur. Men hann vil siga kortini, at tað at heilsufrøðiligu viðurskiftini hjá einum virki, sum ikki er byrjað enn, ikki eru komin uppá pláss, tað er øgiliga vanligt. Tað er ikki óvanligt.*

*Spurdur, um virkið var komið í gongd, svaraði Rógvi, at tað var tað ikki. Tað er so eitt annað mál. Tað arbeiða tey við nú, og eitt tað næsta verður, at nú eitt ár er farið, so má mann koma til eina greiða niðurstøðu, hvussu langt verkætlanin er komin. Men í tí sambandinum skuldi hann siga, at tað er ikki óvanligt, at tað gongur so mikið long tíð sum eitt ár, áðrenn mann veruliga kemur í gongd. Tað síggja vit í øðrum ætlanum, sum eru innan fyri skipanina, sum var í samgonguni frammanundan, sum eitur menningarkvotur, at tað tekur tíð."*

#### Símun Grønadal

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 27. oktober 2022 svarar Símun Grønadal soleiðis uppá málið um Sp/f 31.01.2011:

*"Umsóknin frá Sp/f 31.01.2011 varð gingin á møti fram um aðrar, og spurdur, um virksemið er komið í gongd hjá teimum, ella hvussu støðan er í dag, svaraði Símum, at tað ikki er komið gongd á enn. Tað virkið varð ikki tilmælt. Tilmælingarnevndin metti ikki, at tað virksemið kundi koma í gongd skjótt og innan fyri rímiliga tíð. Talan var um at fara undir framleiðslu av royktum fiski á einum virki, sum hevði ligið stilt leingi. Tí var metingini, at tað fór at taka langa tíð at fáa virkið klárt. Honum vitandi verður tað arbeitt við tí, men tað er framvegis ikki komið í gongd á virkinum, og tað er millum annað eisini orsakað av, at tað ikki er blivið góðkent av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni enn, greiddi Símun frá"*

#### 5.1.4.1.1 - Meting

Í hesum máli velur landsstýrismaðurin at víkja frá tilmælinum og lutar út kvotu til Sp/f 31.01.2011, hóast umsitingin metti umsóknina vera "helst ikki stuðulsverd". Umsitingin metir, at verkætlanin fevnir um menning, nýskapan í virðisøking. Umsitingin metir tó, at tað er ivasamt, nær bygningurin, sum nýtast skal til virksemið, gerst klárur. Harumframt vísir umsitingin á, at tað er ivasamt, um Sp/f 31.01.2011 hevur tikið hædd fyri tollforðingum í sambandi við útflutningi av vøruni.

Avgerðin um at játta part av kvotu er tó m.a. treytað av, at Sp/f 31.01.2011 sendir inn frágreiðing til Fiskimálaráðið, sum ítøkiliga vísir á, nær virkið er klárt og løggilt, og eina frágreiðing um, at hædd er tikin fyri tollforðingum á ES marknaðinum.

Út frá teimum munnligu frágreiðingunum hjá Jacob Vestergaard og Rógva Reinert meti eg tað vera greitt, at umsóknin hjá Sp/f 31.01.2011 meiri ella minni beinleiðis verður hildin upp ímóti umsóknini hjá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait, sí kap. 5.1.1 omanfyri.

Bæði umsitingin í Fiskimálaráðnum og Jacob Vestergaard eru samd um, at verkætlanin hjá Sp/f 31.01.2011 fevnir um menning, nýskapan og virðisøking. Hinvegin, so eru umsitingin og Jacob Vestergaard ikki samd um, at umsóknin frá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait fevnir um menning, nýskapan og virðisøking. Tó meti eg tað framganga greitt av skjalatilfarinum, at ongin ivi er um, nær verkætlanin hjá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait kann byrja.

Við at samanbera umsóknirnar báðar kann tí staðfestast, at onnur lýkur treytina um menning, nýskapan og virðisøking, men møguliga ikki treytina um, nær verkætlanin byrjar, meðan hin umsóknin møguliga ikki í eins stóran mun lýkur treytina um menning, nýskapan og virðisøking, men tó má metast lúka treytina um, nær verkætlanin byrjar.

Sambært metingarskjalinum, sum er skjal 1 til kunngerð um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir, so framgongur hetta viðvíkjandi umsóknum eftir § 49, stk. 1, 1. pkt.:

*"Umsóknir skulu viðgerast og metast við grundarlagi í teimum ítøkiligu upplýsingunum, ið umsóknin hevur um vinnuligu royndina ella verkætlanina og tí virksemi, ið er grundarlag undir teimum.*

*Ítøkiliga verður metingin serliga grundað á hesi fyrilit:*

1) *Í hvussu stóran mun stuðlar verkætlanin, royndin ella virksemið, ið umsóknin fevnir um, undir:*
    a) menning og nýskapan, tað veri seg innan tøkniligan útbúnað og mannagongdir, eins og vørumenning,
    b) virðisøking, tað merkir teir møguleikar fyri virðisøking, ið verkætlanin hevur til endamáls,
    c) at virka veiðuna umborð, og
    d) at virka veiðuna á virkjum á landi.

2) Í heildarmetingini verður dentur lagdur á, at fíggjarlig orka er tøk hjá umsøkjarunum til vinnuligu royndina ella verkætlanina, eins og hvørjar førleikar grundarlagið fyri vinnuligu royndini ella verkætlanini er bygt á…"

Harumframt framgongur, at:

"*Týðandi partur av metingini eru upplýsingar um, nær verkætlanin ella royndin byrjar, eins og útlitini fyri, at verkætlanin gerst virkin og sjálvberandi, tá tíðarskeiðið er farið.*

*Niðurstøðan í viðgerðini skal byggja á eina heildarmeting av vinnuligu royndini ella verkætlanini, nevnd í punktunum omanfyri, umframt onnur atlit sambært lóggávuni annars."*

Jacob Vestergaard byggir sína niðurstøðu á, at íløgan er lutfalsliga lítil, og eginfíggingin er lutfalsliga stór. Hóast ivasemi um, nær verkætlanin byrjar, velur Jacob Vestergaard at víkja frá tilmælinum og luta út kvotu til Sp/f 31.01.2011 við kravi um, at Sp/f 31.01.2011 í seinasta lagi 25. oktober 2021 (4 viku freist) lýkur allar treytirnar í avgerðarskrivinum frá Fiskimálaráðnum, dagfest 24. september 2021.

Jacob Vestergaard víkur soleiðis frá tilmælinum við at geva Sp/f 31.01.2011 eina 4 viku freist at fáa viðurskiftini í rætt lag.

Staðfestast kann, at Fiskimálaráðið framvegis ikki hevur tikið endaliga avgerð í málinum, og hevur Sp/f 31.01.2011 ikki fingið útlutað nakra kvotu.

Virksemið er soleiðis ikki komið í gongd, nú vit skriva 2023.

Kvoturnar eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. verða tillutaðar í eitt samanhangandi 5 ára tíðarskeið (skulu fiskast árini 2021-2025), har loyvið tó skal endurnýggjast árliga.

Eg meti ikki, grundgevingin hjá Jacob Vestergaard um, at verkætlanin hjá Sp/f 31.01.2011 í størri mun enn verkætlanin hjá Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait lýkur treytina um menning, nýskapan og virðisøking, er ósaklig ella í ósamsvari við sjófeingislógina ella kunngerðina.

Grundgevingina um, at íløgan í verkætlanina er lutfalsliga lítil og eginfíggingin lutfalsliga stór, meti eg heldur ikki vera ósakliga ella óviðkomandi.

Í metingarskjalinum til kunngerðina verður tó víst á, at týðandi partur av metingini eru upplýsingar um, nær verkætlanin byrjar, og gerst virkin og sjálvberandi. Metingarskjalið vísir eisini á, at metingin serliga byggir á menning, nýskapan og virðisøking. Spurningurin er so, um menning, nýskapan og virðisøking hevur størri týdning í metingini enn upplýsingar um, nær verkætlanin byrjar.

Sambært metingarskjalinum skal niðurstøðan byggja á eina heildarmeting. Tað ber tí ikki beinleiðis til at siga, at upplýsingar um, nær verkætlanin byrjar, hava størri týdning enn treytirnar um menning, nýskapan og virðisøking. Tó meti eg tað vera greitt, at um ein umsókn ikki lýkur treytirnar um menning, nýskapan og virðisøking, so kann umsóknin ikki gangast á møti.

Tað framgongur onki í kunngerðini ella metingarskjalinum um, nær ein verkætlan í seinasta lagi skal byrja. Tað stendur bara, at tað er týdningarmikið at upplýsa um hetta.

Jacob Vestergaard hevur mett, at um Sp/f 31.01.2011 fær viðurskiftini í rættlag innan eina ávísa freist, so er grundarlag fyri at ganga umsókn teirra á møti. Eg havi ikki fakligan førleika at meta um, hvørt tíðarfreistin hjá Sp/f 31.01.2011 at fáa viðurskiftini í rætt lag er realistisk ella ikki. Eg kann bara staðfesta, at verkætlanin hjá Sp/f 31.01.2011 ikki er komin í gongd enn.

Tað, at verkætlanin ikki er komin í gongd enn, hevur ikki beinleiðis við sær, at tilsøgnin hjá Jacob Vestergaard um at luta út kvotu til Sp/f 31.01.2011 við ávísum treytum, er í ósamsvari við sjófeingislógina ella er ósaklig. Avgerðin um at geva tilsøgn er tikin út frá teimum fortreytum og upplýsingum, ið vóru tøk, tá avgerðin varð tikin.

Í munnligu frágreiðingini nevnir Jacob Vestergaard, at: *"Sandoyggin hevur einki, sum hevur við uppisjóvarfisk at gera yvirhøvur. Tað er møguligt, at tað kanska hevur ligið eitt sindur í bakhøvdinum."*

Í sjófeingislógini og kunngerðini framgongur onki um, at atlit skal takast til tey øki, har lítið virksemi er frammanundan. Um so var, at Jacob Vestergaard hevur lagt dent á slík atlit í sambandi við sínar avgerðir, er helst talan um ósaklig atlit, sum helst ikki kunnu metast vera í samsvari við sjófeingislógina ella fyrisitingarlógina.

Út frá tilfarinum, ið hevur verið til taks, havi eg tó ikki grundarlag fyri at siga, at Jacob Vestergaard hevur beinleiðis lagt dent á slík viðurskifti. Í skrivliga samskiftinum við Fiskimálaráðið, og skrivligu avgerðunum, sum eru sendar út til umsøkjarnar, síggjast slík atlit ikki sum grundarlag fyri niðurstøðunum hjá landsstýrismanninum.

Samanumtikið havi eg ikki grundarlag fyri at siga, at avgerðin hjá Jacob Vestergaard um at víkja frá tilmælinum til fyrimuns fyri Sp/f 31.01.2011 er í ósamsvari við sjófeingislógina og/ella fyrisitingarlógina.

Í hesum sambandi skal eg viðmerkja, at eg meti, bæði Sp/f Glyggur Fishproteins and Bait og Sp/f 31.01.2011 lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu, men orsakað av avmarkaðu nøgdini hevur verið neyðugt hjá landsstýrismanninum at velja ein frá.

At Jacob Vestergaard, út frá einari ítøkiligari meting, velur at "satsa" uppá Sp/f 31.01.2011, hóast virksemið hjá teimum ikki er komið í gongd enn, er í sjálvum sær ikki ein fyrisitingarrættarlig skeiv avgerð.

Sambært kanningarsetninginum skal eg meta um løgfrøðiliga grundarlagið undir avgerðunum hjá Jacob Vestergaard í 2021 viðvíkjandi § 49, stk. 1, 1. pkt. Um umsøkjararnir, eftir at hava fingið tilsøgn um kvotu, síðani møguliga ikki lúka ásettar treytir, meti eg ikki vera part av kanningarsetninginum, sum eg eri settur at svara.

Fiskimálaráðið má í tí føri taka avgerð um, hvørt tilsøgnin skal takast aftur ella ikki.

### 5.1.5 - Umsókn frá P/F Vestmanna Fiskavirki

Umsóknin er latin Fiskimálaráðnum í telduposti 3. juli 2021 (málsskjal 60).

Í umsóknini verður á s. 3, punkt 6 (Lýsing av verkætlanini) víst á, at:

*"Aðalendamálið við hesari menningarætlanini er at skapa størri virðir burturúr uppisjóvarfiskasløgunum makreli og sild við at […]. Eisini verður arbeitt víðari við royndunum, at fáa meiri virðir burturúr at framleiða lidnar vørur […].*

Á s. 7, punkt 9 (Lýsing av ætlanini) verður víst á:

*"Ætlanin er at […] og harvið virðisøkja sild, makrel og svartkjaft.*

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin ikki er stuðulsverd við hesi grundgeving:

*"<u>Umsóknin er ikki stuðulsverd</u> – Sambært umsøkjaranum er aðalmálið við verkætlanini at framleiða […] og útbyggja virki til at kunna framleiða […]. Í tann mun verkætlanin fevnir um menning, nýskapan og virðisøking, er talan í stóran mun um framhald av verandi virksemi. Søkt verður um lutfalsliga stórar minstu nøgdir. Serliga viðvíkjandi svartkjafti verður søkt um sera stórar nøgdir uttan tó at vísa á nakra ítøkiliga virðisøking. Men víst verður ítøkiliga á, at henda nøgd er umráðandi fyri skiparaksturin. At stuðla skiparakstri fellur uttan fyri endamálið í § 49, stk. 1, 1. pkt."*

Í innanhýsis uppriti, dagfest 27. august 2021 (málsskjal 24), framgongur, at landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at tilluta Vestmanna Fiskavirki part av kvotu eftir § 49, stk. 1., 1. pkt. Av uppritinum framgongur m.a.:

*”Landsstýrismaðurin ætlar at tilluta Vestmanna Fiskavirki part av kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir…*

*Ítøkiliga er ætlanin at tilluta P/F Vestmanna Fiskavirki hesa kvotu:*
*Makrel: 800 tons*
*Norðhavssild: 1.000 tons*
*Svartkjaft: 2.000 tons*

*Landsstýrismaðurin hevur í tí sambandi biðið um eina løgfrøðiliga meting av um hetta er í lagi at gera ella um talan kann verða um lógarbrot.*

*Ein embætisbólkur í Fiskimálaráðnum hevur tann 2. august 2021 latið landsstýrismanninum sítt tilmæli. Í tilmælinum verður umsóknin hjá Vestmanna Fiskavirking mett ”ikki stuðulsverd”…*

*Í umsóknini og serliga í tilfarinum, sum er lagt við umsóknini, er nógv gjørt burtur úr skipakeypinum og víst verður á, at kvotan er umráðandi fyri skiparaksturin.*

*Vísast skal tó á, at umsøkjarin eisini hevur lýst eina verkætlan inni á virkinum viðvíkjandi makreli og norðhavssild.*

*Um ein sær burtur frá kvotu til skiparakstur og bert viðger verkætlanina inni á virkinum fyri seg, er talan um eina verkætlan, sum fevnir um menning, nýskapan og virðisøking av makreli og norðhavssild.*

*Tá metast skal um hvørt tað løgfrøðiliga er í lagi at tilluta kvotu til Vestmanna Fiskavirking, er tí neyðugt at býta umsóknina upp, soleiðis at makrelur og norðhavssild verða viðgjørd fyri seg og svartkjaftur fyri seg:*

*<u>Viðvíkjandi kvotu av makreli og norðhavssild:</u>*

*Viðvíkjandi makreli og norðhavssild, verður í tilmælinum serliga víst á tvey viðurskifti. Hesi eru:*

1. *Í tann mun verkætlanin fevnir um menning, nýskapan og virðisøking, er talan í stóran mun um framhald av verandi virksemi.*
2. *Søkt verður um lutfalsliga stórar minstu nøgdir (makrel: 2.300 tons og norðhavssild: 2.500 tons)*

*<u>Viðv. nr. 1:</u> Umsøkjarin upplýsir, at virkið hevur gjørt íløgu í maskinur til at […], og er virkið klárt at hagreiða makrel og sild. Talan er fyri ein part um framhald av verandi virksemi, men ætlanin er at økja um flakaframleiðsluna ígjøgnum árini, soleiðis at meginparturin av rávøruni verður virðisøktur til [x] í 2024 og 2025.*

*Hóast talan partvís er um framhald av verandi virksemi, kann grundgevast fyri, at virkið er í eini tilgongd, har ætlanin er at økja um […] framleiðsluna ár fyri ár. Hetta er nýskapandi í mun til at fiskurin annars bert verður heilfrystur. Eisini hevur virkið ætlanir um at gera eina hvat-ber-til kanning saman við viðkomandi vitanarstovnum, fyri at eyðmerkja hvørjir møguleikar eru fyri at gagnnýta […] betri.*

*Mett verður tí, at landsstýrismaðurin kann grundgeva fyri, at talan er um menning, nýskapan og virðisøking í mun til makrel og norðhavssild.*

*<u>Viðv. nr. 2:</u> Ætlanin er bert at tilluta 800 tons av makreli og 1.000 tons av norðhavssild til umsøkjaran. Hetta er nógv minni enn minstu nøgdirnar, ið søkt varð um, sum vóru 2.300 tons av makreli og 2.500 tons av norðhavssild.*

*Tá talan ikki er um so stórar nøgdir, verður mett, at nøgdirnar betur kunnu rúmast innan fyri samlaðu kvotuna, sum skal útlutast. Mett verður ikki, at atlitið til minstunøgdir er so týðandi longur, nú kvotan er so nógv minkað.*

*Samanumtikið verður mett, at tað løgfrøðiliga kann grundgevast fyri at tilluta Vestmanna Fiskavirki 800 tons av makreli og 1.000 tons av norðhavssild.*

*<u>Viðvíkjandi kvotu av svartkjafti:</u>*
*Viðvíkjandi svartkjafti, verður í tilmælinum serliga víst á tvey viðurskifti. Hesi eru:*

1. *Víst verður ikki til nakra ítøkiliga virðisøking, men víst verður ítøkiliga á, at henda nøgd er umráðandi fyri skiparaksturin. At stuðla skiparakstri fellur uttanfyri endamálið í § 49, stk. 1, 1. pkt.*
2. *Søkt verður um sera stórar minstu nøgdir av svartkjafti (5.000 tons)*

*<u>Viðv. nr. 1:</u> Upplýst verður í umsóknini, at virkið er ikki klárt at framleiða stórar nøgdir av svartkjafti og er hendan framleiðslan tí ikki nærri lýst í umsóknini. Hinvegin verður víst á, at svartkjaftakvotan, ið søkt er um, er sera avgerðandi fyri skiparaksturin, nú kvoturnar skulu út á egið skip.*

*Í § 49, stk. 1, 1. pkt. í sjófeingislógini, er ásett, at kvota av svartkjafti, norðhavssild og makreli kann latast til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgunum.*

*Í kunngerð um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir (kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021) eru treytir eisini ásettar til umsóknir eftir kvotum sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. í løgtingslógini. Her verður m.a. ásett í § 4, at umsóknin skal nágreiniliga lýsa eina vinnuliga roynd ella verkætlan, sum kvotan skal nýtast til, og at umsóknin skal lýsa, hvussu vinnuliga royndin ella verkætlanin, iðkvotan skal nýtast til, kann skapa ella stimbra undir menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av fiskaslagnum.*

*Hetta er ikki lýst í umsóknini. Sum víst á, verður upplýst í umsóknini, at virkið er ikki klárt at framleiða stórar nøgdir av svartkjafti og at hendan framleiðslan tí ikki er nærri lýst í umsóknini.*

*Hinvegin verður víst á, at svartkjaftakvotan, ið søkt er um, er sera avgerðandi fyri skiparaksturin, nú kvoturnar skulu út á egið skip. Sum nevnt fellur beinleiðis stuðul til skiparakstur uttanfyri endamálið í § 49, stk. 1, 1. pkt í sjófeingislógini.*

*<u>Viðv. nr. 2:</u> Ætlanin er bert at tilluta 2.000 tons, sum er nógv minni enn minstu nøgdirnar, ið søkt varð um. Hóast hetta, so verður henda framleiðslan ikki lýst nærri, sum menning, nýskapan og virðisøking í verkætlanini.*

*<u>Mett verður ikki, at tað løgfrøðiliga er heimild fyri at veita virkinum kvotu av svartkjafti, tí treytirnar í lóggávuni eru ikki uppfyltar.</u> Upplýst verður í umsóknini, at virkið er enn ikki klárt at framleiða stórar nøgdir av svartkjafti og er henda framleiðslan tí ikki nærri lýst, sum virðisøking í umsóknini. Hinvegin verður ítøkiliga víst á, at henda nøgd er umráðandi fyri skiparaksturin. At stuðla skiparakstri fellur uttanfyri endamálið í § 49. stk. 1, 1. pkt.*

*Tað er ikki greitt hvar ætlanin er at taka hesi tonsini til Vestmanna Fiskavirking frá. Men vísast skal á, at um ætlanin er at taka frá hinum trimum tilmæltu verkætlanunum, so kann tað viðføra, at farið verður niður um minstunøgd, sum tey hava søkt um. Hetta kann viðføra, at grundarlagið fyri hinum verkætlanunum verður ov vánaligt, soleiðis at tað ikki gerst lønandi hjá hinum umsøkjarunum at fara í gongd við verkætlanina."*

Í avgerðarskrivi til Fiskivinnustovuna, dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin at ganga umsóknini á møti við hesi grundgeving:

*"<u>P/F Vestmanna Fiskavirki</u>*
*Í tilmælinum verður skrivað, at umsóknin ikki er stuðulsverd.*

*Í hesum sambandi verður millum annað víst á í tilmælinum, at aðalmálið er at framleiða […] úr sild og makreli og at útbyggja virkið til framleiðslu úr svartkjafti. Søkt verður um stórar minstunøgdir, serliga viðvíkjandi svartkjafti, uttan tó at vísa á nakra ítøkiliga virðisøking. Víst verur á, at henda nøgd er umráðandi fyri skiparaksturin. At stuðla skiparakstri fellur uttanfyri endamálið í § 49, stk. 1, 1. pkt.*

*Eg eri av tí fatan, at niðurstøðan um svartkjaftin í tilmælinum er røtt, og tí fevnir avgerð mín um tillutan av kvotu ikki um svartkjaft.*

*Viðvíkjandi makreli og sild so verður avgerð tikin um at luta hesi verkætlan eina avmarkaða nøgd av makreli og sild. Í øðrum skipanum innan royndir og verkætlanir hevur umsøkjarin víst á evni at menna eina verkætlan júst úr makreli og sild. Tillutan av hesi kvotu styrkir rávørugrundarlagið í hesi ætlan og harvið møguleikanum fyri framhaldandi menning.*

*Leggjast skal afturat, at tøka nøgdin í hesum umfari til verkætlanir á landi er lutfalsliga lítil. Avmarkaðu nøgdirnar kunnu tí best brúkast til verkætlanir, ið tørva lufalsliga lítla rávørunøgd, ella sum styrkur til rávørugrundarlagið til verkætlanir í framhaldandi menning innan nýskapan og virðisøking.*

Í skrivi, dagfest 24. september 2021 (málsskjal 61), til P/F Vestmanna Fiskivirki tekur Fiskimálaráðið avgerð um at ganga umsóknini partvíst á møti:

*"Fiskimálaráðið metir, at talan er um eina áhugaverda verkætlan, ið fevnir um menning, nýskapan og virðisøking av norðhavssild og makreli.*

*Viðvíkjandi svartkjafti verður søkt um sera stórar nøgdir, tó uttan at víst verður á nakra ítøkiliga viðirsøking. Men víst verður serliga á, at henda nøgd er umráðandi fyri skiparaksturin. At stuðla skiparakstri fellur uttanfyri endamálið í § 49, stk. 1, 1. pkt. í sjófeingislógini.*

*Fiskimálaráðið hevur eftir eini samlaðari meting tikið avgerð um partvíst at ganga umsóknini á møti."*

### *5.1.5.1 - Munnligar frágreiðingar*

#### *Jacob Vestergaard*

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 svarar Jacob Vestergaard soleiðis uppá málið um P/F Vestmanna Fiskavirki:

*"Spurdur um P/F Vestmanna Fiskavirki og uppritið, sum umsitingin í Fiskimálaráðnum læt landsstýrismanninum hesum viðvíkjandi, greiddi Jacob frá, at hann skilti ongantíð, at tað var neyðugt hjá honum at fáa eitt heilt upprit. Tey kundu sagt honum, at tað ikki var grundarlag fyri at tilluta Vestmanna Fiskavirki svartkjaft. Men hann fekk so eitt heilt upprit burtur úr tí. Tað var kanska tí, at hann var als ikki í Fiskimálaráðnum. Nú eru vit í 2021. Tað er beint aftan á Ólavsøku. Nú vórðu ongi politisk kjak. Politisku kjakini vóru liðug, tá lógarbroytingin var. Hann gekk so og grundaði á hetta, sum hann hevði fingið - tilmælið, sum hann hevði lisið ígjøgnum nakrar ferðir, og so metti hann út frá tí. Eftir pkt. 1 helt hann fast við Tavuna í Leirvík. Sjálvandi hevði hann verið og vitjað øll virki í Føroyum hann hevði kanska verið fleiri ferðir hesi árini og kendi rímiliga væl, hvat tey gjørdu. Hann brúkti ógvuliga nógv Rógva í sparringini av hesum, tá ið tilmælið kom í 2021. So hann gekk og grundaði á hetta tilmælið og hvørja heimild, hann hevði og tugdi uppá, hvat var rímilig og saklig grundgeving. Í høvuðsheitinum helt hann, at hann valdi eina meira trygga gongd, helt hann í øllum førum. Tavan í Leirvík hevði arbeitt næstan bara við uppisjóvarfiski ella gullaksi og hevði havt eina fína framleiðslu av sild, sildabitum og øðrum. Og tað var fyri honum rættiliga greitt, at teir vóru partur av tí. Hann kagaði í umsóknina úr Vestmanna, hon var ógvuliga undarliga samansett, umsóknin sjálv, tað kundi hann viðganga. Men Vestmanna hevði, síðani alt tað við makreli byrjaði, fingið onkrar royndarkvotur frá Jákupi Mørkøre, hevði burturav roynt at fáa spesialiserað seg sum eitt lítið virki til at viðgera uppisjóvarfisk. Og í 2021 var tað kanska tað virkið við tí nøgdini, teir hóast alt fingu, sum fekk besta prísin fyri makrel. Teir fingu fyrst makrel og høvdu ymiskar ætlanir um at útbyggja bæði til makrel og sild og eisini svartkjaftaframleiðslu. Tí var tað, at hann spurdi um svartkjaft. Hann helt sum útgangsstøði við teimum royndum, sum Vestmanna Fiskavirki hevði, við tí fígging, sum var, og við teimum royndum, sum teir høvdu gjørt sær, at tað var sakliga grundað, at teir kundu halda fram at virðisøkja og menna tað við uppisjóvarfiski. Tó kanska tann meiri trygga loysnin, tí hann visti, at teir dugdu tað. Ja, høvdu í royndum og veru niðurgoldið virkið rímiliga nógv og høvdu støðuga og góða framleiðslu, sum hetta so kundi vera við til at stimbra og reka víðari. Teir høvdu jú ætlanir um aðra virðisøking av sild og makreli og eisini av svartkjafti. Og tá ið hetta byrjaði í kjakinum, tá ið hann hugdi at hesum puljunum og metti, um teir kundu fingið ein part av svartkjafti, so at tær royndirnar, sum teir tá tosaðu um, tær kundu halda fram, varð niðurstøðan nei, og sjálvandi, so var tað nei. Tað vísti seg so eftirfylgjandi, at teir keyptu skip. Men teir blandaðu onkursvegna skip upp í sína umsókn,*

*Spurdur, um tað ikki skyggir eitt sindur í eyguni, at P/F Vestmanna Fiskavirki í upprunaliga tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum er í bólkinum "ikki stuðulsverd" og síðani endar við at fáa játtað kvotu, svarar Jacob játtandi og greiðir frá, at tað er hann, sum flytir hana upp hagar. Og tað er partvíst orsakað av, at*

*Vestmanna Fiskavirki hevði prógvað ígjøgnum nøkur ár, at teir vóru førir fyri at arbeiða pelagiskan fisk. Teir arbeiddu í høvuðsheitum bara pelagiskan fisk og høvdu miðvíst lagt seg eftir tí og høvdu alla tíðina betrað seg, høvdu alla tíðina fingið betri framleiðslu, rationella framleiðslu, høvdu fingið lønsemi í tað og høvdu ætlanir um at koma víðari við at gagnnýta betri, enn teir høvdu gjørt. Hann helt, at tað, sum Vestmanna so fekk, og sum tað endaði við, at tað heilt avgjørt er innan fyri tað lógarmark, sum hann helt, at umsóknirnar og kunngerðin, metingarskjølini annars søgdu. Tað helt hann eisini, at í hesum førum Rannvá (Sólheim, red.) váttar, burtursæð frá at svartkjafturin ikki bleiv ein partur. Sjálvandi skrivaði hann eitt avgerðarskriv, ella Rógvi skrivaði eitt avgerðarskriv, har teir báðir sparraðu, sum er hansara. Men í tí dagliga sparrar hann við fólk um løgfrøðiligar spurningar altíð innanhýsis í Fiskimálaráðnum.*

*Spurdur um, nær hann bað umsitingina í Fiskimálaráðnum um eitt upprit um P/F Vestmanna Fiskavirki, greiddi Jacob frá, at tað var í hansara samskifti við Rógva. Hann gongur suðuri heima hjá sær sjálvum og grundar á hetta. Tað er lítið av fólki í ráðnum. Rannvá Sólheim er nokk har, tí hon kom so seint, so hon er ikki farin í feriu uppá sama máta. Tað eru eingi fólk í ráðnum akkurát hasa tíðina, men Rógvi er aftur til arbeiðis, og hann sparrar nokkso nógv við Rógva, kann mann siga, og so fer hann víðari í skipanini við teimum ivamálum, sum eru. So tað er nokk tað. Tað er í einum av teimum telefonsamrøðunum við Rógva, at hann biður Rógva hyggja at onkrum umsóknum, umsóknini hjá Vestmannaog onkrum øðrum og siga sær aftur og sovorðið. So tað er meira Rógvi, sum í sparring við hann fer niður í umsóknirnar aftur og hyggur at teimum viðvíkjandi tí, sum hann hugsar. Men sum útgangspunkt við Vestmanna, so er tað eitt virki, sum burturav hevur roynt at virðisøkja og gagnnýta makrel, uppisjóvarfisk. Tað hevur gingið væl hjá teimum ta tíðina, teir hava skapað arbeiðspláss og høvdu ætlanir um víðari virðisøking og annað. Tí helt hann avgjørt, at teir fullu inn undir tað, og tá hann sigur, at hann valdi tað trygga, so høvdu teir prógvað, at teir høvdu klárað tað. Eitt annað, sum var ógvuliga nógv uppi at venda, serliga Poul Gregersen í Fiskavirkinum í Gøtu sum altíð var í luftini um hetta kappingaravlagandi elementið, at nøkur fingu uppisjóvarfisk, makrel, sum hevði verið, áðrenn mann lutaði út til virki, sum høvdu sítt høvuðsgrundarlag í botnfiski, at tey so eisini fingu makrel, sum tey kanska vunnu eitt sindur av peningi avog kundu yvirbjóða Páll, tá hann skuldi keypa tosk og longu á uppboðssøluni. Hann skuldi ikki siga, at tað kjakiðin ikki hevur verið eitt sindur inni í hansara høvdi, men í øllum førum so hevði hann ta fatan, at tey, sum burturav taka sær av uppisjóvarfiski, eru meira miðvís við tí framleiðsluni, enn tey, sum bara høvdu eitt vanligt siðbundið flakavirki, sum so onkursvegna skal royna onkra aðra framleiðslu av. Ja, kanska tað spældi eitt lítið sindur inn, at Vestmanna burturav hevði fingist við og dugdi tað og kláraði framleiðsluna og hevði havt ein skilagóðan rakstur. So tað tiltalaði hann í grundgevingini har, og hann helt ikki, at umsitingin var ósamd við honum um tað. Tað var í lagi, at teir fingu ein part av makreli og sild, men svartkjaftur var ikki komin uppá tal. Hann tímdi als ikki at skifta meiri orð um tað. Tá ið hatta varð niðurstøðan, so góðtók hann tað. Hann fór ikki afturumaftur og spurdi hví og hvat."*

### Rógvi Reinert

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 svarar Rógvi Reinert soleiðis uppá málið um P/F Vestmanna Fiskavirki:

*"Spurdur um ætlanina hjá landsstýrismanninum at luta kvotu eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. til P/F Vestmanna Fiskivirki í 2021, hóast umsitingin í tilmælinum metti verkætlanina vera ikki stuðulsverda, greiddi Rógvi frá, at tað, sum var við Vestmanna Fiskavirki, var, at eftir at landsstýrismaðurin hevði havt tilmælið hjá sær í einar 10 dagar, frá 2. august og fram til 12. august, tá er líkasum ikki nøkur viðgerð ímillum teirra, ella hann visti*

*einki um tað. Og tað helt hann eisini var natúrligt. Hann hevur tilmælið hjá sær, hann lesur tilmælið, hann hugsar tað ígjøgnum, og hann vendir sjálvandi aftur, um tað er nakað, sum hann hevur at siga um tað. Tá ið teir koma út í hálvan august, so nevnir hann, at Vestmanna Fiskavirki er eitt av teimum fáu virkjunum í Føroyum, ið hevur fingið tað á byrjunarstøði at bera til at gagnnýta makrel, sild og svartkjaft í smáskala. Tað er soleiðis, at vit hava 4 risastór virki í Føroyum sammett við Vestmanna Fiskavirki. Tey framleiða kanska eini 1.000 tons um dagin, og kanska onkur framleiðir yvir 2.000 tons um dagin. Men við atliti at fjølbroytni og nýmenning og virðisvøkstri, so hevur mann eina politiska fatan. Hana hevði undanfarna samgongan eisini í menningarkvotunum, at byggja ein meira fjøltáttaðan ídnað upp, har ið makrelur, sild og svartkjaftur, serliga makrelur og sild, eisini falla til tey smærru virkini. Mann hevur virki, sum við nógv minni rávøru enn tey stóru klára at gagnnýta makrel og sild til sínar servørur. Vestmanna Fiskavirki er so eitt av teimum, sum hevur roynt hendan leistin síðani kanska 2011, har á leið, og hevur sum eitt av teimum heilt fáu, kanska Tavan í Leirvík er eitt annað, megnað at ment makrel og sild í smávirkisframleiðslu til lidnar vørur. Landsstýrismaðurin metti, at nøgdin, sum er tøk í hesi skipanini, er so ómetaliga lítil, og sannlíkindini fyri, at mann nær endamálinum í lóggávuni við nýskapan og menning og nýskaparamálum, er kanska avmarkað hjá nógvum. Tí tað er øgiliga torført at fara í gongd, og tí helt hann, at man røkkur betri endamálinum í lógini við at byggja víðari uppá tað, sum Vestmanna hevur gjørt, tí teir skriva sjálvir í síni umsókn, at teir síggja, at har eru vakstrarmøguleikar framhaldandi á virkinum við tí. Ja, gera framhaldandi vakstrarmøguleikar á virkinum, og tí er ógvuliga gott at fáa nakað av nøgd afturat. Men Vestmanna kom eisini í eina aðra serstøðu, kann mann siga. Vit mettu ikki, at tað var rætt at leggja svartkjaft inn á virkið, og tað var tí, at tey smáu virkini hava havt ómetaliga stórar trupulleikar við at menna svartkjaftin av teimum orsøkum, sum tað er. Tað kann mann tosa leingi um. Tí valdi landsstýrismaðurin at gera eina neyðsemju, sum tilmælið í roynd og veru einki sigur um. Og tað er at geva Vestmanna eina tilsøgn, men bara uppá makrel og sild. Og tað var eisini nakað, sum var í samskifti ímillum hann og landsstýrismannin. Hann segði, at tað var ikki rætt at leggja svartkjaftin inn, tí at menningarmøguleikarnir inni á virkinum vóru ikki so eyðsýndir sum fyri makrel og sild. Og so hevur landsstýrismaðurin eisini biðið um løgfrøðiliga ráðgeving um tað sama. Og tað var ikki nakað, sum teir sum so umrøddu nógv í felag. Hann helt, at landsstýrismaðurin kunnaði seg um tað ógvuliga stutt.*

*Spurdur, um talan var um løgfrøðiliga ráðgeving úr Fiskimálaráðnum ella uttanhýsis, svarar Rógvi, at tað var innanhýsis í ráðnum. Rógvi greiddi frá, at tað var Rannvá, sum læt løgfrøðiliga ráðgeving. Landsstýrismaðurin segði tað við hann leysliga, helt hann: "Tú, hatta har við svartkjaftinum har, eg havi biðið um løgfrøðiliga ráðgeving um tað eisini." So landsstýrismaðurin hevur fingið tvær ráðgevingar. Eina frá honum um, at svartkjafturin er ikki tað rætta at leggja inn á hatta virkið. Og tað er eisini tí, at umsøkjarin sigur tað sjálvur, at hann hevur ikki nakra beinleiðis rakstrarætlan at vísa á, men hann hevur eisini eitt annað endamál, sum ikki kemur undir lógina. Tað er tí, teir eru raðfestir so lágt. Tað er nettupp til skipakeyp, og hetta er ikki til skipakeyp. Tískil varð niðurstøðan hjá landsstýrismanninum, at tók mann svartkjaftin burturúr, so var tað í roynd og veru ein tilsøgn, sum var heilt annarleiðis enn tilmælið, og sum er heilt annarleiðis enn umsóknin. Tí bleiv tað gjørt. So at byggja víðari uppá eina ætlan, sum var farin til gongu, heldur enn at leggja tað til nakað heilt annað, tí at rávørunøgdin var so ómetaliga lítil. Har kundi hann siga, at tað er tað sama galdandi fyri Leirvík í Tavuni, men har er so fult samsvar ímillum tilmælið og tað, sum landsstýrismaðurin sigur. Tavan hevur eisini verið ógvuliga virkin í fiskivinnuroyndum og øðrum royndarskipanum við at menna framleiðslu av eitt nú smáum sildabitum í laka og annað og arbeiðir eisini við at skera fløk meira, kanska makrel. So mann kann siga, at avgerðin um Tavuna og Vestmanna er tann sama. Rávørunøgdin er so lítil, og her eru nakrar*

*verkætlanir, sum eru farnar í gongd, og har eru vakstarmøguleikar - fyri at fylgja orðingunum í lóggávuni um menning og nýskapan og menningarendamálið.*

*Spurdur um, nær landsstýrismaðurin bað um eitt nýtt upprit viðvíkjandi P/f Vestmanna Fiskavirki, svarar Rógvi, at hann veit ikki nær. Landsstýrismaðurin hevur ikki biðið hann um nakað upprit, men er farin beinleiðis til løgfrøðingin sjálvur. Upprunaliga tilmælið frá umsitingini er frá 2. august 2021. Uppritið viðvíkjandi P/F Vestmanna Fiskavirki er frá 27. august, so hann metir, landsstýrismaðurin hevur biðið løgfrøðingin kanna spurningin helst 10. ella 12. august. Hann minnist seg hava tosað við landsstýrismannin einaferð tá, har hann sigur: "og forrestin, Rógvi, eg havi biðið løgfrøðingin hjá okkum ráðgeva meg løgfrøðiliga um møguleikar í svartkjaftinum". Tað var líkasum sovorðið, landsstýrismaðurin følir, at niðurstøðan um ikki at taka svartkjaft við, hon liggur enn á tryggari grund, gekk hann bara út frá. Men hann spurdi ikki um, hví landsstýrismaðurin í roynd og veru hevði spurt løgfrøðingin. Hann segði bara, at tað hevði hann gjørt."*

### *Rannvá Sólheim*

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 27. oktober 2022 svarar Rannvá Sólheim soleiðis uppá málið um P/F Vestmanna Fiskavirki:

*"Spurd um endurskoðaða tilmælið viðvíkandi P/F Vestmanna Fiskivirki, og hví landsstýrismaðurin vildi tilluta part av kvotu til felagið, greiddi Rannvá frá, at tað visti hon ikki. Sum hon mintist tað, so bleiv hon kallað upp til Rógva. Í Fiskimálaráðnum sita tey í Fiskivinnustovuni, tey sita á triðju hædd. Rógvi og landsstýrismaðurin, teir sita á fjórðu hædd, men har er trappa ímillum. Ja, sum hon mintist tað, so bleiv hon kallað upp til hansara. Hann ringdi til hennara, og so fór hon upp til hansara. So segði hann, at landsstýrismaðurin ætlaði at tilluta Vestmanna Fiskavirki part av kvotuni til vinnuligar royndir og verkætlanir, og nevndi, hvussu nógv tons tað var. Og so var tað tað, at í teirra tilmæli mettu tey, at verkætlanin ikki var stuðulsverd, og so bað hann tey um eina løgfrøðiliga meting, um landsstýrismaðurin framdi lógarbrot við at luta út til Vestmanna Fiskavirki. Hon svaraði, at tað kundi hon gott gera, og so segði hon, at hon gjarna vildi hava Símun eisini at sparra við, og tá var Ólavur givin, mintist hon rætt. Jú, tað var hann. Og tey hugdu so aftur uppá umsóknina hjá Vestmanna Fiskavirki, og nú var talan um nógv smærri nøgdir, enn tey bóðu um í umsóknini. Men tey mettu út frá umsóknini, at tað var ikki ólógligt at tilluta Vestmanna Fiskavirki hesa kvotuna, sum tey nú blivu spurd um. Tí at mann kann siga, at tey bygdu víðari uppá tað, sum longu var byrjað, og har var ein ætlan um at økja flakaframleiðsluna ár fyri ár.Tey høvdu eina maskinu, sum eitur Baader 220, sum bara kundi flakaskera smáan fiska. Tey høvdu so ætlanir um at flakaskera størri fisk eisini. Størri makrel og sild. Tey hildu, at hetta bleiv eitt størri grundarlag undir hesum. At tað rúmaðist eisini innan fyri hetta her við menning og nýskapan, serliga í mun til atlitið, at alternativið er at gera, sum øll hini gera. Tað er at selja tað bara heilfryst. Tey viðmældu tað so bara viðvíkjandi norðhavssild og makreli, ikki viðvíkjandi svartkjafti. Tey sóu onga menning, altso P/F Vestmanna Fiskivirki greiddi ikki frá nakrari menning ella nýskapan viðvíkjandi svartkjafti. Orsøkin til, at tey líkasum vórðu mett ikki stuðulsfør av fyrstan tíð, tað kann man kanska spyrja, nú tá ið tað broytist - ella mann sigur í øllum førum, at tey ikki meta, at tað er lógarbrot, at mann broytir tað. Altso umsóknin, og serliga kanska skjølini í málinum, bera so nógv brá av, at tey skulu hava eitt nýtt skip. Tá mann søkir eftir 1. pkt, er ikki talan um nýtt skip. Men tá tey so fóru at hyggja at tí aftur, so hevði P/F Vestmanna Fiskavirki altso eina menningar- og nýskaparætlan viðvíkjandi makreli og norðhavssild. Tí mettu tey ikki, at talan var um lógarbrot at tilluta Vestmanna Fiskavirki 800 tons av makreli og 1.000 tons av norðhavssild. Men tey mettu ikki, at tað var grundarlag fyri at tilluta teimum svartkjaft.*

*Spurd, um nøgdirnar, sum Rannvá nevnir í endurskoðaða tilmælinum, eru tær somu sum í umsóknini, svaraði Rannvá, at tað er tað ikki. í umsóknini skal mann skriva ynskiliga nøgd og minstu nøgd. Og har skrivaði Vestmanna Fiskavirki 2.300 ella okkurt sovorðið, helt hon. Altso tey skrivaðu eina nógv størri nøgd, enn tey so fingu.*

*Spurd, um nógvi svartkjafturin, sum Vestmanna Fiskivariki søkti um, skuldi brúkast til at fíggja skipakeyp við, svaraði Rannvá, ja, Vestmanna Fiskavirki, tey skrivaðu eina ynskiliga nøgd uppá 3.800 av makreli og minstu nøgd uppá 2.300. Og av norðhavssild søktu tey um 4.400 og minstu nøgd 2.500 og av svartkjafti 8.000 og minstu nøgd 5.000. Og tað, sum tey blíva spurd um, tað er 800 tons av makreli í mun til, at tey ynsktu 3.800, norðhavssild 1.000 í mun til 4.400 og so svartkjaft 2.000, men tað frámæla tey so, og tað bleiv tað heldur ikki. Tey fingu so ikki akkurát hasi tonsini. Tað bleiv justerað eitt sindur, men altso, tað skal ikki skiljast soleiðis, at tey broyttu teirra tilmæli, men hetta var eitt upprit í mun til, um tey mettu, at landsstýrismaðurin gjørdi nakað ólógligt við at tilluta Vestmanna Fiskavirki ein part av kvotunum. Har mettu tey so, at tað kundi rúmast innan fyri lóg og kunngerð, oyðublað og metingarskjal, at viðvíkjandi norðhavssild og makrelifingu teir ta nøgdina, sum bleiv spurt um tá.*

*Spurd, um umsitingin á nakran hátt føldi seg trýsta til at blástempla umsóknina frá Vestmanna Fiskavirki, svaraði Rannvá, at tað føldu tey als ikki. Altso tey tosaðu als ikki við landsstýrismannin yvirhøvur um tað heldur. Rógvi spurdi bara, um hon kundi gera eitt upprit um tað. Ella hon veit ikki, um hann nevndi orðið upprit, men um at hon kundi gera eina meting av hesum her. Og eisini tá ið svarið kom, ella tá hon hevði givið honum hetta - ella hon helt, at tað var Andras, sum sendi tað til hann. Altso hann takkaði bara fyri.*

*Í sambandi við, at landsstýrismaðurin tók avgerð í málinum, sum víkti frá tilmælinum hjá umsitingini, verður Rannvá spurd, hvør ráðgav honum løgfrøðiliga, um hann fekk løgfrøðiliga ráðgeving ella aðra ráðgeving. Til hetta svaraði Rannvá, at tað visti hon ikki. Hon varð als ikki kontaktað yvirhøvur, so tað visti hon ikki. Eingin visti nakað, fyrr enn avgerðin kom, altso um hon hugsar um tey, embætisbólkin. Tey vistu ikki. Hon bleiv spurd um hatta við Vestmanna Fiskavirki, og so góvu hon og Símun eitt svar, og so fingu tey hesa endaligu avgerðina."*

### *Símun Grønadal*

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 27. oktober 2022 svarar Símun Grønadal soleiðis uppá málið um P/F Vestmanna Fiskavirki:

*"Spurdur um, hví landsstýrismaðurin ætlaði at tilluta P/F Vestmanna Fiskavirki part av kvotuni, svaraði Símun, at tað veit hann ikki. Spurdur, um umsitingin á nakran hátt varð trýst til at blástempla umsóknina frá P/F Vestmanna Fiskavirki, svaraði Símun nei. Umsitingin fekk ein fyrispurning um tað, og tey viðgjørdu tann fyrispurningin. Tað vóru serliga Símun og Rannvá, sum viðgjørdu fyrispurningin. Út frá umsóknartilfarinum, sum kom inn, varð mett, at denturin, sum varð lagdur á skipakeyp, var rættiliga stórur. Høvuðsdenturin varð lagdur á tað, og tí søgdu tey í tilmælinum, at skipakeyp kemur ikki undir stk. 1 í lógini. Tí var tann umsóknin ikki við í tilmælinum. Tá fyrispurningur kemur frá landsstýrismanninum, so framgongur tað eisini í umsóknini, sum P/F Vestmanna Fiskavirki sendi inn, at tey høvdu eina ætlan fyri virking av bæði sild og makreli. Tey søktu*

*eisini um svartkjaft, men høvdu samstundis eisini í tí innsenda tilfarinum sagt, at tey ikki vóru klár at viðgera svartkjaft. Tey høvdu onga ætlan fyri svartkjaft, og tí varð ikki hildið, at hann kundi tillutast.*

*Spurdur um, hvat tað er, sum ger, at umsóknin frá P/f Vestmanna Fiskavirki fer frá at vera ikki-stuðulsverd til, at mann kann stuðla henni, greiddi Símun frá, at tey hava bert mett um, um lógarheimild var fyri tí. Landsstýrismaðurin bað um eina løgfrøðiliga meting av, um hetta var í lagi at gera, ella um talan kundi vera um lógarbrot. Har er ein lýsing í umsóknini um, hvussu tey skulu framleiða sild og makrel og skera tað til flak og annað. Har vóru grundgevingar í mun til § 49, stk. 1 í lógini at framleiða sild og makrel, og tí varð mett, at tað ikki var lógarbrot."*

### 5.1.5.1.1 - Meting

Í upprunaliga tilmælinum frá umsitingini til Jacob Vestergaard verður mett, at umsóknin ikki er stuðulsverd.

Eftir fyrispurningi frá Jacob Vestergaard metir umsitingin í Fiskimálaráðnum tó í innanhýsis uppriti frá 27. august 2021, at grundarlag er fyri at tilluta ávísa nøgd av makreli og sild, men ikki svartkjafti.

Umsóknin fer soleiðis frá at verða mett sum "ikki stuðulsverd" til at verða mett sum stuðulsverd viðvíkjandi makreli og sild, men ikki svartkjafti.

Formliga grundgevingin fyri at ganga umsóknini partvíst á møti er, at talan er um menning, nýskapan og virðisøking.

Í munnligu frágreiðingini vísir Jacob Vestergaard harumframt á grundgevingarnar fyri, hví hann valdi at tilluta kvotu til P/F Vestmanna Fiskavirki fram um hinar umsøkjararnar. Jacob Vestergaard metir tryggastu loysnina vera at luta út kvotu til teir umsøkjarar, sum hava royndir við uppisjóvarfiski. Umsøkjarar, sum longu hava støðugt virksemi grundað á botnfisk, falla tí í raðfestingini.

Sum nevnt omanfyri viðvíkjandi umsóknini frá Sp/f Vaðhorn, sí kap. 5.1.2., so metir Jacob Vestergaard, at Sp/f Vaðhorn er eitt vælrikið virki, men tað virkið hevur ikki royndir við uppisjóvarfiski. Hann metir tryggastu loysnina tí vera, at tilluta kvotu til P/F Vestmanna Fiskavirki fram um Sp/f Vaðhorn.

Havandi í huga, at talan er um avmarkaða nøgd av kvotu, umframt at talan er um meiri ella minni eins góðar umsóknir, sum eru truplar at taka dagar í millum, so meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at grundgevingarnar hjá Jacob Vestergaard fyri at luta kvotu til P/F Vestmanna Fiskavirki eru ósakligar ella óviðkomandi. At umsitingin í Fiskimálaráðnum harumframt í løgfrøðiligum uppriti kemur til ta niðurstøðu, at tað er løgfrøðiliga í lagi at luta P/F Vestmanna Fiskivirki makrel og sild, talar eisini fyri, at Jacob Vestergaard ikki hevur lagt dent á ósaklig atlit í sambandi við sína avgerð.

Tá Jacob Vestergaard velur at taka eina umsókn úr bólkinum "ikki stuðulsverd" og velur at ganga hesi umsókn partvíst á møti, kann spurningur setast við, um Jacob Vestergaard frá byrjan hevur havt ætlanir um, at P/F Vestmanna Fiskavirki skal fáa kvotu tillutaða.

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar av embætisfólki tann 27. oktober 2021 varð spurt beinleiðis, um tey føldu seg trýst til at grundgeva fyri, at P/F Vestmanna Fiskavirki skuldi fáa tillutað kvotu. Svarið til hendan spurning var greitt nei. Tað er soleiðis onki, sum talar fyri, at umsitingin hevur verið vitandi um, at Jacob Vestergaard frá byrjan av skal hava havt ætlanir um, hvør skal hava kvotu eftir § 49, stk. 1, 1. pkt.

Í samskiftinum millum Jacob Vestergaard og Rógva Reinert tykist heldur ikki vera nakað grundarlag fyri at siga, at ábendingar eru um, at Jacob Vestergaard hevur havt nakra slíkan ætlan.

Mín meting er, at grundgevingarnar hjá Jacob Vestergaard fyri at víkja frá upprunaliga tilmælinum og partvíst at ganga umsóknini frá P/F Vestmanna Fiskavirki á møti í samsvari við innanhýsis uppritið, eru sakligar og í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

## 5.2 - Útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini

### 5.2.1 - Lógargrundarlagið

§ 49, stk. 1, 2. pkt. er soljóðandi:

*"Av nøgdini sambært 1. pkt. kann kvota eisini verða latin umsøkjarum í sambandi við verkætlan, ið fevnir um ítøkiligt keyp umsøkjarans av fiskifari uttan veiðiloyvi ella uttan fiskiloyvi í bólki 5, sum tó, áðrenn endalig tilsøgn kann verða givin, lýkur treytirnar sambært § 5, stk. 1, nr. 2-5. Tilsøgn um kvotu sambært 2. pkt. kann verða latin, um landsstýrismaðurin við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars metir, at íløgan í fiskifarið kann bera seg við teimum minstu nøgdunum, ið søkt verður um. Um umsóknin verður gingin á møti, letur landsstýrismaðurin fiskifari, ið ikki frammanundan hevur veiðiloyvi, ávikavist fiskiloyvi í bólki 5, eitt fyribils veiðiloyvi ávikavist fyribils fiskiloyvi í bólki 5, sum er galdandi í tíðarskeiðinum endaliga tilsøgnin er í gildi."*

Í serligu viðmerkingunum til ásetingina framgongur (LM-100/2020, s. 9):

*"Áðrenn endalig tilsøgn kann verða givin, skal fiskifarið tó lúka treytirnar sambært § 5, stk. 1, nr. 2-5. Sostatt verður arbeitt við einari treytaðari fyribils tilsøgn, áðrenn endalig tilsøgn kann verða latin umsøkjaranum. Endalig tilsøgn er treytað av, um landsstýrismaðurin við støði í tilfari frá umsøkjaranum og upplýsingum annars metir, at íløgan kann bera seg við teimum minstu nøgdunum, ið søkt verður um, og at fiskifarið veruliga er keypt, og beinanvegin er klárt til fiskiskap, sum verður sett sum treyt í kunngerð við heimild í § 49, stk. 1, so virði ikki fara fyri skeytið. Hetta hevur sostatt við sær, at um neyðugt er við munandi størri nøgdum, enn ráðiligt er at geva einum umsøkjara, fellur umsóknin í raðfestingini. Endamálið er at lata møguligar nýggjar aktørar royna seg sum eigarar av fiskifari, tó uttan so, at øll kvotan bert verður latin einum umsøkjara."*

Í kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir framgongur hetta viðvíkjandi umsóknum eftir § 49, stk. 1, 2. pkt.:

*"Treytir til umsóknir eftir kvotum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í løgtingslógini*

***§ 5.*** *Umsókn um kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið fevnir um ítøkiligt keyp av fiskifari uttan veiðiloyvi ella uttan fiskiloyvi í bólki 5, skal sum minstamark hava hesar upplýsingar:*

*1) skjalprógv fyri ítøkiligum keypi av fiskifari,*
*2) nær fiskifarið er klárt at fara til fiskiskap,*
*3) hvørjar minstunøgdir av ávísa fiskaslagnum skulu til, fyri at íløgan fer at bera seg, og*
*4) rakstrarætlan fyri skipakeyp og rakstur av skipinum trý tey fyrstu árini og váttan fyri rakstrarfígging.*
*Stk. 2. Í sambandi við ítøkiligt keyp av fiskifari skal umsøkjarin lúka treytirnar í § 49, stk. 3 í løgtingslógini.*
*Stk. 3. Áðrenn endalig tilsøgn kann verða givin, skal fiskifarið lúka treytirnar sambært § 5, stk. 1, nr. 2-5 í løgtingslógini.*
*Stk. 4. Fiskifar, sambært § 49, stk. 1, 2. pkt., kann fiska av tillutaðu nøgdunum sambært endaligu tilsøgnini, og kemur annars í tíðarskeiðinum, endaliga tilsøgnin er í gildi, undir somu rættindi og skyldur sum eigarar av fiskifari við veiðiloyvi, ávikavist fiskiloyvi í bólki 5, tó uttan at vera fevnt av § 7, stk. 1 og 2 í løgtingslógini.*

*…*

*Meting og tilmæli av umsóknum*

***§ 7.** Umsóknir eftir kvotu sambært hesi kunngerð verða viðgjørdar við støði í innkomnum tilfari og treytum sambært løgtingslógini og hesi kunngerð. Umsóknirnar verða mettar við støði í teimum høvuðsfyrilitum, ið tilskilað eru í skjali 1-3 til hesa kunngerð og lóggávuni annars.*
*Stk. 2. Umsóknir sambært § 49, stk. 1, 1. og 2. pkt. í løgtingslógini verða viðgjørdar undir einum."*

Metingarskjal viðvíkjandi umsóknum eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. er hjálagt sum skjal 2 til kunngerðina:

*"Metingarskjal í sambandi við kvotur til ítøkiligt skipakeyp, sambært § 5 í kunngerðini*

*Umsóknir skulu viðgerast og metast við grundarlagi í teimum ítøkiligu upplýsingunum, ið umsóknin hevur um ítøkiliga skipakeypið.*

*Ítøkiliga verður metingin serliga grundað á hesi fyrilit:*

*1) Í hvønn mun verkætlanin er klár at føra út í lívið beinanvegin. Her verður serliga hugt eftir, hvørt umsóknin inniheldur:*
*a) skjalprógvaða avtalu um ítøkiligt skipakeyp,*
*b) játtan at fíggja skipakeypið og neyðuga rakstrarfígging, og*
*c) rakstrarætlan, ið ber seg fíggjarliga við minstu nøgdum, sum søkt verður um.*

*2) Treytina í § 49, stk. 3 í løgtingslógini, ið m.a. tilskilar at "Bert feløg ella persónar, sum hvør sær ella saman við nærstandandi ella øðrum, beinleiðis ella óbeinleiðis, og sum í mesta lagi hava ræði á 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær, sambært stk. 1 og 2, kunnu fáa lut í kvotu sambært stk. 1 og 2...".*

*Niðurstøðan í viðgerðini skal byggja á eina heildarmeting av verkætlanini. Í heildarmetingini verður dentur lagdur á punktini nevnd omanfyri, umframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Harumframt verður eisini hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið."*

Í leiðbeiningini til umsóknarblaðið framganga fylgjandi viðkomandi pkt.:

4. *Gevið gætur! Minstanøgd skal ásetast. Um tøka nøgdin vísur seg at gerast minni enn minstanøgdin sambært umsóknini, kann umsóknin fella í raðfestingini.*
6. *Lýs stutt, hvussu langt ætlanin er komin í fyrireiking og teir førleikar, ið eru grundarlag undir verkætlnaini, eitt nú royndir og vitan innan fiskivinnu. Met um, nær verkætlanin veruliga gerst virkin og sjálvberandi.*
8. *Lýs stutt ta fígging, ið er grundarlagi undir verkætlanini, herundir:*
*- Eginpening*
*- Lánifígging*
*- Rakstrarfígging*

*Váttan frá fíggingarstovni skal leggjast við umsóknini."*

### 5.2.1 - Umsókn frá Sp/f Mót

Sp/f Mót letur inn umsókn til Fiskimálaráðið um kvotu av makreli, norðhavssild og svartkjafti til ítøkiligt skipakeyp tann 6. juli 2021 (málsskjal 62).

Á s. 3, punkt 4 (Nøgd, sum søkt verður um) framgongur, at felagið søkir um ynskiliga nøgd í 2021, 3.900 tons av makreli, 5.400 tons av norðhavssild og 13.000 tons av svartkjafti.

Minsta nøgd, ið søkt verður um í 2021, er 2.800 tons av makreli, 4.200 tons av norðhavssild og 7.900 av svartkjafti.

Í umsóknini verður á s. 4, punkt 5 (Lýsing av verkætlanini. Lýs, hvat ætlanin er at gera.) víst á, at:

*"Í stuttum er ætlanin at keypa pelagiskan trolara/nótaskip, sum hevur kølitangar, hesin skal fiska tillutaðar nøgdir. Skipið talan er um, er […].*

*Kjarnin í verkætlanini snýr seg um hvussu vit kunnu á skynsaman hátt, keypa, fíggja og reka eitt pelagiskt fiskiskip.*

*Í virkisætlanini hava vit lýst verkætlanina nærri.*

*Virkisætlanin snýr seg í høvuðsheitum um hvussu vit keypa og fíggja skipakeyp. Hvat skipið skal brúkast til og hvørjar nøgdir okkum tørvar av ymsu fiskasløgunum fyri at verkætlanin skal kunna fremjast.*

*Í stuttum hava vit greitt frá fíggjar og rakstrarætlan. Í hesum sambandi hava vit eisini sett upp minstu og ynskiliga nøgd av ymsu fiskasløgunum. Við minstu nøgd fiska vit fyri áleið 54 mió og við ynskiligu nøgd fyri áleið 77 mió.*

*Fíggingin av verkætlanini er partur av virkisætlanini. Vit hava fingið sokallaða seljarafígging frá […], sum fíggjar skipakeypið. Eigarnir av Sp/f Mót skjóta […] inn í felagið til rakstrarfígging.*

*Verkætlanin er klár at fara í gongd og kann byrja beint sum loyvið verður tillutað."*

Á s. 5, punkt 6 (Lýsing av ætlanini) skal umsøkjari lýsa stutt, hvussu langt ætlanin er komin í fyrireiking og teir førleikar, ið eru grundarlag undir verkætlanini, eitt nú royndir og vitan innan fiskivinnu. Metast skal um, nær verkætlanin veruliga gerst virkin og sjálvberandi.

Sp/f Mót vísir í hesum sambandi á:

*"Fyrireikingarnar eru lidnar, klárt er at fara í gongd. Vit hava gjørt keypssáttmála, og hava fingið fígging til at keypa […], við øllum reiðskapi.*

*Mennirnir handan Sp/f Mót eru:*

*Heini Martin Jørðdal Niclasen, 35 ár, útbúgvin skipsførari. Hann hevur seinastu nógv árini arbeitt innan tað pelagiska, bæði sum framleiðslustjóri, og síðani frá 2018 sum stýrimaður á pelagiskum skipið í Føroyum. Hann hevur tískil hollar royndir bæði innan fiskiskap eftir pelagisku fiskasløgunum eins og hvussu fiksurin kann koma til lands á bestan hátt góðsku viðvíkjandi. Hann fór fyrsta túr til skips í 2001.*

*Jógvan í Skorini, 34 ár, hevur verið borgarstjóri í Eiðis kommunu seinastu 8 árini, og hevur tískil drúgvar royndir innan fíggjar viðurskifti og fyrisiting.*

*Eisini hava báðir arbeitt við at fáa gongd á reyðætisfiskiskap í føroyskum øki síðani 2017.*

*Fyrsti partur av verkætlanini sum inniber skipakeyp er komin á mál, um vit fáa játtandi svar uppá umsókn gongur skjótt til skipi er klárt at fara til fiskiskap. Vit meta at verkætlanin er sjálvberandi frá byrjan av, um vit í minsta lagi fáa "minsta nøgd".*

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin er stuðulsverd við hesi grundgeving:

*"<u>Umsóknin er stuðulsverd</u> – Umsóknin lýkur allar treytir og ásetingar í lóggávuni. Umsóknin er væl undirbygd við viðløgdum váttanum, eins og víst verður á verandi samstørv, og at felagið hevur royndarloyvi til reyðæti. Verkætlanin fevnir um at keypa […] fyri […] mió. kr. Viðløgd rakstrarætlan vísir, at verkætlanin ber seg við minstu nøgdum. Víst verður á keypssáttmála, ið staðfestir, at skipið kann yvirtakast beinanvegin og er klárt at fara til fiskiskap. Seljarafígging er frá núverandi eigaranum av m/s Norðingi, sum er P/F Næraberg."*

Í avgerðarskrivi til Fiskivinnustovuna, dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin ikki at ganga umsóknini frá Sp/f Mót á møti við hesi grundgeving:

*"Í tilmælinum til hendan partin av málinum, tað merkir ítøkilig skipakeyp, er fyrsti partur býttur upp í 2; 1) umsóknir, ið <u>verða</u> tilmæltar (1 umsókn) og 2) umsóknir, ið <u>kunnu</u> verða tilmæltar (4 umsóknir) í tann mun nøgdir eru tøkar. Í tilmælinum verður samlaða tøka kvotan skipað soleiðis, at kvota kann latast til 2 skip.*

*Í avgerð mínari havi eg í serstakan mun, og kanska í størri mun enn gjørt verður í tilmælinum, lagt dent á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakarnir hava til fiskiskap og skiparakstur.*

*Í slíkari meting eru tvær ella møguliga tríggjar verkætlanir av teimum tilmæltu, ið lúka báðar treytirnar; tað merkir lutfalsligan høgan eginpening og beinleiðis royndir.*

*Samlaði karmurin í tøkari kvotu avmarkar talið av verkætlanum til tvey skip. Hendan niðurstøðan er tann sama sum hon í tilmælinum. Við grundarlagið í hesi meting og fyritreytum verður kvota latin 2 feløgum…*

*Niðurstøða mín er í ávísum fráviki til tilmælið, tó at hon er í rímiligum samsvari í breiðari meting.*

*Samlaða tillutaða nøgdin til skipakeyp og nøgdirnar til einstøku verkætlanina um skipakeyp eru júst tær somu sum tilmælt. Harnæst eru báðar verkætlanirnar, sum avgerðin fevnir um, tilmæltar, tó við fyrivarni.*

*Umframt tær fyritreytir, sum verða lagdar í tilmælið um skipakeyp í síni heild, havi eg serstakt bygt mína meting á tvær fyritreytir: 1) styrki í fíggingini (eginfígging) og 2) beinleiðis royndir til fiskiskap og/ella skiparakstur.*

*Í ymsum tilfari í málinum eins og í umrøðu hevur verið víst á møguligan fyrimun í samskipan millum vanligan fiskiskap og royndir og menning innan nýggja fiskiskapin eftir reyðæti. Tað kunnu møguliga finnast ávísar styrkir í slíkari samskipan, men eftir míni meting – í breiðum høpi – stendur sjónarmiðið veikt. Í vísindaligum tilfari (Havstovan) verður víst á, at tað eru nógvir fyrimunir at royna eftir reyðæti um veturin djúpt í Bankarennuni. Góða vertíðin fyri fiskiskap eftir uppisjóvarfiski er ofta eisini á vetri, og tí er vertíðin fyri báðar fiskiskapirnar, uppsjóvar og reyðæti, samanfallandi og møguligir fyrimunir í samskipan samsvarandi smáir.*

*Í mun til aðrar verkætlanir, ið eru tilmæltar – við ella uttan fyrivarni – verður mett, at tær verkætlanir, ið avgerð mín fevnir um, í størsta mun lúka fyritreytir í síni heild fyri, at íløgan í fiskifarið kann bera seg við teimum minstu nøgdunum, ið søkt verður um.*

*Samlaða tøka nøgdin til skipakeyp gevur ikki pláss fyri fleiri enn tveimum verkætlanum."*

Í skrivi, dagfest 23. september 2021 (málsskjal 63), velur Fiskimálaráðið ikki at ganga umsóknini á møti við hesi grundgeving:

*"Í umsóknini er upplýst, at verkætlanin snýr seg um at keypa skipið […], fyri […] mió. kr.*

*Í umsóknarblaði verður greitt frá, at verkætlanin snýr seg um at fáa til vega skip, ið skal fiska pelagiskt umframt at fiska reyðæti.*

*Umsóknin er væl undirbygd við hjáløgdum váttanum, eins og víst verður á verandi samstørv, og at felagið hevur royndarloyvi til reyðæti. Hjáløgd rakstrarætlan vísir, at verkætlanin ber seg við minstu nøgdum.*

*Víst verður á keypssáttmála, ið staðfestir, at skipið kann yvirtakast beinanvegin og er klárt at fara til fiskiskap. Seljarafígging er frá núverandi eigaranum av […], sum er […]. Eginpeningurin er upplýstur at vera […] kr.*

*Hóast talan er um fleiri verkætlanir, sum kundu verið játtaðar, so avmarkar samlaði karmurin í tøkari kvotu talið av verkætlanum til tvey skip.*

*Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum, er dentur lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakarnir hava til fiskiskap og skiparakstur.*

*Í avgerðini eru verkætlanir, ið vísa á lutfalsligan nógvan eginpening og beinleiðis royndir, sostatt raðfestar.*

*Í hesi meting fellur tykkara umsókn í raðfestingini, serliga í sambandi við, at eginpeningurin er lítil.*

*Eftir eini samlaðari meting er avgerð tí tikin um ikki at ganga umsókn tykkara á møti."*

Tann 24. september 2021 (málsskjal 64) sendir Sp/f Mót kæru til Fiskimálaráðið. Í kæruni verður m.a. ført fram:

*"Fyri tað fyrsta hava stigtakararnir royndir á økinum. Manningin er roynd, eini stigtakarin er skipari á nótaskipi, umframt at hava royndir við góðskumenning hjá Polar Seafood, og hin stigtakarin hevur leiðsluroyndir. Harumframt skal viðmerkjast, at Fiskimálaráðið sjálvt skrivar, at "í metingini verður eisini lagdur dentur á, at endamálið er at lata nýggjar aktørar royna seg sum eigarar av fiskifari. Ein ávís andsøgn fyriliggur tískil, tá umsóknin ikki verður gingin á møti vísandi til manglandi royndir.*

*Fyri tað næsta er eginfíggingin kr. […] aftaná keyp av skipi og útgerð. Hetta má staðfestast at vera ein nøktandi upphædd, og avgjørt nóg mikið til, at Sp/f Mót kann fara í gongd við verkætlanina. Rakstrargrundarlagið er sostatt nøktandi, og hevur Fiskimálaráðið eisini staðfest, at verkætlanin ber seg.*

*Fyri tað triðja hava teir, sum hava fingið kvotur, ikki skip tøkt, sí skjal 1. Tann eini hevur skip, sum ikki lúkar krøvini, og mugu teir tískil leita eftir nýggjum skipi, ímeðan hin einki skip hevur. At hava tøkt skip var annars sett sum treyt. Tískil lúka nevndu aktørar, sum hava fingið kvotur, ikki ásettu krøvini í Kunngerð um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjaft til vinnuligar royndir og verkætlanir § 5.*

*Harumframt framgongur tað greitt av telduposti frá Fiskimáláráðnum, at "verkætlanin skal vera klár at føra út í lívið beinanvegin". Harumframt verður víst til, at "umsøkjarar, ið ikki kunnu vísa á skip, sum er klárt at fara til fiskiskap beinanvegin, kunnu tó senda umsókn til Fiskimálaráðið, men vilja sannlíkt fella í raðfestingini í mun til aðrar umsøkjarar, ið eru klárir at fara til fiskiskap í 2021, sí skjal 2.*

*Her má staðfestast, at viðgerðin av umsóknunum ikki hevur verið saklig, tá egnar ásetingar og krøv soleiðis verða skúgvaði til viks.*

*Og til síðst skal viðmerkjast, at eingin hoyring hevur verið, og er málið av tí sama ikki fult upplýst vísandi til fyrisitingarlógina.*

*Málið verður hervið kært við kravi um, at málið skal ganga umaftur…"*

Tann 6. oktober 2021 (málsskjal 65) sendir Sp/f Mót ískoytiviðmerkingar til kæruna til Fiskimálaráðið:

*"Innlit, sum eg havi fingið í umsóknirnar frá Sp/f Ango og Sp/f Gráastein (skjal 3-4) og avgerðirnar frá 17. september 2021 frá Fiskimálaráðnum til hesar báðar umsøkjarnar (skjal 5-6), geva mær høvi til hesar ískoytisviðmerkingar til kæruna frá 24. september 2021.*

*Krøvini fyri at fá kvotu er, at tað fyriliggur ítøkilig avtala um skipakeyp, játtan fyri fígging av skipakeypi og rakstri. Tað framgongur av fráboðanini (skjal 7), av leiðbeiningini til umsóknarskjali (skjal 8) og av metingarskjalinum (skjal 9).*

*Tað verður eisini endurtikið í avgerðunum frá 17. september 2021 frá Fiskimálaráðnum, at "[s]erliga verður hugt eftir, um verkætlanin inniheldur skjalprógvaðan keypssáttmála [uppá skip], játtan um fígging av íløgu og rakstur av skipinum […] og í hvønn mun verkætlanin er klár at føra út í lívið."*

*Grundgevingin fyri hesum krøvum er m.a. at verkætlanin skal verða klár føra út í lívið beinanvegin. Tað er yvirskipaða og grundleggjandi kravið í metingarskjalinum (9).*

*Eftir at hava lisið umsóknirnar frá Sp/f Ango og Sp/f Gráastein dugi eg at síggja, at hesar umsóknir lúka ikki treytirnar fyri at fáa kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. – ítøkiligt skipakeyp.*

*Í staðin fyri at síggja burtur frá hesum umsóknum, sum ikki lúka treytirnar, og at lata kvotu til m.a. mín klient Sp/f Mót, sum kann føra sína verkætlan út í lívið beinanvegin, so fáa Sp/f Ango og Sp/f Gráastein 4 vikur at fáa grundleggjandi treytirnar uppá pláss.*

*Fiskimálaráðið eigur her at taka hesar treytaðu tilsøgnir aftur alt fyri eitt og lata málið ganga umaftur, soleiðis at umsøkjarnir, ið lúka treytirnar, beinanvegin kunnu føra sínar verkætlanir út í lívið soleiðis sum ætlanin við skipanini er.*

*Um tað ikki varð fyri hesum skeivu avgerðum frá Fiskimálaráðnum, so vórðu verkætlanirnar longu førdar út í lívið fyri umleið tveimum vikum síðan.*

*<u>Sp/f Ango lýkur ikki treytirnar fyri at fáa kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. – ítøkiligt skipakeyp.</u>*

*Í avgerðini frá Fiskimálaráðnum frá 17. september 2021 framgongur, at tað er ivasamt um Sp/f Ango hevur eina avtalu um ítøkiligt skipakeyp. Tað vísir seg, at Sp/f Ango hevur ikki nakra avtalu um skipakeyp. Tað verður stigtakarin John Mikkjal Godtfred endurgivin fyri at upplýsa fyri kringvarpinum (skjal 1).*

*Tað ger eisini avgerðina frá Fiskimálaráðnum frá 17. september 2021 til einkis, tí tað stendur í avgerðini, at kvotan kann einans fiskast við tí í avgerðini nevnda fiskifari. Sp/f Ango hevur onki skip.*

*Sp/f Ango fær í avgerðini frá Fiskimálaráðnum… upplýst, at tað er ongin játtan um fígging. Tað er ein játtan um fígging frá m.a. eigarunum, men hendan er treytað av, at felagið fær minstu nøgd í kvotu.*

*Ein treytað váttan frá peningastovni er ikki ein váttan um fígging av skipakeypi. Av avgerðini framgongur, at peningastovnsfígging er m.a. treytað av, at Sp/f Ango fær tillutað 12 ára rullandi eginkvotur við minsta nøgd av makreli, sild og svartkjafti.*

*Fiskimálaráðið skrivar beinleiðis í avgerðini, at hendan treytaða fíggingin er ikki í samsvari við lógarásettur karmarnar og treytirnar kunnu ikki verða gingnar á møti. Tað merkir, at tað fyriliggur ikki fígging til ítøkiligt skipakeyp og tað fyriliggur ikki ítøkilig fígging til rakstur.*

*Avgerðin um at tillutað Sp/f Ango lut í kvotunum er eisini treytað av, at skjalprógv er fyri eginpeningi, lánsfígging og endaligum keypssáttmála. Tað vil siga, at Sp/f Ango lýkur ikki tær grundleggjandi treytirnar um ítøkiligt skipakeyp og fígging av skipakeypi.*

*Afturat hesum kemur, at Sp/f Ango hevur sett sum minstu nøgd fyri 2021 3.907 tons av makrel, 5.412 tons av sild og 9.481 tons av svartkjafti. Sp/f Ango fær ikki tillutað minstu nøgdina, um tað verður sæð burtur frá fluttu kvotuni frá 2020. Tað vil siga, at raksturin hjá Sp/f Ango ber seg ikki uttan fluttu kvotuni frá 2020.*

*Tað eigur ikki at verða tikin hædd fyri fluttu kvotuni frá 2020. Hesar kvotur eru ikki roknaðar við í tí nøgd, sum umsóknirnar eru grundaðar á og tað er ikki nakað, sum umsøkjarnir hava tikið hædd fyri og heldur ikki kunnu roknað við framyvir.*

*Eftirsum Sp/f Ango ikki fær tillutað tað minstu nøgd, sum Sp/f Ango hevur søkt um, so eigur umsóknin at fella í raðfestingini. Tað framgongur av leiðbeininini til umsóknarskjali… Um Fiskimálaráðið hevði hildið seg til sína egnu raðfesting, so hevði Sp/f Mót komið framum eisini á hesum økinum, tí tillutaðu kvoturnar liggja innanfyri minstu nøgdunum, sum søkt verður um.*

*Sp/f Ango hevur sostatt onki skip, onga avtalu um skipakeyp og onga játtan til skipakeyp ella rakstur. Eftirsum Sp/f Ango ikki lýkur hesar treytir um at hava avtalu um skipakeyp og heldur ikki hevur fígging til skipakeyp og rakstur, so eigur at verða sæð burtur frá umsóknini frá Sp/f Ango.*

*<u>Sp/f Gráastein lýkur ikki treytirnar fyri at fáa kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1, 2. pkt.2…</u>*

*Sp/f Gráastein fær í avgerðini frá Fiskimálaráðnum frá 17. september 2021 upplýst, at váttanin um fígging er ein váttan frá peningastovni treytað av, at Sp/f Gráastein fær tillutað 12 ára rullandi eginkvotur við minstu nøgd av makreli, sild og svartkjafti.*

*Eins og í avgerðini til Sp/f Ango skrivar Fiskimálaráðið beinleiðis í avgerðini, at hendan treytaða fíggingin er ikki í samsvar við lógarásettu karmarnar og treytirnar kunnu ikki verða gingnar á møti. Tað merkir, at tað fyriliggur ikki fígging til ítøkiligt skipakeyp og tað fyriliggur ikki ítøkilig fígging til rakstur.*

*Avgerðin um at tillutað Sp/f Ango [skal verða Sp/f Gráastein] lut í kvotunum er eisini treytað av, at skjalprógv er fyri eginpeningi, lánsfígging og endaligum keypssáttmála. Tað vil siga, at Sp/f Gráastein eins og Sp/f Ango lúka ikki tær grundleggjandi treytirnar um ítøkiligt skipakeyp og fígging av skipakeypi.*

*Stigtakarin til Sp/f Gráastein verður eisini endurgivin fyri at siga við kringvarpið (skjal 1), at Sp/f Gráastein hevur ikki nakað ítøkiligt skip. Í umsóknini hjá Sp/f Gráastein verður víst til ítøkiligt skip, men tað sær ikki út til at passa, um stigtakarin er endurgivin rætt. Um so er, kann Sp/f Gráastein ikki lúka kravið í avgerðini frá Fiskimálaráðnum… um, at kvotan kann einans fiskast við tí í avgerðini nevnda fiskifari.*

*Afturat hesum kemur, at Sp/f Gráastein hevur sett sum minstu nøgd fyri 2021 4.000 tons av makrel, 4.000 tons av sild og 12.000 tons av svartkjafti. Sp/f Gráastein fær eins og Sp/f Ango ikki tillutað minstu nøgdina, um tað verður sæð burtur frá fluttu kvotuni frá 2020. Tað er tó ikki galdandi fyri svartkjaft, har tað eisini við kvotum frá 2020 vanta 1.636 tons í at røkka minstu nøgd. Tað vil siga, at raksturin hjá Sp/f Gráastein ber seg ikki uttan fluttu kvotuna frá 2020.*

*Tað sama ger seg galdandi her sum við Sp/f Ango. Tað er at eftirsum Sp/f Gráastein ikki fær tillutað tað minstu nøgd, sum Sp/f Gráastein hevur søkt um, so eigur umsóknin at fella í raðfestingini í forhold til aðrar umsøkjarar.*

*Sp/f Gráastein hevur eins og Sp/f Ango onga játtan til skipakeyp ella rakstur – og møguliga heldur onki skip. Eftirsum Sp/f Gráastein ikki lýkur hesar treytir um at hava fígging til skipakeyp og rakstur, so eigur at verða sæð burtur frá umsóknini hjá Sp/f Ango [skal verða Sp/f Gráastein].*

*Tað fyrikemur margháttligt, at Sp/f Ango og Sp/F Gráastein, sum ikki lúka treytirnar í kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir, fáa tillutaðar kvotur til verkætlanir, sum onga fígging hava og ikki bera seg rakstrarliga.*

*Tað er serstakliga margháttligt, at slíkar verkætlanir verða tiknar fram um eitt nú Sp/f Mót, sum lýkur treytirnar, hevur skip við hondina og var farin í gongd við verkætlanina sama dag sum kvotur vórðu útlutaðar.*

*Málið má ganga umaftur. Fiskimálaráðið kann ikki taka umsøkjarar, sum ikki lúka treytirnar í kunngerðini ásett við heimild í § 49, stk. 1 í sjófeingislógini, fram um umsøkjarar sum lúka treytirnar í kunngerðini…"*

Fiskimálaráðið svarar uppá kæruna hjá Sp/f Mót í skrivi, dagfest 13. oktober 2021 (málsskjal 66):

*"…avgerð Fiskimálaráðsins kann ikki kærast til Ráðið, og málið verður viðgjørt sambært teimum fyrisitingarligu reglunum um uppafturtøku.*

*Treytin fyri uppafturtøku er, at vísast kann á nýggjar upplýsingar í málinum, undir hesum faktiskar upplýsingar, fyrisitingarligar manglar o.tíl, sum sannlíkt kann broyta niðurstøðuna í málinum.*

*Tygum hava ført fram nøkur kærupunkt, sum Ráðið skal gera viðmerkingar til, men fyrst skal Ráðið gera nakrar yvirskipaðar viðmerkingar til viðgerðina av umsóknunum um kvotu til skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini.*

*Talan er um umsóknarmál, har nógvir umsøkjarar eru til eitt avmarkað kvotugrundarlag. Hetta merkir, at kvotur eru ikki til allar umsøkjarar, og tað er heldur ikki víst, at umsøkjarar, sum lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu, neyðturvuliga fáa kvotu játtaða. Um talan er um fleiri egnaðar umsøkjarar, enn kvota er til, mugu hesir vigast grundað á saklig metingarstøði.*

*Hóast tey fyrilit, sum metingin serliga skal grundast á, eru upplýst í kunngerð, skal tað sláast fast, at fyrisitingin ikki er avmarkað til tey nevndu fyrilitini í síni meting. Talan er um eina heildarmeting, sum skal gerast við við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars. Tað framgongur beinleiðis av metingarskjalinum til kunngerðina, at í heildarmetingini verður dentur lagdur á punktini, sum eru nevnd í kunngerðini, harumframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Harafturat verður eisini hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið.*

*Fyrisitingin er einans bundin av teimum kørmum, sum lógarásetingin setir fyri metingini. Tá metast skal um sakligheitina viðvíkjandi metingarstøðum, skal hetta gerast í mun til, at tað grundleggjandi endamálið við útlutan av kvotum til ítøkiligt keyp av skipi er at loyva nýggjum aktørum framat fiskirættindunum við egnum fiskiførum. Umráðandi er eisini, at pláss er fyri fleiri aktørum. Vísast skal til generellu og serligu viðmerkingarnar til § 49, stk. 1 í løgtingslóg nr. 70 frá 2021 um broyting í sjófeingislógini, sum eru at finna í løgtingsmál nr. 100 frá 2020.*

*Fyrisitingin hevur sostatt víðar karmar, tá metast skal um, hvør umsøkjari er best egnaður til skiparakstur, tá kvotur skulu útlutast til skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini.*

*Fyri at tryggja eina skjóta og eins viðgerð av umsóknunum er ein mannagongd ásett við nýtslu av oyðublaði, har ávísar upplýsingar skulu latast. Umsóknir vera sum útgangsstøði bert viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum.*

*Innkomnu umsóknirnar eru viðgjørdar í samsvari við oman fyri standandi. Nakrar umsóknir, harímillum tykkara, lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu tillutaða. Tá kvotugrundarlag ikki er til allar umsøkjarar, er støða tikin til, hvør mest sannlíkt fer at eydnast við skiparakstri frameftir grundað á útlutaðu kvoturnar. Her er ein heildarmeting gjørd, har dentur er lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakarnir hava til fiskiskap og skiparakstur. Í hesi meting fellur tykkara umsókn í raðfestingini, serliga vísandi til, at eginpeningurin hjá Sp/f Mót ikki er á sama støði sum hjá teimum feløgum, sum hava fingið kvotu tillutaða.*

*At leggja dent á fígging av skipakeypi og -rakstri, undir hesum støddina av eginpeninginum, er viðkomandi fyri, hvussu ein aktørur, sum annars lýkur allar grundleggjandi treytir, kann eydnast frameftir innan fiskivinnuna við egnum fiskifari, og metingarstøðið er tí sakligt vísandi til endamálið við § 49, stk. 1, 2. pkt.*

*Viðvíkjandi tykkara viðmerkingum annars um fyrilit verður tikið til royndir skal viðmerkjast, at ongin andsøgn er í at leggja dent á royndir, hóast endamálið er at fáa nýggjar aktørar í fiskivinnuna. Ein nýggjur aktørur í hesum høpi merkir bert, at tað er ein aktørur, sum ikki longu er etableraður í fiskivinnuni við egnum skipi. Royndir fara undir øllum umstøðum at hava týdning og vera viðkomandi fyri møguleikan at eydnast við skipakeypi og -rakstri innan fiskivinnuna frameftir, og metingarstøðið er tí sakligt.*

*Viðvíkjandi tí umstøðu, at Sp/f Mót er klárt at fara í gongd, meðan aðrir umsøkjarar, sum hava fingið kvotu játtaða, ikki hava skip tøkt, skal viðmerkjast, at hetta hevur týdning í heildarmetingini, at skip er tøkt, men tað er tó ikki altavgerandi, at skipið liggur tøkt við atløgubryggjuna og bíðar. Í pkt. 2 í oyðublaðnum er ásett, at umsøkjarar skuldu lýsa fiskifarið, sum teir ætla av keypa. Tann drúgva viðgerðartíðin um umsóknunum um kvotu til skipakeyp hevur við sær, at Fiskimálaráðið ikki kann seta sum treyt, at umsøkjarar hava skip liggjandi klárt at fara til fiskiskap. Tað ber ikki til hjá umsøkjarum at lúka hetta krav, og krevur hetta eisini, at fíggjarligar íløgur verða gjørdar, áðrenn vissa er fyri kvotu. Eitt tílíkt krav hevði tí hvørki verið rímiligt ella sakligt. Tillutan av kvotu er tí treytað av, at Fiskimálaráðið metir, at tað ber til hjá umsøkjara at fáa viðurskifti viðvíkjandi skipakeypi í rættlag innan eina stutta freist, sum er sett til 4 vikur. Tað skal tó viðgangast, at orðingin av fyrilitinum í metingarskjalinum í kunngerðini kundi verið greiðari, men kunnu tey tó ikki skiljast soleiðis, at aktørar skulu hava skip tøkt, tá fyribils tilsøgnin verður latin.*

*Viðvíkjandi spurninginum um partshoyring skal viðmerkjast, at Ráðið hevur viðgjørt málið við støði í umsóknartilfarinum og hevur mett málið at vera nøktandi upplýst. Ongar upplýsingar eru heldur komnar inn við hesi umbøn um uppafturtøku, sum Ráðið ikki hevur havt kunnleika til og áttu at verið innheintaðar, og heldur Ráðið tí fast við, at málið er viðgjørt á nøktandi grundarlagi.*

*Við hesum viðmerkingum verður umbønin um uppafturtøku sýtt, tí grundarlag ikki er fyri uppafturtøku av málinum."*

Í skjalatilfarinum, sum eg havi fingið útflýggjað frá Fiskimálaráðnum, eri eg komin fram á eitt innanhýsis upprit, sum er dagfest 1. oktober 2021 (málsskjal 28), og sum er skrivað av innanhýsis løgfrøðingi í Fiskimálaráðnum. Viðvíkjandi avgerðini hjá landsstýrismanninum í málinum hjá Sp/f Mót verður m.a. víst á:

*"…Undirritaða metir ikki, at valið hjá landsstýrismanninum var eitt ringt val í sjálvum sær, tí talan er um tvær góðar og seriøsar verkætlanir. Men í mun til krøvini í sjófeingislógini og í kunngerðini um vinnuligar royndir og verkætlanir, so er ringt at koma uttanum umsóknina hjá Sp/f Mót, sum hevði skip tókt og fíggingina uppá pláss.*

*Umsóknin hjá Sp/f Mót lýkur allar treytir og ásetingar í lóggávuni. Umsóknin er væl undirbygd við viðløgdum váttanum, eins og víst verður á verandi samstørv, og at felagið hevur royndarloyvi til reyðæti. Verkætlanin fevnir um at keypa […] fyri […] kr. Viðløgd rakstrarætlan vísir, at verkætlanin ber seg við minstu nøgdum. Víst*

*verður á keypssáttmála, ið staðfestir, at skipið kann yvirtakast beinanvegin og er klárt at fara til fiskiskap. Seljarafígging er frá núverandi eigaranum av […], sum er […].*

*Landsstýrismaðurin vísir í síni niðurstøðu á, at hann í serstakan mun, og kanska í størri mun enn gjørt verður í tilmælinum, hevur lagt dent á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur. Undirritaða metir, at hesi atlit eru saklig og viðkomandi, tá metast skal um hvat skip skal veljast úr næsta bólkinum "helst stuðulsverd, tó við fyrivarni". Her var talan um fýra umsóknir, har tilmælið var, at landsstýrismaðurin skuldi velja eina burturúr. Í sambandi við, at ein heildarmeting skuldi gerast millum hesar fýra umsóknirnar, er tað sakligt og viðkomandi at leggja dent á eginfígging og royndir.*

*Hinvegin, so meti eg ikki, at atlitið til eginfígging og royndir eiga at hava avgerandi týdning fyri Sp/f Mót. Umsóknin hjá Sp/f Mót lýkur allar treytir og ásetingar í lóggávuni (sum nevnt omanfyri) og er tann einasta umsóknin, sum er beinleiðis tilmælt. Ásetingar og treytir í sjófeingislóg og kunngerð um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir við tilhoyrandi metingarskjølum eiga at verða tað, sum fyrst og fremst hevur týdning, tá støða skal takast til umsóknirnar. Tá allar treytir eru loknar í hesum føri, er tað ikki sakligt og viðkomandi at lata eginfígging og royndir verða avgerðandi. (Vísast kann eisini á, at annar av stigtakarunum hjá Sp/f Mót hevur royndir)."*

#### 5.2.1.1 - Munnligar frágreiðingar

##### Jacob Vestergaard

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 svarar Jacob Vestergaard soleiðis uppá málið um Sp/f Mót:

*"Spurdur um umsóknirnar um ítøkiligt skipakeyp og hansara avgerð um at víkja frá tilmælinum frá umsitingini, herundir at luta út kvotu til Sp/f Ango og Sp/f Gráastein fram um Sp/f Mót, greiddi Jacob frá, at orsøkin til ta avgerðina er, sum hann legði dent á, at hann helt, at Ango og Gráasteinur skiltu seg burturúr við einum betri grundarlagi við eginpeningi. Og so hugdi hann eisini eftir, hvørjar royndir fólkini, sum stóðu aftanfyri, høvdu. Hann hevði verið nokkso leingi fiskimálaráðharri í Føroyum, og hann hevur sæð ógvuliga ymiskar, sum hava bjóðað seg fram - ikki tí hasir ikki kundu klára tað - men hann hevur sæð nógvar bjóðað seg fram, sum ikki onkursvegna hava førleikan til tað, teir siga seg skula. Men royndir eru rættiliga týðandi, helt hann, tá tú skal fara undir okkurt. Og tá ið hann hugdi at royndunum hjá teimum, sum stóðu aftan fyri felagið Ango, jJohn Mikkjal og Heri og Birgir - so veit hann, at teir hava drúgvar royndir í fiskiskapi. Mikkjal hevur verið skipari á Ennibergi í nógv ár."*

*Spurdur um royndirnar hjá umsøkjarunum stóðu í umsóknunum, svarar Jacob ja, tað helt hann avgjørt. Hann visti tað í øllum førum. Gráasteinur, Birgir Lützen, kennir hann ikki ella jú, hann veit, hvør hann er. Hann var skipari á Jákup Sverra tá. Hann hevði eisini drúgvar royndir, og onkur, sum var við honum eisini, var parteigari, hevði royndir viðfiskasøluarbeiði og øðrum. Teirra eginpeningsgrundarlag, í øllum førum út frá umsóknunum, var nógv tryggari eftir hansara tykki enn eginpeningsgrundarlagið hjá hinum pørtunum. Tað var tað, sum onkursvegna vigaði meir, enn umsitingin vigaði tað. So skal hann siga eitt um Mót. Mót hevði verið í Fiskimálaráðnum frammanundan og manererað við reyðæti. Søktu um at fáa loyvi til reyðæti og høvdu fingið eisini stuðul til tað, høvdu arbeitt við tí. Og vertíðin fyri reyðæti, soleiðis sum Havstovan metir reyðæti, fellur*

*øgiliga nógv saman við vertíðini fyri sild og makrel. Og tí var hann als ikki samdur í, at tað at fiska makrel og sild stimbraði undir verkætlanina av hinum, heldur mótsett. So onkursvegna, tá mann satsar uppá eitt, so skal mann sasta uppá, at tað ikki verður við øllum í senn. Tí hann dugdi ikki ordiliga at taka tað fyri góða vøru, tá mann hevur fingið rímiliga væl av stuðli í Fiskimálaráðnum til at fara undir reyðætiverkætlanina, at mann so onkursvegna loypir yvir og skal hava eitt annað, sum er uppisjóvarfiskur. So í høvuðsheitinum royndir og eginpeningur í verkætlanini var tað, sum hann legði dent í teimum førum.*

*Spurdur, um hann partvíst hevði upplýsingar um royndir frá umsóknunum, ella um hann hevði upplýsingar aðrastaðni frá, greiddi Jacob frá, at tað er frá upplýsingunum, hann hevur í høvdinum. Hann kennir í roynd og veru øll, sum hava við fiskivinnuna at gera í Føroyum. Tað kann so vera bæði gott og ringt. Hann helt sjálvur, at tað er nokkso gott. Hann hevur verið fiskimálaráðharri í ógvuliga nógv ár í hesi øldini, og tí kennir hann sera nógv - eisini tey, sum altíð liggja framvið at sleppa uppí og hava roynt ymiskt. Hann hevur í høvuðsheitum tikið útgangsstøði í teimum umsóknum, sum vóru. Eginpening, og hvat tú kemur inn við sjálvur í felagið, helt hann vera eitt grundleggjandi og sakligt atlit at hyggja at, og eisini hvørjar royndir tey hava, sum ætla sær at fara í holt við nakað virksemi. Kanska tað spegladist aftur eitt sindur í Vestmanna, tí hann visti, at Vestmanna dugdi tað, sum teir søktu um. Tað dugir Tavan í Leirvík eisini og so framvegis. Og hann hevði eina fatan, tá ið hann sat við hesum umsóknunum. Hann fór ikki víðari enn við teimum, sum vóru tilmæld, at hann hevði eina fatan av, at av teimum vóru tað teir báðir, sum hann helt vera teir rættu, Gráastein og Ango, sum høvdu tað besta grundarlagið til at fara undir hesa verkætlanina. Tað er møguligt, at hann blandar, hvat var upplýst í umsóknarblaðnum.*

*Spurdur um, hvørjar førleikar landsstýrismaðurin hevur at meta um eginfígging og royndir í sambandi við skiparakstur, ella hvørjar royndir hann hevur við skiparakstri sum heild, greiddi Jacob frá, at hann hevur verið fiskimálaráðharri í 2003, frá 2008 til 2011, frá 2012 til 2015 og frá 2019 til 2021 út. Hann hevur soleiðis verið nógv ár fiskimálaráðharri og er ikki púra óroyndur. Hann hevur møtt ógvuliga nógvum fólki í fiskivinnuni ígjøgnum árini og kennir tí øll - Í roynd og veru øll, sum hava við fiskivinnu at gera, næstan útróðrarmenn eisini. Skiparakstur kennir hann einki til, men hann veit, at fert tú undir nakað, og tú hevur eitt dygt grundarlag í eginpeningi, so ert tú meiri mótstøðuførur, enn um tú ongan eginpening hevur og kanst klára meira. Og hann veit eisini, at royndir eru týdningarmiklar, eisini í fiskiskapi. So kann mann so halda um tað, sum mann vil, men royndir- uttan at mann veit tað, at nøkur klára tað væl í eini yrkisgrein, hava víst og prógvað, at tey klára seg væl - so heldur hann, tað telur, skulu tey undir okkurt annað virksemi í somu grein. Tað er væl har, tað er. Hann helt tað vera rímiliga almenn vitan, at royndir, grundarlag og eginpeningur hava týdning. Onkuntíð hava vit sæð, at tað eru nøkur fólk, sum skulu alt møguligt, men hava einki grundarlag, og so dettur alt niðurfyri. Tað virkar fyri honum, at tá fólk leggja meiri lív og sál í og meiri eginpening í, so kanska meina tey tað meira, og tey hava eisini meiri drívkraft til at fáa tað at ganga fyri ikki at missa tað, sum tey hava lagt í og so framvegis. Tú hevur eitt tryggari grundarlag, skuldi mótgangur komið, sum tað ofta er, tá ið tú fert undir nakað nýtt. Tað kann henda, at okkurt brotnar á einum skipi og so framvegis. Hevur tú eitt trygt grundarlag, eitt betri grundarlag við eginfígging, so klárar tú teg betri. Tað er tað. Og tað undrar hann - skal hann siga tað, sum tað er - at umsitingin ikki hugsaði tað. Tað mátti hann erliga siga.*

*Spurdur um uppáhaldini, sum m.a. í ávísan mun vórðu førd fram í tíðindunum, tá avgerðirnar vóru tiknar, um, at landsstýrismaðurin hevur samskift við ávísar tinglimir um, hvør fór at fáa kvotur, greiddi Jacob frá, at tað vóru ymiskar søgur um, hvør fór at fáa. Onkur var av tilvild røtt, og onkur var skeiv. Nei, hann hevði ikki havt*

*samband við nakran part. Men hann varð spurdur av ymiskum, eisini av politikarum, um hvussu gekst. Og svarið var, at umsóknirnar vórðu viðgjørdar, og at teir fingu svar, tá ið tíðin var búgvin til tað. Hann er soleiðis innrættaður, at um onkur ætlar at trýsta hann til nakað sum helst, so gongur tað beint mótsett. Tað varð beint hinvegin, og tað er so, tá ið hann eftirrationaliserar. Tí tað hava fólk funnið útav, at tað nyttar so ikki. Hinvegin, vísti hann á, sum hann byrjaði við at siga, at hann lovaði at vera rættiliga smidligur viðvíkjandi politisku viðgerðunum av § 49 við hesi puljuni, tá ið tey viðgjørdu lóggávuna og royndu at fáa hana igjøgnum tingið. So vildi hann heilt avgjørt liva upp til tað, um politiski viljin var til at broyta ásetingar. Sjálvandi skuldi hann virka innan fyri lógarinnar karmarog skuldi ikki leggja seg tvøran. Tí at nakrir av teimum, sum hjálptu honum og teimum at fáa lóggávuna ígjøgnum beinanvegin, teir vildu hava onkrar broytingar alla tíðina. Hann helt ikki, at teir vistu ordiliga, hvat teir vildu beinanvegin, men hann lovaði at vera smidligur í tí. Tað lættasta hevði verið at sagt: "Fínt, vit halda fast við, at vit selja alt á uppboðssølu einaferð við alla." So keypir tann, sum maktar tað best, og so er tað yvirstaðið. Men tá mann vildi nakað annað, so helt hann, at hann skuldi royna tað politiskt. Men sjálvandi skal alt tað við fyrisiting og lóggávu og øllum tí vera í ordan.  Men um onkur ætlar at trýsta hann, tað riggar ikki. Tað hevur ongantíð riggað. Aldri."*

*Rógvi Reinert*

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 28. oktober 2022 svarar Rógvi Reinert soleiðis uppá málið um Sp/f Mót:

*"Spurdur, um avgerðina at luta kvotu út til Sp/f Ango og Sp/f Gráastein, hóast Sp/f Mót varð tilmælt sum fyrsta val, greiddi Rógvi frá, at hann kendi stigvísu viðgerðina fram ímóti avgerðini, og  mann kann siga, at niðurstøðan í avgerðini, hon vísir eisini, hví tað bleiv gjørt. Men tað bleiv gjørt við tí grundarlagi, at landsstýrismaðurin vísti á royndir, ið stigtakararnir høvdu. Tað er eisini í tráð við leiðbeiningina í umsóknarblaði í stk. 6, har ið tað stendur: "Lýs stutt, hvussu langt ætlanin er komin í fyrireikingunum, og teir førleikar, sum eru grundarlag undir verkætlanini." So tað var einum parti av tí fyrisitingarliga grundarlagnum, sum viðgerðin hvíldi á. Men tað, sum var avgerandi - nú Mót varð nevnt mótvegis hinum, - tað var, at í lógartekstinum stendur: "Landsstýrismaðurin kann lata tilsøgn við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars metir at íløgan í fiskifari kann bera seg." Í viðmerkingunum endurtekur mann eisini: "Landsstýrismaðurin metir, íløgan kann bera seg." Í vegleiðingini stendur: "Um rakstrarætlanin kann bera seg fíggjarliga." Har er tað soleiðis, at bera seg er myndamál, men hann vil standa inni fyri, at øll, sum fáast við verkætlanir, øll sum fáast við bankavirksemi, øll sum fáast við vinnuvirksemi,  øll hava eitt felags forstáilsi fyri, at tað at kunna bera seg er øgiliga avgerandi fyri, hvussu fíggingin er, hvussu lánsfíggingin er. Ein niðurstøða, sum er nokkso tíðarleys, er, at eru fyritreytirnar hjá tveimum fyritøkum líka, tað merkir kvotan er tann sama hjá báðum, skipini líkjast, marknaðurin, har sum vøran verður seld til, er tann sami, økið, har mann fer at fiska, er tað sama, so er ein máti at lýsa munir uppá viðvíkjandi at kunna bera seg, hvussu fíggingin er. Og har sóu vit nokkso skjótt í viðgerðini, at førleikarnir hjá yvirmonnunum í Ango eru góðir, tá ið landsstýrismaðurin heitir á hann um at sparra eitt sindur saman við sær. Landsstýrismaðurin sigur, at hann heldur, at førleikarnir hjá yvirmonnunum í Ango eru eyðsýnt góðir. Tað eru førleikar, sum beinleiðis kunnu setast í samband við skiparakstur og beinleiðis eisini kunnu setast í samband við royndir og vitan í fiskivinnuni, sum skrivað er. Tí eru teirra førleikar at meta sum at hava hægri raðfesting enn aðrir førleikar. Tað var tað eina. Men tá tað kom til fíggingina, tá vísir tað seg, at tað eru 5 verkætlanir. Ein hevur eitt langfreistað lán uppá 125 milliónir, tann næsti hevur eitt lán uppá 73 milliónir, og so eru tríggir, sum eru eins. Og teir liggja ovarlaga í 40'unum,*

*einar 47-48 milliónir. Tí var tað sakligt, rætt og objektivt, hildu teir viðvíkjandi lógarinnar teksti og fyrisitingarliga grundarlagnum at siga, at ein fyritøka, sum hevur 25 milliónir minni í langfreistaðari fígging, hevur betri grundarlag at bera seg. Tað eru nógvir pengar, 25 milliónir. Hon stendur tekstinum um at kunna bera seg, nærri enn ein, sum er 25 milliónir hægri. Tað var líkasum grundgevingin. Tað næsta, mann so tekur við eisini, er líka týdningarmikið sum langfreistað skuld, og tað er váðafúsi kapitalurin, sum verður kallaður eginpeningur. Onkur sigur tann tolni kapitalurin. Er tað nakað, ein hevur brúk fyri við atliti at eini granskingarætlan, fyri at ein ein nýggj ætlan skal kunna bera seg, so er tað at hava góðan og tjúkkan váðafúsan kapital. Har vísti tað seg, at tann, sum hevði 73 milliónir í langfreistaðari fígging, hevur bara 2 milliónir í innskoti, meðan tríggjar hava eini 15, 16, 17 milliónir. Tann eini hevði 19,5, helt hann, í eginfígging. Einastaðni ímillum runt roknað 25 og 30 prosent í solvensi. Solvensurin er so øgiliga nógv størri í teimum trimum. Tí valdi landsstýrismaðurin at siga tað, at hesar tríggjar standa lógartekstinum nærri at kunna bera seg, og um at kunna hava eitt sterkt raktrargrundarlag, er so ómetaliga nógv sterkari enn hin fyrstvalda. Tí fall hon í raðfesting. Hann kundi so nevna, at tá ið mann tosar um fíggingarstovnar um nýtt skip, so hoyrir mann ofta, at mann skal hava 25 til 30 prosent í eginfígging. Tað er tað, sum má til. So munandi annarleiðis fíggingargrundarlag og annarleiðis fíggjarlag er so orsøkin til at gera eina niðurstøðu um, at mann stendur lógartekstinum nærri, um at íløgan kann bera seg. Man stendur eisini leiðbeiningini nærri, har ið mann vísir á eina rakstrarætlan, sum kann bera seg fíggjarliga og eisini í metingarskjalinum, har ið man tosar um rakstrargrundarlagið. So stóð tað eisini í oyðublaðnum, at mann skuldi upplýsa um lániviðurskifti, um eginpening, lánifígging og rakstrarfígging. So tað var líkasum orsøkin til, at tann eini fall nakað í raðfesting. Annars kundi hann siga, at orðingarnar eru nokkso bleytar, tí at mann tilmælir, og mann sigur, at hinar kunnu verða tilmældar.*

*Spurdur, um tað vóru umsóknirnar í bólki 2, sum sipað verður til, svaraði Rógvi játtandi og greiddi frá, at tað var fíggingin, sum var orsøkin. Hon var so ómetaliga nógv annarleiðis.*

*Spurdur, um tað var fíggingin, sum var munurin á Sp/f Ango og Sp/f Gráastein øðrumegin og Sp/f Mót hinumegin, svaraði Rógvi, at tað var fíggingin og so eisini royndirnar.*

*Spurdur, um landsstýrismaðurin hevði aðrar upplýsingar um fígging og royndir hjá umsøkjarunum enn tær, sum stóðu í umsóknartilfarinum, svaraði Rógvi, at honum vitandi vóru ikki aðrar upplýsingar enn tær, sum stóðu í umsóknartilfarinum. Hatta var tað. Tað kom fram í viðgerðini ímillum okkum báðar, sum hann skrivar í teldupostinum til mín 12. august: "Byrja tú at kanna viðurskiftini nærri. Kanst tú kanna tað, sum annars er um hesi málini, nærri?" Og í tí viðgerðini komu vit meira ítøkiligt inn á fíggjarliga spurningin. Hann kundi ikki siga akkurát, hvat áskoðanin hjá landsstýrismanninum var, men í viðgerðini vildi hann siga tað, at hasir tríggir í mun til Mót, har helt hann nokk, fíggingin var tað, sum var so alstórur munur. Tí tú skalt gjalda 25 milliónir meir enn hin. Tað eru milliónir, vit tosa um. At tað var so tyngjandi, tað var nokk tað, sum var tann fyrsta orsøkin.*

*Spurdur aftur, um tað var fíggingin, sum var avgerandi, greiddi Rógvi frá, at royndirnar eisini høvdu týdning. Tí um mann tekur Ango, so er tað soleiðis, at mann sigur ein, hann vildi ikki nevna navn, men ein hevur siglt alt sítt lív, og hann hevur fullan kunnleika um allan fiskiskap, og mann vísir til royndir aftur í 1995. Tann næsti hevur verið í føroysku fiskivinnuni síðani 1990 og hevur royndir sum skipari. Tann triði hevur siglt alt sítt lív og vísir bæði á royndir sum stýrimaður og í uppisjóvarvinnuni uttanlands. Meðan hjá Gráasteini hevur stjóri*

*felagsins royndir sum fiskiskipari, og hinir hava fingist við fiskasølu og útflutning altíð og eisini menning av nýggjum vørum og marknaðum. So tað verður eisini lýst ítøkiligt.*

*Spurdur, um nakað skjalprógv ella annað var lagt við umsóknunum viðvíkjandi royndum og øðrum, svaraði Rógvi, at tað var tað ikki, heldur ikki viðvíkjandi menning av nýggjum vørum og marknaðum. Hann vísti tó á, at tað í umsóknini verður víst á, at stjórin er royndur fiskiskipari. Men sum sagt við Mót metti hann, at fíggingin var tað mest avgerandi. Ella har er tann týðiligasti munurin. Hann vildi næstan siga, at eftir hansara áskoðan kundi fíggingin næstan staðið einsamøll, tá ið tað nú bara var pláss fyri tveimum, tí at íløgan kundi bera seg og hevði eitt sterkt rakstrargrundarlag og fíggjarligt grundarlag.*

*Spurdur um ta einu umsóknina, har eginpeningurin var áleið 19 mió. kr., men har komið varð fram á, at ein stórur partur av tí var ábyrgdarpeningur, greiddi Rógvi frá, at tað legði hann eisini merki til. Tað bleiv so rættað, og tað er so eitt kjak, mann hevur havt leingi, hann visti ikki, um ábyrgdarpeningur skuldi bókast undir eginpening ella ikki. Men hann hugdi í fíggjarætlanina, og tað vísti seg, at ábyrgdarpeningurin skuldi ikki gjaldast í øllum førum tey fyrstu 5 ella 6 árini. Í yvirlitinum hjá grannskoðaranum stóðu rekkjurnar úteftir, at ábyrgdarpeningurin bleiv ikki rørdur tey fyrstu nógvu árini. Men skuldin er framhaldandi eisini lægri enn hjá hinum. So bleiv ein kunnaður um seinri, at eginpeningurin bleiv lækkaður, men skipið vísti seg at blíva bíligari, enn mann hevði væntað. Tað var seinni aftur. Men ein solvensur, sum er ímillum 25 og 30 prosent lægri, skuldi mótvegis einum solvensi, sum er 2, 3 prosent og 25 milliónir hægri skuld.*

*Spurdur um orðingina, at verkætlanin skal vera klár at føra út í lívið "beinanvegin", greiddi Rógvi frá, at har skuldi hann taka til góðan kritikk. Hann skilti væl, at fólk spurdu.  Hann vildi siga, at tað er í tí sambandi, at Mót kanska følir, at alt kanska ikki var, sum tað skuldi viðvíkjandi teimum. Men beinanvegin, tá tú keypir eitt skip, altso tá tú sendir eina umsókn inn, so kanst tú ikki keypa skipið áðrenn. Tað ber ikki til. Tú kanst ikki keypa skipið og risikera at fáa noktandi svar. Vit tosa um skip fyri 50-100 milliónir. Tað er vónleyst. Beinanvegin? - Altso hann vildi sagt nakrar vikur, tí at skipahandil er øgiliga globalur. Tað er einki løgið í, at ein føroyingur keypir eitt skip, sum fiskar uppi í Kanada. Tað er heldur einki løgið at keypa eitt skip, sum liggur í Vesturafrika onkustaðni. Tað er púra, púra normalt. Ja, føroyingar hava enntá selt skip til New Zealands og keypt tey heimaftur til Føroyar. So skipahandil er øgiliga globalur. Um so er, at ein hevur sent eina umsókn inn og fær játtandi svar og fær at vita tað, at skipið liggur niðri í Mauritania, og at teir mugu sigla tað heim til Føroyar, og so mugu teir skráseta skipið eftir føroyskum skrásetingum, og annað umsitingarligt má gerast, og so fara teir avstað. Tað er beinanvegin. Hann tekur skipið upp beinanvegin.*

*Spurdur um, hvussu leingi "beinanvegin" er í praksis, greiddi Rógvi frá, at tað kann vera, at skipið, sum mann keypir, er til fiskiskap hjá gamla eigaranum. Og hann sigur: "Eg selji skipið beinanvegin, men vit mugu sleppa at fiska fiskin lidnan og sigla skipið inn og so koma heim." So tá ið skipið er keypt beinanvegin, so er keypið beinanvegin, og skipakeypið er klárt beinanvegin. Men sum sagt at sigla skipið heim frá einum øðrum kontinenti ella heim úr Kanada, og tað kann vera illveður og annað, so kunnu tað ganga nakrar vikur. Men eg skal siga, at hatta við beinanvegin, hatta var kanska ein manglandi neyvleiki, sum vit sum fyrisiting skulu taka sum góðan kritikk. Men hasi dømini við Ango og Biritu, tey komu til Føroya øgiliga skjótt aftaná, og við vanligari vitan og innlit í skipakeyp, so haldi eg, at um ein keypir eitt skip og fær tað, eftir at nakrar vikur eru farnar, so tað beinanvegin. Hann kundi taka eitt dømi. Um tú selur eitt skip, fullkomiliga selur tað, so hevur mann í lóggávuni fingið tilsøgn um at keypa eitt annað skip. Men tú skalt fáa møguleika at hyggja at einum*

*nýggjum skipi. Tú skal hava møguleika at umbyggja skipið. Tú skalt hava møguleika at finna tað rætta skipið, og tí fær hann, hon, sum fær tilsøgn um eitt nýtt skip, tilsøgn uppá 2 ár í lóggávuni. Tað er so ikki beinanvegin. Tú skalt ikki byggja eitt nýtt skip, tú skalt ikki umbyggja eitt skip. Men sum sagt, ein sum leggur eina verkætlan á borðið, verkætlanin lýkur treytirnar í lógarinnar teksti, um skipið liggur í Kanada, skipið kann siglast heim og vera klárt eftir nøkrum vikum - tað er beinanvegin. Tað er tað. Mann skal navngeva skipið, siga hvar tað liggur og siga alt um skipið.*

*Spurdur um, hvat liggur í hugtakinum "nýggir aktørar", greiddi Rógvi frá, at har er eisini nakað við ískoytiskvotur innan fyri 8%. Men nýggir aktørar, ja, tað er sjálvandi nýggj feløg og nýggj virkir. Tað hugtakið kom serliga upp, tá ið samgongan, sum sat frammanundan hesi samgonguni, sat 2015-2019, segði nýggir aktørar. Í øllum førum er tað, nýggj feløg, sum ikki hava verið í fiskivinnuni yvirhøvur. Har kann mann nevna Vestmanna Fiskavirki, teir hava ikki framleitt uppisjóvarfisk yvirhøvur. Men ígjøgnum menningarkvotur og ígjøgnum royndarskipanir hava teir so ment eina framleiðslu. So tað er ein nýggjur aktørur. 31.01 hevur ikki viðgjørt yvirhøvur royktar […] úr makreli. Tað er ein nýggjur aktørur. Ango og Grástein áttu einki skip, teir høvdu einki skip. Feløgini vóru ikki til, sjálvt um navnið Ango var, og nú keyptu teir eitt skip. So tað eru nýggir aktørar. So kann man siga, at tað er kanska, hann visti ikki, subjektivitetur í øllum. Um ein hevur verið virkin og umboðar 0,01% av onkrum, er hann so ikki nýggjur, um hann kemur í gongd við okkurt størri? Tað visti hann ikki. Sum nevnt, navnið Ango hevur verið í vinnuni fyrr. Men tað var ein skeljabátur, sum fiskaði norðan fyri Føroyar í 80'unum, 90'unum og so víðari. So sjálvt um Ango-navnið í 2022 kemur aftur, so eru tað nýggir aktørar. Tað eru aðrir enn tey, sum hava vanligar kvotur í dag. Tað er tað. Vanligar stórar kvotur, og hvat er so ein vanlig stór kvota? Tað er ein, sum ikki er uppboðssølukvota og ikki er vinnuligar royndir og verkætlanir og ikki royndarkvota annars.*

*Spurdur um umsóknirnar, har fleiri umsøkjarar hava forkeypsrætt til sama skip, og har umsøkjarar enda við at fáa lutað út kvotu til annað skip enn tað, sum stóð í umsóknini, og um hetta er í samsvari við lóggávuna, greiddi Rógvi frá, at orsøkin til, at mann hevur gjørt tað og góðtikið tað, er sjálvandi, at tað skipið, sum mann fær, ikki uppá nakran máta broytir grundleggjandi viðurskiftini so nógv, at upprunaviðgerðin av umsóknini skeiklast fullkomiliga. At hon stendur við. So tað er tað. Og tað, sum serliga kundi gjørt tað, tað er um mann hevði keypt eitt nógv dýrari skip og lænt nógv meira pengar, men tað, sum hann nevndi um handan eginpeningin, sum var broyttur eitt lítið sindur, var, at ein kundi vísa á eitt skip, sum var eitt sindur bíligari. So stendur ein bara tað betri í mun til møguleikarnar um at verja seg. So tankarnir eru tað, at fær mann eitt annað skip, so má tað uppá ongan máta broyta grundleggjandi viðurskiftini í umsóknini ella í viðgerðini av umsóknini og játtanini.*

*Spurdur um orsøkina til, hví Fiskimálaráðið valdi ein leist, har umsøkjarar ikki vórðu hoyrdir (partshoyrdir), greiddi Rógvi frá, at ein grund til tað var, at um tað í hoyring er ein partur, altso teir høvdu viðgjørt tað í skipanini sum heild, so hevur eitt sjónarmið verið frammi um, at so mugu allir umsøkjarar vera vitandi um tað. At tað at verða hoyrdur og sleppa at siga tíni sjónarmið er ein partur av málsgongdini. Tað er ein orsøk. Tað er øgiliga vandamikið at fara út og hoyra ein og ikki hinar, og tað mintist hann, at ein løgfrøðingur hevði sagt við hann. Tað skal øgiliga nógv til, at mann ger tað, tí at so gevur tú einum ein ómetaligan fyrimun fram um hinar. Tí tá sleppur hann í roynd og veru at lata tvær umsóknir inn, eina skrivliga og eina munnliga, uttan at hinir vita av tí. Tað er ein so mikið stórur fyrisitingarligur ólíki, at tað má man ikki fara inn á. So tað er ein regla, at skal hoyring vera, so mugu øll vita tað, at tú hevur tann møguleikan. Tað er tað eina. Tað næsta er,*

*at í leiðbeining til oyðublað, í oyðublaði, í metingarskjali undir kunngerð, í kunngerð, í lógarteksti og í tíðindaskrivi er málið lýst við so nógvum fjølbroytni, men eisini við ítøkiligum leiðbeiningum, serliga tá oyðubløðini og vegleiðingarnar blivu innførdar, so má mann vænta, at allir umsøkjararnir á líka fóti kunnu lýsa alla umsóknina fullborið. Tað er orsøkin. Hasar báðar orsøkirnar. Tí hevur mann valt ikki at gera tað.*

*Spurdur, um hann hevur havt nakað samskifti við nakran umsøkjara, serliga í mun til spurningin um eginpeningur og royndir fóru at vera avgerandi fyri at fáa tillutað kvotu eftir § 49, stk. 1, 2. pkt., svaraði Rógvi, at tað hevði hann ikki."*

### Rannvá Sólheim

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar 27. oktober 2022 svarar Rannvá Sólheim soleiðis uppá málið um Sp/f Mót:

*"Spurd, um tað var nakað skjalprógv uppá royndirnar hjá umsøkjarunum, svaraði Rannvá, at tað var tað ikki. Tey vendu faktiskt ikki aftur til nakran. "Tað var soleiðis, at tað var onkur umsókn, sum tit kanska hava sæð, sum var øgiliga hjálparleys." Og so tosaðu tey um, um tey skuldu venda aftur og siga, at hon ikki var fullfíggjað og sovorðið nakað. Men so var tað tað, at um tey byrjaðu uppá tað, so fór tað at vera akkurát sum, at myllan fór at fara á rull. Tey mettu, at oyðublaðið var greitt, vegleiðingin var greið, metingarskjalið og kunngerð og lóg. Altso, tey viðgjørdu tað út frá tí, sum var komið inn. Og eisini tókuatlit til, at tíðin var knøpp, og at um tey skuldu fáa fiskað nakað av hesum kvotunum í 2021, so varð ikki tíð til tað. Men tað var ikki tað, sum var berandi. Altso tey hildu, at tey høvdu spurt um allar upplýsingarnar, sum vóru neyðugar, og um onkur so ikki hevði upplýst tað, so var tað ikki teirra skyld.*

*Spurd um innanhýsis upprit, sum Rannvá hevði skrivað tann 1. oktober 2021, greiddi Rannvá frá, at hon gjørdi tað serliga fyri eftirtíðina, fyri at lýsa gongdina og at vísa á, at landsstýrismaðurin veik frá teirra tilmæli. Uppritið er nokkso frágreiðandi, og hon hugsaði eitt sindur um, at um 5 ár, tá mann fór aftur at sita í Fiskimálaráðnum og tosa um hetta her, altso hvussu tað nú var akkurát. Og so vildi hon eisini vísa á, at tey stóðu enn føst við sítt tilmæli, men sum sæst, at hon hevur skrivað viðvíkjandi skipakeypum, kanska serligahar undrast hon á, at hann hevur lopið Mót um. Altso tað var soleiðis, at bert umsóknin hjá Mót var mett stuðulsverd (grøn). Tað var líka sum nummar 1, og so vóru tað 4 skip, sum vóru í bólki 2 ella so (tey gulu). Tey hava eisini tosað um nú í sambandi við kanningarstjóran, at av teimum í bólki 2 helt hon faktiskt tá, at tað var eitt gott val. Hon hevur tosað við Símun aftur um tað, hví tað í roynd og veru var, at øll hasi 4 fóru í bólk 2, tí at hon helt faktiskt, at Ango og Gráastein kanska høvdu eitt sindur betri umsóknir enn hini bæði. Men ikki tí at mann skal bólka tað, men av teimum gulu, so helt hon, at hasi bæði vóru góð. Men trupulleikin var bara tað, at hann ikki hevði valt Mót. Tað vildi hon vísa á. Hon skuldieisini líka siga, at hon helt ikki sjálv, at tað var lógarbrot beinleiðis. Tí um tað var, so hevði hon farið aftur til landsstýrismannin og sagt tað beinleiðis við hann, at hon metti, at tað var lógarbrot, at hann valdi Ango og Gráastein og ikki valdi Mót. Men hon heldur, at tað er kanska meira ringur fyrisitingarsiður. Altso, tey hava valt eina øðrvísi loysn. Ella landsstýrismaðurin hevur valt eina øðrvísi loysn at bólka tað egnaða (grøna) og tað kanska egnaða saman (gula). Og har vóru avbjóðingar í sambandi við teir gulu. Tær vóru tað, at tey høvdu treytir um, at tað skuldi verða 12 ára rullandi loyvir. Ta treytina kundu tey ikki geva. Tí helt hon sjálvandi, at nú fingu tey eina fyribils tilsøgn, har sum tey skuldu fáa hetta her í lagi. Men altso í 3. pkt í grein 49, har stendur, at mann skal taka støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars. Altso tað er nokkso vítt, um hvussu mann metir. Tað er*

*ikki bara eitt úrslit. Tað er ikki tað. Í metingarskjalinum stendur eisini, at niðurstøðan skal byggja á eina heildarmeting av verkætlanini, og at hugt verður at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið. So tað er gjørt við vilja, soleiðis at mann skal kunna taka eina heildarmeting. Tí helt hon ikki, at tað var ólógligt, at hann frávaldi Mót, men hon helt ikki, at tað var eitt upplagt val at frávelja Mót. Hon greiddi víðari frá, at í kærumálunum, ella áheitanum um uppafturtøku, sum komu inn aftaná, vísti Fiskimálaráðið í skrivinum til kærararnar, at tað var sakligt at leggja dent á eginpening og royndir fyri møguleikan at eydnast. Og eisini tá ið tað vóru so nógvar umsóknir, altso tað kundu bara veljast í mesta lagi 2. Tí kundi tað eisini vera, at tað vóru umsóknir, sum luku allar treytir, men sum kortini fingu eitt nei.*

*Spurd, um umsøkjararnar í tí gula bólkinum, har umsitingin ikki kundi taka dagar ímillum, greiddi Rannvá frá, at tey vilja ikki ordiliga taka dagar ímillum, hvat ið var. Men tað var bara í mun til tað, sum man hugdi fyrst eftir, har kundi man akkurát sum nikka ja til alt hjá Mót. Har vóru tað so nøkur fyrivarni í gula bólkinum. Serliga hetta her kravið frá peningastovninum um 12 ára rullandi loyvi. Eg veit ikki, um tað er bara sovorðið standard. Tað var nokk krav frá bankanum í fleiri av hesum, og so høvdu teir so eitt krav um kvotustødd, hon mintist ikki ordiliga. Tað var kanska ikki so langt av leið sammett við tað, teir fingu.*

*Spurd um, hvørjari raðfylgju metingarskjalið skal metast eftir, greiddi Rannvá frá, at hon vil siga, at har tað stendur: "ítøkiliga verður metingin serliga grundað á hesi fyrilit." Altso tey hugdu nógv eftir, um tað var ein skjalprógvað avtala um eitt skipakeyp. Sjálvandi høvdu tey ikki keypt skipið, men tey høvdu ein forkeypsrætt. Og so eisini hetta her við fíggingini og rakstrarætlanini, at tað kundi bera seg við teimum kvotunum, sum tey fingu. Tað skuldi tað helst, ella í sambandi við tær minstu kvoturnar, sum tey søktu um. Tað skal so sigast, at tey kundu jú keypa. Tey fiskifør, sum fingu hesar kvoturnar, tey fingu møguleikar, akkurát sum øll onnur, at keypa kvotur á marknaðinum frá øðrum, tá teir vóru komnir í gongd. Men hasum hugdu tey fyrst og fremst eftir, tað gjørdu tey. Hon veit ikki ordiliga, um hon kann siga nakað um, hvat vigaði meira. Men mann kann siga, at tey fóru líkasum niður eftir metingarskjalinum, men um tað síðsta reglubrotið vigaði minni ella meir enn hitt, tað dugdi hon ikki at siga.*

*Spurd, um tað síðsta reglubrotið skal skiljast sum "heildarmetingin", svaraði Rannvá,ja, niðurstøðan í viðgerðini skuldi byggja á eina heildarmeting.*

*Spurd um orðingina "og harumframt verður eisini hugt eftir øðrum viðurskiftum í umsóknini, sum kunnu styrkja rakstrargrundarlagið", svaraði Rannvá, at hon hugsar, at tað kundi verið, um umsøkjarar kanska longu høvdu onkrar royndarkvotur av onkrum øðrum slagi. Men tey gjørdu hetta her, fyri at tað ikki skuldi verða so snævurt. Altso fyri at tað skuldi verða opið fyri eini heildarmeting.*

*Spurd um samskifti, sum kærari hevur havt við Fiskimálaráðið, har spurt verður um, hvussu orðingin "talan kann vera um viðurskifti, ið umsøkjarin metir kunnu styrkja rakstrargrundarlagið", har Fiskimálaráðið svarar, at sum dømi kann nevnast annað virksemi ella samstarv við onnur ella aðrar verkætlanir, greiddi Rannvá frá, at hon hugsaði, tá tey sótu við hesum: "áh, hetta merkir royndir og eginpeningur". Tað gjørdi hon ikki. Men í hesi vegleiðingini til oyðublaðið, so hava tey jú frámerkt, at tað skulu umsøkjarar upplýsa. Teir skulu upplýsa, hvat fyri royndir teir hava, og hvat fyri eginpening teir hava. So hatta er eitt atlit, tey hava mett hevur týdning. Men at tað akkurát er tað, sum er høvuðstátturin til endans, tað er ikki tað, tey akkurát hava hugsað um har. Tað er meira ein samlað meting, og har er so hesin her eginpeningurin, og altso vit kunnu siga møguleikin fyri*

*at eydnast, at mann hevur nakrar royndir og eitt sterkt fíggjarligt grundarlag. Tað metir mann eisini er sakligt at taka atlit til, tá ið tað nú eru fleiri, sum eru nøkulunda líka á vektskálini.*

*Spurd, um hon sendi uppritið, sum hon skrivaði, til nakran, svaraði Rannvá, at tað gjørdi hon ikki. Hon journaliseraði tað bara, og so segði hon tað við Andras einaferð. Hon mintist ikki akkurát nær, men hann visti í øllum førum um, at hon hevði gjørt hetta uppritið. Men hon sendi tað ikki til nakran.*

*Spurd um orðingina "verkætlanin skal vera klár at føra út í lívið beinanvegin" greiddi Rannvá frá, at hon var eitt sindur kedd um, at hatta stendur har. Hon var greið yvir og segði tað eisini við Símun, at "straks er straks". Altso tað mintist hon frá løgfrøðilesnaðinum. So at beinanvegin í hasari orðingin er sjálvandi ikki meint við,e at mann skal hava eitt skip liggjandi við kai, tá mann søkir, ella at tað skal vera klárt frá fyrsta degi. Og tað heldur hon eisini , at mann sær bæði í oyðublaði og metingarskjali. Tí mann spyr jú um avtalu um keyp og um fígging og sovorðið. Tey vóru gott greið yvir, at tá mann fær eitt loyvi, so fer man ikki at fiska dagin eftir. Mann skal fáa klassaskjøl og alt hetta her. Men tað, sum mann hevur meint, tá mann hevur skrivað beinanvegin, tað er innan fyri rímiliga tíð. Og hon skal nokk siga, at tað er tað, sum nokk heldur átti at havt staðið har. Hon veit ikki ordiliga, hví mann hevur skrivað beinanvegin, men tað er serliga viðvíkjandi tí, at mann skal fiska hesar kvoturnar. Kvotan fyri 2021 skal ikki fara fyri skeytið. So mann vil hava, at tað skal ganga skjótt ella sum skjótast, men mann veit gott, at øll hava ikki skipið. Tað var ikki meint sum tað, at mann skuldi keypa eitt skip úr Klaksvík ella av Skála ella eitt ella annað. Altso mann skuldi eisini kunna keypa eitt skip úr útlandinum, ella hvaðani tað var.*

*Spurd, um tað ikki stóð í lógini, at umsøkjari skuldi fáa eina tilsøgn, greiddi Rannvá frá, at mann fær eina tilsøgn um eitt fyribils veiðiloyvi. Tað var tað, at hesi her, tey hava ikki veiðiloyvi frammanundan. Tey hava hvørki veiðiloyvi ella fiskiloyvi. Tey eiga ikki nakað skip áðrenn. So er hetta akkurát sum ein sovorðin roynd ella kemur undir paraplyina vinnuligar royndir og verkætlanir. So skal man akkurát sum fyri fyrst í 5 ár fáa eina tilsøgn, eitt loyvi frá Fiskimálaráðnum um at fiska við hesum fiskifarinum. So er tað so komið inn seinni, at kvotan, mann fær tillutað, hon kann umleggjast. Fyri tað fyrsta, so fær man eina tilsøgn í 5 ár. Tað er tíðarskeiðið fyri verkætlanina. Men fiskiloyvi verður útskrivað hvørt ár. Mann fær bara fiskiloyvi fyri eitt ár í senn. So skulu tey geva eina frágreiðing til Fiskimálaráðið, har tey vísa á, at tey hava fiskað, og tey hava brúkt kvotuna og alt hetta her. So fáa tey fiskiloyvi í eitt ár afturat, og soleiðis gongur tað. Men so er tað komið inn í lógina, at frá nú, 1. januar, kunnu tey søkja um at fáa tað umlagt til egnar árskvotur. Og tá tey fara at leggja um til árskvotur, nú tosa vit um skipakeyp. Um tey so fáa játtan uppá, at tað kann umleggjast, so fáa tey eina aðra støðu. So kunnu tey avhenda hesar kvoturnar, og tað kunnu tey ikki í dag.*

*Spurd um, hvat meinast við hugtakið "nýggir aktørar", greiddi Rannvá frá, at tað er nokk serliga brúkt í sambandi við skipakeyp. Tá hava tey serliga hugsað um, at tað er ein aktørur, sum ikki longu er grundfestur í fiskivinnuni við egnum skipi. Tað er ikki soleiðis, at tað er eitt krav um, at mann skal vera púra blankur. Als ikki. Tí tey spyrja nemliga um royndir í oyðublaðnum. Men ein nýggjur aktørur, altso tað ikki skal vera ein, sum longu eigur skip frammanundan. Sum ikki er grundfestur í fiskivinnuni við egnum skipi. Uppá tann mátan nýggjur aktørur. Men tey hava avgjørt ikki meint tað, at viðkomandi skal koma inn frá gøtuni uttan nakað.*

*Spurd, um tað t.d. kunnu vera virkisleiðarar og onnur, svaraði Rannvá ja, ella skiparar og fólk, sum hava verið leingi á sjónum og vita, hvat tað er, tey tosa um, og sum nú vilja keypa eitt skip og blíva reiðarar. Altso tað hava tey í ráðnum sæð sum eitt pluss.*

*Spurd um málini, har umsøkjarar hava forkeypsrætt til sama skip, og har umsøkjarar fáa tillutað kvotu til annað skip enn tað, sum upprunaliga var søkt um, greiddi Rannvá frá, at tey tosaðu eitt sindur um tað í sambandi við viðgerðina av oyðubløðunum. Tey sóu nevniliga, at tað vóru nøkur, sum høvdu tað sama skipið, og tað spurdi hon eitt sindur um tá altso um mann kundi tað, og tá fekk hon so frágreiðing um, hon veit ikki, um tað var frá Símun, ella hvørjum tað var. Altso tað virkar soleiðis, at mann fær ein forkeypsrætt til skipið. Altso um eg fái einforkeypsrætt, og tú fært forkeypsrætt til sama skip, so er tað tann, sum fyrst tekur av ella so, sum fær skipið. Og tí er ikki nakað forgjørt í, at tað eru fleiri, sum fáa hendaforkeypsrættin til sama skip. So tað var akkurát sum í lagi, at tað var uppá tann mátan. Men spurningurin var kanska meira, um mann kundi skifta til annað skip seinni. Og har høvdu tey líkasum tað uppfatan, at mann fekk henda forkeypsrættin í so og so nógvar dagar. Tí meklarin, sum selur hetta skipið, kundi ikki í fleiri mánaðir parkera skipið til ein ávísan. Tí hetta dró jú út. Tey skuldu senda umsóknina inn 6. juli. Tá skuldu tey hava forkeypsrættin til skipið, og avgerðin fr jú ikki út fyrr enn 30. august. Tá kemur avgerðin, og avgerðin skal so skrivast og fara út til øll hesi her. Tað er so øgiliga langt tíðarskeið. Avgerðirnar fara út í september, men avgerðin kemur til okkara 30. august, men so skulu allar avgerðirnar skrivast. Tað var síðst í septembur, helt hon. Vit tosa um eitt langt tíðarskeið. Tey høvdu forstáilsi fyri, at tað bar ikki til, at mann skuldi halda uppá hetta skipið í øllum hesum tíðarskeiðinum. Og tí vísti tað seg ofta, at skipið var selt aðrar vegir, tá tey vórðu klár. Og so stendur í § 49, stk. 8 í Sjófeingislógini, at um broytingar eru, so skal landsstýrismaðurin góðkenna tað. Ta heimildina høvdu tey brúkt í sambandi við, at tey viðgjørdu,  um tey kundu seta hetta skipið inn í staðin. Tey fingu loyvi uppá hetta skipið, men nú kundu tey ikki keypa tað. Nú fóru tey at keypa eitt annað skip. Tey kravdu nokkso nógv skjalatilfar í sambandi við tað nýggja skipið. Hvussu nógv tað kostaði, hvørjum standi tað var í, altso  um skip nummar 2 kundi koma inn í staðin fyri skip nummar 1. Tað viðgjørdu tey so í teimum førum, har tað var viðkomandi, og loyvdu tí eisini.*

*Spurd um nøkur beinleiðis viðgerð var í sambandi við, at umsøkjarar máttu finna sær onnur skip, greiddi Rannvá frá, at tað absolutt var ein viðgerð. Tey fingu nógv skjalatilfar um tað nýggja skipið, og tey høvdu eisini í onkrum førum fund við tey, sum fingu, Ango ella Gráastein. Annan av teimum høvdu tey fund við, har tey tosaðu um millum annað hetta skipið. Altso tað, sum hevði týdning var ikki, um skipið æt a ella b. Tað var ikki tað týdningarmikla. Tað var, um hetta skipið var líka gott og kundi røkja uppgávuna, sum verkætlanin bleiv játtað til. Líkasum at hugsa, at um nú skip nummar 2 var tað, sum var í umsóknini av fyrstan tíð, um tey so høvdu fingið loyvið.*

*Spurd, um tað var avmarkað, hvørji skip vóru tøk á marknaðinum, greiddi Rannvá frá, at í øllum førum til hendan fiskiskapin var tað avmarkað. Men hon helt orsøkina mest vera, at tað var jú øgilig tíðarneyð. Tey, sum søktu um skipakeyp, tey skuldu fara øgiliga skjótt fram.*

*Spurd um, hví tað tók so langa tíð at lýsa kunngerðina og lýsa eftir umsóknum í 2021, greiddi Rannvá frá, at ein partur er sjálvandi, nær kvotan verður ásett, men tað átti at verið nokkso væl frammanundan. Men tað er eisini um, nær fiskitíðin var. Fyri makrelin er hon frá sumri og til heystið. Altso tað er mest í tí seinnu hálvuni, mann fiskar hetta her. So skuldi mann eisini bíða eftir lógarbroytingini um skipakeyp. So mann kundi ikki gera*

*nakað, fyrr enn tað var komið til tað, at skipakeyp var komið inn sum ein møguleiki. So mann royndi at arbeiða so skjótt sum møguligt. Uppskotið bleiv eisini broytt í tinginum. Uppskotið til dømis, sum fór niðan, har var tað ásett, at hasi skipini bara fingu kvotuna, sum vit tillutaðu teimum. Men tað bleiv broytt í vinnunevndini og samtykt í løgtinginum. At tey eisini skuldu hava loyvi til at keypa og avhenda, ella tey sluppu ikki at avhenda hesa kvotuna, men annars kundu tey virka á marknaðinum sum hini. Tey kundu sleppa at fáa størri kvotugrundarlag at keypa frá onkrum.*

*Spurd um, hví ráðið valdi ikki at hoyra umsøkjararnar, greiddi Rannvá frá, at fyrst og fremst var orsøkin tann, at tey royndu at gera oyðublaðið, tað vil siga lóg og kunngerð og oyðublað, so gott sum møguligt, soleiðis at tey bóðu um alt tað tilfarið, sum tey mettu skuldi verða grundarlagið undir viðgerðini. Nevniliga fyri at hava eitt so gott grundarlag sum møguligt. Tá ið so umsóknirnar komu inn, so høvdu tey eitt prát, hon mintist ikki, um tað var eina ferð ella tvær ferðir, um hetta her. Eitt atlit var tað, at tað vóru nakrar umsóknir, sum vóru øgiliga vánaligar. So var tað spurningurin, um tey skuldu fara út og siga: "evitst tú hvat, tit mugu gera hetta betri, og vit spyrja eisini um hatta og hatta." Men so tosaðu tey um, at so máttu tey eisini fara at spyrja tey um hatta, og so máttu tey eisini fara at spyrja handan um hatta og handan um hatta. So komu tey ásamt um, at tey høvdu gjørt oyðublaðið, og at tað lá á umsøkjarunum, eisini út frá vegleiðingini, at svara uppá tað, tey spurdu um.*

*Spurd, um einki fyrivarni varð ásett í umsóknarblaðnum um, at umsóknirnar bert vórðu viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum, svaraði Rannvá, at tað stóð ikki, men í metingarskjalinum stóð, at tey viðgjørdu tað út frá oyðublaðnum og tí, sum umsøkjarar høvdu upplýst har og umstøðum annars, sum tey høvdu verið inni á. Tað, sum stóð í metingarskjalinum, sum fylgdi við oyðublaðnum, og sum fylgdi við kunngerðini. Men tað stóð ikki beinleiðis.*

*Spurd, um hon hevur havt nakað samskifti við umsøkjarar, har umsøkjarar hava spurt um eginfígging og royndir, svarar Rannvá, at hon kann ikki koma í tankar um, um akkurát hasin spurningurin hevur verið. Tey høvdu øgiliga lítið samskifti við umsøkjarar í tíðarskeiðinum. Onkur bað nevniliga um fund, og tey søgdu nei, tí at tey vildu, at øll skuldu vera á sama stigi. "Tit hava givið okkum hesar upplýsingarnar, og tað er tað." Nei."*

### 5.2.1.1.1 - Meting

Innleiðandi er at viðmerkja, at umsitingin í Fiskimálaráðnum mælir Jacob Vestergaard til at ganga tveimum umsóknum eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. á møti. Talið av umsóknum, sum mælt verður til at ganga á møti (tvær umsóknir), er grundað í karminum í tøkari kvotu. Umsitingin metir soleiðis, at tøka kvotan avmarkar talið av verkætlanum til tvey skip. Hetta tekur Jacob Vestergaard eisini til eftirtektar í síni niðurstøðu og velur at luta kvotu út til tveir umsøkjarar.

Eg havi ikki grundarlag fyri at seta spurnartekin við metingina hjá umsitingini, at tøka kvotan bert rúmar tveimum verkætlanum. Í mini meting leggi eg tískil til grund, at rúm bert er fyri tveimum verkætlanum eftir § 49, stk. 1, 2. pkt.

Í sambandi við kæruna frá Sp/f Mót vísir Fiskimálaráðið á í svari sínum, at talan er um umsóknarmál, har nógvir umsøkjarar eru til eitt avmarkað kvotugrundarlag. Hóast møguliga fleiri umsøkjarar eru, sum lúka

grundleggjandi treytir, er ikki vist, at hesir fáa kvotu játtaða. Um talan er um fleiri egnaðar umsøkjarar, enn kvota er til, mugu teir vigast grundað á saklig metingarstøði.

Fyrst meti eg tað vera viðkomandi at hyggja nærri at, um Sp/f Mót í størri mun enn hinir umsøkjararnir, lýkur grundleggjandi treytirnar. Grundgevingin hjá Sp/f Mót er, at Sp/f Mót lýkur allar treytirnar, sum eru ásettar í sjófeingislógini og kunngerðini, meðan hinar umsóknirnar ikki lúka allar hesar treytir.

Í serligu viðmerkingunum til § 49, stk. 1, 2. pkt. (LM-100/2020, s. 9) sæst:

*"...Endalig tilsøgn er treytað av, um landsstýrismaðurin við støði í tilfari frá umsøkjaranum og upplýsingum annars metir, at íløgan kann bera seg við teimum minstu nøgdunum, ið søkt verður um, og at fiskifarið veruliga er keypt, og beinanvegin er klárt til fiskiskap, sum verður sett sum treyt í kunngerð við heimild í § 49, stk. 1, so virði ikki fara fyri skeytið. Hetta hevur sostatt við sær, at um neyðugt er við munandi størri nøgdum, enn ráðiligt er at geva einum umsøkjara, fellur umsóknin í raðfestingini. Endamálið er at lata møguligar nýggjar aktørar royna seg sum eigarar av fiskifari, tó uttan so, at øll kvotan bert verður latin einum umsøkjara."* (Mín undirstriking)

Sambært § 5, stk. 1 í kunngerð nr. 95 frá 2011 framgongur, at umsóknin, sum minstamark, skal hava hesar upplýsingar:
1) skjalprógv fyri ítøkiligum keypi av fiskifari,
2) nær fiskifarið er klárt at fara til fiskiskap,
3) hvørjar minstunøgdir av ávísa fiskaslagnum skulu til, fyri at íløgan fer at bera seg, og
4) rakstrarætlan fyri skipakeyp og rakstur av skipinum trý tey fyrstu árini og váttan fyri rakstrarfígging.

Sambært § 7 í kunngerðini verða umsóknirnar viðgjørdar við støði í innkomnum tilfari og treytum sambært løgtingslógini og kunngerðini. Harumframt verða umsóknirnar mettar við støði í teimum høvuðsfyrilitum, ið tilskilað er í skjal 2 til kunngerðina og lóggávuna annars.

Í metingarskjalinum (skjal 2 til kunngerðina) framgongur, at metingin serliga verður grundað á:

1) Í hvønn mun verkætlanin er klár at føra út í lívið beinanvegin. Her verður serliga hugt eftir, hvørt umsóknin inniheldur:
a) skjalprógvaða avtalu um ítøkiligt skipakeyp,
b) játtan at fíggja skipakeypið og neyðuga rakstrarfígging, og
c) rakstrarætlan, ið ber seg fíggjarliga við minstu nøgdum, sum søkt verður um.

Til seinast framgongur av metingarskjalinum, at niðurstøðan skal byggja á eina heildarmeting av verkætlanini:
*"Í heildarmetingini verður dentur lagdur á punktini nevnd omanfyri, umframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Harumframt verður eisini hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið."*

Sambært upplýsingunum í málinum meti eg tað vera greitt, at Sp/f Mót lýkur allar treytirnar, sum beinleiðis eru ásettar í lógini og kunngerðini. Eg meti, at Sp/f Mót hevur latið inn skjalprógv fyri ítøkiligt skipakeyp, játtan um fígging og rakstrarætlan, ið ber seg fíggjarliga við minstu nøgdum, sum søkt verður um.

Sambært upplýsingunum í umsóknini er Sp/f Mót klárir at byrja verkætlanina, so skjótt loyvi er givið.

Havandi í huga, at Fiskimálaráðið, sambært § 7 í kunngerðini, ikki hoyrir partarnar og ikki biður um fleiri upplýsingar, um tær mangla, men bert viðger umsóknirnar við støði í innkomnum tilfari, so meti eg, at Sp/f Mót lýkur allar treytirnar, sum ásettar eru í lógini og í kunngerðini.

Um hugt verður at umsóknunum frá Sp/f Ango og Sp/f Gráastein, so lúka hesar umsóknir eisini grundleggjandi treytir, tó so, at tey hava latið inn treytaða játtan um fígging. Í hesum sambandi er serliga at viðmerkja, at tað framgongur beinleiðis av treytaðu tilsøgnini frá Fiskimálaráðnum til hesi feløg, at treytirnar, ið peningastovnarnir hava sett feløgunum, ikki eru í samsvari við lógarásettu karmarnar og kunnu tí ikki verða gingnar á møti. Harumframt hevur Sp/f Gráastein søkt um minstunøgd av svartkjafti á 12.000 tons, sum er 2/3 av tøku kvotuni. Eisini er at viðmerkja, at Sp/f Ango og Sp/f Gráastein fáa tillutað minni enn minstu nøgd av kvotu, sum søkt er um, sí nærri um hesar umsóknir niðanfyri undir kap. 5.2.2 og 5.2.3.

Um vit leggja til grund, at umsóknirnar bert verða viðgjørdar við støði í innkomnum tilfari, smb. § 7 í kunngerðini, so er soleiðis munur á umsóknini hjá Sp/f Mót øðrumegin og Sp/f Ango og Sp/f Gráastein hinumegin.

Sp/f Mót lýkur allar treytirnar, og tískil er ikki neyðugt hjá Fiskimálaráðnum at geva Sp/f Mót eina freist til at fáa viðurskiftini uppá pláss.

Hinvegin, so er neyðugt hjá Fiskimálaráðnum at geva Sp/f Ango og Sp/f Gráastein eina freist at fáa viðurskiftini viðvíkjandi fígging uppá pláss. Spurningurin er so, um tað er í samsvari við § 7 í kunngerðini.

Sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. verður fyrst latin ein treytað fyribils tilsøgn, áðrenn endaligt loyvi verður latið umsøkjaranum: *"…sum tó, áðrenn endalig tilsøgn kann verða givin, lýkur treytirnar sambært § 5, stk. 1, nr. 2-5."*

Í serligu viðmerkingunum til § 49, stk. 1, 2. pkt. (LM-100/2020, s. 9) stendur:

*"Áðrenn endalig tilsøgn kann verða givin, skal fiskifarið tó lúka treytirnar sambært § 5, stk. 1, nr. 2-5. Sostatt verður arbeitt við einari treytaðari fyribils tilsøgn, áðrenn endalig tilsøgn kann verða latin umsøkjaranum."*

§ 5, stk. 1, nr. 2-5 sigur soleiðis:

*"§ 5. [1] Veiðiloyvið er treytað av:*

2) *at eigarin lýkur treytirnar í §§ 11 og 12,*
3) *at fiskifarið er skrásett í skipaskránni ella farskránni, sambært løgtingslóg um skráseting av skipum,*
4) *at fiskifarið hevur siglingarloyvi frá avvarðandi føroyskum myndugleika, og*

*5) at fiskifarið ikki er skrásett á lista hjá økisbundnum fiskiveiðifelagsskapi sum far, ið hevur framt ólógligan, ófráboðaðan ella óskipaðan fiskiskap, ella sum hevur stuðlað slíkum fiskiskapi."*

Heimildin at lata umsøkjarum eina treytaða fyribils tilsøgn skilst soleiðis beinleiðis av § 49, stk. 1, 2. pkt. Eg dugi ikki at síggja, at henda heimild snýr seg um at geva eina freist til m.a. at fáa eina møguliga vantandi fígging uppá pláss. Heimildin skal helst síggjast í ljósinum av, at tað reint praktiskt ikki er møguligt hjá umsøkjara at keypa eitt skip, sum liggur klárt at fara til fiskiskap, áðrenn kvota er játtað.

Í hesum sambandi kann vísast til munnligu frágreiðingarnar hjá embætisfólkunum, har tey viðganga, at orðingin um, at verkætlanin skal verða klár at føra út í lívið "beinanvegin", var ein óheppin orðing. Sjálvandi er neyðugt fyrst at geva ein treytaða fyribils tilsøgn, soleiðis at m.a. skipið kann endaliga keypast, eigaraskifti skrásetast og neyðugt siglingarloyvi útvegast o.a. Hesi viðurskifti taka tíð at fáa avgreitt og tískil hevur Fiskimálaráðið givið umsøkjarum 4 viku freist at fáa hesi viðurskifti í rætt lag.

Sambært upplýsingunum í málinum meti eg viðurskifti tala fyri, at Sp/f Ango og Sp/f Gráastein ikki lúka treytina um fígging sambært § 5, stk. 1, nr. 4 í kunngerðini og pkt. 1, litra b) í metingarskjalinum, skjal 2, til kunngerðina. Fíggingin er ikki endaliga í lagi, tá umsóknirnar verða latnar inn til Fiskimálaráðið, og vísir Fiskimálaráðið eisini beinleiðis á hetta í síni treytaðu fyribils tilsøgn. Tað, at hesir báðir umsøkjarar fáa eina freist at fáa fíggingina uppá pláss, meti eg ikki beinleiðis er í samsvari við endamálið í § 5, stk. 1, nr. 2-5 og § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini. Eg meti tað heldur ikki vera beinleiðis í samsvari við § 7 í kunngerðini. Umsóknirnar verða gingnar á møti, hóast treytirnar um fígging ikki eru uppfyltar, tá umsóknirnar verða latnar inn.

Spurningurin er so, um tað er sakligt og viðkomandi at leggja dent á eginfígging og royndir, fram um treytina um váttan um fígging.

Embætisfólkini hava í sambandi við munnligu avhoyringarnar greitt frá, at Fiskimálaráðið tilvitað hevur valt ikki at partshoyra umsøkjararnar vísandi til, at talan er um nógvar umsóknir og eisini tí viðgerðartíðin ikki mátti vera ov long vísandi til vertíðina fyri fiskiskapinum. Í hesum sambandi er kunngerð við tilhoyrandi metingarskjali og oyðubløð orðað so neyvt sum gjørligt, soleiðis at umsóknirnar bert verða viðgjørdar við støði í hesum.

Staðfestast kann tí, at umsøkjarar bert hava tann eina møguleikan, tá søkt verður. Teir verða soleiðis ikki hoyrdir, um so er, at upplýsingar ella annað manglar í umsóknini. Mangla upplýsingar ella annað, má roknast við, at umsóknin fellur í raðfestingini og ikki verður gingin á møti.

Í fyrisitingarrættarligum høpi er tað ikki ókent at velja ikki at hoyra partarnar í málinum, tá talan er um mál, har nógvir umsøkjarar eru, og tá tíðin at viðgera umsóknirnar er avmarkað (administrativ konviens), sí s. 245f og s. 274 í Forvaltningsret, Almindelige emner, Karsten Revsbech v.fl. 7. útg. 2022. Eg meti ikki grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin hjá Fiskimálaráðnum at nýta hesa mannagongd ikki er í samsvari við fyrisitingarrættarligar grundreglur.

Kjarnuspurningurin í hesum máli er, hvussu treytirnar, ið eru ásettar í kunngerð og metingarskjali, skulu tulkast. Eru tað tær ítøkiligu treytirnar, sum eru ásettar í raðfylgju (nr. 1, 2, 3 og/ella a), b), c)), ið eru avgerandi, ella er tað sjálv heildarmetingin, sum er avgerandi.

Legalitetsmeginreglan byggir á eina rættarliga raðfylgju (løgtingslógir eru oman fyri kunngerðir o.s.fr.). Harumframt byggir legalitetsmeginreglan á, at fyrisitingarrættarligar avgerðir skulu hava lógarheimild. Eru treytirnar, ásettar í lóg ella kunngerð, ógreiðar, kann ein myndugleika í síni avgerð gera eina ítøkiliga meting, sum byggir á viðkomandi og saklig atlit, sí s. 148f og 213f í Forvaltningsret, Almindelige emner, Karsten Revsbech v.fl. 7. útg. 2022.

Fyri at lætta um fyrisitingarrættarligu viðgerðina av nógvu umsóknunum hevur Fiskimálaráðið valt at seta upp nakrar treytir, sum síggjast beinleiðis í kunngerðini og metingarskjalinum. Treytirnar eru settar upp í raðfylgju. Í metingarskjal 2 stendur m.a., at: *"Ítøkiliga verður metingin serliga grundað á… b) játtan at fíggja skipakeypið og neyðuga rakstrarfígging…"*. Síðani stendur, at: *" Í heildarmetingini verður dentur lagdur á punktini nevnd omanfyri, umframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Harumframt verður eisini hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið."*

Tað er trupult beinleiðis at siga, at treytirnar í kunngerðini, herundir metingarskjalinum, skulu tulkast soleiðis, at tær í raðfylgju skulu vera loknar, fyri at umsóknin kann gangast á møti. Jacob Vestergaard hevur út frá eini heildarmeting mett, at hóast Sp/f Ango og Sp/f Gráastein ikki fult út lúka treytina um játtan um fígging, so kunnu teir fáa eina freist at fáa hetta í rætt lag.

Út frá upplýsingunum í málinum kann eg bara staðfesta, at Sp/f Mót hevur latið inn allar viðkomandi upplýsingar, m.a. eisini neyðugt skjalprógv um fígging. Minstu nøgdirnar, sum Sp/f Mót søkir um, eru innan fyri tær nøgdir, sum Sp/f Ango og Sp/f Gráastein fáa tillutað. Hinvegin verða umsóknirnar hjá Sp/f Ango og Sp/f Gráastein bert partvíst gingnar á møti. Kvoturnar, ið verða tillutaðar hesum feløgum, eru lægri enn minstu nøgdirnar, sum søkt er um. Harumframt søkir Sp/f Gráastein um 12.000 tons av svartkjafti, sum er 2/3 av tøku kvotuni.

Fiskimálaráðið vísir í skrivi sínum, dagfest 13. oktober 2021, til Sp/f Mót, á, at:

*"Fyrisitingin er einans bundin av teimum kørmum, sum lógarásetingin setir fyri metingini. Tá metast skal um sakligheitina viðvíkjandi metingarstøðum, skal hetta gerast í mun til, at tað grundleggjandi endamálið við útlutan av kvotum til ítøkiligt keyp av skipi er at loyva nýggjum aktørum framat fiskirættindunum við egnum fiskiførum. Umráðandi er eisini, at pláss er fyri fleiri aktørum. Vísast skal til generellu og serligu viðmerkingarnar til § 49, stk. 1 í løgtingslóg nr. 70 frá 2021 um broyting í sjófeingislógini, sum eru at finna í løgtingsmál nr. 100 frá 2020.*

*Fyrisitingin hevur sostatt víðar karmar, tá metast skal um, hvør umsøkjari er best egnaður til skiparakstur, tá kvotur skulu útlutast til skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini."*

Eg eri samdur við omanfyri nevndu grundgevingum, m.a. at sakliga metingin skal gerast í mun til tað grundleggjandi endamálið við lógini.

Í serligu viðmerkingunum til § 49, stk. 1, 2. pkt. (LM-100/2020) sum Fiskimálaráðið eisini vísir á, stendur:

*"Endalig tilsøgn er treytað av, um landsstýrismaðurin við støði í tilfari frá umsøkjaranum og upplýsingum annars metir, at íløgan kann bera seg við teimum minstu nøgdunum, ið søkt verður um, og at fiskifarið veruliga er keypt, og beinanvegin er klárt til fiskiskap, sum verður sett sum treyt í kunngerð við heimild í § 49, stk. 1, so virði ikki fara fyri skeytið. Hetta hevur sostatt við sær, at um neyðugt er við munandi størri nøgdum, enn ráðiligt er at geva einum umsøkjara, fellur umsóknin í raðfestingini. Endamálið er at lata møguligar nýggjar aktørar royna seg sum eigarar av fiskifari, tó uttan so, at øll kvotan bert verður latin einum umsøkjara."* (mín undirstriking)

Um vit leggja til grund, at sakliga metingin skal gerast í mun til tað grundleggjandi endamálið við lógini, so byggir tann metingin sambært serligu viðmerkingunum til § 49, stk. 1, 2. pkt. á, at umsóknir skulu viðgerast:

1. *við støði í tilfari frá umsøkjaranum og upplýsingum annars*
2. *íløgan kann bera seg við teimum minstu nøgdunum, ið søkt verður um*
3. *um neyðugt er við munandi størri nøgdum, enn ráðiligt er at geva einum umsøkjara, fellur umsóknin í raðfestingini. Endamálið er at lata møguligar nýggjar aktørar royna seg sum eigarar av fiskifari, tó uttan so, at øll kvotan bert verður latin einum umsøkjara.*

Soleiðis sum málið er lýst, og vísandi til serligu viðmerkingarnar til § 49, stk. 1, 2. pkt., so meti eg, at metingin fyrst og fremst skal byggja á omanfyri nevndu viðurskifti. Lúka fleiri umsøkjarar omanfyri nevndu viðurskifti, og er ikki nóg mikið av kvotu til allar, mugu hesir umsøkjarar metast út frá øðrum viðkomandi sakligum atlitum.

Á verandi grundarlagi má eg bara staðfesta, at umsóknin hjá Sp/f Mót lýkur allar omanfyri nevndu treytir. Eg meti ikki, at umsóknirnar hjá Sp/f Ango og Sp/f Gráastein lúka omanfyri nevndu treytir í sama mun sum Sp/f Mót. Sp/f Ango og Sp/f Gráastein hava latið inn treytaða váttan um fígging, sum ikki kann gangast á møti. Sp/f Ango og Sp/f Gráastein fáa tillutað kvotu, ið er minni enn tað, sum søkt er um. At kvotur frá 2020 verða lagdar aftrat, meti eg ikki kann føra til aðra niðurstøðu, soleiðis sum málið er lýst. Haraftrat hevur Sp/f Gráastein søkt um eina minstu nøgd á 12.000 tons av svartkjafti, sum er 2/3 av tøku kvotuni. Hetta talar sambært serligu lógarviðmerkingunum til § 49, stk. 1, 2. pkt. fyri, at umsóknin eigur at falla í raðfestingini. Her kann eisini vísast beinleiðis til pkt. 4 í leiðbeiningini til umsóknarblaðið, harav sæst, at um tøka nøgdin av kvotu vísir seg at gerast minni enn minstanøgdin sambært umsóknini, kann umsóknin falla í raðfestingini.

Út frá teimum generellu og serligu viðmerkingunum til § 49, stk. 1, 2. pkt. meti eg ikki viðurskifti tala fyri, at umsóknin hjá Sp/f Mót eigur at falla í raðfestingini í mun til hinar umsøkjararnar, sum hava fingið tillutað kvotu. Tá Sp/f Mót somuleiðis lýkur allar treytirnar, sum ásettar eru í kunngerðini og tilhoyrandi metingarskjali, er trupult at koma til ta niðurstøðu, at Sp/f Mót fellur í raðfestingini vísandi til vantandi eginpening og royndir.

 Eg eri samdur við landsstýrismanninum í, at tað er sakligt at leggja dent á fíggjarligu orkuna hjá einum umsøkjara, tá metast skal um, hvør hevur best møguleika at eydnast við sínari verkætlan. Tað kann eisini

vera, at avgerðin hjá landsstýrismanninum at luta kvotu út til Sp/f Ango og Sp/f Gráastein út frá einum handilsligum sjónarmiði er skilabesta ella tryggasta loysnin. Landsstýrismaðurin hevur tó skyldu til at fylgja teimum lógum og reglum, sum eru grundarlagið undir viðgerðini av umsóknunum.

Tað sæst av pkt. 6 og 8 í leiðbeiningini til umsóknarblaðið, at umsøkjararnir skulu stutt lýsa førleikar og royndir, ið eru grundarlagið undir verkætlanini, umframt lýsa stutt ta fígging, ið er grundarlagið undir verkætlanini, m.a. eginpening, lánifígging og rakstrarfígging. Hugtakið "førleikar og royndir" verður ikki beinleiðs nevnt í kunngerðini ella í metingarskjalinum til kunngerðina. Í metingarskjalinum verður tó víst á, at hugt verður eisini at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið.

Í avgerðini hjá Fiskimálaráðnum um ikki at ganga umsóknini á møti verður víst til, at umsóknin fellur í raðfestingini orsakað av eginfígging og royndum – serliga vísandi til, at eginpeningurin er lítil.

Viðvíkjandi royndunum hjá umsøkjarunum, meti eg hetta atlitið standa nakað veikt sum eitt metingargrundarlag. Tað er sera ymiskt, hvussu nógvan ómak ymisku umsøkjarnir hava gjørt sær við at lýsa royndir og førleikar. Harumframt er onki skjalprógv ella váttan løgd við umsóknunum, sum vísa royndirnar hjá umsøkjarunum. Út frá munnligu frágreiðingini hjá landsstýrismanninum tykist tað sum um, at metingin av royndunum hjá umsøkjarunum, sum hava fingið játtað kvotu, í stóran mun byggir á persónligu vitanina hjá landsstýrismanninum. Út frá tilfarinum í málinum meti eg ikki munin á royndunum hjá persónunum aftan fyri umsóknirnar hjá Sp/f Mót og Sp/f Gráastein vera eyðsýndur, sí kap. 5.2.2 niðanfyri.

Í síðsta enda tykist tað soleiðis vera eginpeningurin, sum hevur verið avgerandi fyri, at umsóknin hjá Sp/f Mót ikki er gingin á møti. Royndirnar hava í minni mun verið avgerandi.

Tá Sp/f Mót lýkur allar treytir, sum ásettar eru í lóg og kunngerð fram um aðrar umsøkjarar, meti eg tað vera ivasamt at leggja til grund, at tað er sakligt at leggja dent á eginfígging og royndir.

Í innanhýsis uppriti vísir løgfrøðingur í Fiskimálaráðnum eisini á tað sama, aftaná at landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð í málinum. Í munnligu frágreiðingini hjá hesum sama løgfrøðingi verður víst á, at tað er trupult at skilja, at landsstýrismaðurin velur ikki at ganga umsóknini hjá Sp/f Mót á møti, tí Sp/f Mót lýkur allar treytir í lóg og kunngerð. Tó so metir løgfrøðingurin ikki at talan er um beinleiðis lógarbrot, men heldur, at talan er um ikki góðan fyrisitingarsið.

Samanumtikið er tað mín meting, at Sp/f Mót lýkur allar treytirnar í sjófeingislógini og kunngerðini. Tá tað í metingarskjalinum til kunngerðina verður víst á, at metingin ítøkiliga serliga verður grundað á skjalprógvaða avtalu um skipakeyp, játtan at fíggja skipakeyp og neyðuga rakstrarfígging og rakstrarætlan, ið ber seg fíggjarliga við minstu nøgdum, sum søkt verður um, so meti eg avgerðina hjá landsstýrismanninum um serliga at leggja dent á eginpening at vera ivasama. Soleiðis sum lóg og kunngerð eru orðað, meti eg tað vera ivasamt at leggja til grund, at solvensurin skal vera avgerandi fyri, hvørt Sp/f Mót kann fáa tillutað kvotu ella ikki.

Hinvegin, so framgongur av metingarskjalinum til kunngerðina, at niðurstøðan skal byggja á eina heildarmeting, har dentur verður lagdur á ítøkiligu punktini, sum eru nevnd í metingarskjalinum, umframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Eisini verður hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja

rakstrargrundarlagið. Eg eri soleiðis samdur við Fiskimálaráðnum í, at fyrisitingin hevur víðar karmar, tá metast skal um, hvør umsøkjari er best egnaður til skiparakstur.

Hóast eginpeningur og royndir ikki beinleiðis verða nevnd í lóg og kunngerð, so verður biðið um hesar upplýsingar í umsóknarblaðnum. Eg havi tí ikki beinleiðis grundarlag fyri at siga, at landsstýrismaðurin hevur lagt dent á aðrar treytir ella atlit enn tey, ið lýst eru í lóg, kunngerð, metingarskjølum o.t.

Landsstýrismaðurin hevur fingið vegleiðing og ráðgeving frá aðalstjóranum í sambandi við sína avgerð og hevur í avgerðarskrivi til umsitingina lýst og útgreinað sína niðurstøðu og víst ítøkiliga á, hvørji atlit hava verið avgerandi fyri hansara avgerð.

Við hesum í huga, umframt breiðu orðingina í metingarskjalinum um, at talan skal vera um eina heildarmeting, meti eg ikki, tað ber til beinleiðis at siga, at avgerðin hjá landsstýrismanninum um ikki at ganga umsóknini frá Sp/f Mót á møti ikki er lóglig. Eg meti meg soleiðis ikki hava grundarlag fyri at siga, at avgerðin um ikki at ganga umsóknini frá Sp/f Mót á møti ikki er í samsvari sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

### 5.2.2 - Umsókn frá Sp/f Gráastein

Umsóknin er latin Fiskimálaráðnum 6. juli 2021 (málsskjal 67).

Á s. 2, punkt 4 (Nøgd, sum søkt verður um) sæst, at felagið søkir um ynskiliga nøgd í 2021, 6.000 tons av makreli, 6.000 tons av norðhavssild og 18.000 tons av svartkjafti.

Minsta nøgd, ið søkt verður um í 2021, er 4.000 tons av makreli, 4.000 tons av norðhavssild og 12.000 av svartkjafti.

Á s. 2, punkt 5 (Lýsing av verkætlanini) verður víst á:

*"At fiska nevndu fiskasløg tá søluvirði er hægst og lønsemið er best.*

*At fara væl um fiskin so at góðskan er best møguligt.*

*At landa til føroysk virkir, umframt til virkir uttanlanda, har tað lønar seg best.*

Á s. 3, punkt 6 (Lýsing av ætlanini) verður víst á, at:

*"Arbeitt hevur verið miðvíst fram móti hesi verkætlan í nøkur ár.*

*Bert føroyingar standa aftanfyri felagið og fíggingin er fingin til vega við reiðum peningi, umframt láni í…*

*Stjóri felagsins er royndur fiskiskipari, og hinir hava fingið við fiskasølu (útflutning) altíð, herundir menning av nýggjum vørum og nýggjum marknaðum."*

Á s. 3, punkt 8 (Lýsing av fíggjarviðurskiftum – váttan frá fíggingarstovni skal leggjast við umsóknini) verður víst á, at:

*"…Ein av treytunum fyri láni er at talan er um 12 ára kvotur, hetta má avtalast nærri um við ávíkavist kvotuveitara og lánveitara."*

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin helst er stuðulsverd, tó við fyrivarni, við hesum grundgevingum:

*"<u>Umsóknin er helst stuðulsverd, tó við fyrivarni</u> – umsóknin lýkur við fyrivarni avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni og er annars væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum. Verkætlanin fevnir um at keypa skipið […] úr […] fyri […] kr. Viðløgd rakstrarætlan vísir, at verkætlanin kann bera seg við minstu nøgdum. Keypssáttmáli er viðlagdur, men gekk út 5. juli 2021. Treytað játtan um fígging frá… er viðløgd. Vísast skal á, at fíggingarstovnarnir seta sum treyt, "at tildeles egenkvoter på minimum 3000 tons makrel, 3000 tons sild og 12000 tons svartkjaft, og at kvoterne har en løbetid på 12 år." Umframt nevnda fyrivarni við fíggingini skal vísast á, at søkt verður um minstunøgd á 12000 tons av svartkjafti, hetta svarar til 2/3 av tøku kvotuni."*

Í avgerðarskrivi til Fiskivinnustovuna, dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin at ganga umsóknini frá Sp/f Ango á møti við hesi grundgeving:

*"Kostnaðurin fyri skipið er á leið sama støði sum fyri fyrra skipið, ið eisini fær tillutað kvotu. Stigtakararnir upplýsa, at eginpeningurin, herundir ábyrgdarpeningurin, verður […] av samanlagt […] kr. í fígging, ið er umleið […] kr.*

*Upplýsingarnar um stigtakararnar annars eru, at stjóri felagsins er royndur fiskiskipari, og at hinir hava fingist við fiskasølu (útflutning) altíð, herundir menning av nýggjum vørum og nýggjum marknaðum.*

*Sambært upplýsingum í tilmælinum, so er umsóknin stuðulsverd tó við fyrivarni um, at fíggingarstovnarnir seta sum treyt, "at der tildeles egenkvoter… og at kvoterne har en løbetid på 12 år". Umframt nevnda fyrivarni viðvíkjandi fígging skal vísast á, at søkt verður um lutfalsliga stóra nøgd av svartkjafti, umleið 2/3 av tøku kvotuni.*

*Í tilmælinum verður tó staðfest, at umsóknin lýkur við fyrivarni avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni og er annars undirbygd við øllum neyðugum skjølum. Tí leggi eg tað meting í málið, at útlit eru fyri, at umsøkjararnir fáa lagað til tey fyrivarni, ið eru fyri fígging, soleiðis at skipið kann fíggjast og keypast samsvarandi teimum treytum – og tí skipan – sum vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021 byggja á.*

*Samanumtikið meti eg, at umsóknin hevur nøktandi grundarlag fyri játtandi svari um kvotu. Kvotan kann veitast móti tí fyritreyt, at skipið endaliga verður keypt og latið umboðunum fyri hesa verkætlan."*

Í skrivi, dagfest 23. september 2021 (málsskjal 68), velur Fiskimálaráðið partvíst at ganga umsóknini á møti við hesi grundgeving:

*"Serliga er hugt eftir, um verkætlanin inniheldur skjalprógvaðan keypssáttmála, játtan um fígging av íløgu og rakstri av skipinum umframt um rakstrarætlan vísir, um raksturin av skipinum ber seg við minstu nøgdunum, sum søkt verður um, og í hvønn mun verkætlanin er klár at føra út í lívið. Í metingini er eisini lagdur dentur á, at endamálið er at lata møguligar nýggjar aktørar royna seg sum eigarar av fiskifari, tó uttan at øll kvotan bert verður latin einum umsøkjara, sbr. løgtingsmál nr. 100/2020, bls. 9 og metingarskjalið í kunngerðini…*

*Í umsóknini er upplýst, at verkætlanin snýr seg um at keypa skipið… fyri kr….*

*Umsóknin er væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum. Hjáløgd rakstrarætlan vísir, at verkætlanin kann bera seg við minstu nøgdunum. Keypssáttmáli er lagdur við, og upplýst verður í umsóknini, at skipið kann yvirtakast beinanvegin.*

*Í umsóknarblaðið verður greitt frá, at ætlanin er at fiska makrel, norðhavssild og svartkjaft, tá søluvirði er hægst og lønsemið er best.*

*Í umsóknini verður greitt frá, at stigtakararnir hava sera drúgvar royndir innan fiskiskap og fiskasølu, harundir menning av nýggjum vørum og nýggjum marknaðum.*

*Í lýsingini av fíggjarviðurskiftum verður upplýst, at samlaði fíggjartørvurin til keyp av skipi við trolútgerð, umframt til rakstur, er tilsamans… % verður fíggjað við lánið og …% verður eginpeningur. Treytað játtan um fígging frá… er hjáløgd umsóknini.*

*Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum er dentur lagdur á, at felagið kann útvega lutfalsliga nógvan eginpening, <u>umframt</u> at víst verður á drúgvar royndir við fiskiskapi og skiparakstri.*

*Fiskimálaráðið hevur eftir eini samlaðari meting tikið avgerð um at játta Sp/f Gráastein part av kvotunum at fiska árini 2021-2025 við tí í umsóknini nevnda fiskifari, treytað av, at:*

- *skjalprógv er fyri eginpeningi á…kr.*
- *skjalprógv er fyri lánsfíggingini*
- *skjalprógv er fyri endaligum keypssáttmála, og*
- *umsøkjarin lýkur treytirnar, ið eru ásettar í hesi avgerð*

*Nøgdirnar, sum verða tillutaðar Sp/f Gráastein í 2021, eru hesar: Makrelur 3.007 tons, Norðhavssild 4.162 tons og Svartkjaftur 9.480.*

*Flutt kvota frá 2020: Makrelur 1.966 tons, Norðhavssild 3.412 tons og Svartkjaftur 884 tons. (Flutta kvotan frá 2020 er ikki partur av kvotugrundarlagnum eftir 2021)…*

*Ein keypsavtala (purchase offer) varð send Fiskimálaráðnum í juli mánaði, men okkum er óvist, um avtalan enn er galdandi, nú so long tíð er fráliðin. Fiskimálaráðið hevur tó viðgjørt umsóknina út frá tí fyritreytm at talan er um somu keypsavtalu.*

*Treytað játtan um fígging frá… er hjáløgd umsóknini, har fíggingarstovnarnir seta sum treyt, "at [der] tildeles egenkvoter på minimum 3000 tons makrel, 3000 tons sild og 12000 tons svartkjaft, og at kvoterne har en løbetid på 12 år."*

*Treytirnar, ið peningastovnarnir hava sett felagnum, eru ikki í samsvari við lógarásettu karmarnar um vinnuligar royndir og verkætlanir, og kunnu tí ikki verða gingnar á møti…*

*Gevið gætur, at talan er um eina fyribils tilsøgn. Endalig tilsøgn verður veitt mótvegis tí fyritreyt, at skipið… endaliga verður keypt og latið Sp/f Gráastein. Felagið fær í hesum sambandi 4 vikur til at fáa øll viðurskifti uppá pláss, harundir váttan upp á eginpening á…kr., endaligan keypssáttmála og játtan um fígging.*

*Sp/f Gráastein skal í seinasta lagi 18. oktober 2021 boða Fiskimálaráðnum frá, um hesar treytir eru loknar. Eru treytirnar ikki loknar innan hesa freist, fellur tilsøgnin burtur."*

#### 5.2.2.1 - Munnligar frágreiðingar

Víst verður til munnligu frágreiðingarnar, ið eru lýstar undir viðgerðini av umsóknini frá Sp/f Mót, sí kap. 5.2.1.1.

##### 5.2.2.1.1 - Meting

Eg eri samdur við tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum um, at umsóknin hjá Sp/f Gráasteini við fyrivarni lýkur avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni.

Sp/f Gráastein fær tillutað 3.007 tons av makreli, 4.162 tons av norðhavssild og 9.480 av svartkjafti. Hetta er nakað minni enn minsta nøgd, sum søkt var um fyri 2021, ið er 4.000 tons av makreli, 4.000 tons av norðhavssild og 12.000 tons av svartkjafti.

Umsóknin verður soleiðis partvíst gingin á møti.

Sp/f Gráastein upplýsir beinleiðis í umsóknarblaðnum (pkt. 8), at lánifíggingin, ið teir hava fingið bjóðað, er treytað av viðurskiftum, sum ikki samsvara við ásetingarnar, ið eru galdandi fyri tillutan av kvotu eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. Sp/ Gráastein vísir á, at hetta má avtalast nærri millum kvotuveitara og lánveitara.

Eg meti tískil Sp/f Gráastein vera tilvitað um, at lánitreytirnar, tá umsóknin verður latin inn til Fiskimálaráðið, ikki samsvara við ásettu treytirnar í lóg og kunngerð viðvíkjandi § 49, stk. 1, 2. pkt.

Viðvíkjandi royndum hjá stigtakarunum, so stendur undir pkt. 6 í umsóknarblaðnum:

*"Stjóri felagsins er royndur fiskiskipari, og hinir hava fingist við fiskasølu (útflutning) altíð, herundir menning av nýggjum vørum og nýggjum marknaðum."*

Eg havi gjøgnumgingið alt tilfarið, sum eg havi fingið útflýggjað frá Fiskimálaráðnum í sambandi við hesa kanning, og eg dugi ikki at síggja aðrar upplýsingar um royndir hjá stigtakarunum enn tær, sum standa undir pkt. 6 í umsóknarblaðnum. Soleiðis sum eg dugi at lesa umsóknina við tilhoyrandi skjølum, so dugi eg heldur

ikki at síggja, hvørjir persónarnir, nevndir við navni, eru aftan fyri felagið, burtursæð frá sjálvan stjóran, ið er Birgir Lützen.

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar, vórðu bæði Jacob Vestergaard og Rógvi Reinert spurdir, um metingin av royndunum hjá umsøkjarunum, bert varð grundað á upplýsingar úr umsóknarblaðnum, ella um upplýsingar um royndir komu aðrastaðni frá. Til hetta svarar Jacob Vestergaard:

*"...ja, tað helt hann avgjørt. Hann visti tað í øllum førum. Gráasteinur, Birgir Lützen, kennir hann ikki ella jú, hann veit, hvør hann er. Hann var skipari á Jákup Sverra tá. Hann hevði eisini drúgvar royndir, og onkur, sum var við honum eisini, var parteigari, hevði royndir við fiskasøluarbeiði og øðrum. Teirra eginpeningsgrundarlag, í øllum førum út frá umsóknunum, var nógv tryggari eftir hansara tykki enn eginpeningsgrundarlagið hjá hinum pørtunum. Tað var tað, sum onkursvegna vigaði meir, enn umsitingin vigaði tað.*

*Spurdur, um hann partvíst hevði upplýsingar um royndir frá umsóknunum, ella um hann hevði upplýsingar aðrastaðni frá, greiddi Jacob frá, at tað er frá upplýsingunum, hann hevur í høvdinum. Hann kennir í roynd og veru øll, sum hava við fiskivinnuna at gera í Føroyum. Tað kann so vera bæði gott og ringt. Hann helt sjálvur, at tað er nokkso gott. Hann hevur verið fiskimálaráðharri í ógvuliga nógv ár í hesi øldini, og tí kennir hann sera nógv - eisini tey, sum altíð liggja framvið at sleppa uppí og hava roynt ymiskt. Hann hevur í høvuðsheitum tikið útgangsstøði í teimum umsóknum, sum vóru. Eginpening, og hvat tú kemur inn við sjálvur í felagið, helt hann vera eitt grundleggjandi og sakligt atlit at hyggja at, og eisini hvørjar royndir tey hava, sum ætla sær at fara í holt við nakað virksemi… Hann fór ikki víðari enn við teimum, sum vóru tilmæld, at hann hevði eina fatan av, at av teimum vóru tað teir báðir, sum hann helt vera teir rættu, Gráastein og Ango, sum høvdu tað besta grundarlagið til at fara undir hesa verkætlanina…"*

Til spurningin um upplýsingar um royndir svarar Rógvi Reinert:

*"Spurdur, um landsstýrismaðurin hevði aðrar upplýsingar um fígging og royndir hjá umsøkjarunum enn tær, sum stóðu í umsóknartilfarinum, svaraði Rógvi, at honum vitandi vóru ikki aðrar upplýsingar enn tær, sum stóðu í umsóknartilfarinum. Hatta var tað. Tað kom fram í viðgerðini ímillum okkum báðar, sum hann skrivar í teldupostinum til mín 12. august: "Byrja tú at kanna viðurskiftini nærri. Kanst tú kanna tað, sum annars er um hesi málini, nærri?" Og í tí viðgerðini komu vit meira ítøkiligt inn á fíggjarliga spurningin. Hann kundi ikki siga akkurát, hvat áskoðanin hjá landsstýrismanninum var, men í viðgerðini vildi hann siga tað, at hasir tríggir í mun til Mót, har helt hann nokk, fíggingin var tað, sum var so alstórur munur. Tí tú skalt gjalda 25 milliónir meir enn hin. Tað eru milliónir, vit tosa um. At tað var so tyngjandi, tað var nokk tað, sum var tann fyrsta orsøkin.*

*Spurdur aftur, um tað var fíggingin, sum var avgerandi, greiddi Rógvi frá, at royndirnar eisini høvdu týdning. Tí um mann tekur Ango, so er tað soleiðis, at mann sigur ein, hann vildi ikki nevna navn, men ein hevur siglt alt sítt lív, og hann hevur fullan kunnleika um allan fiskiskap, og mann vísir til royndir aftur í 1995. Tann næsti hevur verið í føroysku fiskivinnuni síðani 1990 og hevur royndir sum skipari. Tann triði hevur siglt alt sítt lív og vísir bæði á royndir sum stýrimaður og í uppisjóvarvinnuni uttanlands. Meðan hjá Gráasteini hevur stjóri*

*felagsins royndir sum fiskiskipari, og hinir hava fingist við fiskasølu og útflutning altíð og eisini menning av nýggjum vørum og marknaðum. So tað verður eisini lýst ítøkiligt.*

*Spurdur, um nakað skjalprógv ella annað var lagt við umsóknunum viðvíkjandi royndum og øðrum, svaraði Rógvi, at tað var tað ikki, heldur ikki viðvíkjandi menning av nýggjum vørum og marknaðum. Hann vísti tó á, at tað í umsóknini verður víst á, at stjórin er royndur fiskiskipari. Men sum sagt við Mót metti hann, at fíggingin var tað mest avgerandi. Ella har er tann týðiligasti munurin. Hann vildi næstan siga, at eftir hansara áskoðan kundi fíggingin næstan staðið einsamøll, tá ið tað nú bara var pláss fyri tveimum, tí at íløgan kundi bera seg og hevði eitt sterkt rakstrargrundarlag og fíggjarligt grundarlag."*

Vísandi til tær upplýsingar um royndir, sum síggjast í umsóknarblaðnum, og tær upplýsingar um royndir, sum Jacob Vestergaard byggir sína niðurstøðu á, so meti eg, júst henda grundgevingin stendur nakað veikt í sjálvum sær. Metingin um royndirnar hjá stigtakarunum tykist í stóran mun at byggja á persónligu vitanina hjá Jacob Vestergaard um sjálvar stigtakararnar.

Í umsóknini hjá Sp/f Mót sæst, at annar stigtakarin er:

"*útbúgvin skipsførari. Hann hevur seinastu nógvu árini arbeitt innan tað pelagiska, bæði sum framleiðslustjóri, og síðani frá 2018 sum stýrimaður á pelagiskum skipið í Føroyum. Hann hevur tískil hollar royndir bæði innan fiskiskap eftir pelagisku fiskasløgunum eins og hvussu fiskurin kann koma til lands á bestan hátt góðsku viðvíkjandi. Hann fór fyrsta túr til skips í 2001."*

Út frá umsóknartilfarinum og upplýsingunum í málinum annars dugi eg ikki beinleiðis at meta um, hvørt stigtakararnir aftan fyri Sp/f Gráastein hava drúgvari og/ella meiri viðkomandi royndir enn stigtakararnir aftan fyri Sp/f Mót. Tað tykist eisini sum um, út frá munnligu avhoyringunum av bæði Jacob Vestergaard og Rógva Reinert, at tað serliga er eginpeningurin, ið hevur verið avgerandi fyri niðurstøðuna hjá Jacob Vestergaard.

Sp/f Ango hevur í sínari umsókn gjørt nakað meiri burturúr at lýsa royndirnar hjá stigtakarunum, sí kap. 5.2.3., men eg meti ikki, soleiðis sum málið er lýst, at munurin á royndunum hjá Sp/f Gráasteini og Sp/f Mót er eyðsýndur.

Mín meting er tískil, at Jacob Vestergaard serliga hevur lagt dent á eginpeningin, tá hann velur at tilluta kvotu Sp/f Gráasteini kvotu fram um Sp/f Mót.

Spurningurin er so, um eginpeningurin er eitt sakligt atlit at taka í hesum føri.

Sum víst á omanfyri, undir kap. 5.2.1., so meti eg tað vera ivasamt, at tað er sakligt at leggja dent á eginpening og royndir viðvíkjandi umsóknini hjá Sp/f Mót. Eg meti tó ikki beinleiðis grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin um at tilluta Sp/f Gráastein kvotu er ólóglig.

Hinvegin eri eg samdur við tilmælinum hjá umsitingini í Fiskimálaráðnum í, at umsóknirnar hjá Sp/f Ango, Sp/f Gráasteini, Sp/f JKS Impex og P/F Ocean Group Faroes Ltd. eru so mikið meinlíkar, at tað er sakligt at

leggja dent á eginpening og royndir, tá støða skal takast til hesar umsóknirnar. Hesar umsóknir lúka allar við fyrivarni grundleggjandi treytirnar í lóggávuni.

Eg meti tað tó ikki vera part av kanningarsetninginum at taka støðu til, hvør av omanfyri nevndu umsøkjarum átti at fingið tillutað kvotu framum annan. Eg taki soleiðis ikki støðu til, um tað er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina, at Sp/f Gráastein hevur fingið tillutað kvotu fram um Sp/f JKS Impex og P/F Ocean Group Faroes Ltd.

Vísandi til niðurstøðuna í málinum hjá Sp/f Mót, sí kap. 5.2.1., so meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin um at játta Sp/f Gráasteini kvotu ikki er lóglig.

### 5.2.3 - Umsókn frá Sp/f Ango

Umsóknin er latin Fiskimálaráðnum 1. juli 2021 (málsskjal 69).

Á s. 2, punkt 4 (Nøgd, sum søkt verður um) stendur, at ynskiliga nøgdin, felagið søkir um fyri 2021, er 5.000 tons av makreli, 7.000 tons av norðhavssild og 12.000 tons av svartkjafti.

Minsta nøgd, ið søkt verður um í 2021, er 3.907 tons av makreli, 5.412 tons av norðhavssild og 9.481 tons av svartkjafti.

Á s. 3, punkt 5 (Lýsing av verkætlanini) í oyðublaðnum verður víst á:

*"Ætlanin við sildini, makrelinum og svartkjaftinum byggir á nýhugsan og menning av pelagiskum fiskasløgum í Føroyum…*

*Felagið hevur sett sær fyri, at øll virðisøking av hesum fiskasløgum skal gerast í Føroyum."*

Á s. 3, punkt 6 (Lýsing av ætlanini) verður víst á:

*"Sp/f Ango ætlar at keypa […] til at veiða svartkjaft, sild, makrel og ídnaðarfisk, og sum verður skrásett í Vági. Skipið, sum ætlanin er at keypa, er í sera góðum standi og hevur góða køling, soleiðis at skipið er ført fyri at varðveita fiskin í góðum standi, til hann verður landaður….*

*Teir, sum standa aftan fyri felagið, eru Birgir Andreasen… Heri Godtfred… og John Mikkjal Godtfred.*

*Birgir hevur siglt alt sítt lív. Hann hevur hollan kunnleika til allan fiskiskap, eisini pelagiskan fiskiskap. Hann hevur verið 5 ár við nótaskipi, 3 ár við rækjuskipi. Síðan 1995 hevur hann siglt við partrolara undir Føroyum bæði sum stýrimaður og sum skipari. Fiskaríið hevur verið eftir botnfiski, gulllaksi og nakað av makreli. Í hesum tíðarskeiði hevur hann eisini verið við donskum uppisjóvarskipi til fiskiskap í Norðsjónum og Ensku kanalini. Í løtuni siglir hann sum stýrimaður í offshore vinnuni í Noregi.*

*Heri hevur verið í føroyskari fiskivinnu síðani 1990. Hann var fyrst nøkur ár í rækjuveiðu. Síðstu 20 árini hevur hann fingið royndir sum skipari við ísfiskatrolara undir Føroyum og við frystitrolara í Norðuratlantshavi. Síðstu 10 árini hevur hann verðu stýrimaður við uppsjóvarskipi.*

*John Mikkjal hevur siglt við fiskiskipum alt sítt lív. Fyrst nøkur ár við rækjuskipum, og í 1998 fór John Mikkjal niður til Danmarkar at sigla, sum stýrimaður og skipari við uppsjóvarskipum. John Mikkjal var við Ruth, Strømfjord og Gitte Henning. Hesin fiskiskapur var í mestan mun makrelur, sild og svartkjaftur. Men roynt varð eisini eftir tobis, hestamakreli og lodnu. Í 2005 var John Mikkjal við í keypi av Ran, teir royndu víða um við botn- og flótitroli. Síðani 2010 hevur John Mikkjal siglt sum stýrimaður og skipari á Enniberg, har tað mest hevur veruð toskur í Barentshavinum, og nakað av uppsjóvarfiski so sum kongafisk og makrel.*

*Allur partapeningurin verður føroyskur. Ongin útlendskur kapitalur verður í felagnum.*

*Sp/f Ango hevur treytaða avtalu um skipakeyp og sostatt kann verkætlanin setast í gongd beinanvegin. Við kvotunum, sum søkt verður um, so er verkætlanin sjálvberandi."*

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin helst er stuðulsverd, tó við fyrivarni við hesum grundgevingum:

*"<u>Umsóknin er helst stuðulsverd, tó við fyrivarni</u> – umsóknin lýkur við fyrivarni avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni og er annars væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum, eins og víst verður á fleiri samstarvsavtalur. Verkætlanin fevnir um at keypa skipið […] úr […] fyri […] mió. kr. Viðløgd raskstraræltan vísir, at verkætlanin kann bera seg við minstu nøgdum. Keypssáttmáli er viðlagdur og skipið kann yvirtakast beinanvegin. Treytað játtan um fígging frá [x] og [x] er viðløgd. Vísast skal á, at fíggingarstovnarnir seta sum treyt, at felagið fær tillutað 12 ára rullandi eginkvotur, sum í minsta lagi svara til 3900 tons av makreli, 5400 tons av sild og 9500 tons av svartkjaftinum, av verandi rættindum hjá Føroyum sum strandaland (ikki av økingini, sum Føroyar hava givið sær sjálvum nú eingin semja er)".*

Í avgerðarskrivi til Fiskivinnustovuna, dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin at ganga umsóknini frá Sp/f Ango á møti við hesi grundgeving:

*"Kostnaðurin fyri skipið kann metast vera rímiligur. Upplýst er, at treytað av at felagið fær minstu nøgd av kvotu, vilja partaeigararnir veita felagnum […] kr. í partapeningi, ið er umleið […] av samlaðu íløguni.*

*Upplýsingar, sum eg havi fingið um umsøkjararnar, staðfesta, at teir hava sera drúgvar royndir innan fiskiskap og skiparakstur, tað veri seg í Føroyum eins og uttanlands.*

*Í tilmælinum verður nevnt, at umsóknin er stuðulsverd, tó við fyrivarni. Í hesum sambandi verður víst til, at fíggingarstovnarnir seta sum treyt, at felagið fær tillutað 12 ára rullandi eginkvotur… av verandi rættindunum hjá Føroyum sum strandaland…*

*Í tilmælinum verður tó somuleiðis nevnt, at umsóknin lýkur avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni og er annars væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum, eins og víst verður til fleiri samstarvsavtalur.*

*Tí leggi eg ta meting í málið, at umsøkjararnir í samskifti við fíggingarstovnar kunnu laga lánitreytir soleiðis til, at skipið kann fíggjast samsvarandi tí skipan, sum vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021 byggir á.*

*Samanumtikið meti eg, at nevnda umsókn, saman við aðrari umsókn, hevur besta grundarlagið viðvíkjandi tilsøgn um kvotu. Kvotan kann veitast mótvegis tí fyritreyt, at skipið endaliga verður keypt og latið umboðunum fyri hesa verkætlan."*

Í skrivi, dagfest 17. september 2021 (málsskjal 70), velur Fiskimálaráðið partvíst at ganga umsóknini á møti við hesi grundgeving:

*"Serliga er hugt eftir, um verkætlanin inniheldur skjalprógvaðan keypssáttmála, játtan um fígging av íløgu og rakstri av skipinum umframt um rakstrarætlan vísir, um raksturin av skipinum ber seg við minstu nøgdunum, sum søkt verður um, og í hvønn mun verkætlanin er klár at føra út í lívið. Í metingini er eisini lagdur dentur á, at endamálið er at lata møguligar nýggjar aktørar royna seg sum eigarar av fiskifari, tó uttan at øll kvotan bert verður latin einum umsøkjara, sbr. løgtingsmál nr. 100/2020, bls. 9 og metingarskjalið í kunngerðini…*

*Í umsóknini er upplýst, at verkætlanin snýr seg um at keypa skipið… fyri kr….*

*Umsóknin er væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum, eins og víst verður á fleiri samstarvsavtalur. Hjáløgd rakstrarætlan vísir, at verkætlanin kann bera seg við minstu nøgdunum. Keypssáttmáli er lagdur við, og upplýst verður í umsóknini, at skipið kann yvirtakast beinanvegin.*

*Í umsóknarblaði verður greitt frá, at ætlanin er at fiska makrel, norðhavssild og svartkjaft, tá søluvirði er hægst og lønsemið er best.*

*Í umsóknini verður greitt frá, at stigtakararnir hava sera drúgvar royndir innan fiskiskap og skiparakstur, tað veri seg í Føroyum eins og uttanlands.*

*Treytað játtan um fígging frá… er hjáløgd umsóknini. Upplýst verður eisini, at treytað av, at felagið fær minstu nøgd í kvotu, vilja partaeigararnir veita felagnum… kr. í partapeningi, ið er umleið…% av samlaðu íløguni.*

*Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum er dentur lagdur á, at felagið kann útvega lutfalsliga nógvan eginpening, umframt at víst verður á drúgvar royndir við fiskiskapi og skiparakstri.*

*Fiskimálaráðið hevur eftir eini samlaðari meting tikið avgerð um at játta Sp/f Gráastein part av kvotunum at fiska árini 2021-2025 við tí í umsóknini nevnda fiskifari, treytað av, at:*
- *skjalprógv er fyri eginpeningi á…kr.*
- *skjalprógv er fyri lánsfíggingini*
- *skjalprógv er fyri endaligum keypssáttmála, og*
- *umsøkjarin lýkur treytirnar, ið eru ásettar í hesi avgerð*

*Nøgdirnar, sum verða tillutaðar Sp/f Ango í 2021, eru hesar: Makrelur 3.007 tons, Norðhavssild 4.162 tons og Svartkjaftur 9.480.*

*Flutt kvota frá 2020: Makrelur 1.966 tons, Norðhavssild 3.412 tons og Svartkjaftur 884 tons. (Flutta kvotan frá 2020 er ikki partur av kvotugrundarlagnum eftir 2021)…*

*Ein keypsavtala (memorandum of agreement) varð send Fiskimálaráðnum í juli mánaði, men okkum er óvist, um avtalan enn er galdandi, nú so long tíð er fráliðin. Fiskimálaráðið hevur tó viðgjørt umsóknina út frá tí fyritreyt at talan er um somu keypsavtalu.*

*Treytað játtan um fígging frá… er hjáløgd umsóknini, har fíggingarstovnarnir seta sum treyt, "at felagið fær tillutað 12 ára rullandi eginkvotur, sum í minsta lagi svara til 3900 tons av makreli, 5400 tons av sild og 9500 tons av svartkjaftinum av verandi rættindum hjá Føroyum sum strandaland (ikki av økingini, sum Føroyar hava givið sær sjálvum, nú eingin semja er)."*

*Treytirnar, ið peningastovnarnir hava sett felagnum, eru ikki í samsvari við lógarásettu karmarnar um vinnuligar royndir og verkætlanir, og kunnu tí ikki verða gingnar á møti…*

*Gevið gætur, at talan er um eina fyribils tilsøgn. Endalig tilsøgn verður veitt mótvegis tí fyritreyt, at skipið… endaliga verður keypt og latið Sp/f Gráastein. Felagið fær í hesum sambandi 4 vikur til at fáa øll viðurskifti uppá pláss, harundir váttan upp á eginpening á…kr., endaligan keypssáttmála og játtan um fígging.*

*Sp/f Ango skal í seinasta lagi 18. oktober 2021 boða Fiskimálaráðnum frá, um hesar treytir eru loknar. Eru treytirnar ikki loknar innan hesa freist, fellur tilsøgnin burtur."*

#### *5.2.3.1 - Munnligar frágreiðingar*

Víst verður til munnligu frágreiðingarnar í málinum hjá Sp/f Mót, sí pkt. 5.2.1.1

##### 5.2.3.1.1 - Meting

Eg eri samdur við tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum um, at umsóknin hjá Sp/f Ango við fyrivarni lýkur avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni.

Sp/f Ango fær tillutað 3.007 tons av makreli, 4.162 tons av norðhavssild og 9.480 av svartkjafti. Hetta er nakað minni enn minsta nøgd, sum søkt var um fyri 2021, ið er 3.907 tons av makreli, 5.412 tons av norðhavssild og 9.481 tons av svartkjafti.

Umsóknin er soleiðis partvíst gingin á møti.

Sum við umsóknini hjá Sp/f Gráastein verður eisini í hesi umsókn løgd við ein treytað játtan um fígging, sum Fiskimálaráðið ikki metir er í samsvari við lóggávuna.

Viðvíkjandi royndum hjá stigtakarunum, so eru tær væl betri lýstar í umsóknarblaðnum í mun til hinar tilmæltu umsóknirnar. Tað tykist greitt at talan er um persónar, sum hava drúgvar og viðkomandi royndir.

Eg meti hesi viðurskifti eru saklig og viðkomandi, tá metast skal um umsóknirnar, sum eru tilmæltar, men við fyrivarni. Eg meti tað vera ivasamt, um hesi viðurskifti eru saklig og viðkomandi viðvíkjandi umsóknini hjá Sp/f Mót.

Hinvegin eri eg samdur við tilmælinum hjá umsitingini í Fiskimálaráðnum í, at umsóknirnar hjá Sp/f Ango, Sp/f Gráasteini, Sp/f JKS Impex og P/F Ocean Group Faroes Ltd. eru somikið meinlíkar, at tað er sakligt at leggja dent á eginpening og royndir, tá støða skal takast til hesar umsóknirnar. Hesar umsóknir lúka allar við fyrivarni grundleggjandi treytirnar í lóggávuni.

Eg meti tað tó ikki vera part av kanningarsetninginum at taka støðu til, hvør av omanfyri nevndu umsøkjarum átti at fingið tillutað kvotu fram um annan. Eg taki soleiðis ikki støðu til, um tað er í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina, at Sp/f Ango hevur fingið tillutað kvotu fram um Sp/f JKS Impex og P/F Ocean Group Faroes Ltd.

Vísandi til niðurstøðuna í málinum hjá Sp/f Mót, sí kap. 5.2.1., so meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin um at játta Sp/f Ango kvotu ikki er lóglig.

### 5.2.4 - Umsókn frá Sp/f JKS Impex

Umsóknin er latin Fiskimálaráðnum 5. juli 2021 (málsskjal 71).

Á s. 4, punkt 4 (Nøgd, sum søkt verður um) sæst, at felagið søkir sum ynskiliga nøgd í 2021 um 3.900 tons av makreli, 5.400 tons av norðhavssild og 6.300 tons av svartkjafti.

Minsta nøgd, ið søkt verður um í 2021 er, 2.600 tons av makreli, 3.600 tons av norðhavssild og 6.300 av svartkjafti.

Á s. 4, punkt 5 í oyðublaðnum (Lýsing av verkætlanini) verður greitt frá:

*"Endamálið við umsóknini er at brúka […] í føroyskari pelagiskari fiska- og reyðætisframleiðslu, og harvið á burðardyggum grundarlagi, at skapa virðisøking av nevnda tilfeingi.*

*Hetta verður gjørt við at útvega eitt skip við uppisjóvarkvotum, at gera samstarvsavtalur við granskingarstovnar, virki, persónar og onnur, sum hava royndir á hesum øki…"*

Á s. 5, punkt 6 (Lýsing av ætlanini) verður víst á:

*"Allar kanningar og fyrireikingar eru gjørdar viðvíkjandi at […]*

*Maskinur til endamálið verða keyptar beinanvegin, um umsóknin um kvotur verður gingin á møti."*

Undir punkt 6 verður ikki upplýst um, hvørja vitan og royndir stigtakarnir hava til fiskivinnu, men á s. 3, punkt 2 verður greitt frá, at:

*"Skipari er Kári Petersen (Kári av Skarvanesi), sum er ein tann mest royndi skiparin á nótabáti í Føroyum.*

*Hin skiparin er Birgir Petersen úr Fugloy. Hann hevur somuleiðis drúgvar royndir innan hesa vinnuna.*

*Maskinmeistarin er Uni á Lag. Hann hevur somuleiðis drúgvar royndir á hesum øki.*

*Fyri at sleppa undan byrjanartrupulleikum og fyri at tryggja, at skipið kemur í rakstur beinanvegin, hava vit gjørt avtalu við tann, sum var skipari, og tann, sum var maskinmeistari á skipinum… Sambært avtaluni verða teir við skipinum til trygd er fingin fyri, at skipið er komið væl í rakstur."*

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin helst er stuðulsverd, tó við fyrivarni við hesi grundgeving:

*<u>"Umsóknin er helst stuðulsverd, tó við fyrivarni</u> – umsóknin lýkur við fyrivarni avgerandi treytir og ásetingar í løggávuni og er annars væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum, eins og víst verður á samstarvsavtalur og ítøkiliga verkætlan viðvíkjandi reyðæti. Verkætlanin fevnir um at keypa skipið […] úr […] fyri […] kr. Viðløgd rakstraræætlan vísir, at verkætlanin kann bera seg við minstu nøgdum. Keypssáttmáli er viðlagdur, og skipið kann yvirtakast beinanvegin. Treytað játtan um fígging frá [x] er viðløgd. Vísast skal á, at treytirnar frá fíggingarstovninum eru óítøkiligar, m.a. verður krav sett um, at kvotugrundarlagið skal vera nøktandi, uttan tó at upplýst verður, hvat nøktandi kvotugrundarlag er…"*

Í avgerðarskrivi til Fiskivinnustovuna, dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin ikki at ganga umsóknini frá Sp/F JKS Impex á møti. Víst verður til grundgevingarnar, sum longu eru førdar fram omanfyri í sambandi við umsóknina frá Sp/f Mót undir pkt. 5.2.1.

Í avgerð frá Fiskimálaráðnum, dagfest 17. september 2021 (málsskjal 72), verður víst á, at umsóknin ikki er gingin á møti við hesum grundgevingum:

*"Í umsóknini er upplýst, at verkætlanin snýr seg um at keypa skipið […] fyri umleið […] kr.*

*Í umsóknarblaði verður greitt frá, at verkætlanin snýr seg um at fáa til vega skip, ið skal fiska pelagiskt umframt at fiska reyðæti og vera við í øðrum royndarfiskiskapi.*

*Umsóknin er væl undirbygd við upplýsingum og avtalum um samstørv, fígging, rakstur, umframt annað virksemi, sum verður knýtt at verkætlanini. Vísast kann á, at váttan er frá [x] um, at [x] fíggjar lán til keyp av skipinum Santiago, tó treytað av, at umsøkjarin fær nøktandi kvotu.*

*Vísast kann eisini á, at felagið hevur lutfalsligan nógvan eginpening á […] kr.*

*Hóast talan er um fleiri verkætlanir, sum kundu verið játtaðar, so avmarkar samlaði karmurin í tøkari kvotu talið av verkætlanum til tvey skip.*

*Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum er dentur lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, <u>eins og</u> hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur.*

*Í avgerðini eru verkætlanir, ið vísa á lutfalsligan nógvan eginpening og beinleiðis royndir, sostatt staðfestir.*

*Í hesi meting fellur tykkara umsókn í raðfestingini grundað á, hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur.*

*Eftir eini samlaðari meting er avgerð tí tikin um ikki at ganga umsókn tykkara á møti."*

Í telduposti 19. september 2021 (málsskjal 73) mótmælir Sp/f JKS Impex avgerðina hjá Fiskimálaráðnum og vísir m.a. á:

*"Gjørt verður galdandi, at avgerðin er tikin á skeivum grundarlagi, tí høvuðsgrundgevingin er, at stigtakarnir ikki hava royndir til fiskiskap og skiparakstur.*

*Tað er ikki rætt.*

*Sámal Jákup Sakarisson átti skip í bólki 4 í tíðarskeiðinum 1988-1997.*

*Tá skipið varð selt var tað útgoldið.*

*Fiskimálaráðið átti at partshoyrt JKS, áðrenn avgerðin varð tikin.*

*Manglandi partshoyring ger, at avgerðin verður ógildug, serliga tá hetta eru so viðkomandi upplýsingar, sum eru avgerandi fyri úrslitið.*

*Fiskimálaráðið verður tí biðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð, og ikki at skrivað nakað loyvi út áðrenn henda viðgerð er endað."*

21. september 2021 (málsskjal 74) sendir Sp/f JKS Impex kæru til Fiskimálaráðið, har m.a. verður víst á:

*"Av tí at fyrisitingarliga viðgerðin hevur so týðandi brek og manglar sambært fyrisitingarlógini og sjófeingislógini og kunngerðum og vegleiðingum, ið ávístar verða niðanfyri, og sum seta rættartrygd umsøkjarans til viks, verður biðið um, at kæran fær steðgandi virknað fyri øllum avgerðum Fiskimálaráðsins um at lata kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, soleiðis at fyrisitingarliga viðgerðin kann ganga umaftur og avgerðin takast av nýggjum.*

1. *<u>Kærumøguleiki, lóggáva og vegleiðing</u>*

*Í skrivligu avgerðini er ongin kæruvegleiðing givin til umsøkjaran, og sambært sjófeingislógini, kunngerðini og vegleiðingum er onki ítøkiligt ásett um kærumøguleikar av umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir. Heldur onki er ásett um, at avgerðirnar eru endaligar innan fyrisitingina…*

*At ongin kæruvegleiðing verður givin, er týðandi brek og mangul í skrivligu avgerðini, sum er send okkum.*

2. *Vantandi grundgevingar, skeivar grundgevingar, ósakligar grundgevingar og vantandi partshoyring*

*Í avgerðini verður staðfest, at umsókn okkara lýkur allar treytir, sum eru settar í lóg, kunngerð og metingarskjølum.*

*Okkara umsókn hevur greiða rakstrarætlan, fígging og avtalur um virðisøking og ítøkiligt skipakeyp og byggir á sakligar grundgivnar og veruleikabygdar nøgdir í mun til tøku kvotuna sambært kunngerðini.*

*Og okkara umsókn lýkur allar sakligar treytir í metingarskjølunum…*

*Men sýtandi avgerðin um okkara umsókn er grundgivin soleiðis:*

*Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum er dentur lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvur stigtakarnir hava til fiskiskap og skiparakstur.*

*Í avgerðini eru verkætlanir, ið vísa á lutfalsliga stóran eginpening og beinleiðis royndir, sostatt staðfestar.*

*Í hesi meting fellur tykkara umsókn í raðfestingini grundað á, hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur.*

*Her er í fyrsta lagi talan um vantandi grundgeving sambært fyrisitingarlógini…§ 23…*

*Í avgerðini er ikki talan um nakra frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini…*

*Í øðrum lagi er talan um skeivar grundgevingar:*

*Bæði stigtakarar og fólk, ið eru knýtt at verkætlanini hava drúgvar og beinleiðis royndir við fiskiskapi og skiparakstri, sum lýst er nágreiniliga í umsóknini. Eisini teir, ið hava skrivað undir umsóknina. Sostatt er grundgevingin beinleiðis skeiv og ikki bygd á nakra skjalfesting.*

*Í triðja lagi er talan um ósakligar grundgevingar:*

*Í bæði lóg, kunngerð og metingarskjølum er allur dentur lagdur á virðisøking, avtalur, fígging og rakstrarætlan, realistiskar nøgdir, ið prógva, at royndirnar og verkætlanin kann fremjast.*

*Í avgerðini er sýtanin av umsóknini grundað á atlit, ið ikki eru nevnd í lóg, kunngerð ella metingarskjølum, nevnliga ein (skeiv) tilvísing til beinleiðis royndir hjá stigtakaranum til fiskiskap og skiparakstur.*

*Henda ósakliga grundgevingin verður nýtt sum høvuðsatlit fyri at sýta umsóknini.*

*Talan er tí ikki um eina heildarmeting, soleiðis sum lóg, kunngerð og vegleiðing fyriskriva, men um eitt uppfunnið og nýtt atlit, ið umsøkjarar ikki eru kunnaðir um, og sum ikki hevur nakað skjalprógv ella frágreiðing um tær veruligu umstøðurnar í málinum.*

*Tey atlit, sum lóg, kunngerð og metingarskjøl fyriskriva, eiga sjálvsagt at viga mest í heildarmetingini, meðan sekundér uppáhald frá fyrisitingini ikki kunnu yvirtrumfa sakligu atlitini og metingarnar.*

*Sostatt ganga grundgevingarnar og metingarnar annars í avgerðarskjalinum beint ímóti niðurstøðuni um at sýta umsóknini.*

*Í fjórða lagi er talan um vantandi partshoyring um veruligu umstøðurnar í málinum.*

*Tá ið avgerðin einans verður grundað á eitt nýtt, ókent og ósakligt atlit, sum ikki er kunnað okkum sum partur í málinum, er talan eisini um greitt brot á fyrisitingarlógina § 18…*

*Øll avgerðin byggir á eitt uppáhald um upplýsingar um umsøkjararnar, ið verður lagt fram sum veruligar umstøður í málinum. Og hesar upplýsingar verða lagdar til grund sum veruligar umstøður av stórum týdningi – ja, sum einasta grundgeving – fyri avgerðini í málinum. Uttan at vit eru kunnaðir ella hoyrdir um hesar avgerandi upplýsingar, sum eru okkum til ófyrimuns…*

Fiskimálaráðið svarar uppá kæruna í telduposti 13. oktober (málsskjal 75), og vísir m.a. á:

*"…avgerð Fiskimálaráðsins kann ikki kærast til Ráðið, og málið verður viðgjørt sambært teimum fyrisitingarligu reglunum um uppafturtøku.*

*Treytin fyri uppafturtøku er, at vísast kann á nýggjar upplýsingar í málinum, undir hesum faktiskar upplýsingar, fyrisitingarligar manglar o.tíl, sum sannlíkt kann broyta niðurstøðuna í málinum.*

*Tygum hava ført fram nøkur kærupunkt, sum Ráðið skal gera viðmerkingar til, men fyrst skal Ráðið gera nakrar yvirskipaðar viðmerkingar til viðgerðina av umsóknunum um kvotu til skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini.*

*Talan er um umsóknarmál, har nógvir umsøkjarar eru til eitt avmarkað kvotugrundarlag. Hetta merkir, at kvotur eru ikki til allar umsøkjarar, og tað er heldur ikki víst, at umsøkjarar, sum lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu, neyðturvuliga fáa kvotu játtaða. Um talan er um fleiri egnaðar umsøkjarar, enn kvota er til, mugu hesir vigast grundað á saklig metingarstøði.*

*Hóast tey fyrilit, sum metingin serliga skal grundast á, eru upplýst í kunngerð, skal tað sláast fast, at fyrisitingin ikki er avmarkað til tey nevndu fyrilitini í síni meting. Talan er um eina heildarmeting, sum skal gerast við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars. Tað framgongur beinleiðis av metingarskjalinum til kunngerðina, at í heildarmetingini verður dentur lagdur á punktini, sum eru nevnd í kunngerðini, harumframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Harafturat verður eisini hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið.*

*Fyrisitingin er einans bundin av teimum kørmum, sum lógarásetingin setir fyri metingini. Tá metast skal um sakligheitina viðvíkjandi metingarstøðum, skal hetta gerast í mun til, at tað grundleggjandi endamálið við útlutan av kvotum til ítøkiligt keyp av skipi er at loyva nýggjum aktørum framat fiskirættindunum við egnum fiskiførum. Umráðandi er eisini, at pláss er fyri fleiri aktørum. Vísast skal til generellu og serligu viðmerkingarnar til § 49, stk. 1 í løgtingslóg nr. 70 frá 2021 um broyting í sjófeingislógini, sum eru at finna í løgtingsmál nr. 100 frá 2020.*

*Fyrisitingin hevur sostatt víðar karmar, tá metast skal um, hvør umsøkjari er best egnaður til skiparakstur, tá kvotur skulu útlutast til skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini.*

*Fyri at tryggja eina skjóta og eins viðgerð av umsóknunum er ein mannagongd ásett við nýtslu av oyðublaði, har ávísar upplýsingar skulu latast. Umsóknir vera sum útgangsstøði bert viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum.*

*Innkomnu umsóknirnar eru viðgjørdar í samsvari við oman fyri standandi. Nakrar umsóknir, harímillum tykkara, lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu tillutaða. Tá kvotugrundarlag ikki er til allar umsøkjarar, er støða tikin til, hvør mest sannlíkt fer at eydnast við skiparakstri frameftir grundað á útlutaðu kvoturnar. Her er ein heildarmeting gjørd, har dentur er lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakarnir hava til fiskiskap og skiparakstur. Sp/f JKS fellur í raðfestingini vísandi til, at royndirnar hjá stigtakarunum í Sp/f JKS ikki eru á sama støði, sum hjá stigtakarnum í teimum feløgum, sum hava fingið kvotu tillutaða.*

*At leggja dent á royndir er viðkomandi fyri, hvussu ein aktørur, sum annars lýkur allar grundleggjandi treytir, kann eydnast frameftir við skiparakstri innan fiskivinnuna, og metingarstøðið er tí sakligt vísandi til endamálið við § 49, stk. 1, 2. pkt.*

*Viðvíkjandi tykkara ítøkiliga máli er upplýst undir pkt. 2 í umsóknini, at manningin, sum er knýtt at verkætlanini, hevur drúgvar royndir, undir hesum at eini skiparin hevur drúgvar royndir við nótabáti.*

*Hesar royndir eru ikki á sama støði, sum royndirnar hjá stigtakarunum í teimum verkætlanunum, sum hava fingið kvotu tillutaða. Tað kann heldur ikki føra til aðra niðurstøðu hesum viðvíkjandi, at upplýst er í teldubrævi frá 19. september 2021, at tann eini stigtakarin í tykkara verkætlan hevur átt skip í bólki 4 í tíðarskeiðinum 1988-1997, og tí hevur royndir innan fiskivinnuna. Tær royndir, sum tit vísa á her, eru framvegis ikki á sama støði sum í teimum verkætlanum, sum hava fingið kvotu játtaða.*

*Viðvíkjandi spurninginum, um Ráðið átti at hoyrt tykkum um royndir hjá stigtakarum ella øðrum tilknýttum at verkætlanini, skal vísast á, at tit eru bidnir um at upplýsa um møguligar royndir í oyðublaðnum, sí punkt 6 í leiðbeiningini til umsóknarblaðið. Her verður biðið um at lýsa teir førleikar, sum eru grundarlag undir verkætlanini, eitt nú royndir og vitan innan fiskivinnu. Ráðið mátti tí ganga út frá, at tær tøku royndirnar vóru tær, sum vóru lýstar í umsóknini. Ongin orsøk var at halda, at nakrar upplýsingar vantaðu, og tað hevur eisini víst seg við teimum seinni innkomnu upplýsingum, at ongar upplýsingar av týdningi vantaðu.*

*Vísandi til oman fyri standandi verður umbønin um uppafturtøku sýtt. Avgerð Ráðsins er mett at vera nøktandi upplýst og grundgivin, og onki er annars komið fram við umbønini um uppafturtøku, sum gevur grundarlag fyri at viðgera málið av nýggjum.*

*At enda skal viðmerkjast, at viðvíkjandi spurninginum um steðgandi virknað hevur Ráðið mett, at sjálvt málið var skjótari at avgreiða enn spurningurin um steðgandi virknað, og er málið tí raðfest. Við hesi avgerð um at sýta uppafturtøku er ikki grundarlag at steðga virknaðinum av avgerð Ráðsins um at útluta kvotur.*

*Avgerðin um ikki at ganga umsóknini um kvotu sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. á møti og/ella hendan avgerðin um at sýta uppafturtøku eru endaligar innan fyrisitingina. Tær kunnu leggjast fyri Føroya Rætt til støðutakan."*

#### 5.2.4.1 - Munnligar frágreiðingar

Víst verður til munnligu frágreiðingarnar í málinum hjá Sp/f Mót, sí pkt. 5.2.1.1

##### 5.2.4.1.1 - Meting

Eg eri samdur við tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum um, at umsóknin hjá Sp/f JKS Impex við fyrivarni lýkur avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni.

Fiskimálaráðið vísir í avgerð síni á, at umsóknin fellur í raðfestingini orsakað av vantandi beinleiðis royndum hjá stigtakarunum til fiskiskap og skiparakstur.

Í hesum føri verður ikki víst til manglandi eginfígging, tí Sp/f JKS Impex hevur lutfalsligan nógvan eginpening, sum eisini víst verður á í avgerðini frá Fiskimálaráðnum.

Í svarinum til kæruna frá Sp/f JKS Impex vísur Fiskimálaráðið á, at umsóknirnar bert verða viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum. Ráðið metir, at royndirnar hjá manningini og royndirnar hjá stigtakarunum aftan fyri Sp/f JKS Impex ikki er á sama støði sum royndirnar hjá teimum, sum hava fingið tillutað kvotu.

Sum víst á omanfyri í sambandi við viðgerðina av umsóknini hjá Sp/f Mót, so meti eg grundgevingin um "beinleiðis royndir hjá stigtakarunum" stendur nakað veikt.

Í oyðublaðnum viðvíkjandi § 49, stk. 1, 2. pkt. stendur viðvíkjandi upplýsing um royndir undir pkt. 6: *"Lýs stutt, hvussu langt ætlanin er komin í fyrireiking og teir førleikar, ið eru grundarlag undir verkætlanini, eitt nú royndir og vitan innan fiskivinnu…"*.

Í oyðublaðnum verður soleiðis ikki biðið um skjalprógv fyri royndirnar. Tað framgongur heldur ikki greitt, um tað eru sjálvir stigtakarnir, sum skulu hava royndir, ella um starvsfólk/manning eisini eru viðkomandi fyri metingina.

Nakrir umsøkjarar hava gjørt meiri burturúr enn aðrir at lýsa beinleiðis royndir. Nakrir upplýsa áramál og hvat slag av fiskiskapi talan er um, meðan aðrir upplýsa at vera "royndur skipari". Út frá umsóknartilfarinum meti eg tað soleiðis vera trupult at taka dagar ímillum, hvør umsøkjari hevur betri royndir enn ein annar.

Sum víst á omanfyri, so meti eg tað vera sakligt at leggja dent á eginfígging og royndir, um talan er um meinlíkar umsóknir. Við tað at Fiskimálaráðið hevur tikið avgerð um at viðgerða umsóknir bert við støði í umsóknartilfarinum, so ber ikki til at biðja ávísar umsøkjarar um fleiri upplýsingar.

Um so er, at ein almennur myndugleiki skal taka avgerð í einum máli, har viðurskifti viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum eru ógreið ella ikki fult lýst, velur myndugleikin vanliga at biðja borgaran um fleiri upplýsingar. Hevur myndugleikin ikki møguleika fyri at biðja um fleiri upplýsingar, má myndugleikin gera eina meting út frá teimum upplýsingum sum eru tøkir. Ein slík meting skal vera so veruleikanær sum gjørligt, sí s. 219 í Forvaltningsret, Almindelige emner, Karsten Revsbech v.fl. 7. útg. 2022

Vísandi til munnligu avhoyringarnar tykist greitt, at metingin av royndunum hjá umsøkjarunum í ikki ótýðandi mun byggir á persónligu vitanina hjá Jacob Vestergaard um umsøkjararnar. Spurningurin er so, um tað er saklig fyrisiting at byggja sína niðurstøðu á eina persónliga vitan um umsøkjararnar.

Vísandi til tilmælið frá umsitingini í Fiskimálaráðnum, har mælt var landsstýrismanninum til sjálvur at velja ein umsøkjara úr bólkinum ”helst stuðulsverd, tó við fyrivarni”, so meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at metingin hjá Jacob Vestergaard av førleikunum hjá umsøkjarunum er ósaklig í sjálvum sær.

Fiskimálaráðið hevur valt eina mannagongd, har umsóknirnar verða viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum, og at umsøkjarar ikki verða hoyrdir. Jacob Vestergaard hevur soleiðis skulað tikið eina avgerð við støði í teimum upplýsingum, sum eru tøkir. Á hesum grundarlagi meti eg ikki, at avgerðin um at nokta Sp/f JKS Impex kvotu byggir á ósaklig atlit ella er í ósamsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina. Eg meti tí avgerðin er lóglig og í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina.

Eg taki tó ikki støðu til, um Sp/f JKS Impex í størri ella minni mun lýkur treytirnar um at fáa kvotu tillutaða í mun til hinar umsøkjararnar, sum tilmælt varð at geva í bólkinum ”helst stuðulsverd, tó við fyrivarni”.

#### 5.2.5 - Umsókn frá P/F Ocean Group Faroes ltd.

Umsóknin er latin Fiskimálaráðnum 6. juli 2021 (málsskjal 76).

Á s. 2, punkt 4 (Nøgd, sum søkt verður um) sæst, at felagið søkir sum ynskiliga nøgd í 2021 um 3.500 tons av makreli, 4.000 tons av norðhavssild og 15.000 tons av svartkjafti.

Minsta nøgd, ið søkt verður um í 2021, er 3.200 tons av makreli, 3.200 tons av norðhavssild og 12.000 av svartkjafti.

Á s. 2, punkt 5 (Lýsing av verkætlanini) í oyðublaðnum verður víst á:

*”Ætlanin er at keypa og reka […] út frá Vági. […] er ein minni nótabátur, sum vit hava rikið fyrr.*

*Báturin kann yvirtakast beinanvegin, og verður klárur tá verkætlanin byrjar, ella ca. ein mánað eftir at umsóknin verður gingin á møti.*

*Kjarnin í ætlanini er at reka […], sum skal tryggja grundarlagið hjá felagnum. […] hevur møguleika at landa smærri nøgdir í Vági, og størri nøgdir til […] ella aðrar, har partar av vøruni síðani kann koyrast suður til Vágs at arbeiða, til […] ella aðrar at arbeiða…"*

Á s. 3, punkt 6 (Lýsing av ætlanini) verður víst á, at:

*[…] hevur verið innflaggaður fyrr í Føroyum.*

*<u>Tíðarætlan</u>*

1. *Skipið verður innflaggað til Føroyar*
2. *Innflaggingin tekur uml. 2-3 vikur.*
3. *Fiskireiðskapur er við skipinum.*
4. *[…] hevur verið innflaggað fyrr, so innflaggingin av skipinum verður uttan trupulleikar.*

*Manning á økinum hevur rikið skipið fyrr, teir eru dugnaligir, og kenna til slíkan rakstur. Somu menn eru klárir at reka skipið.*

*Vit hava dugnaligt fólk aftanfyri ætlanina, ma. sum ráðgevar í drift og í tekniskum spurningum, viðlíkahald av skipinum v.m.*

*Skipið kann koma til Føroyar beinanvegin, eftir okkara meting er skipið klárt til fiskarí uppá ein mánað.*

*Verkætlanin gert virkin beinanvegin tá skipið er í drift, og við kvotugrundarlagnum í umsóknini, verður ætlanin sjálvberandi."*

Í tilmælinum frá umsitingini verður mett, at umsóknin helst er stuðulsverd, tó við fyrivarni við hesi grundgeving:

*"<u>Umsóknin er helst stuðulsverd, tó við fyrivarni</u> – umsóknin lýkur við fyrivarni avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni og er annars væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum. Verkætlanin fevnir um at keypa […] úr […] fyri […], umframt at keypa kvotur fyri […] kr. Tilsøgn um seljarafígging av skipi, kvotukeypi og rakstri frá […] er viðløgd. Einki verður upplýst um, hvørjar kvotur talan er um at keypa, og heldur ikki verða nakrar treytir um lánifíggingina á […] kr. upplýstar í tilsøgnini. Umframt nevnda fyrivarni viðvíkjandi fíggingini av kvotunum, skal vísast á, at søkt verður um minstunøgd á 12.000 tons av svartkjafti, sum svarar til 2/3 av tøku kvotuni."*

Í avgerðarskrivi til Fiskivinnustovuna, dagfest 14. september 2021, velur landsstýrismaðurin ikki at ganga umsóknini frá P/F Ocean Group Faroes Ltd. á møti. Víst verður til grundgevingarnar, sum longu eru førdar fram omanfyri í sambandi við umsóknina frá Sp/f Mót undir pkt. 5.2.1.

Í avgerð frá Fiskimálaráðnum, dagfest 17. september 2021 (málsskjal 77), verður víst á, at umsóknin ikki er gingin á møti við hesum grundgevingum:

*"Í umsókn tykkara er upplýst, at verkætlanin snýr seg um at keypa skipið […], í løtuni nevnt […] og skrásett í […], fyri […] kr. Harafturat snýr verkætlanin seg um at keypa kvotur fyri […] kr.*

*Umsóknin er væl undirbygd við øllum neyðugum skjølum og váttanum. Tilsøgn um seljarafígging av skipi, kvotukeypi og rakstri frá […] er hjáløgd. Eginpeningurin er upplýstur at vera […] mió. kr. í 2019.*

*Einki verður tó upplýst um, hvørjar kvotur talan er um at keypa, og heldur ikki verða nakrar treytir um lánsfíggingina á […] kr. upplýstar í tilsøgnini.*

*Hóast talan er um fleiri verkætlanir, sum kundu verið játtaðar, so avmarkar samlaði karmurin í tøkari kvotu talið av verkætlanum til tvey skip.*

*Í sambandi við endaligu metingina av umsóknunum, er dentur lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakarnir hava til fiskiskap og skiparakstur.*

*Í avgerðini eru verkætlanir, ið vísa á lutfalsligan nógvan eginpening og beinleiðis royndir, sostatt raðfestar.*

*Í hesi meting fellur tykkara umsókn í raðfestingini, serliga í sambandi við, at eginpeningurin er lítil.*

*Eftir einari samlaðari meting er avgerð tí tikin um ikki at ganga umsókn tykkara á møti."*

Í telduposti, dagfestur 24. oktober 2021 (málsskjal 78), til Fiskimálaráðið hevur P/F Ocean Group Faroes Ltd. hesar viðmerkingar:

*"Samb. umsókn okkara og skrivi tykkara nr. 21/14030-3, gekk hon øllum treytum í umsóknini á møti, men umsóknin sjálv bleiv ikki gingin á møti. Hetta setur okkum fleiri spurningar…*

*Tað sum vit undrast á í skrivi tykkara nr. 21/14034-3 er, at í endaligu metingina av umsóknunum, er dentur lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur.*

*Til hetta hava vit viðmerkingar og fylgjandi spurningar.*

*Tað stóð ikki í umsóknini, at dentur verður lagdur á eginpening, vit mæla til at hetta krav fellur burtur, og tí er fyrsti spurningur a) kunnu tit vísa okkum hvat í lógini tit hava heimild til, at meta um eina verkætlan, út frá eginpeningi?*

*Fann ikki í umsóknarblaðnum, at dentur var lagdur á royndir til fiskiskap og skiparakstur…*

*Vit hava, 1) reiðara, 2) tekniska vitan av rakstrartólum og fiskireiðskapi og 3) góða manning og skipara. Ein nýggjur aktørur er nýggjur og eigur ikki at kenna reiðararolluna og eigur ikki tekniska kunnleikan av skipinum.*

*Tit sum stovnur hava upplýsingarskyldu, og eiga at upplýsa allar treytir í eini umsókn, serliga um nýggjar og avgerðandi treytir eru, eins og í hesi umsókn.*

*Vit heita á tykkum um, at omanfyri nevnda skriv, verður tikið við og fest í okkara umsókn, áðrenn endalig avgerð verður tikin, um at útskriva loyvini…*

Í skrivi, dagfest 3. november 2021 (málsskjal 79), svarar Fiskimálaráðið soleiðis:

*"Vísandi til teldubræv tygara frá 24. oktober við spurningum til avgerð Ráðsins skal Ráðið fyrst gera nakrar yvirskipaðar viðmerkingar.*

*Talan er um eitt umsóknarmál, har nógvir umsøkjarar eru til eitt avmarkað kvotugrundarlag. Hetta merkir, at kvotur eru ikki til allar umsøkjarar, og tað er heldur ikki vist, at umsøkjarar, sum lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu, neyðturvuliga fáa kvotu játtaða. Um talan er um fleiri egnaðar umsøkjarar, enn kvota er til, mugu hesir vigast grundað á saklig metingarstøði.*

*Hóast tey fyrilit, sum metingin serliga skal grundast á, eru upplýst í kunngerð, skal tað sláast fast, at fyrisitingin ikki er avmarkað til tey nevndu fyrilitini í síni meting. Talan er um eina heildarmeting, sum skal gerast við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars. Tað framgongur beinleiðis av metingarskjalinum til kunngerðina, at í heildarmetingini verður dentur lagdur á punktini, sum eru nevnd í kunngerðini, harumframt onnur atlit sambært lóggávuni annars. Harumframt verður eisini hugt at øðrum viðurskiftum í umsóknini, ið kunnu styrkja rakstrargrundarlagið.*

*Fyrisitingin er einans bundin av teimum kørmum, sum lógarásetingin setir fyri metingini. Tá metast skal um sakligheitina viðvíkjandi metingarstøðinum, skal hetta gerast í mun til, at tað grundleggjandi endamálið við útlutan av kvotum til ítøkiligt keyp av skipi er at loyva nýggjum aktørum framat fiskirættindum við egnum fiskiførum. Umráðandi er eisini, at pláss er fyri fleiri aktørum. Vísast skal til generellu og serligu viðmerkingarnar til § 49, stk. 1 í løgtingslóg nr. 70 frá 2021 um broyting í sjófeingislógini, sum eru at finna í løgtingsmáli 100 frá 2020.*

*Fyrisitingin hevur sostatt víðar karmar, tá metast skal um, hvør umsøkjari er best egnaður til skiparakstur, tá kvotur skulu útlutast til skipakeyp sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini.*

*Fyri at tryggja eina skjóta og eins viðgerð av umsóknunum er ein mannagongd ásett við nýtslu av oyðublaði, har ávísar upplýsingar skulu latast. Umsóknir vera sum útgangsstøði bert viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum.*

*Innkomnu umsóknirnar eru viðgjørdar í samsvari við oman fyri standandi. Nakrar umsóknir, harímillum tykkara, lúka grundleggjandi treytir fyri at fáa kvotu tillutaða. Tá kvotugrundarlag ikki er til allar umsøkjarar, er støða tikin til, hvør mest sannlíkt fer at eydnast við skiparakstri frameftir grundað á útlutaðu kvoturnar. Her er ein heildarmeting gjørd, har dentur er lagdur á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur. P/F Ocean Group Faroes Ltd. fellur í*

*raðfestingini serliga vísandi til, at eginpeningurin hjá felagnum ikki er á sama støði sum hjá teimum feløgum, sum hava fingið kvotu tillutaða.*

*Viðvíkjandi tykkara ítøkiligu spurningum skal viðmerkjast, at tað er sakligt at leggja dent á fígging av skipakeypi og -rakstri, undir hesum støddina av eginpeninginum. Hetta er viðkomandi fyri, hvussu ein aktørur, sum annars lýkur allar grundleggjandi treytir, kann eydnast frameftir innan fiskivinnuna við egnum fiskifari, og metingarstøðið er tí sakligt vísandi til endamálið við § 49, stk. 1, 2. pkt.*

*Viðvíkjandi tykkara viðmerkingum annars um fyrilit verður tikið til royndir skal viðmerkjast, at ongin andsøgn er í at leggja dent á royndir, hóast endamálið er at fáa nýggjar aktørar í fiskivinnuna. Ein nýggjur aktørur í hesum høpi merkir bert, at tað er ein aktørur, sum ikki longu er etableraður í fiskivinnuni við egnum skipi. Royndir fara undir øllum umstøðum at hava týdning og vera viðkomandi fyri møguleikan at eydnast við skipakeypi og -rakstri innan fiskivinnuna frameftir, og metingarstøðið er tí sakligt.*

*Vísast skal eisini á, at tit eru biðin um at upplýsa um møguligar royndir í oyðublaðnum, sí punkt 6 í leiðbeiningini til umsóknarblaðið. Her verður biðið um at lýsa teir førleikar, ið eru grundarlag undir verkætlanini, eitt nú royndir og vitan innan fiskivinnu. Ráðið gekk tí út frá, at royndirnar vóru tær, sum vórðu lýstar í umsóknini. Leggjast skal tó afturat, at tær upplýsingar, sum nú verða lagdar fram, kunnu ikki broyta niðurstøðu Ráðsins viðvíkjandi tillutan av kvotum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini."*

#### *5.2.5.1 - Munnligar frágreiðingar*
Víst verður til munnligu frágreiðingarnar í málinum hjá Sp/f Mót, sí pkt. 5.2.1.1

##### 5.2.5.1.1 - Meting
Eg eri samdur við tilmælinum frá umsitingini í Fiskimálaráðnum um, at umsóknin hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. við fyrivarni lýkur avgerandi treytir og ásetingar í lóggávuni.

Fiskimálaráðið vísir í avgerð síni á, at umsóknin fellur í raðfestingini serliga í sambandi við, at eginpeningurin er lítil.

Í hesum føri er í avgerðini serliga lagdur dentur á, at eginpeningurin er lítil. Her verður soleiðis ikki beinleiðis víst til manglandi royndir hjá teimum umsøkjarum, sum hava fingið tillutað kvotu.

Í umsóknini er upplýst um royndir:

*"Manning á økinum hevur rikið skipið fyrr, teir eru dugnaligir, og kenna til slíkan rakstur. Somu menn eru klárir at reka skipið.*

*Vit hava dugnaligt fólk aftanfyri ætlanina, ma. sum ráðgevar í drift og í tekniskum spurningum, viðlíkahald av skipinum v.m."*

Vísandi til, at umsóknirnar bert verða viðgjørdar við støði í umsóknartilfarinum, skal eg enn einaferð vísa á, at eg meti grundgevingin um royndir stendur veikt. Í umsóknini hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. verða

førleikarnir aftan fyri verkætlanina lýstir stutt og yvirskipað. Eg meti tað vera trupult at taka dagar ímillum, hvørt royndirnar aftan fyri verkætlanina hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. eru betri ella verri enn royndirnar hjá hinum umsøkjarunum.

Eg kann tó út frá skjalatilfarinum staðfesta, at eginfíggingin hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. er væl lægri enn eginfíggingin hjá teimum umsøkjarunum, sum hava fingið tillutað kvotu.

Spurningurin er so, um tað er sakligt at lata eginfíggingina verða avgerandi fyri, at umsøkjari fær noktað kvotu.

Vísandi til, at P/F Ocean Group Faroes Ltd. er í tilmælinum bólkað sum ”helst stuðulsverd, tó við fyrivarni”, har mælt verður til, at landsstýrismaðurin sjálvur avger, hvør av hesum umsøkjarunum skal fáa tillutað kvotu, meti eg tað vera sakligt at leggja dent á eginfíggingina.

Umsitingin viðgongur í tilmælinum til Jacob Vestergaard, at tað er trupult at vísa á fyrisitingarliga saklig viðurskifti, ið kunnu lyfta eina umsókn fram um aðra. Jacob Vestergaard hevur í hesum sambandi mett eginfíggingina vera eitt avgerandi atlit at taka serliga viðvíkjandi rakstrargrundarlagnum undir verkætlanini.

Á hesum grundarlagi meti eg ikki, at avgerðin um at nokta P/F Ocean Group Faroes Ltd. kvotu byggir á ósaklig atlit ella er í ósamsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina. Eg meti tí, avgerðin er lóglig.

Sum áður sagt, so taki eg ikki her støðu til, um P/F Ocean Group Faroes Ltd. í størri ella minni mun lýkur treytirnar um at fáa tillutað kvotu í mun til hinar umsøkjararnar í bólkinum ”helst stuðulsverd, tó við fyrivarni”.

## 5.3 - Útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini í 2021

11. juni 2021 varð lýst eftir umsóknum í sambandi við ískoytiskvotur til svartkjaft eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini (málsskjal 16).

Sambært § 3 í kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir verða sambært § 15, stk. 1, nr. 1 í sjófeingislógini sett 12.640 tons av svartkjafti av til ískoytikvotur.

23. september 2021 varð hetta tilmæli latið landsstýrismanninum (málsskjal 26):

*”Sambært § 49, stk. 2 í sjófeingislógini verður ávís nøgd av makreli, norðhavssild og svartkjafti sett av til ískoytiskvotur at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskiførum, hvørs eigarar lúka treytirnar í § 49, stk. 3.*

*Ískoytiskvotur av makreli og norðhavssild vórðu í 2020 lutaðar út fyri 5 ár fram, og tí kann í 2021 bert søkjast um svartkjaft.*

*Landsstýrismaðurin hevur í kunngerð ásett nøgdina, ið søkjast kann um í 2021, at vera 12.640 tons av svartkjafti, jbr. § 3 í kunngerð nr. 95 frá 11. juni 2021 um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir.*

*Umframt tøku nøgdina í 2021, eru 1.178 tons av svartkjafti flutt frá 2020 til at verða fiskað sum ískoytiskvota í 2021, jbr. § 3, stk. 3 í kunngerðini.*

*<u>Tilmæli</u>*
*Í 2021 hava 7 umsøkjarar søkt um ískoytiskvotu av svartkjafti. Av hesum lúka 4 umsóknir treytirnar fyri at fáa lut í ískoytiskvotuni sambært § 49, stk. 2 í sjófeingislógini. Tær umsóknirnar eru:*

1. *P/F Jókin – m/s Arctic Voyager*
2. *P/F Thor Fisheries – m/s Hoyvík*
3. *P/F Jupiter – m/s Jupiter*
4. *P/F Kinnfelli – m/s Katrin Jóhanna*

*Vísandi til avgerðarskrivið, Avgerð viðvíkjandi ískoytiskvotum 2020, dagfest 24. september 2020 (20/00074-59), verður mælt til at býta tøku nøgdina av svartkjafti javnt millum skikkaðu umsøkjararnar, ið eru nevndir omanfyri.*

*Mælt verður sostatt til, at kvotuparturin til hvørt fiskifar verður 3.160 tons av svartkjafti.*

*Harumframt skal flutta nøgdin frá 2020 á tilsamans 1.178 tons leggjast afturat at kunna vera veidd í 2021. Av fluttu nøgdini fær hvørt av hesum somu fiskiførum sostatt 294,5 at fiska í 2021…"*

Viðvíkjandi teimum 3 umsóknunum, sum ikki vórðu tilmæltar at fáa kvotu, verður í tilmælinum víst á, at tær ikki lúka treytina í § 6 í kunngerðini, har ásett er, at bert fiskifør, sum í 2019 ella 2020 hava fingið útskrivað fiskiloyvi og í hesum sambandi eru skrásett at hava avreitt svartkjaft av føroyskum kvotum, kunnu fáa lut í ískoytiskvotuni.

Í telduposti, dagfestur 24. september 2021 (málsskjal 27), til Rógva Reinert boðar landsstýrismaðurin frá, at hann tekur undir við tilmælinum frá umsitingini.

Avgerðarskriv er sent øllum umsøkjarunum 30. september 2021.

### 5.3.1 - Meting

Eg kann staðfesta, at landsstýrismaðurin velur at fylgja tilmælinum hjá umsitingini uttan nakað frávik. Landsstýrismaðurin fylgir soleiðis tilmælinum fult og heilt.

Eg havi hugt umsóknirnar ígjøgnum og meti ikki nakað talar fyri, at avgerðirnar hjá landsstýrismanninum ikki eru í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina. Eg meti, tí avgerðirnar eru lógligar.

# Kap. 6. Brot framt á lóg um ábyrgd landsstýrisins?

## 6.1 - Viðvíkjandi útsettari útlutan av kvotu eftir § 49, stk. 1 frá 2020 til 2021

Viðvíkjandi spurninginum um, hvørt viðgerðin av umsóknunum og tiknu avgerðirnar hjá landsstýrismanninum hava verið í samsvari við sjófeingislógina og fyrisitingarlógina, eri eg í sambandi við avgerðina hjá landsstýrismanninum at útseta útlutanina av kvotu eftir § 49, stk. 1 frá 2020 til 2021, sí kap. 4.1.1., komin til ta niðurstøðu, at landsstýrismaðurin tilvitað hevur drálað við at viðgera umsóknirnar.

Vísandi til, at løgtingið samtykkir at broyta sjófeingislógina, soleiðis at heimild er fyri at flyta kvotur yvir um ár og harvið útseta útlutanina og viðgerðina av umsóknum til 2021, meti eg tó ikki, at landsstýrismaðurin fremur brot á sjófeingislógina ella fyrisitingarlógina. Tó meti eg tað vera brot á góðan fyrisitingarsið, at landsstýrismaðurin tilvitað velur at drála við at viðgera umsóknirnar. Eg meti tað eisini vera brot á góðan fyrisitingarsið, at umsøkjarar ikki fáa formligt svar uppá sínar umsóknir fyrr enn í mai mánað 2021. Hetta er góðar 9 mánaðir eftir, at umsóknirnar eru latnar Fiskimálaráðnum.

Vísandi til munnligu frágreiðingina hjá landsstýrismanninum 28. oktober 2022, har landsstýrismaðurin viðgongur, at hann valdi at bíða við at avgreiða umsóknirnar, meti eg, talan er um tilvitað brot á óskrivaðu fyrisitingarrættarligu reglurnar um góðan fyrisitingarsið.

Sambært § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrisins sæst, at løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara.

Eyðbjørn Larsen, adv., hevur vegna Jacob Vestergaard víst á, at spurnartekin kann setast við, um brot á góðan fyrisitingarsið kann metast sum brot á lóggávuna. Advokaturin vísur eisini á, at tá ið ongin formlig lóg er brotin, ber sum meginregla ikki til at koma undir ábyrgd ella ábyrgd landsstýrisins § 5, stk. 1.

§ 5, stk. 1 í donsku lógini ”lov om ministres ansvar” (lov nr. 117 af 15. april 1964) er meinlík føroysku § 5, stk. 1:

*”En minister straffes, hvis han forsætligt eller af grov uagtsomhed tilsidesætter de pligter, der påhviler ham efter grundloven eller lovgivningen i øvrigt eller efter hans stillings beskaffenhed.”*

Í lógarviðmerkingunum til § 5, stk. 1 stendur:

*”Man har imidlertid ved forslagets formulering ønsket at markere, at der påhviler ministrene pligter, <u>der ikke er positivt fastslået i lovgivningen</u>, men som dog efter en forfatningsretlig bedømmelse må anses forbundet med stillingen som minister, og at også tilsidesættelse af sådanne pligter kan medføre strafansvar.”* (mín undirstriking)

Á s. 201-202 í Dansk Forfatningsret 2, Henrik Zahle, 3. útg. 2001 stendur:

*”…efter hans stillings beskaffenhed… Denne åbne beskrivelse af ansvarsgrundlaget er inspireret af strfl §§ 156-157 og fandtes af folketinget påkrævet, idet en præcis angivelse af samtlige de pligter, der påhviler*

*ministre, ikke kan foretages i lovteksten… For så vidt har det måttet erkendes, at en lovregulering af ministeransvaret må efterlade sådanne åbenheder i regelgrundlaget, at ministeransvaret kan udvikle sig i overensstemmelse med den forfatningsretlige udvikling."*

Havandi í huga, at landsstýrismaðurin sambært § 37 í stýrisskipanarlógini og § 2 í lóg um ábyrgd landsstýrisins hevur rættarliga ábyrgd av fyrisitingini, meti eg tað vera trupult at síggja burtur frá, at fyrisitingin hevur skyldu til at halda fyrisitingarrættarligar grundreglur, hóast tær møguliga ikki kunnu sigast verða ein rættarkelda, sum kann samanberast við eina løgtingslóg. Við tað at landsstýrismaðurin er hægsta embætisfólk í aðalráðnum og hevur ábyrgdina av fyrisitingini, meti eg, at landsstýrismaðurin hevur skyldu til at halda reglurnar um góðan fyrisitingarsið. Hóast landsstýrismaðurin møguliga ikki kann sigast at hava brotið eina formliga lóg, so meti eg, at landsstýrismaðurin, við at fremja brot á góðan fyrisitingarsið, hevur sett til viks tær skyldur sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara.

Við tilvitað at hava framt brot á reglurnar um góðan fyrisitingarsið meti eg, at talan er um brot á § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

Vísandi til umstøðurnar í málinum annars og serliga, at Løgtingið hevur samtykt at broyta sjófeingislógina, soleiðis at kvoturnar kundu flytast til 2021, meti eg tó ikki grundarlag vera fyri at reisa revsimál mótvegis landsstýrismanninum. Vísandi til tær hugleiðingar og metingar, sum verða førdar fram av Hans Gammeltoft Hansen, kanningarstjóra, í kanningini um "Eysturoyartunnilin" í 2015, kap. 11, um siðvenjuna at reisa mál mótvegis landsstýrisfólki, meti eg ikki grundarlag vera fyri at reisa mál mótvegis landsstýrismanninum.

Viðmerkjast kann, at meirilutin í Vinnunevndini í Løgtinginum í sambandi við broytingaruppskotið um at flyta kvoturnar yvir um ár (LM-69/2020), átalar landsstýrismannin fyri at hava drálað í málinum.

Um støðuna hjá meirilutanum í Vinnunevndini stendur í álitinum til lógaruppskotið soleiðis:

*"<u>Harumframt hava Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer, Henrik Old og Bjarni Kárason Petersen hesar viðmerkingar:</u>*

*Undirritaðu vísa harumframt á, at landsstýrismaðurin, sum nú biður um heimild at flyta kvotur til royndir og vinnuligar verkætlanir, hevur havt stóran part av árinum til at avgreiða og býta út hesar kvotur. Landsstýrismaðurin valdi at fara frá leistinum, at ein metingarnevnd eftir fakligum og sakligum metingarstøði býtti út kvoturnar, til sjálvur at velja millum umsóknirnar til kvotur. Tað er átaluvert at drála í so stóran mun, og ásannast má, at landsstýrismaðurin ikki hevur megnað at avgreiða mongu umsóknirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir."*

Landsstýrismaðurin hevur soleiðis áður fingið atfinningar í einum áliti frá einum av nevndunum í Løgtinginum fyri handfaringina av málinum.

Út frá omanfyri standandi vil eg mæla til, at Løgtingið endar hetta málið við í einum uppskoti til samtyktar at geva fyrrverandi landsstýrismanninum, Jacob Vestergaard, eina átalu fyri brot á § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd

landsstýrismanna fyri tilvitað at hava drálað við at viðgera umsóknirnar viðvíkjandi útlutan av kvotu eftir § 49, stk. 1 í sjófeingislógini í 2020. Her skal serliga vísast á, at lýst varð eftir umsóknum, umsóknir vórðu latnar inn, og umsitingin í Fiskimálaráðnum hevði viðgjørt umsóknirnar umframt latið Jacob Vestergaard tilmæli til støðutakan. Málið var soleiðis klárt at avgreiða. Landsstýrismaðurin velur tó tilvitað at drála og ikki viðgera umsóknirnar orsakað av politiskum orsøkum, sum ikki kunnu metast vera sakligar.

## 6.2 - Viðvíkjandi manglandi kunning til P/F Ocean Group Faroes Ltd. í 2020

Í sambandi við gjøgnumgongd av serliga tveimum málum um útlutan av kvotu eftir § 49, stk. 2 í sjófeingislógini í 2020, eri eg komin til ta niðurstøðu, at spurnartekin kann setast við, um P/F Ocean Group Faroes Ltd. hevur fingið somu viðgerð, sum P/F Thor Fisheries, sí kap. 4.2.1 og 4.2.2.

Spurnartekin kann tí setast við, um fyrisitingarrættarliga líkareglan er hildin.

Sambært tilfarinum í málinum, m.a. eisini munnligu frágreiðingina hjá landsstýrismanninum 28. oktober 2022, tykist tó greitt, at landsstýrismaðurin sjálvur ikki hevur verið við í viðgerðini av umsóknini hjá P/F Ocean Group Faroes Ltd. Heldur er tað umsitingin í Fiskimálaráðnum, sum metir, at felagið ikki lýkur treytirnar fyri at fáa tillutað kvotu eftir § 49, stk. 2. Hetta framgongur eisini av tilmælinum, sum verður latið landsstýrismanninum, og sum landsstýrismaðurin eisini fylgir.

Út frá tilfarinum í málinum meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at Jacob Vestergaard tilætlað ella við grovum ósketni hevur skúgvað til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara, smb. § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

## 6.3 - Viðvíkjandi avgerð um at víkja frá tilmæli eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í 2021

Í sambandi við útlutan av kvotum eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í 2021 kann staðfestast, at Jacob Vestergaard hevur vikið frá tilmælinum frá umsitingini og lutað út kvotu til Sp/f Ango og Sp/f Gráastein fram um Sp/f Mót.

Mín niðurstøða í hesum føri er, at tá Sp/f Mót lýkur allar treytir, sum ásettar eru í lóg og kunngerð, fram um aðrar umsøkjarar, meti eg tað vera ivasamt, um tað er sakligt at leggja dent á eginfígging og royndir.

Eg meti tó ikki grundarlag vera fyri at siga, at avgerðin hjá Jacob Vestergaard at víkja frá tilmælinum er beinleiðis brot á sjófeingislógina ella fyrisitingarlógina. Jacob Vestergaard er ikki bundin at fylgja tilmælinum frá umsitingini. Hann kann velja at víkja frá, men so skal hann grundgeva sakliga fyri, hví hann víkir frá tilmælinum. Í hesum sambandi hevur Jacob Vestergaard fingið vegleiðing og ráðgeving frá Rógva Reinert, aðalstjóra, og skrivaranum í Fiskimálaráðnum. Avgerðin og grundgevingarnar hjá Jacob Vestergaard eru skjalfestar í innanhýsis avgerðarskrivi, sum er sent umsitingini í Fiskimálaráðnum til avgreiðslu.

Í sambandi við munnligu avhoyringarnar av Jacob Vestergaard, Rógva Reinert og embætisfólkunum kom greitt fram, at arbeiðið í Fiskimálaráðnum varð skipað soleiðis, at umsitingin skuldi gera oyðubløð, viðgera umsóknirnar og gera tilmæli til landsstýrismannin. Jacob Vestergaard vildi síðani brúka Rógva Reinert at sparra við og ráðgeva sær í sambandi við endaligu avgerðina. Rógvi Reinert hevur síðani, saman við skrivaranum í Fiskimálaráðnum, veitt Jacob Vestergaard ta tænastu at gera uppskot til innanhýsis avgerðarskriv at senda umsitingini (Fiskivinnustovuna) til avgreiðslu.

Jacob Vestergaard hevur soleiðis ikki av sínum eintingum tikið avgerð í málinum uttan vegleiðing og ráðgeving frá sínum starvsfólki í ráðnum. Jacob Vestergaard hevur søkt sær ráðgeving og hevur, meti eg, soleiðis roynt at tryggjað sær, at avgerðirnar eru í samsvari við lóg og reglur.

Út frá tilfarinum í málinum meti eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at Jacob Vestergaard tilætlað ella við grovum ósketni hevur skúgvað til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara, smb. § 5, stk. 1 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

# Skjalayvirlit

Skjal 1: Málsskjøl....1
Skjal 2: Endurgevingar av avhoyringum ....5
Ólavur Dalsgarð ....5
Torkil V. Rasmussen....10
Símun Grønadal ....17
Rannvá Sólheim ....21
Andras Kristiansen....29
Rógvi Reinert ....34
Jacob Vestergaard ....49
Skjal 3: Viðmerkingar frá Eyðbjørn Larsen, adv., vegna Jacob Vestergaard....63